LANDSGRANNSKOÐANIN

Fíggjarárið 2019

Ársfrágreiðing

latin
løgtingsgrannskoðarunum

sambært § 12 í Ll. nr. 25/1999
“um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.”

AUGUST 2020

Innihaldsyvirlit

0. FRAMLØGA 7

1. INNGANGUR 9

1.1 LANDSROKNSKAPURIN 2019 9
1.2 GRANNSKOÐAN AV ROKNSKAPINUM 9

2. LØGMANSFYRISITINGIN 13

2.1 UMBYGGING Í TINGANESI (LG 2019/202-0111) 13
2.2 LØGMAÐUR OG LANDSSTÝRIÐ (LG 2019/202-0123) 14
2.3 FØROYA KÆRUSTOVNUR (LG 2019/202-0141) 17
2.4 DÁTUEFTIRLITIÐ (LG 2017/202-0142) 17

3. FÍGGJARMÁL 19

3.1 LANDSROKNSKAPURIN IKKI FULLFÍGGJAÐUR (LG 2014/100-0001) 19
3.2 VEÐHALDS- OG EFTIRLØNARSKYLDUR (LG 2019/203-0151) 20
3.3 EFTIRLØNIR HJÁ FÓLKASKÚLALÆRARUM (LG 2019/203-0181) 21
3.4 DAGFØRING AV ROKNSKAPARRUNDSKRIVI (LG 2016/203-0151) 21
3.5 KERVISGRANNSKOÐAN (LG 2019/203-0151) 22
3.5.1 KERVISGRANNSKOÐAN HJÁ TAKS 22
3.5.2 KERVISGRANNSKOÐAN HJÁ GJALDSTOVUNI 23
3.5.3 KERVISGRANNSKOÐAN HJÁ KT LANDSINS 24
3.6 HAGSTOVA FØROYA (LG 2015/203-0152) 26
3.7 LANDSBANKI FØROYA (LG 2017/203-0151) 27
3.8 TALGILDU FØROYAR (LG 2018/203-0111) 28
3.9 AVGJALD AV KAPITALEFTIRLØNUM (LG 2017/220-0521) 32
3.10 INNHEINTING AV BARNAPENINGI (LG 2017/203-0151) 33
3.11 BUNDIN EFTIRLØN AV B-INNTØKUM (LG 2016/220-0521) 34
3.12 NEGATIVT MEIRVIRÐISGJALD (LG 2016/220-0522) 34
3.13 BRENNIOLJUGJALD (LG 2019/220-0522) 35
3.14 FRAMLEIÐSLUGJALD (LG 2019/220-0522) 37
3.15 FERÐAAVGJALD (LG 2019/220-0522) 40
3.16 ENDURGJØLD AV MEIRVIRÐISGJALDI (LG 2018/220-0522) 42
3.17 STUÐUL TIL RENTUÚTREIÐSLUR (LG 2019/203-0224) 44

4. FISKIVINNUMÁL 49

4.1 FISKIMÁLARÁÐIÐ (LG 2016/205-0111) 49
4.2 STUÐUL TIL BJARGINGARFELØG (LG 2019/205-0311) 49
4.3 FISKIVEIÐIEFTIRLITIÐ (LG 2017/205-0342) 50
4.4 NÝTT HAVRANNSÓKNARSKIP, LØGUJÁTTAN (LG 2019/205-0343) 51
4.5 FISKIVINNUROYNDIR (LG 2018/205-0343) 53
4.6 EFFEKTIVAR VEÐHALDSÚTREIÐSLUR (LG 2017/205-0345) 54

5. MENTAMÁL 57

5.1 NÁM (LG 2017/207-0231) 57
5.2 FÓLKASKÚLIN (LG 2019/207-0232) 57
5.3 MIÐNÁMSSKÚLIN Í SUÐUROY (LG 2019/207-0233) 58
5.4 HEILSUSKÚLI FØROYA (LG 2019/207-0233) 60
5.5 GLASIR (LG 2017/207-0233) 61
5.6 LØNIR Á SERBREYTUNUM (LG 2018/207-0233) 63
5.7 TEKNISKI SKÚLI Í KLAKSVÍK, LØGUJÁTTAN (LG 2018/207-0233) 66
5.8 FRÍTÍÐARUNDIRVÍSING (LG 2019/207-0235) 66
5.9 FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA (LG 2018/207-0236) 70
5.10 VINNUHÁSKÚLIN (LG 2018/207-0236) 76
5.11 GRANSKINGARRÁÐ FØROYA (LG 2014/207-0236) 78
5.12 TJÓÐPALLUR FØROYA (LG 2015/207-0242) 79
5.13 TJÓÐSAVNIÐ (LG 2019/207-0243) 79
5.14 KRINGVARP FØROYA, LØGUJÁTTAN (LG 2019/207-0244) 81
5.15 MENTANARGRUNNUR LANDSINS (LG 2015/207-0242) 83
5.16 KIRKJUGRUNNURIN OG TILTAKSGRUNNURIN (LG 2019/207-0245) 83
5.17 ÍTRÓTTAHØLL Á SANDOYNNI (LG 2018-207-0246) 89

6. HEILSU- OG INNLENDISMÁL 91

6.1 HEILSU- OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ (LG 2016/211-0111) 91
6.2 FÓLKAHEILSURÁÐIÐ (LG 2016/211-0201) 91
6.3 HEILSUTRYGD (LG 2019/211-0202) 91
6.4 GJALD TIL HEILSUTRYGD, ÓGREINAÐ J. (LG 2019/211-0202) 94
6.5 HEILSUTRYGDARVEITINGAR (LG 2019/211-0202) 97
6.6 KOMMUNULÆKNASKIPANIN (LG 2019/211-0202) 99
6.7 ØKISHEILSUSKIPANIN (LG 2019/211-0202) 100
6.8 GIGNI – HEILSUFRØÐI FYRI BØRN OG UNG (LG 2019/211-0213) 100
6.9 KOPPSETINGAR (LG 2019/211-0201) 101
6.10 ÍLEGUSAVNIÐ (LG 2018/211-0202) 101
6.11 ELVEITING, UMSITING (LG 2017/211-0321) 103
6.12 FERÐ Á GRØNA ORKU (LG 2017/211-0321) 104
6.13 STUÐUL TIL ÚTOYGGJAMENNING (LG 2019/211-0372) 104
6.14 UMHVØRVISSTOVAN (LG 2017/211-0374) 105
6.14.1 STUÐULSFÍGGJAÐ VIRKSEMI 105
6.14.2 UMHVØRVISSTOVAN, STOVNSRAKSTUR 107

7. ALMANNAMÁL 109

7.1 ALMANNAMÁLARÁÐIÐ (LG 2016/212-0111) 109

7.2 FAMILJUFYRISITINGIN (LG 2019/212-0141) 109
7.3 ALMANNAVERKIÐ (LG 2017/212-0211) 111
7.4 KASSAEFTIRLIT Á ALMANNAVERKINUM (LG 2018/212-0211) 112
7.5 BARNAPENINGUR VEITTUR Í FORSKOTI (LG 2015/212-0213) 113
7.6 EINKJUBARNASTYRKUR (LG 2014/212-0213) 113
7.7 BARNAÍSKOYTI (LG 2015/212-0213) 114
7.8 BÚSTOVNAR O.A., LØGUJÁTTAN (LG 2019/212-0216) 114
7.9 ALMANNAVERKIÐ, TRIVNAÐARTÆNASTUR (LG 2018/212-0216) 121
7.9.1 TRIVNAÐARTÆNASTUR 121
7.9.2 FELAGSRAKSTUR Í TRIVNAÐARDEPLINUM 122
7.9.3 EIND 1 124
7.9.4 UPPFYLGING AV GRANNSKOÐAN, EIND 4 124
7.10 KASSAEFTIRLIT Á VÓN OG VIRKNI (LG 2019/212-0216) 126
7.11 FELAGSKASSAR (LG 2019/212-0216) 127
7.12 VANLIG FORSORG (LG 2014/212-0217) 128
7.13 FORSORGARHJÁLP VEGNA ARBEIÐSLOYSI (LG 2019/212-0217) 128
7.14 SERLIGUR STUÐUL SAMBÆRT § 15A (LG 2019/212-0217) 130
7.15 HJÁLPARAMBOÐ V.M. § 18 (LG 2019/212-0217) 132
7.16 ARBEIÐSFREMJANDI TILTØK (LG 2017/212-0217) 136
7.17 FÓLKAPENSJÓN (LG 2018/212-0218) 136
7.18 FYRITÍÐARPENSJÓN (LG 2019/212-0218) 137

8. UTTANRÍKIS- OG VINNUMÁL 141

8.1 UTTANRÍKIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ (LG 2016/213-0111) 141
8.2 JARÐFEINGI (LG 2017/213-0321) 141
8.3 SJÓVINNUSTÝRIÐ (LG 2015/206-0351) 142
8.4 LOYVISNEVNDIN (LG 2019/213-0371) 142
8.5 VINNUSTOVNURIN (LG 2017/213-0371) 144
8.6 SKRÁSETING FØROYA (LG 2017/213-0371) 144
8.7 RÚSDREKKASØLA LANDSINS (LG 2018/213-0373) 147
8.8 HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN (LG 2017/213-0375) 147

9. SAMFERÐSLUMÁL 151

9.1 UMVÆLING AV ALMENNUM BYGNINGUM (LG 2019/217-0111) 151
9.2 LANDSVERK (LG 2019/217-0381) 156
9.2.1 FLYTINGAR FRÁ LØGUJÁTTANUM 158
9.2.2 LANDSVERKSSKRIVSTOVAN, RAKSTUR 158
9.3 NÝGGIR LANDSVEGIR (LG 2019/217-0381) 161
9.3.1 HVALBIARTUNNILIN 164
9.3.2 FUNNINGSFJØRÐ, VÍKIPLÁSS 165
9.3.3 ELDUVÍKARVEGURIN V.M. 165
9.4 HAVNIR, LØGUJÁTTAN (LG 2019/217-0381) 165
9.5 STRANDFARASKIP LANDSINS (LG 2019/217-0382) 166
9.6 STUÐUL TIL ÚTOYGGJAR (LG 2019/217-0382) 169
9.7 AKSTOVAN (LG 2019/217-0384) 169
9.8 SEMINGSMANNASKIPANIN (LG 2018/217-0391) 170
9.9 BARSILSSKIPANIN (LG 2017/217-0394) 170

10. FÍGGJARSTØÐA **173**

10.1 FÍGGJARSTØÐA (LG 2019/300-0000) **173**
10.1.1 KAPITALINNSKOT (LG 2019/300-0102) 173
10.1.2 VIRÐISBRØV 175
10.1.3 ÚTLÁN 177
10.1.4 ÁOGN O.A. 177
10.1.5 TØKUR PENINGUR 180
10.1.6 SKULD 182
10.2 ÚTJAVNINGARKONTA (LG 2019/300-0203) **183**
10.2.1 JAVNING AV FÍGGJARSTØÐU VIÐ ÁRSBYRJAN 183
10.2.2 JAVNINGAR Á ÚTJAVNINGARKONTUNI UNDANFARIN ÁR 184
10.3 FYRISITING AV GJALDFØRI OG SKULD (LG 2019/300-0104 OG 0202) **185**
10.3.1 PORTEFØLJUSKIPANIN 185
10.3.2 GJALDFØRIÐ HJÁ LANDINUM 185
10.3.3 LANDSKASSASKULD - BRÆVALÁN 187

11. ORÐALISTI **193**

0. Framløga

Sambært § 12, stk. 2, í grannskoðanarlógini skal roknskapargrannskoðanin innan 8 mánaðir[1] eftir fíggjarárslok lata løgtingsgrannskoðarunum frágreiðing um úrslitið av grannskoðanini. Løgtingsgrannskoðararnir kunnu leingja freistina.

Við hesum letur Landsgrannskoðanin løgtingsgrannskoðarunum ársfrágreiðing sína í sambandi við, at løgtingsgrannskoðararnir skulu leggja landsroknskapin 2019 fyri Løgtingið til samtyktar.

Frágreiðingin er løgd fyri teir landsstýrismenn til viðmerkingar, sum hava umsitið málsøkini. Møguligar viðmerkingar og fráboðanir frá landsstýrismonnunum um tiltøk og ætlanir, frágreiðingin hevur elvt til, eru tiknar við.

Landsgrannskoðanin roknar grannskoðanina av landsroknskapinum 2019 sum lidna. Kortini kann Landsgrannskoðanin seinni fara at kanna mál og spurningar, sum viðvíkja bæði 2019 og eldri árum. Upplýsingar kunnu koma fram, sum elva til, at tey mál, sum eru umrødd í hesari frágreiðing, verða mett og viðgjørd av nýggjum.

Argir, 31. august 2020

Beinta Dam
landsgrannskoðari

[1] Í 2015 var freistin stytt úr 10 mánaðum í 8 mánaðir.

1. Inngangur

1.1 Landsroknskapurin 2019

§ 45, stk. 1, í stýrisskipanarlógini ásetir, at landskassaroknskapurin skal verða lagdur fyri Løgtingið í seinasta lagi seks mánaðir eftir fíggjarárslok. Sambært § 1, stk. 1, í Ll. nr. 33 frá 23. mars 1994 "um landsins almenna roknskaparhald v.m." skal Landsstýrið, innan mai mánaður er liðin, leggja samlaða landsroknskapin fyri undanfarna fíggjarár fyri Løgtingið.[2]

Tað er eisini ásett í § 11, stk. 1, í grannskoðanarlógini, at landsstýrismaðurin í seinasta lagi fimm mánaðir eftir fíggjarárslok skal lata løgtingsgrannskoðarunum og Landsgrannskoðanini tann árliga landsroknskapin fyri undanfarna fíggjarár.

Aðalráð og stovnar skulu leggja fram ein rættan roknskap – gjørdur í Búskaparskipan landsins.

Neyvari reglur um roknskaparhaldið eru ásettar í K. nr. 22 frá 14. mars 2007 "um roknskaparverk landsins o.t."[3] Aðalráðini og teir stovnar, sum hoyra undir aðalráðini, skulu leggja fram ársroknskap, sum er gjørdur í Búskaparskipan landsins, og sum gevur eina rætta mynd av inntøkum og útreiðslum í fíggjarárinum og av ognum og skuld við fíggjarárslok.

Aðalráðini og stovnar teirra skulu eisini støðugt hava tað innanhýsis eftirlit, ið skal til, fyri at ársroknskapur kann verða gjørdur, sum gevur eina rættvísandi mynd uttan stórvegis skeivleikar.

Gjaldstovan setir landsroknskapin upp.

Sambært § 10 í roknskaparkunngerðini verða roknskaparupplýsingar samsvarandi góðkendum ársroknskapum tiknar við í landsroknskapin, sum Gjaldstovan setir upp.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum skal leggja fram samlaðan landsroknskap.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum skal, áðrenn mai mánaður er liðin, leggja fyri Løgtingið samlaða landsroknskapin.

Landsroknskapurin fyri fíggjarárið 2019 var latin Løgtinginum 27. mai 2020.

1.2 Grannskoðan av roknskapinum

Yvirskipaðu reglurnar um grannskoðan av almennum roknskapum eru ásettar í § 45 í stýrisskipanarlógini. Neyvari reglur eru ásettar í Ll. nr. 25 frá 21. apríl 1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m."

Endamálið við grannskoðanini.

Sambært grannskoðanarlógini er endamálið við grannskoðanini at ansa eftir,

- at allar inntøkur landsins eru settar í roknskapin,
- at eingin útreiðsla er goldin uttan við heimild í fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg,

[2] Í 2015 var tíðarfreistin stytt úr 6 mánaðum í 5 mánaðir.
[3] Broytt við K. nr. 110 frá 14. juli 2017.

at roknskapurin er rættur, og at tær avgerðir, roknskapurin fevnir um, eru samsvarandi veittum játtanum, galdandi lógum og fyriskipanum, verandi avtalum og vanligum siði,
at hóskandi er atborið fíggjarliga í sambandi við umsiting av ognum og viðvíkjandi rakstri av teimum stovnum og tí virksemi, roknskapurin fevnir um, og
at roknskapar- og eftirlitsskipanir eru tryggar.

Ábyrgd grannskoðarans.

Landsgrannskoðanin

Landsgrannskoðanin er stovnur undir Løgtinginum og er óheft í virki sínum. Landsgrannskoðanin skal grannskoða árliga landsroknskapin, t.e. samlaða roknskapin fyri landsumsitingina og allar landsstovnarnar.[4]

Grannskoðanin skal fevna um fíggjarliga grannskoðan, løgfrøðiliga-kritiska grannskoðan og fyrisitingargrannskoðan. Harafturat skal grannskoðanin regluliga kanna, um roknskapar- og eftirlitsskipanir eru tryggar.

Landsgrannskoðanin ger sjálv av, hvussu grannskoðanin verður útint. Grannskoðanin verður løgd soleiðis til rættis, at øki og stovnar verða grannskoðað við jøvnum millumbili. Landsgrannskoðanin fer út á stovnar og deildir at kanna t.d. roknskapar- og lønarviðurskifti ella at kanna mannagongdir fyri umsiting av lóggávu og játtanum. Aðrar uppgávur eru t.d. játtanareftirlit, gjøgnumgongd av fíggjarstøðu og avstemman.

Privatir grannskoðarar

Hjá nøkrum landsstovnum og grunnum er tað við lóg, kunngerð ella viðtøkum ásett, at grannskoðanin skal verða útint av løggildum ella skrásettum grannskoðarum. Í øðrum førum verður grannskoðanin útint sambært avtalu ella siðvenju.

Grannskoðararnir lata løgtingsgrannskoðarunum frágreiðingar um úrslitini av grannskoðanunum. Seinnu árini hava løgtingsgrannskoðararnir gjørt ein samandrátt av frágreiðingunum frá privatu grannskoðarunum, sum er latin Løgtinginum saman við uppskoti til samtyktar um góðkenning av landsroknskapinum.

Frágreiðingar umbidnar av løgtingsgrannskoðarunum

Løgtingsgrannskoðararnir kunnu áleggja Landsgrannskoðanini at gera frágreiðingar um viðurskifti, sum teir vilja hava lýst. Løgtingsgrannskoðararnir kunnu eisini áleggja Landsgrannskoðanini at gera víðkaða fyrisitingargrannskoðan á ávísum økjum ella at gera tvørgangandi fyrisitingargrannskoðan, sum fevnir um fleiri játtanir, stovnar o.a.

Dømi um slíka frágreiðing er “frágreiðing um meirnýtsluna av verkætlanini at byggja Skúladepil við Marknagil”, sum Landsgrannskoðanin lat løgtingsgrannskoðarunum í apríl 2019.

Viðmerkingar og fráboðanir frá landsstýrismonnum

Í § 12, stk. 1, í grannskoðanarlógini er ásett, at landsstýrismaðurin skal hava eina skrivliga fráboðan um úrslitið av grannskoðanini. Vanligt er, at stovnsleiðslan frammanundan fær høvi at gera sínar viðmerkingar til frágreiðingina. Tað er fyri at tryggja, at ongar misskiljingar eru, og at tey skriv, sum verða send landsstýrismanninum, eru so røtt sum gjørligt, og at allir partar fáa høvi at lýsa síni sjónarmið.

Landsstýrismaðurin skal hava frágreiðingar til viðmerkingar.

Í § 12, stk. 3, er ásett, at áðrenn frágreiðing um úrslitið av einari grannskoðan verður latin løgtingsgrannskoðarunum, skal hon verða løgd fyri viðkomandi landsstýrismann til viðmerkingar. Møguligar viðmerkingar og fráboðanir frá landsstýrismanninum um tiltøk og ætlanir, sum frágreiðingin hevur elvt til, skulu takast við í frágreiðingina til løgtingsgrannskoðararnar.

[4] Tó ikki roknskapirnar hjá teimum, har tað í lóg, kunngerð, viðtøkum, siðvenju e.l. er ásett, at grannskoðanin verður útint av løggildum ella skrásettum grannskoðarum.

Frágreiðingin skal sendast landsstýrismanninum til viðmerkingar til tess at tryggja, at tað tilfar, sum verður latið løgtingsgrannskoðarunum, verður so objektivt rætt sum gjørligt, og at landsstýrismaðurin eisini fær høvi at lýsa síni sjónarmið.

Stuðul frá Norðurlendska Ráðharraráðnum (LG 2019/409-0005)
Hvørt ár sendir danska ríkisgrannskoðanin eitt yvirlit yvir stovnar og verkætlanir í Føroyum, sum hava fingið stuðul frá Norðurlendska Ráðharraráðnum. Talan er um norðurlendskar stovnar í Føroyum, so sum Norðurlandahúsið og Norrønt Atlantssamstarv (NORA). Eisini stuðlar Ráðharraráðið fleiri prosjektum í Føroyum, t.d. tænastumannaumbýti.

Landsgrannskoðanin ger ein samandrátt av árligu grannskoðanini av norðurlendsku stovnunum, og hyggur eftir, um roknskapur ella váttan fyriliggur fyri prosjektini. Samandrátturin verður sendur donsku ríkisgrannskoðanini, sum hevur ábyrgd av at grannskoða Norðurlendska Ráðharraráðið og Norðurlandaráðið. Samandrátturin er partur av samlaða roknskapinum hjá Norðurlendska Ráðharraráðnum og Norðurlandaráðnum.

Millumlanda samstørv
Landsgrannskoðanin er við í norðurlendskum samstarvi ímillum ríkisgrannskoðanirnar í Danmark, Finnlandi, Íslandi, Norra, Svøríki og Føroyum. Landsgrannskoðanin er eisini við í norðuratlantiskum samstarvi ímillum grannskoðanirnar í Íslandi, Grønlandi og Føroyum.

Sum skrivari hjá løgtingsgrannskoðarunum, er landsgrannskoðarin við á fundum ímillum skrivararnar hjá parlamentarisku grannskoðarunum í Norðurlondum.

Landsgrannskoðanin hevur umboð í grannskoðaranevndini, ið grannskoðar ES-stuðul frá Northern Periphery and Arctic Programme.

2. Løgmansfyrisitingin

2.1 Umbygging í Tinganesi (LG 2019/202-0111)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað høvuðskontu 2.11.1.21 "Umbygging í Tinganesi". Landsverk stendur fyri umbyggingini, og hevur ræðisrættin á játtanini.

Roknskaparviðurskifti o.a.
Vit kannaðu m.a. um uppgávurnar at umbyggja hølini og at lata innbúgv eru bodnar út alment, ella um fleiri eru biðin um at geva tilboð. Eisini kannaðu vit, um innbúgv o.a., sum er keypt, er til staðar.

Verkætlanarleiðarin hevur undirskrivað sáttmálarnar um arbeiðstøkur, tó at roknskaparreglugerðin hjá Landsverki ásetir, at stjórin skal undirskriva sáttmálar yvir 300 t.kr., og deildarleiðari skal undirskriva sáttmálar ímillum 100 og 300 t.kr.

Roknskapartøl 2015 til 2019:

t.kr.

Heiti	2015	2016	2017	2018	2019
Ógreinað	0	0	0	10	0
Handverkaraútr.	1.609	640	3.608	1.948	258
Projekteringsútr. ext	205	53	244	79	70
Eftirlit og byggileiðsla ext	14	37	0	0	0
Verkætlanarleiðsla	132	105	118	60	129
Útgerð og tól	0	0	0	602	-19
Málásettar útr.	28	102	22	0	0
Tilsamans	**1.989**	**937**	**3.992**	**2.699**	**438**

Landsverk hevur gjørt avtalur við nakrar handverkarafyritøkur um tímaprís á 350 kr. umframt MVG. Fyri fleiri av størru arbeiðstøkunum er eingin skrivlig avtala.

Løgmansskrivstovan hevur kunnað um, at tey hava tikið spurningin upp við Landsverk, sum viðurkennir, at tað er ikki nøktandi, og at Landsverk sigur seg vilja tryggja, at allar avtalur verða skjalfestar í framtíðini.

Allar avtalur um arbeiðstøkur skulu vera skrivliga skjalfestar.

Landsverk hevur ikki skrivliga avtalu við Løgmansskrivstovuna, hvussu avrokningin ímillum Landsverk og løgujáttanina skal gerast.

Innbúgv
Landsverk hevur keypt størsta partin av innbúnum frá *einari* fyritøku, uttan at tað er boðið út. Landsverk váttar og leysgevur rokningarnar; hvørki Landsverk ella Løgmansskrivstovan hava kannað, um vørurnar eru latnar.

Landsgrannskoðanin kannaði, um innbúgvið, ið er keypt í 2017 og 2018, var til staðar. Vit staðfestu saman við Løgmansskrivstovuni, at eitt borð, ein stólur og ein sofa fyri tilsamans 34 t.kr. vóru ikki at finna. Niðurstøðan var, at vørurnar ongantíð vóru móttiknar.

Keyptar og goldnar vørur ikki móttiknar.

Landsverk hevur verið í sambandi við veitaran og fingið kreditnotu upp á innbúgvið, sum vantaði, og upphæddin er inntøkuførd í 2019.

Í desember 2019 hevur Løgmansskrivstovan greitt frá, at sum eina eyka trygd hevur hon gjørt eina nýggja mannagongd viðvíkjandi góðkenning av rokningum fyri "leysar" lutir so sum møblar. Húsavørður í Tinganesi skal nú eftirkanna, at vøran er móttikin fyri síðani at góðkenna samsvarandi rokning. Løgmansskrivstovan væntar, at tað minkar um vandan fyri at samsvar ikki er millum vørur, avtalur og rokningar.

Eitt mál hevur verið ímillum Landsverk og eina fyritøku, ið legði nýtt teppi á í Tinganesi í 2014 fyri slakar 200 t.kr. Sambært Løgmansskrivstovuni vísti tað seg eftir stutta tíð, at arbeiðið var ikki nøktandi, og drúgv togtogan hevur verið ímillum Landsverk og veitaran. Niðurstøðan er, at Landsverk skiftir teppið, og krevur veitaran eftir endurgjaldi.

Sambært Løgmansskrivstovuni er trupult at meta um, um tað eydnast Landsverki at krevja pengarnar inn.

Tíðaravmarkingar

Skeivar tíðar-avmarkingar geva skeivan roknskap.

Roknskapirnir fyri 2018 og 2019 eru ikki rættir, tí góðar 120 t.kr., sum hoyra til 2018 eru bókaðar í 2019. Eisini er ógreitt, nær innbúgv fyri 357 t.kr., sum er faktureræð í 2017 og bókað í 2018, er latið.

Løgmansskrivstovan hevur greitt frá, at sambært Landsverki fer stovnurin at fáa viðurskiftini í rættlag, við at nýta fíggjarstýringsskjalið, sum var ment í 2019.

Aðrar viðmerkingar

Løgmansskrivstovan hevur greitt frá, at hon fylgir við tilgongdini hjá Fíggjarmálaráðnum viðvíkjandi nýskipan av Landsverki. Tá ið tað arbeiðið er liðugt, fer Løgmansskrivstovan at meta, um neyðugt er at gera broytingar í mannagongdunum, sum tey fylgja, tá ið tey brúka Landsverk sum byggiharra og lata stovninum ræðisrætt yvir kontuni, sum eitt nú við Umbyggingini í Tinganesi.

2.2 Løgmaður og landsstýrið (LG 2019/202-0123)

Í Ll. nr. 10/1993 "um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m." eru ásetingar um løn, bústað og kostnaðarendurgjald til løgmann og landsstýrismenn. Løgmaður fær 130%, og landsstýrismenn 110% av mánaðarligu samsýningini sambært 40. lønarflokki í lønartalvuni fyri Felag Tænastumanna Landsins.

Hevur løgmaður fastan bústað uttan fyri høvuðsstaðarøkið, kann hann flyta til høvuðsstaðin í ein bústað, sum landið rindar. Hevur landsstýrismaður fastan bústað, har tað ikki er landfast, ella gera serlig viðurskifti seg galdandi, kann løgmaður játta endurgjald fyri útreiðslur til bústað í høvuðsstaðnum. Fyri hvønn landsstýrismann kann í mesta lagi verða endurgoldið upp til 10.000 kr. um mánaðin fyri húsaleigu, el og hita.

Løgmaður og landsstýrismenn fáa kostnaðarendurgjald fyri flutningskostnað við egnum bili við Strandfaraskipum Landsins 200 ferðir aftur og fram árliga, og koyripening og tunnilsgjald millum heimstað og Tórshavn 200 ferðir aftur og fram árliga. Landsstýrismenn úr Tórshavn, Hoyvík, av Argjum og Hvítanesi fáa ikki kostnaðarendurgjald.

Landið rindar upp í 15% av lønarsamsýningini afturat í eftirløn í eina eftirlønarskipan, sum er góðkend av landsstýrinum. Eftirlønarprosentið verður ásett í mun til, hvussu leingi landsstýrismaður hevur virkað eftir gomlu skipanini, og hvussu leingi hann hevur

sitið á Tingi. Landsstýrismenn, ið høvdu rætt til eftirløn, áðrenn nýggju lógarbroytingina, fáa eftirløn sambært lóg um tænastumannaeftirlønir. Bæði løgmans-, landsstýrismanna- og bíðiløn verða goldnar forút.

Roknskaparviðurskifti o.a.

Vit kannaðu lønir og kostnaðarendurgjøld, sum eru goldin út í oktober 2018 og oktober 2019.

Roknskapartøl fyri høvuðskontu 2.12.3.01 "Løgmaður og landsstýrið":

t.kr.

	2015	2016	2017	2018	2019
Lønir	7.036	8.346	7.694	7.908	9.584
Keyp av vørum og tænastum	10	0	0	0	0
Ymsar rakstrarútreiðslur	722	30	30	27	18
Tilsamans	**7.768**	**8.376**	**7.724**	**7.935**	**9.602**

Samsýningar til løgmann og landsstýrismenn oktober 2019:

t.kr.

	Samsýning	Arb.gj.	Kostn.-endurgj.	Eftirlønargj. arbeiðsg.	Tilsamans
Bárður á Steig Nielsen	84.705	4.491	4.094	[5]	93.290
Elsebeth M. Gunnleygsdóttir	71.674	4.049	8.367	5.734	89.824
Helgi Abrahamsen	71.674	3.970	6.825	5.734	88.202
Jacob Vestergaard	71.674	3.867	4.783		80.324
Jenis K. av Rana	71.674	3.625	0		75.299
Jørgen Niclasen	71.674	3.907	5.566		81.147
Kaj Leo H. Johannesen	71.674	3.625	0		75.299
Tilsamans					**583.385**

Fer landsstýrismaður frá, fær hann samsýning eftir, hvussu leingi hann hevur sitið. Hevur hann sitið styttri enn eitt ár, fær hann samsýning í 3 mánaðir, og hevur hann sitið longri enn eitt ár, fær hann samsýning í 6 mánaðir.

Løgtingsmannaløn verður mótroknað í fráfaringarløn.

Fær landsstýrismaður samsýning ella bíðipening sum løgtingsmaður, verður tann inntøkan mótroknað krónu fyri krónu í fráfaringarlønini. Eftirløn og kostnaðarendurgjald verður ikki rindað afturat bíðiløninni. Samsýningin hjá løgtingsfólkum var 40.459,50 kr. í oktober 2019.

Bíðiløn til fráfarna løgmann og landsstýrisfólk, oktober 2019:

t.kr.

	Landsstýris-mannaløn	Løgtingsm.løn mótroknað	Arb.gj.	Munur at rinda
Aksel V. Johannesen	84.705	40.459	2.131	42.590
Eyðgunn J. Samuelsen	71.674		3.452	75.126
Hanna Jensen	71.674		3.452	75.126
Heðin Mortensen	71.674	40.459	1.578	42.038
Høgni K. Hoydal	71.674	40.459	1.578	42.038
Kristina Háfoss	71.674	31.214	1.502	32.716
Poul J. S. Michelsen	71.674	31.214	1.578	32.792
Sirið S. Stenberg	71.674	31.214	1.502	32.716
Tilsamans				**375.142**

Endurgjøld fyri ferðaútreiðslur

Í oktober 2019 høvdu tveir landsstýrismenn rætt til kostnaðarendurgjald sambært § 1, stk. 4, í Ll. nr. 10/1993. Frá mai 2015 hava teir fingið ein part av kostnaðarendurgjaldinum sum skattafrían ferðastuðul, og restina sum kostnaðarendurgjald, ið er

[5] Bárður á Steig Nielsen, Jacob Vestergaard, Jenis av Rana, Jørgen Niclasen og Kaj Leo H. Johannesen hava vunnið rætt til fulla tænastumannapensjón.

skattað. Ferðastuðulin og kostnaðarendurgjaldið eru avgreidd eftir útrokning í rundskrivi frá 2007 “um endurgjald fyri nýtslu av egnum bili í tænastuørindum”.

Fíggjarmálaráðið hevur víst á, at samsýningarnar eru skattskyldugar, tí talan er um árligan ferðapening og ikki um endurgjøld í sambandi við ávísar tænastuferðir.

Tá ið Løgmansskrivstovan avgreiddi kostnaðarendurgjaldið, mótroknaði hon upphædd, ið svarar til árligan ferðastuðul, sum løntakarar vanliga fáa fyri at ferðast ímillum heim og arbeiðsstað dagliga. Býtið ímillum skattafría og skattskylduga kostnaðarendurgjaldið tí til landsstýrismann, búsitandi í Klaksvík, er eftir tí:

- Ferðastuðul: 11.480 kr. um árið = 956,67 kr. um mánaðin.
- Skattað kostnaðarendurgjald: 106.410 kr. um árið. (106.410 – 11.480)/12 = 7.910,83 kr. um mánaðin.

og til landsstýrismann, búsitandi í Suðuroynni:

- Ferðastuðul: 9.360 kr. um árið = 780 kr. um mánaðin.
- Skattað kostnaðarendurgjald: 65.518 kr. um árið. (65.518 – 9.360)/12 = 4.679,83 kr. um mánaðin.

Sambært Løgmansskrivstovuni var tað ein feilur, at alt kostnaðarendurgjaldið ikki varð skattað.

Í februar 2020 hevur Løgmansskrivstovan kunnað um, at hon hevur gjørt eina innanhýsis frágreiðing um alla gongdina síðani 2014, har tann, ið hevði samskiftið við Fíggjarmálaráðið og TAKS í 2014 og 2015, og tann, sum avgreiddi lønirnar í 2019, hava skrivað hvør sín part.

Løgmansskrivstovan gjørdi í desember 2019 av at senda málið til TAKS at avgreiða við yvirliti yvir upphæddirnar, sum eru útgoldnar skattafrítt. Samanlagt eru upphæddirnar:

kr.

	2015	2016	2017	2018	2019	Tilsamans
Sirið Stenberg	3.120	9.360	9.360	9.360	6.240	37.440
Henrik Old	3.120	9.360	9.360	9.360		31.200
Eyðgunn Samuelsen	3.827	11.480	11.480	11.480	8.187	46.454
Hanna Jensen					3.908	3.908
Tilsamans	**10.067**	**30.200**	**30.200**	**30.200**	**18.335**	**119.002**

Kostnaðarendurgjøld hjá landsstýrismonnum eru skattskyldug.

Frá september 2019 eru øll kostnaðarendurgjøldini útgoldin sum skattskyldugar veitingar.

Fylgja av lógarbroytingunum í 2015

Landsstýrismenninir og løgmaður, ið tóku við 15. september 2015, fingu løn frá 1. oktober 2015, tí valdi Løgmansskrivstovan at lata lønina hjá fráfarandi landsstýri ganga mánaðin út, tá ið teir fóru frá í september 2019.

Sambært Løgmansskrivstovuni var tað ikki rætt, tí í nýggju lógini[6] stendur einki um, nær lønin skal byrja. Løgmansskrivstovan heldur tí, at landsstýrismenninir skulu hava løn frá tí degi, teir taka við starvinum til tann dagin, teir fara frá.

Landsstýrismenninir, ið tóku við 16. september 2019, fingu hálva mánaðarløn fyri september.

[6] Áðrenn lógin um samsýning og eftirløn landsstýrismanna varð broytt í 2015, var ásett í § 7, at: *“Samsýningar og kostnaðarendurgjaldið verða útgoldin við 1/12 um mánaðin frammanundan frá 1. degi í mánaðinum aftaná, at landsstýrismaður hevur tikið við starvinum, til tann mánaðurin er úti, hann fer frá.”* Í broytingini 2015 varð § 7 strikað.

Spurd, um tey hava skrivligar mannagongdir fyri, nær lønin hjá landsstýrismonnunum byrjar og endar, hevur Løgmansskrivstovan svarað, at tey halda, at mannagongdin er nøktandi skjalfest í journalini hjá Løgmansskrivstovuni og í Lønarportalinum hjá Gjaldstovuni.

2.3 Føroya Kærustovnur (LG 2019/202-0141)

Í 2019 kannaðu vit peningastovnskontuna og keyp við gjaldkorti. Vit høvdu nøkur tilmæli, sum Kærustovnurin hevur boðað frá, at hann tekur til eftirtektar.

Samanumtikið mælti Landsgrannskoðanin m.a. til, at Kærustovnurin ansar eftir:

- at rokningar verða sendar stovninum talgilt,
- at inngjøld ikki eru á peningastovnskontuna, men verða send Gjaldstovuni,
- at farið verður ikki upp um hámarkið,
- at peningastovnskontan ikki kemur í trot, so at trotarenta verður roknað, og
- at skjøl fyri hvørja einstaka bóking altíð eru við uppgerðini av peningastovnskontuni.

2.4 Dátueftirlitið (LG 2017/202-0142)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Dátueftirlitinum.

KT-viðurskifti
Landsgrannskoðanin mælti til at gera mannagongdir, ið tryggja, at váðameting og KT trygdarpolitikkur verða integreraðir partar av innaneftirlitinum.

Eitt grannskoðaravirki gjørdi eina váðameting fyri Dátueftirlitið í 2009. Sama ár gjørdi stovnurin eina trygdarhandbók, sum umrøður elektroniska, fysiska og fyriskipanarliga trygd og KT trygdarpolitikk.

Í 2009 gjørdi Dátueftirlitið skrivliga útveitingar- og trygdaravtalu við P/f Elektron, har m.a. er ásett, at trygdarábyrgdarhavandi hjá báðum pørtum gjøgnumganga avtaluna regluliga og í minsta lagi eina ferð um árið. Sambært § 5 í trygdarkunngerðini kann Dátueftirlitið krevja trygdarskoðan av nýtsluni av upplýsingakervinum.

Spurt, um avtalan varð gjøgnumgingin árliga, og um Dátueftirlitið hevði umhugsað eina trygdarskoðan av upplýsingakervinum, svaraði Dátueftirlitið, at stovnurin fær ISAE 3402 váttan frá veitaranum árliga, og at stjórin sá tað sum eina regluliga trygdarskoðan, ið gav betri vernd enn vanlig endurskoðan av avtaluni.

Landsgrannskoðanin ivaðist í, um ISAE 3402 váttan frá veitaranum kundi koma ístaðin fyri gjøgnumgongd av avtaluni ímillum Elektron og Dátueftirlitið. Sambært Dátueftirlitinum høvdu tey somu skjøl um útveiting av KT, trygdarpolitikki, váðameting o.ø., sum stovnurin hevði í 2009. Stovnurin vísti á, at ongar broytingar ella hendingar høvdu verið, sum áttu at havt elvt til aðra fyriskipan enn hana, Dátueftirlitið hevði.

Landsgrannskoðanin var ikki samd við Dátueftirlitið, vísandi til at stovnurin hevði fingið nýggja skjalaskrá í 2013, umframt at bøtt var um fysisku trygdina við royk- og eldvarnarum. Stovnurin átti at tikið støðu til váðamyndina av nýggjum tá.

Nýggj váðameting átti at verið gjørd.

Í juni 2019 kunnaði Løgmansskrivstovan um, at váðameting var gjørd, og at váðagreining og KT-trygdarpolitikkur fóru at verða integreraðir partar av innaneftirlitinum.

Dátueftirlitið hevði bíðað við at skifta KT-útbúnaðin út og at dagføra netið og skipanina, tí eingin tænasta varð veitt til verandi útbúnað eftir 2020, og stovnurin arbeiddi við at endurskoða KT-viðurskiftini.

Dátueftirlitið greiddi í mai 2019 frá, at trygdarskjøl, váttanir og KT-trygdarpolitikkur vóru nútímansgjørd og avgreidd, men at enn manglaði at avgreiða eina trygdarskoðan, sum var gjørd, men sum Dátueftirlitið skuldi venda aftur við.

Trygdarskoðan enn ikki gjørd.

Í august 2020 hevur Løgmansskrivstovan kunnað um, at sambært Dátueftirlitinum er trygdarskoðanin framvegis ikki gjørd. Dátueftirlitið hevur í hesum sambandi verið í drúgvum samskifti við Elektron og Formula. Partarnir eru ikki samdir um, hvørjar leiklutir teir hava, eitt nú dátuábyrgdari og dátuviðgeri. Løgmansskrivstovan fer at fylgja tí upp í september (2020).

Lønir

Landsgrannskoðanin mælti til hóskandi skráseting av arbeiðstíð fyri at tryggja, at lønarútgjaldingarnar eru rættar. Sambært stjóranum var skrásetingin hóskandi, tí stovnurin er so lítil, at formlig skráseting av arbeiðstíð er ikki skynsom. Dátueftirlitið skrásetti frítíð og sjúkrafráveru hjá starvsfólkunum eina ferð um árið.

Dátueftirlitið er farið at skráseta arbeiðstíðir.

Í august 2020 hevur Løgmansskrivstovan greitt frá, at Dátueftirlitið er farið at skráseta arbeiðstíðir manuelt og at gjøgnumganga tær mánaðarliga, tí at starvsfólkini ikki longur hava somu arbeiðstíðir. Dátueftirlitið heldur, at skipanin virkar nøktandi. Løgmansskrivstovan tekur undir við, at tað er nøktandi skráseting av arbeiðstíð.

3. Fíggjarmál

3.1 Landsroknskapurin ikki fullfíggjaður (LG 2014/100-0001)

Í 2013 setti Fíggjarmálaráðið í gildi K. nr. 95/2013 "um at lata inn roknskapar-upplýsingar um alment virksemi til búskaparliga ráðlegging, stýring og eftirlit". Endamálið við kunngerðini var at fáa til vega upplýsingar um alment virksemi, sum ikki er við í fíggjarlógini, men er fevnt av almennu roknskaparlógini.

Landsroknskapurin fevnir um næstan allar landsstovnar og alment virksemi, sum landið varðar av. Somuleiðis er við gjaldføri o.ø. hjá landinum.

Dømi um almennar stovnar og virksemi, sum ikki eru við í landsroknskapinum, eru Føroya Realkreditstovnur og Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin, sum hava einar 2 mia.kr. í eginogn.

Í svari til løgmann í sambandi við Lm. nr. 37/2016 kunnaði landsstýrismaðurin um, at tað "*framhaldandi og áhaldandi verður arbeitt fram ímóti einum fullfíggjaðum landsroknskapi. Arbeiðið fer sostatt fram í stigum. Bústaðir og Búnaðargrunnurin eru aftur tiknir við í landsroknskapin fyri 2016. Arbeitt verður við nýggjum lógaruppskoti fyri Realin, har støða eisini verður tikin til tilknýti til landsroknskapin.*"

Grunnarnir eru tiknir við sum notur til landsroknskapin undir partinum "Eksternir grunnar". Ætlanin var, at eginpeningurin í Bústøðum, Búnaðargrunninum, Granskingargrunninum, Mentanargrunninum og Vinnuframa í framtíðini verður tikin við í landsroknskapinum undir "Innistandandi í landsfyritøkum, grunnum o.t." Sambært landsstýrismanninum var eftir at fáa greiðu á, hvussu Arbeiðsloysisskipanin, Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin, Framtaksgrunnurin og Realurin kundu verða tikin við í landsroknskapin.

Alsamt meira virksemi verður lagt í t.d. partafeløg.

Seinastu árini er alsamt meira virksemi hjá landinum lagt í virkiseindir, sum eru skildar frá landsfyrisitingini, t.d. í partafeløg. Flestu almennu reglur og fyriskipanir galda ikki almennu partafeløgini. Feløgini eru heldur ikki partur av fíggjarlóg ella roknskapum, sum verða lagdir fyri Løgtingið. Vit kunnu tí siga, at landsroknskapurin í minni mun avspeglar veruliga virksemið, váðar o.a. hjá landinum, umframt at tílíkt virksemi í stóran mun ikki skal fylgja øðrum almennum reglum.

Í 2016 segði Fíggjarmálaráðið seg vera samt við Landsgrannskoðanina um vandan, ið kann standast av, at ov nógv virksemi verður lagt í almenn partafeløg uttan fyri fíggjarlóg, har ikki sama gjøgnumskygni, almenn stýring og almennar reglur eru galdandi.

Í 2018 kunnaði landsstýrismaðurin um, at mánaðarliga innlatingin av roknskapartølum frá Búnaðargrunninum og Húsalánsgrunninum (Bústaðir) var komin í rættlag.

Fíggjarmálaráðið arbeiddi fram ímóti, at eginpeningurin í eksternu grunnunum fór at verða tikin við í landsroknskapin fyri 2017 undir "Innistandandi í landsfyritøkum,

grunnum o.t." Arbeitt varð við nýggjum lógaruppskoti fyri Realin, har støða eisini fór at verða tikin til tilknýtið til landsroknskapin.

Arbeitt verður framhaldandi ímóti einum fullfíggjaður landsroknskapi.

Landsstýrismaðurin greiddi í 2018 og aftur í 2019 frá, at tað var framhaldandi arbeitt fram ímóti einum fullfíggjaðum landsroknskapi. Arbeiðið fór fram í stigum. Í 2018 var miðað ímóti, at í landsroknskapinum fyri 2018 skuldi eginpeningurin í eksternu grunnunum takast við undir "Innistandandi í landsfyritøkum, grunnum o.t." Í 2019 greiddi landsstýrismaðurin frá, at tað verður ikki gjørt kortini.

Í august 2019 kunnaði landsstýrismaðurin um, at nýggja lógaruppskotið fyri Realin var sent til hoyringar í apríl 2019. Í uppskotinum var ásett, at Realurin verður skrásettur í landsroknskapinum, men verður ikki tikin við í fíggjarlógini. Tað eydnaðist ikki at fáa uppskotið fyri Løgtingið, áðrenn Løgtingið fór heim í mai.

Í august 2020 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at arbeitt verður framvegis við nýggjum lógaruppskoti fyri Realin. Lógaruppskotið er sett á løglista, sum var latin Løgtinginum saman við løgmansrøðuni í ár, og verður tískil ætlandi lagt fyri Løgtingið í hesari tingsetuni.

3.2 Veðhalds- og eftirlønarskyldur (LG 2019/203-0151)

Eftirlønarskyldur landskassans[7]

Tænastumannaeftirlønarskyldurnar eru 5,7 mia.kr.

Gjaldstovan hevur seinastu árini skrásett allar tænastumannaeftirlønarskyldurnar, og fekk fyri nøkrum árum síðani ein aktuar at meta um, hvat tað hevði kostað, hevði landið keypt seg leyst frá skyldunum. Skyldan hjá landskassanum verður roknað av nýggjum 3. hvørt ár. Sambært landsroknskapinum 2019 er samlaða eftirlønarskyldan hjá landskassanum 5.670 mió.kr.

Veðhaldsskylda vegna tryggingaravtalur hjá Føroya Lívstrygging

Sambært § 3 í Ll. nr. 105/1999 "um umskipan av Føroya Lívstrygging" er landskassaábyrgdin framvegis galdandi fyri tær tryggingaravtalur, sum Føroya Lívstrygging hevði, tá ið lógin kom í gildi. Roknskaparreglurnar vórðu broyttar við virknaði fyri roknskaparárið 2012, so heimild ikki longur er at innrokna landskassaveðhaldið í roknskapin. Avleiðingin av tí var, at eginognin hjá P/f LÍV lívs- og pensjónstryggingarfelag, hvørs skyldur landskassin veðheldur fyri, gjørdist negativ.

Sambært ársfrásøgnini fyri 2019 er eginognin negativ við 1.321 mió.kr. Roknaðu skyldurnar eru umleið 3.355 mió.kr., og íløguognirnar eru 2.017 mió.kr.

Landsstýrismaðurin hevur heimild at rinda til LÍV, tá ið felagnum tørvar pening at halda tryggingaravtalur.

Sambært § 3, stk. 2, í Ll. nr. 53/2015 hevur landsstýrismaðurin heimild til at rinda til felagið, tá ið felagnum tørvar pening at halda verandi tryggingaravtalur.

Veðhaldsskylda vegna P/f Eystur- og Sandoyartunlar

Partafelagið Eystur- og Sandoyartunlar hevur tikið 2,7 mia.kr. í láni[8]. Lánið verður fast rentað við 2,73% fram til 2040, tá ið lánið skal verða goldið aftur. Pr. 31. desember 2019 var tunnilsverkætlanin gjørd upp til 1.849 mió.kr. Av hesum var tilgongdin í 2019 609 mió.kr.

Sambært § 5 í Ll. nr. 30/2014 setir landið 400 mió.kr. í partapeningi í felagið tíðarskeiðið fram til 2024. Til og við 2019 eru 140 mió.kr. goldnar felagnum.

Landsstýrismaðurin kann hækka partapeningin ella veita trygd fyri minstuferðslu.

Sambært lógini hevur landsstýrismaðurin heimild at hækka partapeningin ella at veita felagnum trygd fyri minstuferðslu í Eysturoyartunlinum og Sandoyartunlinum. Felagið kann tiltransportera hesa játtan og trygd fyri minstuferðslu sum trygd í sambandi við

[7] Kelda: s. 230 í Landsroknskapinum 2019.
[8] Kelda: s. 231 í Landsroknskapinum 2019.

fígging av verkætlanum felagsins. Harafturat kann felagið tiltransportera í mesta lagi 10 mió.kr. um árið í møguligum rakstrarstuðli, sum landsstýrismaðurin eftir umsókn kann veita felagnum, tá ið Sandoyartunnilin er tikin í nýtslu.

3.3 Eftirlønir hjá fólkaskúlalærarum (LG 2019/203-0181)

Endurrindan frá statinum 2019

Undir hesa skipan koma tænastumenn, sum hava verið settir í føroyska skúlaverkinum, og tey, sum hava verið sett við eftirlønarrætti sum tænastumenn í fólkaskúlanum. Eftirlønirnar verða veittar eftir somu reglum sum hjá teimum, ið fáa tænastumannaeftirløn.

Ll. nr. 32/1971 "um tænastumannaeftirlønir" er galdandi fyri tænastumenn, sum eru eftirløntir eftir 30. juni 1997. Teir, sum eru eftirløntir fyri 30. juni 1997, eru eftirløntir eftir danskari lóg.

Danski staturin endurrindar 80%.

Staturin endurrindar 80% av útreiðslunum til tænastumenn v.fl. í fólkaskúlanum, sum eru farnir frá áðrenn 1. januar 1988, herundir eftirsitandi, sum hava rætt til eftirlønina. Harafturat endurrindar staturin 80% av tí parti av eftirlønunum, sum rættur var vunnin til inntil 31. desember 1987.

Gjaldstovan sendir Moderniseringsstyrelsen krav um endurgjald fyri læraraeftirlønir eina ferð um mánaðin. Eina ferð um árið ger Gjaldstovan upp, hvat staturin skal endurrinda. Í uppgerðini fyri 2019 eru upphæddirnar:

kr.

Ár	Endurgjaldskrav frá Gjaldstovuni	Endurgjaldskrav smb. eftirlønarlistunum	Munur
2019	29.905.991	29.931.208	25.217

Við støði í lógum, avtalum og grannskoðanarleiðbeining kannaðu vit nøkur eftirlønarmál, um:

- eftirlønarmóttakararnir á teimum báðum yvirlitunum uppfylla ásetingarnar,
- útgoldnu eftirlønarupphæddirnar geva rætt til endurgjald, og um
- endurgjaldskrøvini eru rætt roknað.

Niðurstøðan er, at eftirlønarmóttakararnir høvdu rætt til eftirløn, og at landsstýrið hevði rætt til endurgjald frá statinum fyri útgoldnu eftirlønarupphæddirnar.

3.4 Dagføring av roknskaparrundskrivi (LG 2016/203-0151)

Roknskaparreglugerðin frá 2001 er ikki dagførd.

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Gjaldstovuni og KT Landsins. Í sambandi við grannskoðanina umrøddu vit, at roknskaparreglugerðin, sum var góðkend av Fíggjarmálaráðnum í 2001, ikki var dagførd. Gjaldstovan hevði gjørt uppskot til nýggja roknskaparreglugerð eftir nýggjum leisti, sum stovnurin sjálvur hevði gjørt, og sum eftir ætlan skuldi gerast til eitt roknskaparrundskriv fyri landsumsitingina.

Í august 2017 segði Fíggjarmálaráðið, at ráðið fór at gjøgnumganga uppskotið til dagført roknskaparrundskriv og uppskotið til dagførda roknskaparreglugerð saman við Gjaldstovuni, soleiðis at tey kundu verða sett í gildi og góðkend á heysti 2017.

Roknskaparundskrivið ikki dagført.

Í juli 2019 kunnaði landsstýrismaðurin um, at arbeiðið hjá Gjaldstovuni og Fíggjarmálaráðnum at gera eitt dagført roknskaparrundskriv var komið so mikið áleiðis, at tað væntandi kundi verða lýst tíðliga á heysti 2019.

Í august 2020 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at *"tá ið nýtt landsstýri varð skipað, vórðu fleiri málsøki løgd afturat Fíggjarmálaráðnum at umsita. Í sama tíðarskeiði hevur útskifting verið í starvsfólkahópinum* [hjá Fíggjarmálaráðnum]*, umframt at Korona-farsóttin síðani í vár hevur órógvað vanligu arbeiðsgongdirnar. Tí hevur minni arbeiðsorka verið til arbeiðsuppgávurnar, herundir roknskapar- og grannskoðanar-viðurskifti. Arbeiðið verður nú aftur raðfest."*

3.5 Kervisgrannskoðan (LG 2019/203-0151)

Kervisgrannskoðari grannskoðar hvørt ár skipanir og kervi hjá TAKS, Gjaldstovuni, KT Landsins og ávísum veitarum hjá KT Landsins. Um viðurskifti eru, sum ikki eru nøktandi, gevur kervisgrannskoðarin ítøkilig tilmæli. Tilmælini verða raðfest soleiðis:

- Høg: týðandi veikleiki, sum eigur at fáast í rættlag sum skjótast,
- Miðal: týðandi veikleiki, sum eigur at fáast í rættlag innan 6 mánaðir, og
- Lág: týðandi veikleiki, sum eigur at fáast í rættlag innan 12 mánaðir.

3.5.1 Kervisgrannskoðan hjá TAKS

Grundarlagið undir samstarvinum millum TAKS og P/f Elektron hevur í mong ár verið ein sáttmáli frá juni 1999, við seinni rættingum og uppískoytum. Í desember 2017 var nýggjur sáttmáli um rakstur, menning og viðlíkahald (SLA) gjørdur, sum byggir á ISO 27001 standardin frá 2013, eins og krøvini til trygdarviðurskiftini eru útgreinað á nøktandi hátt.

Frágreiðingar um kervisgrannskoðan

TAKS hevur útflýggjað Landsgrannskoðanini avrit av trimum frágreiðingum fyri 2019, t.e.

- Ársfrágreiðing frá kervisgrannskoðan, kervisgrannskoðanararbeiðið fyri TAKS í 2019,
- Frágreiðing 2019, grannskoðan av almennum KT-eftirlitsskipanum á Elektron fyri TAKS, og
- ISAE 3402 váttan um almennar KT-eftirlitsskipanir hjá P/f Elektron fyri 1. januar 2019 til 31. desember 2019 í mun til SLA avtalu við TAKS.

Við árslok 2019 hevði kervisgrannskoðanin 2 óloyst tilmæli; bæði høvdu miðal raðfesting. Talvan niðanfyri vísir gongdina í óavgreiddum tilmælum árini 2015 til 2019:

Óavgreidd tilmæli við árslok	2015	2016	2017	2018	2019
Høg raðfesting	0	0	0	0	0
Miðal raðfesting	6	5	6	2	2
Lág raðfesting	1	1	4	4	0
Tilsamans	**7**	**6**	**10**	**6**	**2**
Av hesum eldri enn eitt ár	1	6	5	6	1

Tænastusáttmálin sum heild nøktandi, og fylgdur á trygdar-góðan hátt.

Niðurstøðan hjá kervisgrannskoðaranum er, at tænastusáttmálin sum heild er nøktandi, og at Elektron fylgir honum á trygdargóðan hátt. Einstakir veikleikar av týdningi eru kortini staðfestir, meðan ein røð av áður staðfestum veikleikum eru betraðir í árinum.

Av týðandi betringum í árinum kunnu nevnast, at týðandi skipanir hjá TAKS nú eru skjalfestar, og harvið eru fýra tilmæli lokað, sum hava verið opin í mong ár.

Við ársbyrjan vóru seks tilmæli opin; tvey miðal raðfest og fýra lágt raðfest. Fimm av hesum eru lokað í árinum, eftir at Elektron hevur bøtt um viðurskiftini. Umframt hesi viðurskiftini eru tríggir nýggir veikleikar staðfestir, sum hava givið orsøk til nýggj tilmæli,

ið eru miðal raðfest. Av teimum tilmælunum eru tvey loyst fyri árslok, eftir at Elektron hevur bøtt um viðurskiftini.

Kervisgrannskoðarin sigur eisini, at sum heild er niðurstøðan, at eftirlits- og trygdarstigið kring skipanir og dátur, sum TAKS nýtir hjá Elektron – burtursæð frá viðmerktu viðurskiftunum – er trygdargott. Niðurstøðan er somuleiðis, at Elektron, burtursæð frá einstøkum viðurskiftum, sum eru fevnd av tilmælunum, livir upp til ásetingarnar í SLA-avtaluni partanna millum.

Grannskoðan av skipanum hjá TAKS

Í mai 2004 gjørdu TAKS, Elektron, grannskoðarin hjá Elektron og innanhýsis kervisgrannskoðarin hjá Elektron avtalu um kervisgrannskoðan av skipanunum hjá TAKS, sum eru hjá Elektron.

Sambært avtaluni skal kervisgrannskoðarin grannskoða eina brúkaraskipan um árið. Í 2019 varð Endabýtisskipanin grannskoðað, og umframt hana eru higartil Skattauppgerðarskráin, Húsaleiguskipanin, eTollur, Innkrevjingarskipanin og Fyribilsskattaskipanin grannskoðaðar.

Grannskoðanin av Endabýtisskipanini gav ikki orsøk til tilmæli til Elektron.

3.5.2 Kervisgrannskoðan hjá Gjaldstovuni

Kervisgrannskoðarin hevur gjørt avtalu við leiðsluna á Gjaldstovuni um at grannskoða innanhýsis KT-viðurskifti og KT-stýring hjá Gjaldstovuni í mun til tænastuveitingar til stovnarnar, sum nýta skipanirnar hjá Gjaldstovuni (Búskaparskipan landsins), eins og tað verður gjørt fyri Elektron, sum er høvuðsveitari hjá Gjaldstovuni. Fyri árið 2019 hevur kervisgrannskoðarin gjørt fimm frágreiðingar um KT-viðurskiftini hjá Gjaldstovuni:

- Ársfrágreiðing frá kervisgrannskoðanini, kervisgrannskoðanararbeiði fyri Føroya Gjaldstovu í 2019,
- Frágreiðing 2019, grannskoðan av almennum KT-eftirlitsskipanum á Elektron fyri Føroya Gjaldstovu,
- Frágreiðing 2019, grannskoðanargjøgnumgongd av almennum KT-eftirlitsskipanum á Føroya Gjaldstovu,
- ISAE 3402 váttan um almennar KT-eftirlitsskipanir hjá P/f Elektron fyri tíðarskeiðið 1. januar 2019 til 31. desember 2019 í mun til SLA avtalu við Gjaldstovuna, og
- ISAE 3402 váttan um almennar KT-eftirlitsskipanir hjá Føroya Gjaldstovu í veitingini av Búskaparskipan Landsins fyri tíðarskeiðið 1. januar til 31. desember 2019.

KT-eftirlitsskipanir á Gjaldstovuni

Talvan niðanfyri vísir gongdina í óavgreiddum tilmælum frá kervisgrannskoðanini árini 2016 til 2019:

Óavgreidd tilmæli við árslok	2016	2017	2018	2019
Høg raðfesting	0	0	0	0
Miðal raðfesting	1	4	2	1
Lág raðfesting	7	5	2	2
Tilsamans	**8**	**9**	**4**	**3**
Av hesum eldri enn eitt ár	6	6	3	2

Úrslitið av kervisgrannskoðanini var trý tilmæli; eitt við miðal raðfesting og tvey við lágari raðfesting. Tvey tilmæli vórðu lokað í 2019, men eitt nýtt var givið. Tvey av tilmælunum eru eldri enn eitt ár.

Gjaldstovan hevur framvegis gjølliga og nøktandi stýring av KT-umhvørvi sínum á flestu økjum

Niðurstøðan hjá kervisgrannskoðaranum er, at Gjaldstovan framvegis hevur gjølliga og nøktandi stýring av KT-umhvørvi sínum á flestu økjum, og at tað støðugt verður

arbeitt við at bøta um trygdarviðurskiftini. Sum heild er niðurstøðan, at trygdar- og eftirlitsstigið, ið er sett í verk innan almennu KT-eftirlitsskipanirnar hjá Gjaldstovuni, við atliti at veitingini av Búskaparskipan landsins, er nøktandi, undantikið viðmerktu veikleikar.

KT-eftirlitsskipanir á Elektron fyri Gjaldstovuna

Talvan niðanfyri vísir gongdina í óavgreiddum tilmælum frá kervisgrannskoðanini árini 2018 og 2019:

Óavgreidd tilmæli við árslok	2018	2019
Høg raðfesting	0	0
Miðal raðfesting	3	4
Lág raðfesting	1	0
Tilsamans	**4**	**4**

Úrslitið av kervisgrannskoðani var fýra tilmæli, øll miðal raðfest. Eitt lágt raðfest tilmæli er lokað í árinum og trý nýggj miðal raðfest tilmæli vóru givin. Tvey teirra vóru lokað áðrenn árslok.

Niðurstøðan hjá kervisgrannskoðaranum er, at tænastusáttmálin sum heild er nøktandi og verður fylgdur á trygdargóðan hátt av Elektron. Ávísir veikleikar av týdningi eru kortini staðfestir.

Eftirlits- og trygdarstig kring skipanir og dátur, sum Gjaldstovan nýtir hjá Elektron, eru sum heild nøktandi.

Sum heild er niðurstøðan, at eftirlits- og trygdarstigið kring skipanir og dátur, sum Gjaldstovan nýtir hjá Elektron, er nøktandi, burtursæð frá teimum viðmerktu viðurskiftunum. Somuleiðis er niðurstøðan, at Elektron, burtursæð frá einstøkum viðurskiftum, sum eru fevnd av tilmælunum, livir upp til ásetingarnar í SLA-avtaluni partanna millum.

3.5.3 Kervisgrannskoðan hjá KT Landsins

Kervisgrannskoðarin hjá Elektron hevur í 2019 grannskoðað almennu KT-kontrollarnar í sambandi við, at Elektron veitir tænastur til KT Landsins og kundar tess. Kervisgrannskoðarin hevur eisini grannskoðað KT-kontrollarnar v.m. í sambandi við KT-tænastur, sum Formula veitir KT Landsins. Grannskoðanin er framd sambært SLA-avtalum partanna millum.

P/f Elektron

Fyri 2019 hevur kervisgrannskoðarin gjørt tvær frágreiðingar um KT-viðurskiftini ímillum KT Landsins og Elektron:

- Frágreiðing 2019, grannskoðan av almennum KT-eftirlitsskipanum á Elektron fyri KT Landsins, og
- ISAE 3402 váttan um almennar KT-eftirlitsskipanir hjá P/f Elektron fyri tíðarskeiðið 1. januar til 31. desember 2019 í mun til SLA-avtalu við KT Landsins.

Úrslitið av grannskoðanini av almennum KT-eftirlitsskipanum hjá Elektron er, at tænastusáttmálin sum heild er nøktandi og verður fylgdur á trygdargóðan hátt av Elektron. Við árslok 2019 vóru trý tilmæli opin, øll miðal raðfest. Trý nýggj tilmæli vóru givin í árinum; tvey av teimum vóru loyst áðrenn árslok. Eitt eldri tilmæli var eisini loyst í árinum.

Talvan niðanfyri vísir gongdina í óavgreiddum tilmælum frá kervisgrannskoðanini árini 2016 til 2019:

Óavgreidd tilmæli við árslok	2016	2017	2018	2019
Høg raðfesting	0	0	0	0
Miðal raðfesting	1	3	2	3
Lág raðfesting	1	3	1	0
Tilsamans	**2**	**6**	**3**	**3**

Kervisgrannskoðarin heldur, at tá ið sæð verður burtur frá nevndu manglum og veikleikum, er trygdar- og eftirlitsstigið kring skipanir og dátur, sum KT Landsins nýtir hjá Elektron, trygdargott. Kervisgrannskoðarin heldur eisini, at Elektron hevur hildið krøvini í SLA-avtaluni í tíðarskeiðnum burtursæð frá einstøkum viðurskiftum, sum eru fevnd av tilmælunum.

P/f Formula

Formula og KT Landsins gjørdu nýggja SLA-avtalu galdandi frá 1. september 2016, sum ásetir tænastustøðið fyri veitingina. Kervisgrannskoðarin hevur fyri árið 2019 gjørt tvær frágreiðingar um KT-viðurskiftini millum KT Landsins og Formula:

- ISAE 3402 váttan frá óheftum grannskoðara um almennar KT-eftirlitsskipanir í tænastuveiting hjá P/f Formula mótvegis KT Landsins fyri árið 2019, og
- Frágreiðing um ISAE 3402 váttan frá óheftum grannskoðara um almennar KT-eftirlitsskipanir í tænastuveiting hjá P/f Formula mótvegis KT Landsins fyri árið 2019.

Gongdin í óavgreiddum tilmælum frá kervisgrannskoðanini frá 2015 til 2019:

Óavgreidd tilmæli við árslok	2015	2016	2017	2018	2019
Høg raðfesting	0	2	2	2	0
Miðal raðfesting	7	9	6	5	2
Lág raðfesting	6	6	1	3	1
Tilsamans	**13**	**17**	**9**	**10**	**3**
Av hesum eldri enn eitt ár	13	9	5	2	1

Kervisgrannskoðarin sigur m.a., at Formula hevur lokað 9 tilmælir í árinum, harav tvey høgt raðfest viðvíkjandi trygdaravritan. Tilmælini eru lokað, eftir at kervisgrannskoðarin hevur staðfest, at viðurskiftini eru betrað. Tvey nýggj tilmæli eru givin í 2019, annað við miðal raðfesting og hitt við lágari raðfesting. Sostatt eru trý tilmæli opin við árslok 2019.

Kervisgrannskoðarin sigur eisini, at sum heild eru flestu lýsingarnar av eftirlitum væl grundaðar við støði í teimum leiðreglum, ið eru settar í verk. Somuleiðis eru flestu eftirlitini tilevnað á hóskandi hátt, og eru í tráð við ásetingarnar í ISO 27002:2013 standardinum, ið Formula brúkar sum starvskarm fyri váttanina. Harafturat hava flestu eftirlitini virkað munadygt í árinum. Tey eftirlit, sum Formula hevur sett í verk, hava virkað munadygt í árinum. Einstøk undantøk eru tó staðfest.

Sum heild eru flestu lýsingar av eftirlitum væl grundaðar í leiðreglunum.

KT-eftirlitsskipanir á KT Landsins

Kervisgrannskoðarin og leiðslan á Gjaldstovuni hava avtalað, at kervisgrannskoðarin skal grannskoða innanhýsis KT-viðurskifti og KT-stýringar á tænastuveitingunum, sum KT Landsins veitir stovnunum, ið nýta Landsnet. Grannskoðanin skal verða gjørd á sama hátt, sum grannskoðanin av høvuðsveitarunum hjá KT Landsins, Elektron og Formula. Endamálið við tí er m.a. at tryggja, at grundleggjandi og týðandi viðurskifti viðvíkjandi almennum KT-eftirliti eru í samsvari við trygdarásetingarnar hjá KT Landsins, umframt at meta um, hvørt nøktandi trygdar- og eftirlitsstig eru sett í verk.

Fyri 2019 hevur kervisgrannskoðarin gjørt tríggjar frágreiðingar um KT-viðurskiftini á KT Landsins:

- Ársfrágreiðing frá kervisgrannskoðan, kervisgrannskoðanararbeiðið fyri KT Landsins í 2019,
- Frágreiðing 2019, grannskoðan av almennum KT-eftirlitsskipanum hjá KT Landsins, og
- ISAE 3402 váttan um almennar KT-eftirlitsskipanir hjá KT Landsins í veitingini av Landsneti fyri árið 2019.

Gongdin í óavgreiddum tilmælum frá kervisgrannskoðanini árini 2016 til 2019:

Óavgreidd tilmæli við árslok	2016	2017	2018	2019
Høg raðfesting	0	0	0	0
Miðal raðfesting	3	2	1	1
Lág raðfesting	8	5	3	2
Tilsamans	**11**	**7**	**4**	**3**
Av hesum eldri enn eitt ár	8	6	2	2

Úrslitið av grannskoðanini er, at trý tilmæli eru opin við árslok 2019, eitt miðal raðfest, og tvey lágt raðfest. Tvey tilmæli eru loyst í 2019, og eitt nýtt er givið.

KT Landsins hevur framvegis gjølliga og nøktandi stýring av sínum KT-umhvørvi á flestu økjum.

Niðurstøðan hjá grannskoðaranum er m.a., at KT Landsins framvegis hevur gjølliga og nøktandi stýring av sínum KT-umhvørvi á flestu økjum, og at tað støðugt verður arbeitt við at bøta um trygdarviðurskiftini. Trygdar- og eftirlitsstigið, ið er sett í verk innan almennu KT-eftirlitsskipanirnar hjá KT Landsins við atliti at veitingini av Landsneti, við undantaki av viðmerktu veikleikunum, er trygdargott.

3.6 Hagstova Føroya (LG 2015/203-0152)

Landsgrannskoðanin hevur í undanfarnum ársfrágreiðingum víst á roknskaparviðurskifti hjá Hagstovuni, sum ikki hava verið nøktandi. Landsgrannskoðanin mælti til at dagføra roknskaparreglugerðina, sum var frá 2005.

Nøkur roknskaparviðurskifti hava ikki verið nøktandi.

Hagstovan hevði ikki fullfíggjað ognaryvirlit, men bert yvirlit yvir teldur og telefonir. Landsgrannskoðanin hevur fleiri ferðir mælt til, at ognaryvirlit verður gjørt og dagført regluliga.

Fleiri starvsfólk høvdu stórar tímasaldur. Landsgrannskoðanin mælti til, at Hagstovan ásetti reglur um tímasaldur í roknskaparreglugerðini, og at stovnurin skuldi lýsa lønarumsitingina í reglugerðini, herímillum hvussu arbeiðstíð, frítíð, sjúka o.a. vórðu skrásett.

Landsgrannskoðanin mælti eisini til at áseta mannagongdir í roknskaparreglugerðini um at krevja ómaksgjøld og at avskriva skuld.

Í august 2017 vísti landsstýrismaðurin á, at roknskaparkunngerðin partvíst var broytt, við tað at broytingarnar viðvíkjandi lønarútreiðslum, tíðaravmarkingum og tíðarskrásetingum vóru komnar í gildi. Fíggjarmálaráðið skuldi eisini gera rundskriv um arbeiðstíð. Sambært landsstýrismanninum fór Fíggjarmálaráðið at heita á Hagstovuna um at dagføra roknskaparreglugerðina, eisini við teimum dagføringum Landsgrannskoðanin mælti til, so skjótt sum roknskaparrundskrivið var dagført, og rundskriv um arbeiðstíð var gjørt.

Í 2018 kunnaði landsstýrismaðurin um, at nú tøkniliga menningin av ognaryvirlitum í Búskaparskipan landsins var framd, fór Fíggjarmálaráðið at heita á Hagstovuna og hinar stovnarnar undir ráðnum um at dagføra ognaryvirlitini.

Sambært landsstýrismanninum hevði Hagstovan gjørt uppskot til roknskaparreglugerð, og Fíggjarmálaráðið fór í næstum at góðkenna reglugerðina. So skjótt sum roknskaparrundskrivið var dagført, og rundskriv um arbeiðstíð var gjørt, fór ráðið at heita á Hagstovuna um at dagføra reglugerðina, í tann mun broyttar ásetingar eru.

Í august 2020 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at roknskaparreglugerðin er enn ikki góðkend, men arbeiðið við játtanar-, roknskapar- og grannskoðanarviðurskiftum verður nú uppraðfest.

3.7 Landsbanki Føroya (LG 2017/203-0151)

Reglur um virksemi
Sambært Ll. nr. 116/2016 "um Landsbanka Føroya og Føroya váðaráð" skal nevndin gera reglur fyri virksemið hjá nevnd og stjóra. Hon skal m.a. gera neyvari ásetingar um umsiting av landsins gjaldføri, skuld og lántøku, og nevndin skal gera eina íløgustrategi fyri plasering av gjaldføri.

Í § 17 er ásett, at bankin verður stovnaður við 20 mió.kr. í fæi. Fæið kann nýtast at javna inntøkur og útreiðslur í mun til virksemið, og fæið er uttanhýsis partur av landsroknskapinum.

Nevndin skal gera nærri reglur um, hvat fæið kann brúkast til. Stjórin í Landsbankanum hevur greitt frá, at nærri reglur um stovningarfæið eru ikki gjørdar. Landsgrannskoðanin mælti til at fáa greiðu á, hvat stovningarfæið kann nýtast til, og at gera ásetingar um tað.

Reglur um stovnsfæið eru ikki gjørdar.

Í august 2018 greiddi landsstýrismaðurin frá, at tá ið uppskotið til lógina um Landsbankan varð lagt fram, var ein áseting um, at Landsbankin kundi veita kommunum lán. Vórðu lánini veitt, var neyðugt at hava eitt fæ sum "buffara". Ásetingin um heimildina at veita kommununum lán var tó tikin burtur í samtyktu lógini. So leingi sum endamálið við fænum ikki er greiðari ásett í lógini, verða ásetingar ikki gjørdar, og fæið stendur órørt.

Greitt endamál um fæið manglar í lógini. Tí stendur tað órørt.

Roknskaparviðurskifti
Játtanin til raksturin av Landsbankanum er undir høvuðskontu 3.15.1.20.

Játtanar- og roknskspartøl:

t.kr.

Heiti	2017 Játtan	Rokn-skapur	2018 Játtan	Rokn-skapur
Lønir v.m.	6.800	3.993	6.800	4.662
Keyp av vørum og tænastum	1.900	1.809	1.720	1.689
Keyp av útbúnaði	200	720	200	247
Leiga, viðlíkahald og skattur	0	805	0	54
Søla av vørum og tænastum	-1.000	-1.265	-1.000	-1.492
Aðrar flytingarinntøkur	-7.900	0	-7.900	0
Innanhýsis flytingar millum alm. stovnar (útr.)	0	97	180	182
Innanhýsis flytingar millum alm. stovnar (innt.)	0	-6.159	0	-5.342
Tilsamans	**0**	**0**	**0**	**0**

Í §§ 17-20 í lógini um Landsbankan eru reglur um fíggjarlig viðurskifti hjá bankanum. Landsbankin hevur rakstrarjáttan í fíggjarlógini. Fyri røkt av gjaldføri og skuld landsins fær bankin 4‰ av landsins minstagjaldføri.

Landsbankin verður fíggjaður av gjaldføri landskassans.

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið stendur, at *"upphæddin verður flutt av játtanini fyri rentuinntøkur landsins. Við at fastleggja inntøkur stovnins við lóg kemur Landsbankin at vera óheftur. Landsbankin kann eisini krevja gjøld frá teimum almennu eindunum, ið nýta hann til ognar- og skuldarumsiting og til ráðgeving"*.

Stjórin kunnaði um, at bankin hevur inntøkur sambært avtalu við AMEG um umsiting av ogn hjá grunninum umframt alla fyrisiting. Gjaldið er ásett út frá arbeiðsbyrðu, og at tað ikki skal vera kappingaravlagandi. Eisini hevur Landsbankin "innlán" frá m.ø. Framtak og Vinnusjúkugrunninum. Tey gjøldini fevna um samskifti við almennu eindirnar, bókingar og rokning av rentu.

Í § 18, stk. 3, er ásett, at bankin kann hava inntøkufíggjað virksemi. Stjórin í Landsbankanum metir, at umsiting av AMEG, Búskapargrunninum og innlánum hjá øðrum almennum eindum, sum ikki hoyra beinleiðis til landskassan, er inntøkufíggjað

Landsbankin hevur inntøkufíggjað virksemi.

virksemi. Uppgávan at umsita ogn og skuld hjá landskassanum og at vera greiningarstovnur kemur undir vanligt virksemi. Stjórin vísir á viðmerkingarnar til lógaruppskotið, um at bankin kann krevja gjøld frá teimum almennu eindunum, ið nýta hann til ognar- og skuldarumsiting og til ráðgeving.

Minstagjaldføri landsins í 2019 varð ásett til 2.830 mió.kr.; 4‰ av upphæddini svara til 10,7 mió.kr. Inntøkurnar fyri røkt av gjaldføri og skuld landsins vóru 6,2 mió.kr.; t.e. 5,1 mió.kr. minni enn ásett.

Sambært avtalu við AMEG fær Landsbankin samsýning, svarandi til 0,025% av virðisbrævaognunum ultimo hvønn ársfjórðing. Í 2019 vóru inntøkurnar 1,4 mió.kr.

Enn eingin eftirmeting av gjaldinum.

Í 2018 samtykti nevndin innlánspolitikk viðvíkjandi umsiting av fíggjarognum hjá almennum grunnum og stovnum. Árliga umsitingargjaldið var ásett at vera 0,1% av miðalsaldu. Landsgrannskoðanin mælti til at kanna, um gjøldini svaraðu til veruliga kostnaðin og reglur um prísáseting.

Í august 2018 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Landsbankin fór at eftirmeta, um gjaldið í innlánspolitikkinum svaraði til veruliga kostnaðin og reglur um prísáseting.

Landsstýrismaðurin kunnaði eisini um, at Landsbankin samanumtikið fylgir mannagongdunum hjá landinum. Landsbankin var farin undir at gera roknskaparreglugerð og skriva mannagongdir um m.a. journalisering, heimaarbeiðspláss, starvsfólkapolitikk og tíðarskráseting.

Í august 2020 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at arbeiðið við játtanar-, roknskapar- og grannskoðanarviðurskiftum fer at verða uppraðfest.

3.8 Talgildu Føroyar (LG 2018/203-0111)

Landsgrannskoðanin hevur kannað verkætlanina Talgildu Føroyar. Vit spurdu m.a., hvussu langt verkætlanin var komin pr. apríl 2019 í mun til tíðarætlanina, um kostnaðarætlanin helt, og um fíggingin var komin upp á pláss.

Vinnumálaráðið og Fíggjarmálaráðið tóku í 2015 stig til verkætlan at talgilda tænastur til borgarar, vinnu og almenna geiran í Føroyum árini 2016 til 2020. Í stuttum snýr verkætlanin seg um, at borgarar og fyritøkur kunnu samskifta talgilt við almenna geiran, at fyrisitingarligar tænastur hjá tí almenna eru tøkar á netinum, og at veitingar og mannagongdir í almennu fyrisitingini eru talgildar.

Fyrisitingarliga eru Talgildu Føroyar skipaðar undir landsstýrismanninum í fíggjarmálum. Verkætlanareigari er aðalstjórin í Fíggjarmálaráðnum. Harnæst er verkætlanarstýrisbólkur, har stjórin á Gjaldstovuni er formaður. Onnur í stýrisbólkinum eru umboð fyri kommunur og aðrar samstarvsfelagar. Undir stýrisbólkinum er verkætlanarskrivstova, sum er dagliga leiðslan av verkætlanini.

Ein verkætlanarstjóri er fyri allari verkætlanini. Ein verkætlanarleiðari er fyri hvønn verkætlanarpart, t.e. Heldin, Samleiki, Grundardáta og Tænastuportalur. Verkætlanarleiðararnir vísa til verkætlanarstjóran. Aðrir stuðlandi bólkar og funktiónir eru eisini knýtt at verkætlanini.

Raksturin av Talgildu Føroyum fer at verða skipaður sum partur av umhvørvinum hjá Gjaldstovuni.

Í september 2019 greiddi Fíggjarmálaráðið frá, at avgerð var tikin um, at raksturin av Talgildu Føroyum verður skipaður sum partur av umhvørvinum hjá Gjaldstovuni á sjálvstøðugari høvuðskontu.

Fleiri avtalur eru gjørdar at tryggja raksturin av verkætlanini, tá ið hon er liðug. Rakstrarleiðari er settur, og fyrireikingar eru gjørdar at skipa eina rakstrareind.

Játtan og roknskapur

Roknskapar- og játtanartøl fyri árini 2015 til 2019:

t.kr.

	2015	2016	2017	2018	2019	Tils.
Lønir	6	251	3.761	5.874	8.486	18.378
Keyp av vørum og tænastum	2.785	4.556	3.364	6.699	10.064	27.468
Keyp av útbúnaði, netto	718	385	8.979	12.598	19.114	41.794
Leiga, viðlíkahald og skattur	36	56	921	48	53	1.114
Vanligar flytingarinntøkur	0	0	0	-7.000	-12.465	-19.465
Vinningsbýti					-595	-595
Innanh. flyt. ml. alm. stovn.	424	659	1.602	3.261	1.912	7.858
Flyting frá komm. til landið	0	0	0	-2.500	-2.500	-5.000
Tilsamans	**3.969**	**5.907**	**18.627**	**18.980**	**24.069**	**71.552**
Játtan	4.000	10.000	20.000	19.000	24.000	77.000

Í 2015 vóru 2 mió.kr. játtaðar á undirkontu 6.11.1.06.23 hjá Vinnumálaráðnum at seta sjøtul á at talgilda tænastur til borgarar og vinnu. Í eykajáttanarlóg oktober 2015 vóru 2 mió.kr. játtaðar afturat til m.a. at fyrireika útboð av talgildum samleika og at gera pilotverkætlan til Heldina. 4 mió.kr. vórðu nýttar í 2015.

Í 2016 vóru 10 mió.kr. játtaðar í verklagslóg til Talgildu Føroyar, og í 2017 var nýggj verklagslóg samtykt, galdandi til 31. desember 2023, har útreiðslurnar í mesta lagi kunnu verða 145 mió.kr. Útreiðslurnar hjá landinum kunnu í mesta lagi verða 85 mió.kr. Sambært verklagslógini er landsstýrismanninum heimilað at gera avtalur við fyritøkur, kommunur og grunnar um at fíggja part av verkætlanini.

Í 2016 vóru 5,9 mió.kr. nýttar, tí er samlaða upphæddin, sum kann nýtast til verkætlanina 150,9 mió.kr. Við árslok 2018 vóru tilsamans 57 mió.kr. nýttar, harav hevði landið goldið 47,5 mió.kr.

Sambært viðmerkingunum til verklagslógina frá 2017, er fíggingarleisturin hesin:

t.kr.

	Ár 2016 til 2020
Land	90.000
Ymiskir samstarvsfelagar	19.500
Peningastovnar	15.000
Kommunur	25.500
Tilsamans	**150.000**

Seinkingar og ymiskar avbjóðingar hava gjørt, at ætlaði fíggingarleisturin var broyttur nakað. Sambært Talgildu Føroyum var tillagaði fíggingarleisturin tá:

t.kr.

	Ár 2016 til 2020
Land	90.214
Ymiskir samstarvsfelagar	17.200
Peningastovnar	9.000
Kommunur	10.600
Tilsamans	**127.014**

Bert ein kommuna ynskti at luttaka í fíggingini.

Verkætlanarstjórin kunnaði um, at allar kommunurnar, uttan Tórshavnar Kommuna, høvdu boðað frá, at tær fyribils ikki ynsktu at luttaka í fíggingini av Talgildu Føroyum. Orsakað av tvístøðuni millum Fíggjarmálaráðið og Kommunufelagið, hevði Kommunufelagið steðgað øllum samstarvi og samskifti við Fíggjarmálaráðið, og hevði samstundis heitt á allar limakommunurnar um fyribils at steðga á við at skriva undir samstarvsavtalur við Fíggjarmálaráðið um Talgildu Føroyar.

Upprunaliga skuldu ymiskir samstarvsfelagar fíggja 19,5 mió.kr., men eftir samráðingar varð upphæddin 17,2 mió.kr. Peningastovnarnir skuldu upprunaliga rinda 15 mió.kr. til verkætlanina, harav 2 mió.kr. um árið til rakstur í tíðarskeiðnum 2018 til 2020. Peningastovnarnir fíggja bert talgilda samleikan, og av tí at menningin av honum var seinkað, rinda peningastovnarnir einki í verkætlanartíðarskeiðnum. Avtalað var tó, at peningastovnarnir rinda 2 mió.kr. um árið til rakstur av Samleikanum, eftir 2020.

Av teimum 60 mió.kr., sum landið ikki sjálvt fíggjar, vóru sostatt gjørdar avtalur við samstarvsfelagar, peningastovnar og kommunur fyri 36,8 mió.kr.

Umsiting og stýring av verkætlanini

Talgildu Føroyar hava felags umsiting við Gjaldstovuna, sum fevnir um roknskap og bókhald, móttøku, leiðslu, fyrisiting og HR. Fyri hesar tænastur rindaðu Talgildu Føroyar 700 t.kr. um árið í 2017 og 2018. Í 2016 rindaðu Talgildu Føroyar 300 t.kr. fyri leiðslu. Sambært Talgildu Føroyum var upphæddin grundað á eina frammanundan roknaða meting av útreiðslunum.

Sambært verkætlanarstjóranum helt fíggjarætlanin fyri teir partar, sum vóru avtalaðir við undirveitarar.

Til at fylgja verkætlanini upp vóru regluligir fundir í øllum bygnaðarløgum, frá starvsfólkum til landsstýrismannin í fíggjarmálum.

Broytingar í verkætlanini

Verkætlanin tillagað, tí ikki øll fíggingin var fingin til vega.

Sambært verkætlanarstjóranum var verkætlanin í høvuðsheitum ikki broytt, síðani upprunaliga ætlanin varð gjørd. Talan er framvegis um 4 yvirskipaðar partar, Heldin, Tænastuportal, Samleika og Grundardátur. Av tí at øll fíggingin ikki var fingin til vega, hevði verið neyðugt at tillaga verkætlanina. Avgerð var tikin um fyribils at taka matrikkul- og tinglýsingarpartin umframt menning av virkisskránni burturúr Grundardátum, til ein møgulig loysn var fingin á fíggingini. Tó var ein partur av tinglýsingarpartinum gjørdur.

Landsgrannskoðanin vísti á, at tað at taka matrikkul- og tinglýsingarpartin burturúr, var ein týðandi broyting av verkætlanini í mun til tað, sum Løgtingið hevði samtykt.

Í september 2019 vísti Fíggjarmálaráðið á, at landsstýrismaðurin støðugt var kunnaður um tillagingar í verkætlanini. Verkætlanin var løgd til rættis soleiðis, at hægst raðfestu partarnir vórðu gjørdir fyrst. Tað merkti ikki, at nakrir partar vóru endaliga valdir frá, tí tað bar til at koma til teir seinni, um fíggingin lagaði seg í gildistíðini av verklagslógini fram til og við 2023.

Sambært verkætlanarstjóranum var strembað eftir at fylgja góðum prosjektleiðslusiði, tá ið broytingar vórðu gjørdar í verkætlanini. Áðrenn broytingar verða gjørdar, skal sonevnt “change request” verða góðkent av hægri myndugleikum fyri sjálva verkætlanina, ella fyri einstøku partsverkætlanina. Stýrisbólkur, umboðandi land, kommunur og uttanhýsis sponsorar, var settur til m.a. at góðkenna broytingar. Broytingar vóru eisini viðgjørdar við verkætlanareigaran (Fíggjarmálaráðið), serliga um talan var um broytingar, sum vórðu hildnar at hava politiskan áhuga.

Avtalur við undirveitarar

Umframt at verkætlanin er býtt í 4 høvuðspartar, er hon eisini býtt upp í undirverkætlanir, sum verða bjóðaðar út at menna. Verkætlanarstjórin kunnaði um, at enn vóru ikki allar undirverkætlanirnar bodnar út. Støðan var at:

- Heldin: Avtalur vórðu gjørdar í sambandi við at loysnin varð sett upp í 2016. Ongar nýggjar avtalur vóru gjørdar.
- Samleikin: Flestu avtalurnar vóru gjørdar. Nakrar avtalur vantaðu í sambandi við at menna undirskriftarpartin og aðrar undirloysnir.

- Grundardátur: Avtalur vóru gjørdar viðvíkjandi Fólkayvirlitinum og kort/geodáta, og at skanna tinglýsingar- og matrikkularkivið. Avtalur vóru gjørdar um forkanning av Virkisskrá og at talgilda Tinglýsingarskipanina, men menningin er enn ikki boðin út.
- Tænastuportalur: Flestu avtalurnar vóru gjørdar.

Lógir og reglur

Verkætlanarstjórin kunnaði um, at øll lóggáva var komin upp á pláss fyri teir partar av verkætlanini, sum vóru sjósettir.

Tíðarætlanin apríl 2019

Verkætlanin byrjaði í 2016 og sambært heildarætlanini skuldi hon vera liðug og sett í verk í 2020. Sambært verkætlanarstjóranum var ætlanin nakað seinkað í ávísum pørtum:

Heldin: Í tráð við tíðarætlanina var Heldin sett í verk á heysti 2016, og klárt var at knýta KT-skipanir hjá almennum stovnum uppí. 21. oktober 2016 setti Fíggjarmálaráðið rundskriv um Heldina í gildi. Í rundskrivinum er ásett, at alt nýtt dátusamskifti millum myndugleikar skal umvegis Heldina. Eisini er ásett sum mál, at alt dátusamskifti millum KT-skipanir hjá almennum myndugleikum skal fara fram umvegis Heldina innan 3 ár.

Sambært verkætlanarstjóranum brúktu fleiri og fleiri stovnar Heldina, men tað var ivasamt, um málið fór at verða nátt, m.a. tí at eingir sanktiónsmøguleikar vóru, sum kundu tvinga myndugleikar at knýta KT-skipanir uppí. Talgildu Føroyar eggjaðu heldur stovnum til tað.

Eingir sanktiónsmøguleikar at tvinga myndugleikar at knýta uppí skipaninar.

Samleikin: Sambært upprunaligu tíðarætlanini skuldi menningin av talgilda samleikanum verið liðug og sett í verk í 2018. Sambært verkætlanarstjóranum var menningin seinkað. Avgjørt var at býta menningina í tveir partar, menning av talgildari innritan og menning av talgildari undirskrift. Talgild innritan skuldi verða sett í verk beint eftir árslok 2019.

Talgildu Føroyar bíðaðu við partinum um talgilda undirskrift, til ES hevði gjørt nýggja ES standardin um talgilda undirskrift. Verkætlanarstjórin væntaði, at talgilda undirskriftin fór at verða liðugt ment miðskeiðis í 2020, og sett í verk í seinnu hálvu av 2020.

Grundardátur: Eingin ítøkilig tíðarætlan var nevnd í heildarætlanini fyri at menna og seta í verk Grundardátur, men sambært verkætlanarstjóranum var arbeiðið seinkað. Grundardátur eru í fimm pørtum, og eingin partur var liðugur.

Høvuðsorsøkirnar til seinkingina vóru broytingar í leiðslu og prosjektbygnaði.

Geodátur, ella kortal.fo, var gjørt av nýggjum. Avgerð var tikin um, at menning av vinnuskránni, matrikkulparturin og restin av tinglýsingarpartinum ikki verða gjørd, fyrr enn fíggingin er komin upp á pláss.

Tænastuportalur: Eftir upprunaligu ætlanini skuldi arbeiðið við tænastuportalinum byrja í 2015, og setast í verk í 2016. Tað arbeiðið byrjaði í 2017. Ætlandi skuldi 1. slepping setast í verk samstundis sum talgilda innritanin, t.v.s. seint á sumri 2019. Ein orsøk til seinkingina var, at Talgildu Føroyar høvdu keypt ein menningarpall at menna tænastuportalin. Endamálið var at effektivisera menningina, men nógvir byrjanartrupulleikar vóru.

Samanumtikið vórðu bara menningin og íverksetanin av Heldini liðug til tíðina. Allir hinir partarnir av verkætlanini vóru seinkaðir. Sambært verkætlanarstjóranum vóru orsøkirnar fleiri, m.a. at á onkrum parti hevði avbjóðingin verið størri enn væntað, og

at Talgildu Føroyar høvdu bíðað eftir nýggja ES standardinum. Flestu partarnir skuldu eftir ætlan verða lidnir í 2020, hóast nakað skerdir.

Aðrar avbjóðingar
Sambært verkætlanarstjóranum høvdu ikki aðrar týðandi avbjóðingar verið, enn tær sum kundu væntast í stórum verkætlanum. Allar ósemjur og ymiskar fatanir vóru handfarnar annaðhvørt við samrøðum, við at gera smærri tillagingar í avtalum, ella við at gera ískoytisavtalur. Allar uppgávur vóru grundaðar á avtalur, og størri uppgávur/-verkætlanir vóru grundaðar í sáttmálum, sum skilliga greina uppgávuna.

Verkætlanarstjórin væntaði ikki fleiri hóttandi avbjóðingar. Tó kundu hesar avbjóðingar koma fyri:

- Vantandi fígging kundi hava við sær, at matrikkulparturin í Grundardátum mátti veljast frá. Kommunurnar høvdu boðað frá, at tær fyribils ikki luttóku í fíggingini.
- Ein "yvirupphitaður" KT-marknaður kundi hava við sær, at ov fá KT-fólk vóru í Føroyum at menna loysnirnar, og at tær kundu gerast dýrari, enn ætlað.
- At skriva og at seta í verk allar mannagongdir fyri Talgilda samleikan var ein uppgáva, sum hvørki Gjaldstovan ella rakstrarveitarin høvdu roynt áður. Tað fór eisini at krevja munandi hægri trygd, enn roynt var áður.

Viðmerkingar frá landsstýrismanninum

Fleiri kommunur hava nú víst áhuga.

Í august 2020 hevur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum greitt frá, at fleiri kommunur hava aftur víst áhuga í verkætlanini, og avtalur eru longu gjørdar við tríggjar kommunur. Tað ger, at tað er møguligt at fara undir partar av verkætlanini, sum fígging ikki var til. Landsstýrið raðfestir framhaldandi verkætlanina. Samgongan hevur m.a. sett sær fyri, at Talgildu Føroyar eisini skulu fevna um sjúkrahúsverkið, og fer tí í gongd við fyrireikandi arbeiðið í heyst, so farast kann undir at menna tænastur á hesum øki.

Verkætlanin verður nú royndarkoyrd.

Landsstýrismaðurin leggur afturat, at íverksetanin av bæði vanganum og samleikanum ganga væl. Í løtuni verður verkætlanin royndarkoyrd við umleið 100 brúkarum. Samstundis verður ein tøknilig og fyrisitingarlig grannskoðan gjørd av samleikanum, sum er neyðug, fyri at hann kann lúka altjóða krøv. Um alt gongur væl, er grannskoðanin liðug um hálvan september.

Í oktober er ætlanin at íverkseta samleikan og vangan fyri allar føroyingar.

3.9 Avgjald av kapitaleftirlønum (LG 2017/220-0521)

Í undanfarnu frágreiðing umrøddu vit grannskoðan av umsitingini hjá TAKS av avgjaldi av kapitaleftirlønum.

Landsgrannskoðanin kannaði við stakroyndum inngjøld av avgjøldum av kapitaleftirlønum, og hevði bert smávegis viðmerkingar. Samanumtikið virkaði umsitingin væl, tá ið talan var um at tryggja, at tað, sum var goldið, var rætt. Tá ið stjórin góðkendi mánaðarroknskapir, váttaði hann mótvegis Fíggjarmálaráðnum, at allar inntøkur vóru við, og at roknskapurin var rættur og álítandi. Landsgrannskoðanin vísti á, at TAKS onga vissu hevði fyri, at øll, sum skuldu rinda avgjald, høvdu rindað landskassanum avgjøldini.

Landsgrannskoðanin hevur áður umrøtt spurningin, um at grannskoðarin hjá eftirlønarveitarum árliga kundi váttað, at mannagongdir og bókhald vóru hóskandi skipað við atliti at útrokning og avrokning av avgjøldunum. Sambært TAKS høvdu tey í longri tíð ynskt at fingið tað í lóggávuna, men komið var ikki á mál.

Landsstýrismaðurin kunnaði um, at hann ætlaði at fáa tað inn í lógina, næstu ferð rentutryggingarlógin varð broytt.

Enn er eingin broyting gjørd í rentutryggingarlógini.

3.10 Innheinting av barnapeningi (LG 2017/203-0151)

Í seinastu frágreiðing umrøddu vit grannskoðan av innheintingini av barnapeningi.

Heimildir at heinta inn barnapening
Barnapeningur verður heintaður inn sambært Lov nr. 150/1963[9]. Heimildir at heinta inn krøv uttan fyri Føroyar, eru sambært:

- Bekendtgørelse nr. 433/1965 "om inddrivelse af underholdsbidrag i henhold til den af De Forenede Nationer vedtagne konvention af 20. juni 1956",
- Bekendtgørelse nr. 434/1965 "om anerkendelse og fuldbyrdelse af afgørelser om underholdsbidrag i henhold til Haagerkonventionen af 15. april 1958 om underholdspligt over for børn", og
- Bekendtgørelse nr. 269/1963 "om inddrivelse af underholdsbidrag i henhold til konvention af 23. marts 1962 mellem Danmark, Finland, Island, Norge og Sverige".

Ov kostnaðarmikið at heinta inn uttan fyri Norðurlond.

TAKS hevði ikki sett nakra innheinting í verk uttan fyri Norðurlond, tí tað var ov kostnaðarmikið. TAKS sendi fráboðan til skuldarar, tá ið stovnurin fekk mál frá Almannaverkinum. Óvist var, um fráboðanirnar yvirhøvur komu fram, og ofta gekk long tíð, áðrenn einstøk brøv komu retur.

Spurdur, um TAKS hevði skyldu til at taka ímóti krøvum, sum kortini ikki vórðu heintað inn, svaraði landsstýrismaðurin, at TAKS hevði ábyrgd av innheintingini, og tí skyldu til at taka ímóti krøvunum.

Eftirgeving av skuld
Sambært § 13, stk. 1, í Ll. nr. 71/1996 "um barnagjald til einsamallar uppihaldarar o.fl." skal Almannaverkið eftirgeva forskotsvís útgoldin gjøld, sum ikki eru afturgoldin av tí gjaldskylduga, tá ið einki gjald er útgoldið síðsta árið, ella tá ið tann gjaldskyldugi hevur verið innsettur á stovni undir Kriminalforsorgini.

Ein fyritreyt fyri at eftirgeva eftir stk. 1 er, at gjaldskyldugi ikki er førur fyri at rinda.

Einki yvirlit yvir, hvussu nógv er eftirgivið.

Landsgrannskoðanin helt tað ikki vera nøktandi, at TAKS einki yvirlit hevði yvir, hvussu nógv var eftirgivið sambært § 13.

Avskriving og avseting móti tapi
Í 2007 gjørdi TAKS eitt átak at rudda upp í skuldarunum og niðurskrivaði ein part av áognini. Ivasamt var, um stovnurin hevði heimild at avskriva, og tí var sannlíkt, at áognin hjá landskassanum átti at verið størri, enn hon var. TAKS helt, at ein triðingur av skuldini kundi verðið avskrivaður, tí TAKS fær ongantíð peningin inn.

Sambært landsstýrismanninum skal fíggjarstøðan í landsroknskapinum vera so rætt-vísandi sum gjørligt. Í hesum føri var talan um persónar, sum eingi gjaldsevni høvdu og fóru tí helst ikki at kunna rinda. Vóru als eingi útlit fyri, at skuldin fór at verða afturgoldin, átti hon at verða avskrivað roknskaparliga.

Í juli 2019 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Fíggjarmálaráðið, saman við TAKS, Almannamálaráðnum og Almannaverkinum, fór at viðgera málið, fyri at finna eina nøktandi loysn viðvíkjandi innheinting av barnapeningi og eftirgeving av skuld.

[9] "om inddrivelse af underholdsbidrag", som ændret ved lov nr. 280 af 8. juni 1977.

Í august 2020 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at *"tá ið nýtt landsstýri varð skipað, vórðu fleiri málsøki løgd afturat Fíggjarmálaráðnum at umsita. Í sama tíðarskeiði hevur útskifting verið í starvsfólkahópinum* [hjá Fíggjarmálaráðnum]*, umframt at Korona-farsóttin síðani í vár hevur órógvað vanligu arbeiðsgongdirnar. Tí hevur minni arbeiðsorka verið til arbeiðsuppgávurnar, herundir roknskapar- og grannskoðanarviðurskifti. Arbeiðið verður nú aftur raðfest."*

3.11 Bundin eftirløn av B-inntøkum (LG 2016/220-0521)

Í seinastu frágreiðing umrøddu vit grannskoðan av bundnari eftirløn av B-inntøku.

Eftirlønarlógin kom í gildi 1. januar 2014 og er broytt síðani. Lógin áleggur øllum persónum at rinda til egna eftirløn. Fyrsta árið var gjaldið 1% av bæði A- og B-inntøkum og hækkar eitt prosent um árið til 2026, tá ið tað verður 12%. Skattur av eftirlønargjaldinum er millum 30% og 40% alt eftir inntøku.

Eftirlønargjald av A-inntøkum verður sjálvvirkjað tikið av lønunum og flutt á eftirlønarkontur hjá skattgjaldarum, og samstundis verður skatturin fluttur landskassanum.

Tey, ið hava B-inntøku skulu gera vart við eftirlønaruppsparingina á sjálvuppgávuni. Síðani verða eftirlønin og skatturin roknað sum partur av árligu skattauppgerðini. Rokning verður send teimum, og tá ið rokningin er goldin, verður eftirlønin flutt á persónliga eftirlønarkontu, og skatturin í landskassan.

Verða eftirlønargjøldini og eftirlønarskatturin ikki goldin til tíðina, hevur TAKS heimild at panta.

Við árslok 2019 stóðu 4 mió.kr. á depotkontu.

Fleiri persónar, sum verða kravdir eftir eftirlønargjaldi, hava ikki eftirlønarkontu. Tær upphæddirnar verða skrásettar á eina depotkontu í bókhaldinum hjá TAKS og verða bókaðar á aðra stuttfreistaða skuld í landsroknskapinum. Við árslok 2019 var upphæddin 4 mió.kr. netto.

Persónar við B-inntøku fáa hvørt ár skriv um, hvussu nógv skal rindast í eftirløn og í skatti. Í skrivinum verður upplýst, at sáttmáli skal gerast við ein eftirlønarveitara, og kontunummar latast TAKS.

TAKS lesur dagliga í skattaskipanunum, um nýggjar eftirlønarkontur eru stovnaðar. Er ein eftirlønarkonta stovnað hjá einum persóni við depotkontu, verður upphæddin á depotkontuni sjálvvirkjað flutt til ta kontuna.

Sambært Fíggjarmálaráðnum virkar skipanin við fyribils depotkontum, sum ætlað.

3.12 Negativt meirvirðisgjald (LG 2016/220-0522)

Í seinastu ársfrágreiðing umrøddu vit umsitingina av negativum meirvirðisgjaldi. Sum liður í innaneftirlitinum brúkti leiðslan á TAKS talgilda kekklistaskipan at stýra afturvendandi rutinuuppgávum innan tær freistir, hon ásetir.

Leiðslan hevði ikki nágreinað, hvørji eftirlit skuldu gerast, ella hvussu hon vildi hava eftirlitini framd og skjalprógvað, fyri at tryggja sær, at tað, sum TAKS rindaði út, var rætt, og at roknskapurin tí kundi sigast at vera rættur.

Deildarleiðarin setti mál fyri eftirlitini, sum vanliga vóru tey somu, sum árið fyri. TAKS kannaði umleið 4% av øllum negativum MVG-uppgerðum, fyri tað mesta íløgur, sum

á einstøkum uppgerðum gjørdu, at avgjaldstilsvarið varð negativt. Landsgrannskoðanin ivaðist í, um kanningarhátturin var nøktandi út frá týdningi og váða.

TAKS vísti á, at tey høvdu ikki og komu ongantíð at hava møguleika at kanna øll útgjøld, tí var tað altíð ein raðfesting.

Landsgrannskoðanin vísti á, at tað, at TAKS ikki hevði møguleika at kanna allar útgjaldingar, kundi ikki forða fyri, at leiðslan hevði greiðari ásetingar um, hvussu hon vildi hava eftirlitini framd og skjalprógvað, fyri at tryggjað sær, at tað, sum TAKS rindaði út, var so rætt sum gjørligt.

Leiðslan eigur at hava greiðar ásetingar um, hvussu eftirlit skulu fremjast og skjalprógvast, fyri at tryggja sær, at tað, sum verður rindað út, er rætt.

Í august 2018 greiddi landsstýrismaðurin frá, at sambært TAKS varð hugt eftir stødd og vinnugrein og samanborið við undanfarnar uppgerðir og ár, tá ið útgjøld vóru kannað. Í hvørjum einstøkum føri varð støða tikin til, hvat skuldi kannast og ikki. Orka var ikki altíð til at gera eftirlit úti á virkjunum, men stakroyndir vóru gjørdar, og tí varð tað eitt tilval og eitt frával.

Í juli 2019 greiddi landsstýrismaðurin frá, at arbeitt varð støðugt við at hava eitt so virkið og neyvt eftirlit hjá TAKS sum møguligt, umframt at vunnin arbeiðsorka við talgilding ætlandi varð nýtt til at uppraðfesta eftirlitsøkið, herundir eftirlitið við negativum meirvirðisgjaldi.

Fíggjarmálaráðið hevur í august 2020 ikki nakað nýtt at leggja afturat.

3.13 Brennioljugjald (LG 2019/220-0522)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað inntøkur av brennioljugjaldi og endurrindan av brennioljugjaldi til ávísar bátar og virkir. Tvey oljufeløg eru skrásett hjá TAKS at avrokna oljuavgjøld. TAKS heldur seg við vissu kunna siga, at tað eru ikki fleiri sum selja olju.

Inntøkurnar eru skrásettar á høvuðskontu 20.52.2.13 “Brennioljugjald” í landsroknskapinum og greinaðar á standardkontu 53 “Stuðul til vinnu” og standardkontu 61 “Skattur og avgjøld”.

Høvuðstøl sambært landsroknskapinum 2014 til 2019:

t.kr.

Heiti	2014	2015	2016	2017	2018	2019
Stuðul til vinnu	-10.494	-10.952	-10.776	-11.705	-11.802	-13.013
Skattur og avgjøld	72.031	79.212	79.082	79.503	87.370	88.875
Tilsamans	**61.537**	**68.260**	**68.306**	**67.798**	**75.568**	**75.862**
Játtan	65.000	65.000	68.000	68.000	65.000	76.000

Innkrevjing

Heimild at krevja inn brennioljugjald er í Ll. nr. 179/1992 “um serligt avgjald á brenniolju”, og nærri ásetingar um endurgjøld eru í K. nr. 23/2003 “um endurgjald av serligum oljuavgjaldi”.

Sambært § 1 í lógini verða 80 oyru løgd á hvønn litur av seldari gassolju til brúkarar, og 10 oyru verða løgd á hvønn litur av brenniolju til flogfør.

Sambært § 2 eru m.a. skip, bjargingarbátar, ídnaður og farmaflutningsvirki undantikin at rinda avgjald, ella tey kunnu fáa avgjaldið endurgoldið. Ávís virkir kunnu fáa lutfalsliga endurgoldið oljuavgjald. Kunngerðin ásetir nærri treytir fyri endurgjaldi av brennioljugjaldi.

Sambært lógini skal avgjaldið rindast í seinasta lagi 22. í øðrum mánaði eftir uppgerðarmánaðin, annars skal renta roknast við 0,7% fyri hvønn byrjaðan mánað frá gjalddegnum at rokna.

TAKS hevur gjørt leiðreglur um uppgerð av brennioljugjaldi. Oljufeløgini krevja avgjaldið inn vegna landskassan og rokna sjálvi út, hvussu nógv skal avroknast til TAKS. Oljufeløgini senda eitt standard uppgerðarskjal inn, sum TAKS bókar eftir.

TAKS kunnaði um, at oljufeløgini higartil hava rindað til tíðina, tí er eingin eftirstøða og eingin renta roknað. Sambært TAKS noyðast tey at rokna møguliga rentu manuelt, men ætlanin er at gera renturokningina sjálvvirkandi.

Tað er vanliga ikki sami persónur hjá TAKS, sum skrásetir bæði krav og inngjald, tó kann tað koma fyri, t.d. í feriutíð.

Konturnar fyri inntøkur av brennioljugjaldi verða stemmaðar av sjálvvirkandi. Avstemmanin tryggjar, at samsvar er millum bókhaldsskipanina hjá TAKS og Búskaparskipan landsins.

Nógv ár síðani heimildin at eftirkanna roknskapartilfar o.a. varð brúkt.

Fyri at tryggja, at oljufeløgini geva rætt upp, hevur TAKS, sambært § 3a í lógini, til eina og hvørja tíð heimild at kanna vørur á goymslu, handilsbøkur og annað roknskapartilfar v.m. hjá feløgunum. Sambært TAKS hava tey nýtt heimildina fyri nógvum árum síðani.

Eftirlitið og eftirlitsorkan hjá TAKS er avmarkað sambært stovninum. TAKS raðfestir samlaðu eftirlitini út frá einari váðameting um vandan fyri feilum, avleiðingum av møguligum feilum v.m. TAKS heldur ikki, at brennioljugjøld eru av slíkum slagi, at vandin fyri feilum er stórur, og tískil er eftirlitsorka ikki nýtt til hetta økið.

Landsgrannskoðanin heldur, at tað er ikki nøktandi at TAKS ikki tryggjar sær, at oljufeløgini geva rætt upp, t.d. við at nýta heimildina í § 3a í lógini.

Landsgrannskoðanin hevur áður reist spurningin um at áleggja feløgum, sum krevja inn avgjøld vegna landskassan, at útvega grannskoðanarváttan frá sínum grannskoðarum um, at avroknaðu avgjøldini eru røtt. TAKS kunnaði um, at tey hava latið Fíggjarmálaráðnum málið um grannskoðanarváttan at seta á løglista.

Landsgrannskoðanin kannaði skuldarasalduna í Búskaparskipan landsins 31. desember 2019, sum var 9.158 t.kr. Eisini kannaðu vit avrokningar fyri juni og oktober 2019. Einki var at finnast at.

Landsgrannskoðanin kann ikki sanna, at avroknaðu brennioljugjøldini eru røtt.

Samanumtikið kann Landsgrannskoðanin ikki sanna, at avroknaðu brennioljugjøldini eru røtt. Nøktandi skjalprógv eru ikki í skjalatilfarinum, og TAKS kann ikki sanna rættleikan, tá ið stovnurin ikki hevur framt eftirlit hjá oljufeløgunum.

Landsgrannskoðanin bað landsstýrismannin um viðmerkingar, og hann hevur svarað: *"Álit er gott, men eftirlit er betri, verður tikið til. Men tað er ein sannroynd, at ov nógv eftirlit er ov kostnaðarmikið, bæði viðvíkjandi tilfeingi og upphæddum, og er neyvan gagnligt hvørki fyri land ella fyritøkur.*

Sum TAKS hevur svarað Landsgrannskoðanini, er orka ikki til eftirlit við øllum, men stakroyndir verða gjørdar. Sjálvsagt kann eftirlitsarbeiðið betrast, men tað verður ongantíð møguligt fult og heilt at forða fyri sviki, og at fanga ella steðga øllum mistøkum.

Spurningurin er so, um meiri orka skal nýtast til eftirlit við brennioljugjaldi. Tað týdningarmesta er, at eftirlitið sannlíktger, at avroknaðu brennioljugjøldini sannlíkt eru røtt. Í samskifti við TAKS fer Fíggjarmálaráðið at tryggja, at eitt minstakrav er fyri eftirliti við av øllum skattum og avgjøldum, herundir við brennioljugjaldinum.

Í hesum sambandi kann verða upplýst, at tað eru 2 feløg sum standa fyri brennioljugjaldinum. Eftirlitsfólkini koma at "kenna" feløgini.

Fíggjarmálaráðið er samt við TAKS um, at størri eftirlitsorka er ein spurningur um raðfesting innan játtanina, tí hevur TAKS fullan stuðul til átakið "null inntøpping". Átakið byrjaði á sumri 2016 og hevur ikki sligið fult ígjøgnum enn. Vónandi kann meira arbeiðsorka, vegna nýtslu av Vinnuglugganum, verða flutt frá inntøpping til økta eftirlitsorku."

Endurrindan

Um 325 virkir og bátar vóru í januar 2020 skrásett hjá TAKS at fáa oljuavgjald endurrindað. Í 2019 eru 13 mió.kr. endurrindaðar teimum, sum sambært § 2, stk. 3 og 4, hava rætt til at fáa endurrindað brennioljugjaldið, ið tey hava goldið oljufeløgunum.

Virkini senda umsóknir til TAKS um at fáa alt ella partvíst brennioljugjald endurrindað. Tá ið umsókn er gingin á møti, skrásetir TAKS viðkomandi virki við ávísari kotu í Vinnuskránni, og so leingi TAKS ikki fær fráboðan um broyting, stendur skrásetingin óbroytt.

Tey, sum hava rætt til endurgjald, seta upphæddina fyri brennioljugjald á MVG-uppgerðina í Vinnuglugganum. Endurgjaldið verður mótroknað í møguligari MVG-skuld, ella løgd afturat møguligari MVG-afturbering.

TAKS hevur upplýst, at sperring liggur í Vinnuglugganum, soleiðis at ikki ber til hjá oljukeyparum at skráseta brennioljugjald sum skal endurrindast, um báturin ella virkið ikki er skrásett í skipanini til at hava rætt til endurgjald. Endurrindan til bátar undir 20 GT[10] er eisini automatiserað, og virkar á sama hátt sum hjá øðrum virkjum.

TAKS eftirkannar ikki, um tey, sum skráseta upphæddina fyri endurgjald av oljuavgjaldi, geva rættar upplýsingar, um tey hava rætt til fulla ella lutvísa afturrindan, ella um tey yvirhøvur hava rætt til nakra afturrindan. TAKS kannar heldur ikki um viðurskiftini hjá oljukeyparunum við tíðini eru broytt soleiðis, at teir ikki longur hava rætt til somu endurrindan, sum skrásetingin sigur.

Virkiseftirlitið hjá TAKS kannar, um oljukeyparar hava rætt til endurgjaldið, tey søkja um. Sambært TAKS gjøgnumgingu tey í 2010 øll, ið eru skrásett til endurrindan av oljuavgjaldi, um tey vóru rætt skrásett. Ætlanin var at gjøgnumganga tey aftur í 2019. TAKS heldur ikki, at tað er rætt at kanna allar endurrindanirnar, tí stovnurin hevur hvørki orku ella tilfeingi til tað.

Seinasta gjøgnumgongd var í 2010.

Landsgrannskoðanin bað TAKS um at fáa skjøl viðvíkjandi trimum feløgum, sum eru skrásett at hava rætt til endurrindan av brennioljugjaldi. Vit fingu útskriftir av MVG-uppgerðum fyri juni og oktober 2019. Av tí at MVG-uppgerðirnar verða sendar TAKS umvegis Vinnugluggan, eru eingi undirskjøl við. Av hesari orsøk, og av tí at TAKS einki eftirlit hevur havt, kann Landsgrannskoðanin ikki sanna, at endurrindanin av brennioljugjaldi er røtt.

Landsgrannskoðanin kann ikki sanna, at endurrindanin av brennioljugjaldi er røtt.

3.14 Framleiðslugjald (LG 2019/220-0522)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað framleiðslugjøld. Framleiðslugjald verður kravt inn við heimild í Ll. nr. 19/2002 "um avgjald á framleiðslu og innflutningi". Sambært § 2 í lógini skal avgjald rindast til landskassan fyri vørur, ið við vinnuligum endamáli verða framleiddar, sum ásett í frumskjali 1 til Toll- og vøruskránna. Avgjaldið er eitt %-gjald av fakturavirði og ein upphædd pr. kg ella litur.

[10] Gross Tonnage

Framleiðsluvirkir gera avgjaldið upp hvønn mánað, og senda uppgerðina til TAKS í seinasta lagi 28. í mánaðinum eftir. Verður avgjald ikki goldið rættstundis, rinda virkini 0,7% í mánaðarligari rentu. TAKS hevur heimild at panta gjaldkomin krøv sambært § 3, stk. 4, í lógini.

TAKS kann játta afturrindan av avgjøldum, tá ið vørur verða útfluttar frá tolløkinum ella latnar til tær í § 8 í tolllógini nevndu sølubúðir. Eisini kann TAKS eftir umsókn endurrinda ella fráskriva framleiðsluavgjøld av vørum, sum verða oyðilagdar undir framleiðslu ella á framleiðsluøkinum treytað av, at vørurnar verða burturbeindar undir tolleftirliti.

Framleiðslugjøld seinastu 5 árini:

t.kr.

Heiti	2015	2016	2017	2018	2019
Sterkt øl, kl A	15.871	17.135	19.013	17.356	18.379
Aðrar vørur	33	74	57	44	43
Sodavatn 1 kr./l	5.555	5.730	5.270	4.683	5.367
Afturgjald	-1.522	-592	-841	-924	-1.143
Brennivín	0	0	0	1.634	2.213
Tilsamans	**19.937**	**22.348**	**23.499**	**22.793**	**24.859**

Nógv tann størsta inntøkan stavar frá framleiðslu av sterkum øli.

Eftirlit o.a.

Virkiseftirlitið hjá TAKS hevur eftirlit við, at virkir rinda røtt framleiðsluavgjøld. TAKS hevur heimild at kanna hølir, vørur á goymslu og alt roknskapartilfar, brævaskifti v.m. hjá framleiðsluvirkjunum.

TAKS fremur reglulig eftirlit hjá tax-freehandlinum í floghavnini.

Virkisgongdir hjá TAKS lýsa, hvussu avgjaldsbókhaldið avgreiðir uppgerðirnar. Tá ið uppgerðirnar eru skrásettar í journalini, samanber Tolldeildin tær við áður móttiknar uppgerðir. TAKS tók undir við tilmælinum frá Landsgrannskoðanini um at skjalfesta kanningarnar.

Avgjaldsbókhaldið kannar hvønn mánað, um krøv eru skrásett hjá øllum skuldarum, ið eiga at rinda framleiðslugjald, og um tey eru goldin rættstundis.

Fyrr skuldu virkir søkja TAKS um loyvi at framleiða til vinnuligt virksemi. Eftir lógarbroytingina skulu virkini sjálvi boða frá, tá ið tey fara undir avgjaldsskylduga framleiðslu.

TAKS skrásetir øll framleiðsluvirkir í Vinnuskránni, og stovnurin fylgir væl við virkseminum; tá ið virki í Føroyum byrja avgjaldsskylduga framleiðslu, setir TAKS seg í samband við tey.

Átta virkir eru skrásett at rinda framleiðslugjald. Vinnuskráin hevur ein teig fyri um virkini skulu rinda framleiðslugjald, og har stendur “N”, sum merkir, at hesi virkini ikki skulu rinda. Sambært TAKS hevur skrásetingin ongan týdning fyri avrokningina.

Landsgrannskoðanin vísti á, at tað hevur týdning fyri umsitingina og innaneftirlitið, at skrásetingin er røtt.

Tvey virkir, sum ikki eru skrásett við skyldu at rinda framleiðslugjald, vóru farin undir avgjaldsskylduga framleiðslu. Sambært TAKS, hava tey samskifti við virkini, annað virkið er byrjað at rinda framleiðslugjald, og hitt virkið er ikki byrjað at framleiða.

Sambært TAKS er ein gomul avgerð um, at nakrir framleiðarar avrokna fyri ársfjórðingin, t.v.s. at teir fáa upp í 3 mánaðir kreditt. Landsgrannskoðanin vísti á, at tað

er ikki í samsvari við lógina. TAKS er samt við Landsgrannskoðanini, og fer at rætta mannagongdina.

Sambært TAKS er tað ov tíðarkrevjandi at vera til staðar, tá ið bryggjaríini tappa. Tó hevur TAKS verið hjástatt, tá ið annað virkið hevur beint vørur burtur.

TAKS hevur kunnað um, at tey fara at skipa so fyri í framtíðini, at spillvøra hjá báðum bryggjaríunum verður skrásett og burturbeind undir tolleftirlitið.

Eitt framleiðsluvirki gavst at gjalda framleiðslugjald, tí tað metti seg ikki hava skyldu at gjalda. TAKS hevur boðað virkinum frá, at eingin ivi er um, at virkið skal rinda framleiðslugjald sambært lógini. TAKS arbeiðir við málinum, og fer at boða Landsgrannskoðanini frá úrslitinum, tá ið málið er avgreitt.

Tá ið lógin í 2015 bleiv broytt til, at krem og parfumur sluppu undan innflutningsgjaldi, skuldu virki, ið framleiða slíkar vørur, heldur ikki rindað framleiðslugjald. Eitt tílíkt virki hevur higartil rindað framleiðslugjald. Sambært TAKS er tað nú rættað.

Samanumtikið

Landsgrannskoðanin kann ikki sanna, at avroknaðu framleiðslugjøldini eru røtt. TAKS raðfestir ikki økið, lítil orka er sett av til arbeiðið, og manuellu mannagongdirnar tryggja ikki, at øll, sum skulu rinda framleiðslugjald, rinda. TAKS roknar framvegis rentu av ov seint goldnum avgjaldi manuelt.

Landsgrannskoðanin kann ikki sanna, at avroknaðu framleiðslugjøldini eru røtt.

TAKS hevur kunnað um, at tey fleiri ferðir hava víst Fíggjarmálaráðnum á, at neyðugt er við størri játtan fyri at nøkta eftirlitstørvin, serliga á tolløkinum.

TAKS er samt við Landsgrannskoðanina, at renturokningin eigur at fáa hægri raðfesting og vónar, at fíggjarligt rúm verður fyri tí innan alt ov langa tíð.

Landsgrannskoðanin heldur, at eftirlitini við bryggjaríunum eru ikki nøktandi. Tó at TAKS kann endurrinda avgjald, treytað av at vørurnar verða burturbeindar undir tolleftirliti, er sambært TAKS ov lítil arbeiðsorka til, at eftirlit kann vera við báðum bryggjaríunum.

Mannagongdir tryggja ikki, at virkir í longri tíðarskeið ikki sleppa undan at senda inn uppgerðir, ella at virkir gevast við at rinda avgjald, tó at tey hava skyldu til tess. Sambært TAKS fer stovnurin undir at endurskoða mannagongdirnar.

Landsgrannskoðanin hevur áður reist spurningin um at áleggja feløgum, sum krevja inn avgjald vegna landskassan, at útvega grannskoðanarváttan frá sínum grannskoðara um, at avroknaðu avgjøldini eru røtt.

Í januar 2020 hevur TAKS kunnað um, at tað framvegis verður arbeitt við málinum. Sambært TAKS hevur stovnurin fyri einum ári síðani biðið Fíggjarmálaráðið um at seta uppskotið um grannskoðanarváttan á løglista.

Viðmerkingar frá landsstýrismanninum

Landsstýrismaðurin vísir á, at ov nógv eftirlit er ov kostnaðarmikið, bæði viðvíkjandi tilfeingi og upphæddum, og er neyvan gagnligt, hvørki fyri land ella fyritøkur. Orka er ikki til eftirlit við øllum, men stakroyndir verða gjørdar. Sjálvsagt kann eftirlitsarbeiðið betrast, men tað verður ongantíð møguligt fult og heilt at forða fyri sviki, og at fanga ella at steðga øllum mistøkum.

Sambært landsstýrismanninum er ov nógv eftirlit ov kostnaðarmikið.

Tað týdningarmesta er, at eftirlitið ger sannlíkt, at avroknaðu framleiðslugjøldini eru røtt. Í samskifti við TAKS fer Fíggjarmálaráðið at tryggja, at eitt minstakrav er fyri eftirliti við øllum skattum og avgjøldum, herundir við framleiðslugjaldinum.

Landsstýrismaðurin vísir eisini á, at tað eru 2 feløg, nú við sama eigara, sum standa fyri størsta partinum av framleiðslugjaldinum. Eftirlitsfólkini koma at "kenna" virkini. Stakroyndir vera tó eisini gjørdar av hinum uppgerðunum.

Sambært TAKS hevur stovnurin gjørt av at gera eftirlit hjá framleiðsluvirkjunum í ár, har bæði Tolldeildin og Virkiseftirlitið vera við, og ætlanin er at uppraðfesta, at spillvøra verður skrásett og burturbeind undir tolleftirliti. Eisini eru kekklistar og mannagongdir gjørdar og endurskoðaðar aftaná vitjanina av Landsgrannskoðanini.

Fíggjarmálaráðið er samt við TAKS um, at størri eftirlitsorka er ein spurningur um raðfesting innan játtanina, tí hevur TAKS fullan stuðul til átakið "null inntøpping". Átakið byrjaði á sumri 2016 og hevur ikki sligið fult ígjøgnum enn. Vónandi kann meira arbeiðsorka, vegna nýtslu av Vinnuglugganum, verða flutt frá inntøpping til økta eftirlitsorku.

3.15 Ferðaavgjald (LG 2019/220-0522)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað inntøkur av ferðaavgjøldum. Sambært § 1 í Ll. nr. 37/1988 "um ferðagjald", skal fyri hvørt ferðafólk, sum verður flutt av landinum, rindast 65 kr. Sambært § 3 skal avgjald ikki rindast fyri børn undir 12 ár, sum ferðast loftvegis, og fyri børn undir 16 ár, sum ferðast sjóvegis. Heldur ikki skulu ferðafólk, ið eru í Føroyum í transitt, og ferðafólk, ið ferðast við fari, sum ikki vanliga verður nýtt til ferðafólkaflutning, rinda avgjald. Ferðafólkaflutningsfeløg krevja avgjaldið inn og rinda tað til TAKS.

Sambært § 2, stk. 1, í lógini kann avsláttur verða veittur í ferðaavgjaldinum. Sambært stk. 2 skal landsstýrismaðurin áseta nærri reglur fyri, hvørjar avsláttarskipanir geva rætt til avsláttur. Reglur eru ikki gjørdar um avsláttarskipanir. TAKS kunnaði um, at eingin avsláttur verður givin.

Í landsroknskapinum eru inntøkurnar skrásettar á høvuðskontu 20.52.2.25 "Ferðaavgjald", og greinaðar á standardkontu 61, inntøkur, og standardkontu 67, morarentur.

Høvuðstøl 2014 til 2019:

t.kr.

Heiti	2014	2015	2016	2017	2018	2019
Skattur og avgjøld	8.590	9.564	9.392	11.435	13.171	13.432
Rentuinntøkur	9	9	10	8	10	10
Tilsamans	**8.599**	**9.573**	**9.402**	**11.443**	**13.181**	**13.442**
Játtan	9.000	9.000	10.000	10.000	12.000	13.000

Inntøkurnar eru øktar úr 8,6 mió.kr. í 2014, í 13,4 mió.kr. í 2019, ella 56%.

Sambært § 1, stk. 3, skulu flutningsfyritøkurnar lata TAKS uppgerðir yvir flutt ferðafólk í seinasta lagi 10. í øðrum mánað eftir uppgerðarmánaðin, og rinda avgjøldini í seinasta lagi 22. í øðrum mánað eftir uppgerðarmánaðin.

Í § 1, stk. 4, er ásett, at 0,7% skulu roknast í rentu fyri hvønn byrjaðan mánað frá gjalddegnum at rokna, eru ferðaavgjøldini ikki goldin, tá ið freistin er úti.

Trý ferðaflutningsfeløg eru skrásett hjá TAKS at avrokna ferðaavgjald, og tað eru einans tey trý feløgini, ið rinda ferðaavgjøld. Ferðafólk, sum koma og fara við leiguflogførum, rinda ikki ferðaavgjald, tó at tey steðga í Føroyum. Ferðafólk við farmaskipum, sum hava loyvi at taka ferðafólk við, rinda heldur ikki.

TAKS vísti á, at flutningsfeløg skulu ikki rinda avgjald fyri ferðafólk, sum eru í Føroyum í transitt, og at ferðaavgjald bert skal roknast fyri persónar, sum ferðast úr Føroyum.

Landsgrannskoðanin heldur tað er i ivasamt, um ferðafólk, sum koma til Føroya á henda hátt, kunnu roknast at vera í transitt, og harvið verða undantikin sambært § 3 lógini at rinda avgjald, tá ið tey fara av landinum aftur.

Spurt, hevur Fíggjarmálaráðið svarað, at ráðið er ikki ósamt við metingina hjá TAKS um, hvørji ferðaflutningsfeløg skulu uppkrevja og avrokna ferðaavgjald til landskassan.

TAKS hevur gjørt leiðreglur um, hvussu stovnurin kannar og avgreiðir uppgerðir av ferðaavgjaldi. Stovnurin hevur eisini gjørt eitt standard uppgerðarskjal, sum tey bókað eftir.

Sambært TAKS gjalda feløgini í høvuðsheitum altíð rættstundis. Um feløgini koma í eftirstøðu, rinda tey rentu av eftirstøðuni.

Renta av ov seint goldnum ferðaavgjøldum verður roknað manuelt. TAKS hevur fyrr gjørt vart við og eisini í januar 2020, at stovnurin ætlar at laga skipanina, sum roknar rentur av MVG-eftirstøðum, til eisini at kunna rokna rentur av gjaldkomnum ferða-avgjøldum. Uppgávan er ikki raðfest frammarlaga. Landsgrannskoðanin mælti til, at sjálvvirkandi renturokning verður sett í verk, ella at manuella renturokningin verður kannað av øðrum persóni.

Landsstýrismaðurin hevur víst á, at sjálvvirkandi renturokning er á flestu økjum, og er tað ynskiligt, at tað eisini verður galdandi fyri økini, sum eftir eru, herundir ferðaavgjøld. Av tí, at talan er um sera fá feløg við fáum uppgerðum, sum sjáldan rinda ov seint, er vandin fyri feilum tó sera lítil og arbeiðið av hesum rættiliga avmarkað. Sambært TAKS verður arbeiðið við sjálvvirkandi renturokning fyri øll krøvsløg væntandi liðugt í heyst.

Fyri at tryggja, at samsvar er ímillum bókhaldsskipanina hjá TAKS og Búskaparskipan landsins, verða allar kontur fyri ferðaavgjøld stemmaðar av sjálvvirkandi. Eina ferð um mánaðin kannar bókhaldsdeildin stovnsnummarið fyri ferðaavgjøld, at alt sær út sum vanligt.

Seinasta eftirlitsvitjan hjá TAKS var í 2011.

Sambært § 4a í lógini um ferðaavgjøld hevur TAKS heimild at kanna roknskapartilfar, brævaskifti o.a. hjá flutningsfeløgunum. TAKS hevur ikki nýtt heimildina at kanna um upplýsingarnar, sum flutningsfeløgini lata inn, eru rættar. TAKS hevur seinast verið á eftirlitsvitjan hjá flutningsfeløgum í 2011.

TAKS hevur víst á, at eftirlit og eftirlitsorka hjá stovninum eru avmarkað. Samlaða raðfestingin av eftirlitum verður gjørd út frá einari váðameting um vandan fyri feilum, avleiðingum av møguligum feilum v.m. Ferðaavgjøld eru sambært TAKS ikki av slíkum slag, at vandin fyri feilum er stórur, tí er eftirlitsorka ikki nýtt til hetta økið.

Landsgrannskoðanin heldur, at tað er ikki nøktandi, at TAKS ikki tryggjar sær, at flutningsfeløgini geva rætt upp, t.d. við at nýta heimildina í § 4a.

Vit hava áður reist spurningin um áleggja ferðaflutningsfeløgunum at útvega grann-skoðanarváttan frá sínum grannskoðarum um, at avroknaðu ferðaavgjøldini eru røtt. TAKS kunnaði um, at stovnurin hevur latið Fíggjarmálaráðnum málið um grann-skoðanarváttan at seta á løglista.

Seinar bókingar gera, at fíggjarstøðan í landsroknskapinum verður ikki røtt.

Landsgrannskoðanin hevur kannað skuldarasalduna í Búskaparskipan landsins 31. desember 2019, sum var -282 t.kr., og staðfest, at nøkur krøv og inngjøld frá 2019 ikki vóru skrásett í skipanini fyrr enn í januar 2020. Seinu bókingarnar gera, at fíggjar-støðan í landsroknskapinum verður skeiv. Landsgrannskoðanin mælti til, at krøv og inngjøld verða skrásett so skjótt, sum tilber.

Landsgrannskoðanin hevur kannað avrokningar fyri juni og oktober 2019. Einki var at finnast at.

Landsgrannskoðanin kann ikki sanna, at avroknaðu ferða-avgjøldini eru røtt.

Samanumtikið kann Landsgrannskoðanin ikki sanna, at avroknaðu ferðaavgjøldini eru røtt, tá ið TAKS ikki hevur gjørt eftirlit hjá ferðaflutningsfeløgunum.

Vit bóðu landsstýrismannin um viðmerkingar, og hann hevur svarað:
"Álit er gott, men eftirlit er betri, verður tikið til. Men tað er ein sannroynd, at ov nógv eftirlit er ov kostnaðarmikið, bæði viðvíkjandi tilfeingi og upphæddum, og er neyvan gagnligt hvørki fyri land ella fyritøkur.

Sum TAKS hevur svarað Landsgrannskoðanini, er orka ikki til eftirlit við øllum, men stakroyndir verða gjørdar. Sjálvsagt kann eftirlitsarbeiðið betrast, men tað verður ongantíð møguligt fult og heilt at forða fyri sviki, og at fanga ella steðga øllum mistøkum.

Spurningurin er so, um meiri orka skal nýtast til eftirlit við ferðaavgjøldum. Tað týdningarmesta er, at eftirlitið sannlíktger, at avroknaðu ferðaavgjøldini eru røtt. Í samskifti við TAKS fer Fíggjarmálaráðið at tryggja, at eitt minstakrav er fyri eftirliti við øllum skattum og avgjøldum, herundir við ferðaavgjøldunum.

Í hesum sambandi kann verða upplýst, at tað eru 3 feløg, sum standa fyri ferða-avgjøldunum. Eftirlitsfólkini koma at "kenna" virkini."

3.16 Endurgjøld av meirvirðisgjaldi (LG 2018/220-0522)

Í seinastu frágreiðing umrøddu vit grannskoðan av endurgjøldum sambært §§ 3 a-d í MVG-lógini.

Reglurnar um MVG eru í Ll. nr. 136/1992 "um meirvirðisgjald". Sambært lógini skal avgjald rindast til landskassan í øllum liðum av vinnuligari sølu av vørum og tænastum og við innflutningi úr útlondum.

Í §§ 3 a-d eru ásetingar um, at søkjast kann um at fáa MVG'ið endurrindað fyri ávísar íløgur:

- § 3 a: Felagsskapir, stovnar og grunnar, ið gera íløgur í ikki-vinnuligt, almannagagnligt frítíðarvirksemi fyri meira enn 1 mió.kr.,
- § 3 b: Bygging/umbygging av bygningi til leigubústaðir, fyri meira enn 200 t.kr.,
- § 3 c: Akfar, sum bert nýtir ravmagn ella vetni, og
- § 3 d: Hitapumpuskipanir.

Øll fýra sløgini av endurgjøldum eru tíðaravmarkað.

Endurgjald sambært § 3 a
Góðkendur grannskoðari skal í góðkenning sínari av fíggjarætlanini og kostnaðar-ætlanini staðfesta, at íløgan er oman fyri 1 mió.kr., og at í minsta lagi 33% av samlaða íløgukostnaðinum, er fingin til vega sum gáva ella innsavnað við óløntum og sjálv-bodnum arbeiði, og at fígging er til alla íløguverkætlanina. Eisini skal kommunan, har íløgan verður gjørd, góðkenna øll neyðug byggiteknisk myndugleikakrøv og –loyvi til verkætlanina.

Sambært TAKS koma flestu umsóknirnar frá ítróttafeløgum, samkomuhúsum, felags-skapum o.l. Higartil eru bert umsóknir um nýbygging og umbygging av bygningum komnar. Í løtuni koma so at siga ongar nýggjar umsóknir til TAKS.

TAKS tryggjar sær, at váttanir frá grannskoðara og kommunu fylgja við umsóknunum. TAKS ásannar, at tað er trupult at kanna eftir, at í minsta lagi 33% av íløgukostnaðinum er gáva og/ella ólønt arbeiði.

Eru kravdar váttanir og skjøl fingin til vega, og lýkur umsøkjarin treytirnar fyri at fáa endurgjald, verður goldið út, so hvørt umsøkjari sendir MVG-uppgerðir inn.

Upphæddin søkt verður um, verður vanliga ikki broytt, um prísurin ikki heldur. Um umsøkjari boðar frá, at prísurin verður hægri, enn søkt er um, verður hann biðin at senda nýggja umsókn. Higartil eru allar umsóknir gingnar á møti.

TAKS ætlar at skipa betri eftirlit við, at ikki meira verður goldið út, enn MVG'ið, sum er givið upp í fíggjarætlanini og kostnaðarætlanini.

Um íløgan verður seld, ella virksemið heldur uppat innan 10 ár, skal endurgjaldið rindast aftur lutfalsliga eftir reglunum um javning.

Endurgjald sambært § 3 b
Fíggjarætlan og kostnaðarætlan at byggja ella umbyggja bygning til leigubústað skal vera góðkend av góðkendum grannskoðara. Kommunan skal vátta, at byggiverkætlanin er í samsvari við lóg um at byggja bygningar o.a.

TAKS tryggjar sær, at váttan frá grannskoðara fyriliggur, at kommunan hevur góðkent ætlanina, og at umsøkjararnir lúka treytirnar um tíðarfreistir o.a. Eisini tryggjar TAKS sær, at einki verður goldið út, uttan at veðskuldarbræv er tinglisið.

TAKS fylgir ikki altíð mannagongdunum og treytunum, tí TAKS fær ikki umsóknir frá Bústøðum til hvørja einstaka verkætlan. Bústaðir hava søkt eina ferð, tá ið tey byrjaðu at byggja íbúðir, og eftir tað hevur TAKS bert fingið tinglýst veðskuldarbrøv sendandi, so hvørt tey fara undir nýggja verkætlan. Tað vil siga, at TAKS fær ikki váttaða kostnaðarætlan frá grannskoðara og góðkenning frá kommunum fyri einstøku verkætlanirnar.

Landsgrannskoðanin helt, at mannagongdin hjá TAKS viðvíkjandi endurgjaldi til Bústaðir var ikki í tráð við reglurnar í lóg og kunngerð. TAKS hevur tikið viðmerkingina til eftirtektar og heitt á Bústaðir at senda umsókn til TAKS við tilhoyrandi loyvum til hvørja einstaka verkætlan.

Veðskuldarbrøvini liggja til skjals hjá TAKS. Íløgan kemur undir reglurnar í MVG-lógini um javning. Sambært TAKS hava tey ikki skipað, hvussu tey verða mint á at avlýsa veðskuldarbrøvini aftur, tá ið tann tíðin kemur.

Endurgjald sambært § 3 d
Tey, sum keypa góðkendar hitapumpuskipanir til upphiting og heitt vatn í sethúsum ella bygningum, kunnu eftir umsókn fáa endurrindað MVG av íløgukostnaði til hitapumpu, útbúnað og arbeiðsløn. Fyri at fáa MVG endurgoldið, skulu hesar treytir verða loknar:

- talan skal vera um sethús ella bygning, har hitapumpa letur í minsta lagi 80% av samlaðu nýtsluni til upphiting og heitt vatn, og restin av nýtsluni skal vera grundað á el,
- samlaðu útreiðslurnar skulu vera hildnar í seinasta lagi 31. desember 2019 og umsókn skal vera TAKS í hendi í seinasta lagi 31. mars 2020,
- hitapumpur skulu vera góðkendar sambært Bygningskunngerðini,
- arbeiðið at installera hitapumpuskipanina skal vera gjørt av góðkendum installatøri, og um talan er um jarðhitaskipan, skal arbeiðið vera gjørt av góðkendum brunnborara, og
- Umhvørvisstovan skal vátta, at treytirnar eru loknar.

Umhvørvisstovan málsviðger umsóknir, TAKS rindar út, uttan aðra viðgerð.

Umsókn skal sendast TAKS á serskildum oyðublaði, saman við kvittanum fyri íløgu-útreiðslunum. TAKS og Umhvørvisstovan hava gjørt avtalu um, at Umhvørvisstovan skal málsviðgera umsóknirnar, tí tey hava fakkunnleika á økinum. Umhvørvisstovan kannar og váttar, at treytirnar at fáa endurgjald eru loknar. Tá ið TAKS fær váttanina frá Umhvørvisstovuni, rindar TAKS út uttan aðra viðgerð.

Ivasamt um heimild er at seta hámark.

Á umsóknarblaðnum er ásett, at í mesta lagi verða útreiðslur upp til 7 t.kr. endurgoldnar fyri elarbeiði og arbeiðsløn fyri íbinding. Hámarkið er ikki heimilað í lógini, men Umhvørvisstovan hevur gjørt løgfrøðiligt upprit, har niðurstøðan er, at heimild til MVG afturbering ikki kann toyggjast til annað elarbeiði enn tað, sum krevst fyri at binda eina hitapumpuskipan í verandi elkervi í húsinum. Sambært Umhvørvisstovuni er upphæddin, í mesta lagi 7 t.kr., ásett eftir einari samlaðari meting av, hvat ein miðal kostnaður var fyri elarbeiði í sambandi við íbinding av hitapumpuskipan. Landsgrannskoðanin ivast í heimildini at áseta eitt slíkt hámark.

Í september 2019 kunnaði Fíggjarmálaráðið um, at ráðið fór at umrøða spurningin um hámarkið við TAKS, sum varðar av endurgjaldinum av MVG.

Í august 2020 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at *"tá ið nýtt landsstýri varð skipað, vórðu fleiri málsøki løgd afturat Fíggjarmálaráðnum at umsita. Í sama tíðarskeiði hevur útskifting verið í starvsfólkahópinum, umframt at Koronafarsóttin síðani í vár hevur órógvað vanligu arbeiðsgongdirnar. Tí hevur minni arbeiðsorka verið til arbeiðsuppgávurnar, herundir roknskapar- og grannskoðanarviðurskifti. Arbeiðið verður nú aftur raðfest."*

3.17 Stuðul til rentuútreiðslur (LG 2019/203-0224)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað stuðul til rentuútreiðslur. Stuðul til rentuútreiðslur verður goldin út sambært Ll. nr. 148/1996. Lógin gevur heimild til at lata stuðul til rentur av bústaðar- og útbúgvingarlánum, og til gjalding av ávísum ábyrgdum.

Rentustuðul til bústaðarlán verður bert veittur fyri matrikkulnummarið ávikavist bústaðareindina, har viðkomandi verður hildin at búgva. Til bygging av bústaði kann rentustuðul latast fyri rentuútreiðslur í byggitíðini í mesta lagi fyri tvey ár, áðrenn flutt verður inn.

Rætt til rentustuðul hevur tann, sum er fult skattskyldugur í Føroyum og sum hevur rentur av lánum, sum eru nevnd í § 2. Harumframt verður sambært stk. 3 bert goldin rentustuðul fyri matrikkulin ella bústaðareindina, har viðkomandi verður hildin at búgva, t.e. tann bústaður, sum viðkomandi persónliga og fíggjarliga er mest knýttur at.

Treyt fyri at fáa stuðul er, at lánið sum heild er stuðulsloyvt, t.v.s. at lánságóðin ikki heilt ella lutvíst kann nýtast til annað endamál enn tað, lógin loyvir.

Tríggjar kunngerðir hava ásetingar um rentustuðul:

- K. nr. 30/2003 "um rentustuðul til persónar, sum hava rætt til endurgjald á annan hátt fyri rentuútreiðslur".
- K. nr. 100/1997 "um rætt til stuðul til persónar, sum ikki lúka treytirnar í rentustuðulslógini" og
- K. nr. 101/1997 "um skjalprógv, tá søkt verður um rentustuðul".

Rentustuðulin er 35% av tilskrivaðu rentuni. Í mesta lagi verða veittar 100.000 kr. um árið í rentustuðli fyri hvørt matrikkulnummar, óansæð um ein ella fleiri persónar eiga bústaðin.

Sambært TAKS eru eingi lán eftir, sum fingu stuðul eftir reglunum fyri lán, ið vóru avtalað áðrenn 18. januar 1991.

Stuðul til rentuútreiðslur verður skrásettur á høvuðskontu 3.22.4.01 "Stuðul til rentuútreiðslur", og er greinaður á standardkontu 52 "Tilskot til einstaklingar" og standardkontu 77 "Flyting frá kommunum til landið".

Gongdin frá 2015 til 2019:

t.kr.

Heiti	2015	2016	2017	2018	2019
Tilskot til einstaklingar	82.121	80.025	79.241	79.310	79.690
Fl. frá kommunum til landið	-36.796	-35.908	-35.538	-35.525	-35.685
Tilsamans	**45.325**	**44.116**	**43.703**	**43.786**	**44.005**
Játtan	46.000	44.000	44.000	44.000	44.000

Nettoútreiðslurnar eru lítið broyttar seinastu 5 árini. Nettojáttanin er lækkað úr 46 mió.kr. í 2015 í 44 mió.kr. í 2019.

Býti millum land og kommunur

Landið rindar rentustuðulin fyrst í hvørjum mánaði, og fær síðani endurrindað kommununar part frá tí kommununi, har umsøkjarin er tilmeldaður. Kommununar partur verður mótroknaður í kommunuskattinum hvønn mánað. TAKS stemmar avrokningina við kommununrnar av hvønn mánað.

Landsgrannskoðanin hevur eftirroknað avroknaða býtið millum land og kommunur fyri 2019. Einki var at finnast at.

Málsviðgerð

TAKS hevur skrivligar mannagongdir fyri málsviðgerðini av rentustuðlinum, bæði fyri handfaring av umsóknum og fyri eftirliti. Sambært TAKS eru tey í holt við at gera nýggja virkisgongd og mannagongdir.

TAKS hevur standard umsóknarbløð til rentustuðul. Í K. nr. 101/1997 er ásett, hvørjar upplýsingar umsøkjarar skulu lata og hvørji skjalprógv skulu fylgja við.

Hóast lántakarar sjálvir hava ábyrgd av at søkja um rentustuðul, er tað í flestu førum peningastovnarnir, sum vegna lántakararnar senda umsóknirnar umvegis teldupost til TAKS. Vanliga fylgja eingi skjalprógv við, men lántakararnir hava tó skrivað undir umsóknarbløðini.

Sambært TAKS kanna málsviðgerar upplýsingarnar, sum vera latnar við umsóknunum. Er talan um hækking av láni, hyggur TAKS eftir, um samsvar er ímillum upphæddina, sum lánið verður hækkað við, og tað endamál sum umsøkjarin hevur upplýst, hækkingin skal brúkast til. Er ikki samsvar, biður TAKS um kontuavrit og onnur skjøl, sum kunnu prógva, at grundarlag er fyri rentustuðlinum. Málsviðgerin kannar m.a., um:

- umsøkjarin er búsitandi í Føroyum,
- umsøkjarin býr á matriklinum, sum rentustuðul verður søktur um,
- umsøkjarin skyldar rentustuðul,
- upphæddin á láninum samsvarar við umsókn,
- umsøkjarin eigur útgjaldskontuna,
- umsøkjarin er tinglisin ognari av ognini, og um
- upphæddin á láninum samsvarar við tað, sum er tinglisið sum skuld í ognini.

Um TAKS kemur fram á eitthvørt ivasamt, biðja tey umsøkjaran um fleiri upplýsingar. Endalig málsviðgerð bíðar, til upplýsingarnar eru fingnar til vega. Í førum har umsóknin eyðsýnt ikki lýkur treytirnar, verður hon noktað, og svar við grundgeving og kæruvegleiðing verður sent til umsøkjaran.

Rentustuðul til bygging av egnum bústaði verður veittur, tá ið bústaðurin er liðugt bygdur, og umsøkjarin er fluttur í bústaðin. Umsøkjari kann søkja um rentustuðul afturvirkandi fyri tvey ár frá innflytingardegnum. Treytin er, at viðkomandi ikki hevur fingið rentustuðul fyri annað bústaðarlán í tíðarskeiðnum.

Rentustuðul kann bert latast til eini hús. Hava eini hjún t.d. tvinni hús, fæst rentustuðul bert fyri annað húsið, sjálvt um tey búgva í báðum.

Hjún, sum búgva hvør sær, og sum eru eigarar av hvør sínum matrikkuli og eigarar av hvør sínari skuld, hava rætt til at fáa stuðul til rentuútreiðslur. Tann siðvenjan hevur verið galdandi eftir avgerð hjá Skattakærunevndini 25. oktober 2012.

Bert ein persónur kann standa sum móttakari av rentustuðli fyri hvørja ogn. Við hjúnaskilnað kemur fyri, at tann sum ber rentuútreiðslurnar ikki er tann, sum fær rentustuðulin útgoldnan. Um umsøkjarar ynskja at broyta, hvør fær útgjaldið, ger TAKS eftir ynskjunum. Tann av hjúnunum, sum tá býr í húsinum, hevur bert rætt til hálvan stuðul, so leingi ognin ikki er býtt.

Lýkur umsøkjari allar treytirnar fyri at fáa rentustuðul, sendir TAKS honum játtanarskriv. Landsgrannskoðanin mælti til, at annar persónur enn skrásetarin eftirkannar upplýsingarnar, sum verða skrásettar.

TAKS heldur, at eftirlitið við útgjaldi er nøktandi, men fer at broyta mannagongdina, soleiðis at ein triði persónur eftirkannar og tekur stakroyndir úr einum lista yvir lán, ið eru stovnað mánaðin frammanundan.

Tá ið ov nógvur rentustuðul av onkrari orsøk er goldin út, sendir TAKS ætlanarskriv til móttakaran. Í ætlanarskrivinum er ásett, at afturgjaldsfreistin er 14 dagar. Um kravið ikki er goldið tá, verður tað skrásett í innkrevjingarskipanini hjá TAKS.

Persónar undir DIS-skipanini

Persónar, sum sigla undir DIS-skipanini, kunnu velja ímillum at fáa rentustuðul í Føroyum, ella kompensatión fyri renturnar í Danmark. Um persónur velur at fáa rentustuðul í Føroyum, skal hann hvørt ár senda eina váttan frá Udligningskontoret til TAKS um, at hann ikki fær kompensatión úr Danmark. Persónur, sum eigur ogn saman við maka, og sum velur at fáa kompensatión úr Danmark, fær nú bert kompensatión fyri helvtina av bústaðarláninum. Makin hevur rætt til at fáa rentustuðul í Føroyum fyri hina helvtina av bústaðarláninum.

Nýggj umsókn skal sendast hvørt ár saman við váttan frá Udligningskontoret. Um persónur hevur fingið kompensatión í sama tíðarskeiði, sum hann hevur fingið rentustuðul, krevur TAKS rentustuðulin aftur.

Lestrarlán

Rentustuðul kann veitast til rentur av lestrarlánum. Tá ið søkt verður um rentustuðul eftir lokna útbúgving, verður sambært § 4, stk. 2, í lógini[11] veittur rentustuðul fyri rentu, ið tilskrivað verður í afturgjaldstíðini, umframt fyri rentu, sum er samansavnað í tíðini, áðrenn afturgjalding byrjar.

Føroysk lestrarlán verða skrásett og viðgjørd sum vanlig peningastovnslán. Fyri donsk lestrarlán skal stuðulsmóttakari senda ársuppgerð til TAKS hvørt ár. Váttan frá lánistovni um tilskrivaða rentu skal sendast saman við umsókn.

[11] Ll. nr. 148/1996

Persónar, ið hava bústaðarskyldu
Frá 1. januar 2018 hava t.d. prestar rætt til at fáa rentustuðul fyri sethúsalán á vanligan hátt, sjálvt um viðkomandi ikki er búsitandi á sínum matrikkuli. Føroya Stiftsstjórn skal tá vátta, at persónurin er í starvi sum prestur. Heimildin er í § 2, stk. 4, í lógini.

Innaneftirlit
TAKS kannar ikki allar umsóknirnar, men skrivar javnan til nakrar umsøkjarar og biður um kontuavrit og fakturar, fyri at fáa váttað, at lánið er nýtt til tað, sum er upplýst.

Mælt varð til at skjalfesta eftirlitini.

TAKS hevði skjalfest nøkur eftirlit í rokniarki, og vísti á, at onnur eftirlit eru partur av vanligari málsviðgerð. TAKS hevði gjørt 43 eftirlit í 2019. Landsgrannskoðanin mælti til, at øll eftirlitini verða skjalfest.

Sambært mannagongdunum "Eftirlit rentustuðul" hevur TAKS eftirlit við mánaðarligum listum og við at stemma av millum rentustuðulsskipanina og Búskaparskipan landsins.

Hvønn mánað verða listar skrivaðir út fyri ymiskar feilkotur. TAKS gongur listarnar ígjøgnum og skrásetir teir í 360. Landsgrannskoðanin hevur hugt eftir eftirlitslistunum fyri juli 2019. Einki var at finnast at.

TAKS stemmar eisini av millum rentustuðulsskipanina og Búskaparskipan landsins, umframt at debitorar og kreditorar verða eftirhugdir.

Sambært TAKS lækkar skrásetta lánsupphæddin í rentustuðulsskipanini sjálvvirkandi eina ferð um árið í mun til avdráttirnar, sum eru falnir í árinum. Av tekniskum ávum hevði niðurskrivingin av lánsupphæddini í rentustuðulsskipanini ikki riggað í 2 – 3 ár. Niðurskrivingin varð sett í verk aftur í mars 2020. Rentustuðulin til nøkur lán steðgaði, tá ið niðurskrivingin varð sett í verk aftur. Hesir lántakararnir skulu søkja av nýggjum.

Stakroyndir
Landsgrannskoðanin tók 30 stakroyndir av málum um sethúsalán, sum blivu avgreidd í 2019. Allar umsóknirnar vóru játtaðar.

Vit kannaðu, um umsøkjararnir høvdu rætt til rentustuðul, um lánini góvu rætt til rentustuðul, og um stuðulin var rætt útroknaður.

Eingi skjalprógv fyri, at lánini vóru brúkt til endamálið.

Allir umsøkjarar sum fingu rentustuðul játtaðan, luku treytirnar. Eingi skjalprógv vóru í málunum fyri, at lánini vóru brúkt til endamál, sum lúka treytirnar fyri at fáa rentustuðul. Allar umsóknirnar vóru sendar av peningastovnunum vegna lántakararnar.

Rentustuðulin er rætt roknaður, út frá teimum upplýsingum sum Landsgrannskoðanin hevur.

4. Fiskivinnumál

4.1 Fiskimálaráðið (LG 2016/205-0111)

Í seinastu frágreiðing umrøddu vit grannskoðan av Fiskimálaráðnum. Vit mæltu til at dagføra roknskaparreglugerðina, sum var frá 2011.

Í august 2020 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at dagføringin av roknskaparreglugerðini er komin væl áleiðis og verður væntandi liðug á heysti 2020.

Landsgrannskoðanin mælti til, at Fiskimálaráðið, har tað bar til, savnaði lønarskjølini, sum kundu sanna, at lønirnar vóru rættar. Í august 2020 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Fiskimálaráðið hevur gjøgnumgingið lønarskjøl, setanarbrøv o.a., fyri at eftirkanna rættleikan í lønargjaldingunum hjá ráðnum. Niðurstøðan er, at samanumtikið er sera gott samsvar millum setanarskriv, lønargjaldsumbønir og lønarstig.

Í 2017 áttu fleiri starvsfólk nógvar tímar á, og sambært landsstýrismanninum vóru avtalur gjørdar við nøkur um at fáa tímasalduna burtur.

Í juni 2019 kunnaði landsstýrismaðurin um, at avtala var gjørd um at avspáka og avgreiða tøka tímatalið í seinasta lagi 1. januar 2021.

Í august 2020 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at tímatalið hjá einstøkum starvsfólkum, ið eiga nógvar tímar á, er lækkað. Onkur starvsfólk eiga framhaldandi nógvar tímar á, m.a. tí, at uppgávur við lóggávusmíði á heysti 2019 kravdu arbeiði í yvirtíð og halgidagar. Málið verður ikki avgreitt við ársbyrjan 2021 sum ætlað, men tá ið nakað er fráliðið, skal talið av tímum, ið fólk hava til góðar, liggja á munandi lægri stigi, enn tað áður hevur ligið og síðani stigvíst avgreiðast.

Onkur starvsfólk eiga framvegis nógvar tímar á.

4.2 Stuðul til bjargingarfeløg (LG 2019/205-0311)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað høvuðskontu 5.31.1.05 “Stuðul til bjargingarfeløg”.

Játtan og heimild
Í fíggjarlógini 2019 eru játtaðar 2,2 mió.kr. Stuðulin verður serliga latin at keypa bjargingarútgerð, men partur kann eisini brúkast til rakstur og viðlíkahald av bjargingarbátum og útgerð. Stuðulin til bjargingarfeløgini hevur verið býttur ímillum feløgini og útgoldin frammanundan við teirri treyt, at feløgini føra roknskap/uppgerð yvir virksemið.

Fiskimálaráðið umsitur stuðulin, har ein samskipari viðger umsóknir og hevur eftirlit við útgoldna stuðlinum. Tilbúgvingarsamskiparin luttekur á aðalfundi hjá Landsfelagnum hjá bjargingarfeløgunum og heldur seg annars kunnugan um virksemi hjá bjargingarfeløgunum.

Fiskimálaráðið hevur gjørt “Reglugerð fyri fíggjarlógarjáttan til bjargingarfeløg”, at umsita eftir. Í reglugerðini er ásett endamál við stuðlinum og býti av stuðlinum ímillum rakstur og verkætlanir. Ásetingar eru um eftirlit og um ognir, sum eru keyptar fyri stuðulin. Fiskimálaráðið ætlar at endurskoða reglugerðina, tí hon er ikki heilt í samsvari við umsitingarligu mannagongdina.

Í 2016 var stuðulin til bjargingarfeløg 2 mió.kr., harav 1 mió.kr. var markað til rakstur og viðlíkahald av bátum. 30% av ómarkaðu pengunum var latin sum rakstrarstuðul til feløgini, sum eitt gjald, og 700 t.kr. vóru latnar til ymiskar verkætlanir á landi. Bjargingarfeløgini ynsktu broytingar í orðingina í fíggjarlógini, so tey ikki vóru bundin av, at tann eina milliónin einans kundi brúkast til rakstur og viðlíkahald av bátum, men kundi latast til eitthvørt endamál, alt eftir hvat feløgini og Fiskimálaráðið samdust um.

Í fíggjarlógini 2017 var orðingin broytt og markingin tikin burtur, soleiðis at møguligt bleiv at lata stuðul til verkætlanir á landi afturat teimum 700 t.kr., ið áður høvdu verið býttar. Í 2019 er játtanin hækkað til 2,2 mió.kr.

Umsøkjarar skulu brúka oyðublaðið hjá Fiskimálaráðnum. Umframt eina lýsing av, hvussu verkætlanin fer fram, skal verða ein útgreinað fíggjarætlan, har útgreinaðar útreiðslur og fígging, bæði eginfígging, onnur fígging og fígging úr Fiskimálaráðnum, skulu síggjast serskilt.

Landsgrannskoðanin hevur við stakroynd kannað útgjald, og hevði einki at finnast at.

Tilbúgvingarsamskiparin útinnir eftirlitið við at krevja grannskoðaðar roknskapir frá stuðulsmóttakarunum; hann lesur roknskapirnar og protokollirnar fyri at tryggja sær, at stuðulin fer til ætlaða endamálið. Roknskapurin 2018 fyri Landsfelagið fyri Bjargingarfeløg er latin inn 2. mai 2019. Landsgrannskoðanin mælti til, at roknskapirnir verða latnir inn áðrenn 1. apríl, sum ásett er í § 22, stk. 2, nr. 7 í K. nr. 125/2011 “um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan”.

Landsgrannskoðanin heldur, út frá tí sum vit hava sæð, at játtanin “Stuðul til bjargingarfeløg” í 2018 og 2019 er væl umsitin.

4.3 Fiskiveiðieftirlitið (LG 2017/205-0342)

Í seinastu frágreiðing umrøddu vit grannskoðan av Fiskiveiðieftirlitinum.

Lønir
Starvsfólkini í umsitingini skrásettu arbeiðstíðina, t.v.s., at tey skrásettu komu, fráveru, feriu o.a. Fiskiveiðieftirlitið hevði skrivligar reglur um, nær dagliga arbeiðstíðin var. Eingin áseting var um, hvussu nógvar tímar starvsfólk kundu eiga til góðar ella skylda, men meginreglan var +37/-15 tímar.

Í januar 2018 áttu trý av teimum 16 starvsfólkunum væl meira enn 37 tímar á, og tvey skyldaðu meira enn 15 tímar. Stovnurin hevði í serligum førum loyvt starvsfólkum at skylda fleiri tímar, men eingir tímar vóru avskrivaðir. Av tí at arbeiðsbyrðan til tíðir var so stór, áttu nøkur starvsfólk nógvar tímar til góðar. Stovnurin hevði fingið nógv nýggj arbeiðsøki seinastu árini, men fíggjarligi parturin var ikki øktur í mun til arbeiðsbyrðuna.

Í august 2020 hevur landsstýrismaðurin vísst á, at tað er ásett í starvslýsingini hjá hvørjum starvsfólki, hvat ábyrgdarøkið er, og hvat arbeiðstíðin hjá hvørjum fólki verður brúkt til. Starvsfólk hava ábyrgd av at skráseta komu, fráveru, feriu o.t. Tað er hinvegin ábyrgd leiðarans at tryggja, at skrásetingin er rætt, og at starvið verður rækt í samsvari við starvslýsingina.

Landsstýrismaðurin vísir á, at øktu arbeiðsuppgávurnar, serliga í sambandi við landingar av útlendskum skipum, gera, at eftirlitsfólkini stundum hava økta arbeiðsbyrðu, sum økir um tímasaldurnar. Um tímatalið fer út um meginregluna, verður tað tikið upp í hvørjum einstøkum føri og roynt verður at finna eina loysn.

Ognaryvirlit

Skipini og 4 bilar vóru skrásett í landsroknskapinum. Landsgrannskoðanin mælti til at dagføra ognaryvirlitið, tí innbúgv, teldur o.a. vóru ikki skrásett. Í juni 2019 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Fiskiveiðieftirlitið hevði yvirlit yvir alt, sum lá á goymslu, so sum eykalutir, trossar, veirar og annað, og at innbúgvið á skrivstovuni manglaði enn at verða skrásett.

Mælt varð til at skráseta allar ognir.

Í august 2020 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at øll vøra, ið er á goymslu á Hjalla, er og verður skrásett við inngangandi og útgangandi rørslu. Í sambandi við at KT-politikkurin hjá stovninum verður endurskoðaður, so hann samsvarar krøvunum, ið KT-grannskoðanin setir, verður allur telduútbúnaður skrásettur. Vørn hevur skrásett innbúgvið á skrivstovuni, og í framtíðini verður keypta innbúgvið skrásett so hvørt.

KT-viðurskifti

Eitt grannskoðanarvirki gjørdi í 2014 eina váðameting fyri Fiskiveiðieftirlitið. Stovnurin hevði nógvar dátur, sum høvdu týdning fyri stovnin sjálvan og fyri samfelagið sum heild. Dáturnar vóru goymdar á servarum, sum vóru speglaðir til tveir aðrar servarar á øðrum staði. Persónupplýsingar skrásetti stovnurin bert í sambandi við starvssetanir. Atgongdin til persónupplýsingar var avmarkað til tvey fólk.

Síðani váðametingin varð gjørd, vóru munandi ábøtur gjørdar viðvíkjandi trygdini. Í juni 2019 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Vørn hevði gjørt avtalu við grannskoðanarvirki um at gera eina nýggja váðameting á heysti 2019.

Í august 2020 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at síðani seinastu grannskoðan, hevur Vørn arbeitt miðvíst fram móti at betra um KT-trygdina og at broyta mannagongdir á økinum. Stovnurin hevur sett eitt KT-trygdarráð, ið hevur fund eina ferð um vikuna. Vørn ætlaði at fáa arbeiðið liðugt áðrenn næstu grannskoðan, men arbeiðið er drúgvari enn væntað, tí er ikki komið á mál, tó at ein stórur partur er gjørdur, m.a. váðameting og dátuflokking.

4.4 Nýtt havrannsóknarskip, løgujáttan (LG 2019/205-0343)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað høvuðskontu 5.34.3.06 “Nýtt havrannsóknarskip, løgujáttan”.

Landsstýrismaðurin hevur, við Ll. nr. 76/2011 “um bygging av nýggjum havrannsóknarskipi”, fingið heimild at gera avtalur um bygging av havrannsóknarskipi fyri í mesta lagi 286 mió.kr.

Játtanirnar 2016 til 2020:

t.kr.

Játtan	2016	2017	2018	2019	2020	Tilsamans
Fíggjarlóg	10.000	9.500	85.000	107.500	74.000	286.000
Flutt frá síðsta ári	0	9.530	2.119	1.033	0	12.682
At flyta til næsta ár	-9.530	-2.119	-1.033	0	0	-12.682
Tilsamans	**470**	**16.911**	**86.086**	**108.533**	**74.000**	**286.000**

Frá 2011 til 2015 vóru 4,5 mió.kr. nýttar til detailprosjektering o.a. Byggingin var boðin út síðst í 2016, og sáttmáli undirskrivaður við P/f MEST í 2017. P/f MEST gjørdi sáttmála við skipasmiðju í Litava um at byggja skrokkin, og skrokkurin kom til Føroyar í september 2019. Eftir ætlan skuldi skipið latast Fiskimálaráðnum 1. juni 2020.

Roknskapartøl 2016 til 2019:

t.kr.

Heiti	2016	2017	2018	2019	Tilsamans
Keyp av vørum og tænastum	465	360	761	1.425	3.011
Keyp av útbúnaði, netto	5	37	5	0	47
Ymsar rakstrarútreiðslur	0	-397	-767	-1.425	-2.589
Bygging og løguframleiðsla	0	16.911	86.086	108.762	211.759
Tilsamans	**470**	**16.911**	**86.086**	**108.762**	**212.229**

Byggikostnaður

Í januar 2020 bað Landsgrannskoðanin Havstovuna um:

- skrivligu avtalurnar við P/f MEST um byggingina av skipinum,
- skrivligu avtalurnar um eftirlit, og
- skjalprógv fyri, at kostnaðurin svarar til tilboðini.

Av teimum fimm skipasmiðjunum, ið bjóðaðu seg fram at geva tilboð upp á byggingina, lótu tríggjar tilboð inn. Lægsta tilboðið leyk ikki treytirnar í útbjóðingartilfarinum, og Havstovan tók tí av tilboðnum frá P/f MEST, sum hevði lægsta boð av teimum, sum luku treytirnar í útbjóðingartilfarinum.

17. mai 2017 skrivaðu Fiskimálaráðið, sum byggiharri, og P/f MEST, sum arbeiðstakari, undir byggisáttmála. Avtalaði byggiprísurin er 276,7 mió.kr., sum skal gjaldast í fimm gjøldum, soleiðis:

1. Tá ið sáttmálin er endaligur (6%) 16.513.500 kr.
2. Tá ið kjølurin er strektur (31%) 85.319.750 kr.
3. Tá ið skrokkurin er samlaður á byggibeding (39%) 107.337.750 kr.
4. Tá ið skipið er klassagóðkent (17%) 46.788.250 kr.
5. Tá ið skipið er leverað (7%) 20.765.750 kr.

Fyrsta, annað og triðja gjald eru goldin í ávikavist 2017, 2018 og 2019. Sostatt eru samanlagt 207.756 t.kr. goldnar 31. desember 2019.

P/f MEST hevur sambært sáttmálanum rætt til at brúka undirveitarar. Skipasmiðjan hevur fulla ábyrgd av, at arbeiði hjá undirveitarunum eru gjørd samsvarandi sáttmálanum, tekningum og spesifikatiónum og annars sambært avtalu partanna millum, á sama hátt sum um arbeiðini vórðu gjørd av skipasmiðjuni sjálvari. MEST hevur latið Havstovuni tær bankatrygdir, sum eru kravdar í sáttmálanum.

Havstovan hevur havt byggifundir triðju hvørja viku við MEST og ráðgevararnar, og sambært Havstovuni halda tíðarætlanin og kostnaðurin. Ongar størri hendingar hava verið, sum geva orsøk til at broyta tíðarætlanina ella til at halda, at byggiprísurin ikki heldur.[12]

Havstovan hevur kunnað um, at tey hava tryggjað sær, at eingi eykakrøv koma frá MEST ella øðrum veitarum við javnan at umrøða viðurskiftini og við at tryggja sær, at í hesari verkætlanini skulu eykakrøv ikki koma fyri.

Ráðgeving og eftirlit

Havstovan hevur gjørt sáttmála við Knud E. Hansen A/S um eftirlit og ráðgeving fyri samlaðan mettan kostnað, sum er 4,5 mió.kr. Fer kostnaðurin upp um 5 mió.kr., skulu partarnir gera nýggja skrivliga avtalu. Samsýningin verður avroknað mánaðarliga eftir brúktum tímum og avtalaðum tímataksti. Higartil eru góðar 2,2 mió.kr. goldnar.

Knud E. Hansen ráðgevur Havstovuni í sambandi við sáttmálasamráðingar. Felagið skal hava eftirlit við og góðkenna tekningar og aðra dokumentatión vegna byggiharran,

[12] Eftirsíðan hava vit fingið at vita, at orsakað av serligum umstøðum kring Covid-19, verður skipið væntandi latið Fiskimálaráðnum í september 2020.

herundir eisini ráðgeving og samskifti um møgulig ivamál. Ráðgevin hevur sambært sáttmálanum havt eftirlit við arbeiðstilgongdini, meðan skrokkurin var smíðaður uttanlands, eins og hann skal hava eftirlit við arbeiðstilgongdini, meðan útgerð verður sett í skrokkin, og skipið verður smíðað liðugt á skipasmiðjuni í Føroyum.

Niðurstøða
Samanumtikið hevur Landsgrannskoðanin frá leiðsluni á Havstovuni fingið ta fatan, at samlaði byggikostnaðurin fer at halda seg innan fyri játtanina. Eftir ætlan verður skipið avhendað í september 2020.

Eftir ætlan verður havrannsóknarskipið avhendað í september 2020.

4.5 Fiskivinnuroyndir (LG 2018/205-0343)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av umsitingina av Fiskivinnuroyndum.

Samanumtikið fylgdi umsitingin skrivligu mannagongdunum í viðgerðini av umsóknunum og við at lýsa stuðulin alment.

Niðurstøðan av teimum stakroyndum, sum vit gjørdu í sambandi við grannskoðanina var:

- Verkætlanirnar 0144 og 0176 vóru lidnar, men eingin stuðul var goldin út. Eingin frágreiðing og roknskapur var latin Fiskivinnuroyndum,
- Verkætlanirnar 0181 og 0161 hildu áfram, ávegis stuðul var goldin út, og ávegisfrágreiðing var latin inn, og
- Verkætlan 0180 var liðug, ávegis stuðul var goldin út, men tey írestandi 15% vóru ikki goldin út, tí frágreiðing og roknskapur vóru ikki latin inn.

Spurdur, hvat síðani er hent í málinum, hevur landsstýrismaðurin í august 2020 svarað:

Verkætlanin 0144, Blóð vekk.
Stuðulin fyri 2016, 160 t.kr., varð útgoldin í tveimum gjøldum ávikavist í august 2016 og januar 2017. Játtaðar vóru 150 t.kr. til framhald av verkætlanini í 2017, men eingin umbøn er enn komin fyri 2017.

Frágreiðing og samandráttur fyri verkætlanina er send ráðnum, men í apríl 2019 vórðu umsøkjararnir bidnir um at senda eina betri endaliga frágreiðing, sum eisini tekur afturíaftur fyrr gjørdar royndir (Impulsblóðging).

Tá ið verkætlanin endar og biðið verður um seinasta útgjald, skal endalig frágreiðing (íroknað samandrátt til heimasíðuna), og grannskoðaður roknskapur fyri alt tíðarskeiðið sendast Fiskivinnuroyndum.

Verkætlanin 0176, Menning og virðisvøkstur av makrelúrdráttum til Evropa og Fjareystur.
Verkætlanin fekk fyrsta útgjaldið 150 t.kr. (50%) í august 2018. Síðani er verkætlanin dottin niðurfyri ella steðgað upp. Orsøkin er serliga, at verkætlanarleiðarin fór í annað starv, og eingin hevur tikið yvir verkætlanina.

Verkætlanin 0181: Virðisøking av upsa – paneraðar og vacuumpakkaðar upsavørur.
Verkætlanin hevur gingið sum ætlað. Verkætlanarleiðslan hevur sent inn roknskap fyri 2019, samandrátt og umbøn um seinasta gjaldið á 200 t.kr., men hevur í juli 2020 fingið at vita, at verkætlanarroknskapur fyri 2018 og 2020 og endalig verkætlanarfrágreiðing eisini má sendast inn.

Verkætlanin 0161, Toska-u DNA.
Verkætlanin hevur gingið sum ætlað. Talan er um verkætlan á Havstovuni. Verkætlanarleiðarin hevur kunnað Fiskimálaráðið ávegis. Endalig frágreiðing er ikki komin til ráðið enn, men hon er væntandi.

Verkætlanin 0180, Frystiturking av føroyskum sjógæti.
Verkætlanin hevur stórt sæð gingið sum ætlað og er nærum liðug. Úrslitini og smakkiroyndir vórðu løgd fram á 11. framløgudegnum í mars 2019. Í februar 2019 vóru treytirnar til útgjaldið sendar umsøkjaranum, har mint varð á at senda inn endaliga frágreiðing, samandrátt, roknskap og umbøn um seinasta gjaldið; 22.500 kr. (15%).

Landsstýrismaðurin hevur eisini greitt frá, at umsøkjarar, hvørs umsókn ikki verður gingin á møti, fáa teldupost har í høvuðsheitum verður grundgivið fyri, hví teirra umsókn ikki er gingin á møti. Tilskilað verður eisini í svarinum, at um gjøllari frágreiðing ynskist, kunnu umsøkjararnir venda sær til Fiskimálaráðið.

4.6 Effektivar veðhaldsútreiðslur (LG 2017/205-0345)

Í seinastu frágreiðing umrøddu vit grannskoðan av effektivum veðhaldsútreiðslum.

Ábyrgdarbýtið
Fiskimálaráðið er ánari av høvuðskontuni. Sambært ráðnum var uppgávan m.a. at taka sær av fyrispurningum um at flyta trygdir, strika veð, avskriva avsetta skuld og annars at viðgera ivamál, ið kundu stinga seg upp.

Gjaldstovan tekur sær av lánsbókhaldinum, og TAKS krevur inn. Í 1997 var ábyrgdin av innkrevjingini av vinnulánum flutt frá Fíggjar- og Búskapardeildini til Gjaldstovuna, og var hon flutt til TAKS í 1998, um sama mundi sum almenna innkrevjingin og pantifútarnir vóru flutt frá Gjaldstovuni til TAKS.

Landsgrannskoðanini kunnugt, var eingin skrivlig avtala viðvíkjandi ábyrgdarbýtinum, annað enn ein roknskaparleiðbeining, sum greinaði arbeiðs-/ábyrgdarbýtið millum stovnar, TAKS og Gjaldstovuna í sambandi við umsiting av lánum o.t.

Tá ið TAKS yvirtók innkrevjingina, vóru tað ávís starvsfólk, ið høvdu vinnulánini um hendi. TAKS hevði ikki pantiheimild fyri hesi lánini, og tey vóru heldur ikki skrásett í innheintingarskipanini hjá TAKS, tí høvdu pantifútarnir ikki gjørt nógv við innheintingina.

Spurdur, um stovnurin ætlaði at útvega innheintingarheimild, svaraði TAKS, at brúk var fyri greiðari heimild fyri at kunna gera nakað við vinnulánini. Vanliga vóru heimildirnar í avvarðandi lógum. Í hesum førinum vóru lógirnar ikki til longur. Um politiski myndugleikin vil hava broytingar á økinum, krevst lógarheimild.

Landsstýrismaðurin kunnaði um, at *"Fiskimálaráðið hevur ongar ítøkiligar ætlanir um at útvega TAKS pantiheimild. TAKS hevur ikki vent sær til Fiskimálaráðið við trupulleikanum. Um TAKS metir, at ein pantiheimild kann betra innheintingina, vil Fiskimálaráðið stuðla TAKS í at finna eina loysn".*

Upprunalig lánsskjøl
Sambært roknskaparleiðbeining frá 2002 skuldi Gjaldstovan goyma lánsskjøl. Gjaldstovan, Fiskimálaráðið og TAKS høvdu upprunaskjøl viðvíkjandi lánunum. Harumframt hevði advokaturin hjá TAKS í hesum máli eisini nøkur upprunaskjøl. Sambært TAKS var einki fullfíggjað yvirlit yvir støðuna, og helst vóru ikki øll upprunaskjøl til. TAKS ætlaði at gera nakað við at fáa yvirlit.

Gongdin seinastu árini

Við árslok 2017 var eftirstøðan 104,7 mió.kr. fyri veðhaldsútlegg og 5,9 mió.kr. fyri Globallán, tilsamans góðar 110 mió.kr. Sambært saldulistum var talan um 79 lán. Onkrir skuldarar vóru skrásettir fyri fleiri enn eitt lán. Sambært Gjaldstovuni var bert goldið inn á eitt lán seinastu fimm árini, tilsamans slakar 277 t.kr.

Í 2014 fór TAKS við hjálp frá advokati ígjøgnum saldulistan fyri at rudda upp í eftirstøðum. Úrslitið var, at fleiri vinnulán vórðu fult avskrivað, tí feløgini vóru strikað í partafelagsskránni. Í 2014 vórðu 20,2 mió.kr. avskrivaðar, og í 2017 vórðu 18,4 mió.kr. avskrivaðar.

Sambært TAKS ætlaðu tey at fáa greiðu á restini av vinnulánunum, og stovnurin setti fýra fólk at gjøgnumganga lánini. Ætlanin var at samla alt tilfar, sum tey kundu finna um tey einstøku lánini, og senda rykkjarar til tey, har lánini ikki vóru fyrnað, og síðani at avskriva tað, sum var fyrnað. TAKS segði í desember 2017, at arbeiðið skuldi verða liðugt innan 3 mánaðir.

Einki skipað eftirlit hevur verið við at halda lív í krøvunum.

Landsgrannskoðanini kunnugt var einki skipað eftirlit við at halda lív í krøvunum. TAKS visti ikki at siga, hvørji krøv vóru fyrnað, ella hvørji vóru tætt at fyrningarfreistini. Afturat hesum vóru nøkur partsreiðarí, sum ikki vóru blivin individualiserað. Landsgrannskoðanin spurdi, um TAKS hevði ætlanir um at finna partsreiðararnar. TAKS vísti til uppruddingararbeiðið, sum skuldi setast í gongd.

Viðmerkingar frá Fiskimálaráðnum

Í juni 2019 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Fiskimálaráðið hevði sent Fíggjarmálaráðnum skrivliga áheitan um at fáa eina dagførda niðurstøðu í málinum, og at Fíggjarmálaráðið hevði sent áheitanina til leiðslurnar á TAKS og Gjaldstovuni.

Sambært Fiskimálaráðnum var TAKS í holt við at gjøgnumganga allar skuldarar við vinnulánum í saldulistanum hjá Gjaldstovuni og at skriva frágreiðing um tað. Frágreiðingin viðger tey innheintingarstig, sum TAKS hevur tikið mótvegis skuldarum/-skuldini og ikki undirliggjandi krøv.

Í hesum sambandi hevði TAKS innheintað skjøl frá Gjaldstovuni, advokatum, Fútarættinum og Skipaskránni. Einki yvirlit var yvir hesi skjøl, men TAKS hevði brúkt tey í málsviðgerðini, og víst var til tey í frágreiðingini. Tey mál, sum ikki vóru fyrnað, vóru journaliserað hjá TAKS.

TAKS hevði somuleiðis kunnað Fiskimálaráðið um, at tað í frágreiðingini varð mælt til, at skuldin, sum var fyrnað til innheintingar, varð avskrivað, men at skuldin, ið ikki var fyrnað til innheintingar, varð skrásett í serviceskipanini hjá TAKS (bókhaldinum), eins og skuldin verður innheintað av innheintingardeildini hjá TAKS.

Landsstýrismaðurin greiddi eisini frá, at Fiskimálaráðið, Fíggjarmálaráðið, Gjaldstovan og TAKS fóru at umrøða málið í sambandi við, at nevnda frágreiðing var tøk. Umrøðan skuldi taka støði í, at Fiskimálaráðið er kravánari, men at TAKS hevur skuldarrøktina. Ætlanin var eisini, at spurningurin um at betra innheintingina, t.d. við pantiheimild til TAKS, skuldi verða viðgjørdur tá.

Í august 2020 hevur landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum greitt frá, at í november 2019 lat leiðslan í TAKS Fiskimálaráðnum eina fráboðan um skuld, sum er til innheintingar. TAKS kunnaði um, at í desember 2017 fór ein arbeiðsbólkur frá Innheintingardeildini og Lógardeildini undir at gjøgnumganga alla skuld og allar skuldarar, sum sambært einum saldulista hjá Gjaldstovuni vóru í eftirstøðu av ymiskum vinnulánum. Í juli 2019 var arbeiðið liðugt, og TAKS hevur síðani vent sær til Fíggjarmálaráðið fyri at fáa staðfest hvørjir kravánarar nú eru.

Í 2019 mælti TAKS til at avskriva skuldina sum var fyrnað til innheintingar.

Í fráboðan sínari til Fiskimálaráðið í november 2019, tók TAKS samanum og mælti til, at skuldin, sum var fyrnað til innheintingar, varð avskrivað. Frágreiðingin frá juli 2019 var viðløgd fráboðanini. Innleiðandi sigur TAKS, at málsetningurin var at gjøgnumganga alt tilfar, sum TAKS, Gjaldstovan og aðrir almennir myndugleikar høvdu um vinnulánini, og at útvega allar upplýsingar og alt tilfar frá advokatum, sum høvdu viðgjørt málini. Endamálið var at rudda upp í saldulistanum og fáa eitt fullfíggjað yvirlit yvir, hvørjir skuldarar vóru, og um skuldin framvegis skuldi heintast inn.

Í frágreiðingini, ið lógardeildin á TAKS lat stjóranum, verður tikið samanum í einum tilmæli:

"Í gjøgnumgongd av skuldarum hava vit, umframt tey skjøl, sum Gjaldstovan og TAKS hava havt í málinum, innheintað skjøl og upplýsingar frá advokatum, sum hava havt skuldina til innheintingar. Harumframt hava vit biðið um skjøl og upplýsingar frá Fútarættinum, Skiftirættinum og Skipaskránni.

Hendan gjøgnumgongd vísir, at í alt 104 skuldarar við eini skuld á í alt 185.518.335 kr. eru til innheintingar hjá TAKS. Av teimum eru í alt 160.817.019 kr. fyrnaðar til innheintingar. Skuldin, sum ikki er fyrnað til innheintingar, er íalt 24.701.316 kr. hjá 45 skuldarum.

161 mió.kr. verða avskrivaðar.

Mælt verður til, at skuldin, sum er fyrnað til innheintingar, verður avskrivað, í alt 160.813.562 kr.

Harumframt verður mælt til, at skuldin, sum ikki er fyrnað til innheintingar, saman við skuldarunum verður skrásett í skipanini hjá TAKS (bókhaldinum), og at málini verða uppráettað ella skrásett í journalini hjá TAKS saman við tilhoyrandi skjølum.

Mælt verður tí til, at skuld á í alt 24.704.774 kr. íroknað rentur frá juli 2019 hjá 45 skuldarum, hereftir verður innheintað eftir teimum vanligu innheintingarreglunum við mótrokning og úttøku, sum Fútarætturin hevur heimild at fremja".

Fiskimálaráðið tekur tilmælið frá TAKS um avskriving av skuld til eftirtektar, samsvarandi tí áseting, sum TAKS hevur mælt til. Niðurstøðan er gjørd við grundarlagi í tí fráboðan, ið leiðslan á TAKS hevur latið Fiskimálaráðnum, eins og tí frágreiðing og gjøgnumgongd, ið arbeiðsbólkur á TAKS framdi frá desember 2017 til juli 2019.

5. Mentamál

5.1 Nám (LG 2017/207-0231)

Í seinastu frágreiðing umrøddu vit grannskoðan av Námi.

Kunngerð um virksemi á Námi er ikki gjørd.

Ll. nr. 53/2014 “um at útvega undirvísingarmiðlar o.a.” var sett í gildi í mai 2014. Í august 2018 greiddi landsstýrismaðurin frá, at Mentamálaráðið arbeiddi við at umskipa Nám við atliti at bygnaðarbroytingum í ráðnum, har Nám skuldi átaka sær øktar uppgávur sum fakligur og námsfrøðiligur menningardepil. Tí var kunngerðin um virksemi á Námi ikki gjørd enn.

Arbeiðið at skipa eftirútbúgvingina í síni heild, sum byrjaði í 2013, var ikki liðugt. Sambært landsstýrismanninum var tað arbeiðið eisini tongt at bygnaðarbroytingunum og broyttu uppgávunum hjá Námi.

Í august 2017 vóru enn stórar flexsaldur hjá starvsfólkunum í Prívstovuni, sum bygnaðarliga var flutt til Nám. Sambært landsstýrismanninum var framvegis arbeitt við at finna loysn á flexsaldunum, ið vóru tongdar at stórum arbeiðsbyrðum í prívtøkutíðarskeiðnum og at gera prívtøkutilfar.

Í juli 2019 kunnaði landsstýrismaðurin um, at flexsaldurnar í Prívstovuni enn vístu, at nøkur starvsfólk arbeiddu ov nógvar tímar, og at Prívstovan arbeiddi við at loysa trupulleikan. Prívstovan hevði í ávísan mun loyst undirskotið av arbeiðsorku við at seta fyribilsstarvsfólk, og ætlaði at seta eitt skrivstovufólk parttíð á heysti 2019.

Í august 2020 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at sambært Námi hevur Prívstovan verið undirmannað síðstu tíðina og hevur tí verið noydd at taka arbeiðsorku uttaníframá, umframt at nøkur starvsfólk hava verið noydd at arbeiða partvísa yvirtíð. Prívstovan hevur nú fingið fleiri starvsfólk aftur, men sambært stjóranum slepst ikki undan ávísum yvirtíðarsaldum, tí arbeiðið er merkt av prívtøkutíðarskeiðunum. Yvirtíðarsaldan er nú á slíkum støði, at tað ikki lønar seg at seta fleiri starvsfólk.

5.2 Fólkaskúlin (LG 2019/207-0232)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað nakrar læraraløgnir í fólkaskúlanum á høvuðskontu 7.23.2.01 “Fólkaskúlin”. Í 2019 er játtanin 375 mió.kr., harav meginparturin er lønarútreiðslur. Sambært fíggjarlógini er talan um 756 fulltíðarstørv.

Fólkaskúlin virkar eftir Ll. nr. 125/1997 “um fólkaskúlan”. Sambært § 32, stk. 2, í lógini skipar landsstýrismaðurin í mentamálum talið av lærarum í skúlunum.

Roknskapartøl fyri árini 2015 til 2019:

t.kr.

Heiti	2015	2016	2017	2018	2019
Lønir v.m.	293.147	301.627	327.312	348.163	370.435
Keyp av vørum og tænastum	1.151	1.078	1.809	728	1.104
Tilskot til einstaklingar	0	2	9	0	0
Stuðul til annað virksemi	1.201	886	1.099	1.086	1.029
Innanh. flyt. millum alm. stovn. (útr)	501	695	1.116	1.788	1.840
Innanh. flyt. millum alm. Stovn. (innt.)			-19.228	-27.815	-5
Tilsamans	**296.000**	**304.288**	**312.116**	**323.919**	**374.402**

Ein forskipan er til avgreiðslu av læraralønum. Skipanin er grundað á upplýsingar frá skúlunum um væntað tal av næmingum, flokkum o.ø. Einstaki skúlin sendir Undirvísingarstýrinum næmingatølini, og stýrið tillutar skúlunum tímar og umsitur forskipanina. Lønardepilin á Gjaldstovuni rindar lønirnar út.

Við stakroyndum kannaðu vit nakrar læraralønir hjá Tvøroyrar skúla. Endamálið við grannskoðanini var at kanna, um útgoldnu lønirnar eru rættar, og um almenni setanarpolitikkurin verður hildin. Vit kannaðu eisini, hvussu starvsfólkamál verða viðgjørd og skrásett.

Sambært almenna setanarpolitikkinum eru starvssetanir at meta sum fyrisitingarligar avgerðir og eru tí fevndar av ásetingunum í fyrisitingarlógini og persónupplýsingarlógini. Skúlin er setanarmyndugleiki, og skúlastjórin lýsir størv leys, skipar setanartilgongdina og setir lærarar.

Sambært sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag skal settur lærari fáa setanarbræv í seinasta lagi 14 dagar eftir setanina. Setanarpolitikkur landsins ásetir, at setanarbræv skal vera latið, áðrenn starvsfólk byrjar í starvinum. Grannskoðanin vísti, at onkur setanarbrøv hjá Tvøroyrar skúla vóru dagfest og undirskrivað væl eftir setanina.

Skúlin førir dagliga protokoll yvir næmingarnar. Um lærari boðar frá, at hann ikki kann møta t.d. vegna sjúku, syrgir varaskúlastjórin fyri at fáa avloysara. Varaskúlastjórin skrásetir, hvør ikki er møttur og hvør er avloysari. Tílíkar skrásetingar kunnu hava týdning fyri starvsfólkamálini, t.d. fyri at vita um talið av sjúkradøgum er innan fyri sáttmálarættin viðvíkjandi sjúkudøgum ella døgum við sjúkum barni.

Grannskoðanin vísti, at lønirnar hjá lærarum eru rættar.

Samanumtikið vístu stakroyndirnar, at lønirnar eru goldnar út eftir røttum sáttmála og røttum lønarflokki. Læraararnir hava virksemisætlan og frávera verður skrásett. Alt samskifti um frídagar og umbýti av vaktum fer umvegis leiðsluna og verður skrásett í skúlaforskipanini.

5.3 Miðnámsskúlin í Suðuroy (LG 2019/207-0233)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað fyrisitingina á Miðnámsskúlanum í Suðuroy.

Miðnámsskúlin er skipaður sambært í Ll. nr. 62/2012 “um gymnasialar miðnámsútbúgvingar”. Á skúlanum eru hugbreyt og náttúrubreyt, ið taka 3 ár, búskaparbreyt, ið tekur 2 ár, og FHS yrkisnám, ið tekur 1 ár.

Roknskapartøl 2015 til 2019:

t.kr.

Heiti	2015	2016	2017	2018	2019
Lønir v.m.	9.442	10.534	11.703	12.121	13.176
Keyp av vørum og tænastum	1.020	1.093	1.035	1.059	1.049
Keyp av útbúnaði, netto	386	291	254	86	472
Leiga, viðlíkahald og skattur	157	80	160	212	292
Søla av vørum og tænastum	0	0	-5	-14	-115
Innanh. flyt. m.almennar stovn. (útr)	9	0	0	0	0
Innanh. flyt. m.almennar stovn. (innt)	0	-112	-450	-750	-154
Tilsamans	**11.014**	**11.884**	**12.698**	**12.715**	**14.720**

Roknskaparviðurskifti o.a.

Roknskaparreglugerðin er dagførd í mai 2020 og send Uttanríkis- og mentamálaráðnum til góðkenningar.

Roknskaparhaldið hjá skúlanum er í Búskaparskipan Landsins. Skrivstovuleiðarin góðkennir og bókar allar rokningar til útgjaldingar, og rektarin leysgevur. Skúlin hevur biðið um tilboð frá fleiri veitarum, tá ið størri keyp eru gjørd.

Ognaryvirlitið er ikki dagført.

Kassin verður brúktur til smærri útreiðslur og til inntøkur frá sølu av bókum, avritum og pappíri til næmingar v.m., og peningastovnskontan verður brúkt til at seta kassapeningin inn á. Skúlin brúkar gjaldkort til keyp á netinum.

Skrivstovufólkið ger kassan upp regluliga og stemmar peningastovnskontuna av. Vit taldu kassan upp og høvdu einki at finnast at.

Við stakroyndum kannaðu vit, um lønirnar hjá starvsfólkunum vóru rættar, og um skúlin fylgir almenna setanarpolitikkinum. Skúlin hevur orðaðan starvsfólkapolitikk. Vit samanhildu setanarskriv, prógv o.a. við galdandi lønarsáttmálar, og samanhildu upplýsingar um flokkar, lærugreinar, næmingatal o.a. Einki var at finnast at.

KT-trygd

Miðnámsskúlin í Suðuroy hevur upplýsingar, dátugrunnar og skjøl, sum hava týdning fyri skúlan og næmingarnar.

Skúlin hevur orðaðan trygdarpolitikk. Rektarin greiddi frá, at allar persónupplýsingar verða goymdar í læstum rúmi, har leiðarin á skúlanum, lestrarvegleiðarin og skrivstovuleiðarin hava atgongd.

Miðnámsskúlin og Heilsuskúlin hava hvør sínar servarar. Brúkararnir undirskriva brúkaraváttan, har teir vátta, at teir eru kunnaðir um galdandi KT-politikk, og at teir hava skyldu til at fylgja galdandi “Leiðreglum fyri brúkarar”.

Skúlin hevur váðameting og dátuflokking, sum teldusamskiparin eftirmetir árliga saman við leiðsluni.

Journalskipan

Skúlin skrásetir inn- og útgangandi post í rokniark. Leiðslan arbeiðir við at fáa eina nýggja journalskipan og at gera mannagongdir viðvíkjandi journalisering.

5.4 Heilsuskúli Føroya (LG 2019/207-0233)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin hjá Heilsuskúla Føroya. Skúlin er skipaður sambært Ll. nr. 42/2019 "um heilsuhjálparaútbúgving, heilsurøktara-útbúgving og námsfrøðiliga hjálparaútbúgving".

Upptøka til heilsuhjálpara er tvær ferðir um árið, og útbúgvingin tekur 15 mánaðir; upptøka til heilsurøktara er eina ferð um árið, og útbúgvingin tekur 22 mánaðir. Námsfrøðilig hjálparaútbúgving byrjar eftir ætlan í heyst.

Skúlin skipar eisini fyri skeiðum fyri vegleiðarar, ið skulu vegleiða næmingum skúlans í starvsvenjing, eins og skipað verður fyri førleikamennandi skeiðum innan almanna- og heilsuøkið.

Roknskaparviðurskifti
Roknskapartøl 2015 til 2019:

t.kr.

Heiti	2015	2016	2017	2018	2019
Lønir v.m.	4.779	4.774	4.812	5.086	5.372
Keyp av vørum og tænastum	821	599	548	1.201	414
Keyp av útbúnaði, netto	35	131	192	138	184
Leiga, viðlíkahald og skattur	10	2	20	21	13
Ymsar rakstrarútreiðslur	-18	0	0	0	-0
Søla av vørum og tænastum	-6	-16	-7	-10	-10
Innanh. flyt. m.almennar stovn. (innt)	-397	-23	0	-552	-80
Tilsamans	**5.225**	**5.467**	**5.566**	**5.884**	**5.892**

Í juni 2020 er roknskaparreglugerðin dagført og send Uttanríkis- og mentamála-ráðnum til góðkenningar.

Skúlin hevur peningastovnskontu, sum er skrásett í Búskaparskipan landsins, og stjórin og skrivarin hava atgongd til kontuna umvegis netbanka. Gjaldkort er knýtt at kontuni, og heimildarváttan er fingin til vega. Skúlin brúkar gjaldkortið, tá veitari ikki kann senda rokning, og til keyp av bókum á netinum. Peningastovnskontan verður stemmað av regluliga.

Skúlin hevur stovnskassa, sum verður gjørdur upp regluliga. Vit taldu kassan upp. Einki var at finnast at.

Heilsuskúlin hevur ikki keypt í stórum, tí hava tey ikki brúkt Keypsportalin, men tey hava biðið um tilboð, tá ið tey hava keypt fyri yvir 50 t.kr.

Heilsuskúlin hevur yvirlit yvir innbúgv og telduútgerð. Skúlin húsast í Skúladeplinum í Suðuroy saman við Miðnámsskúlanum, ið hevur ábyrgd av hølum og innbúgvi sum heild.

Lønir
Skúlin hevur orðað starvsfólkapolitikk og mannagongdir fyri arbeiðsviðurskifti. Við stakroyndum kannaðu vit um lønirnar hjá starvsfólkunum vóru rættar, og um skúlin fylgir almenna setanarpolitikkinum. Vit samanhildu setanarskriv, prógv o.a. við galdandi lønarsáttmálar. Einki var at finnast at.

Trygdarpolitikkur, herundir váðameting
Heilsuskúlin hevur upplýsingar, dátugrunnar og skjøl, sum hava týdning fyri skúlan og næmingarnar.

Skúlin hevur orðað trygdarpolitikk. Brúkararnir undirskriva brúkaraváttan, har teir vátta, at teir eru kunnaðir um galdandi KT-politikk, og hava skyldu til at fylgja galdandi leiðreglum fyri brúkarar.

Heilsuskúlin hevur gjørt váðameting og dátuflokking, sum teldusamskiparin eftirmetir árliga saman við leiðsluni.

Journalskipan
Skúlin hevur talgilda journal- og intranetskipan, ið er býtt í tvey. Ein journal er til fyrisiting og persónsmál, sum bert leiðsla og skrivari hava atgongd til, og ein goymsluskipan er til onnur skjøl skúlans, ið leiðslan og lærarar hava atgongd til.

Atgongdirnar eru brúkarastýrdar, og starvsfólk hava bert atgongd til skipanina, tá ið tey eru á skúlanum. Mannagongd er gjørd til skipanina.

5.5 Glasir (LG 2017/207-0233)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Glasi.

Útbúgvingarnar á Glasi eru skipaðar sambært lógum. Eitt depilsráð virkar m.a. fyri, at Glasir í størst møguligan mun bjóðar út yrkisfakligar grund-, eftir- og víðariútbúgvingar, ið eru viðkomandi fyri vinnuna. Eisini hevur ráðið yvirskipaðu ábyrgdina av inntøkufíggjaða virkseminum hjá Glasi.

Sambært § 6, stk. 2, í Ll. nr. 79/2015 “um skúladepil í Marknagili” ger Depilsráðið starvsskipan, ið landsstýrismaðurin skal góðkenna. Mentamálaráðið hevði gjørt viðmerkingar til uppskot frá Depilsráðnum um starvsskipan og sent tað aftur til Depilsráðið.

Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur kunnað um, at ráðið hevur havt fund við Depilsráðið um starvsskipanina, og hevur ráðið eftirfylgjandi sent Depilsráðnum starvsskipanina við nøkrum tillagingum, sum ráðið vil hava gjørdar.

Ætlanin var, at Skeiðsdepilin skuldi verða partur av Glasi, tá ið fíggjarligu viðurskiftini viðvíkjandi sjálvsognarstovnunum vóru fingin í rættlag. Eisini var ætlanin at fáa loyvi at flyta ónýttan pening yvir ár.

Sjálvsognarstovnarnir eru enn ikki tiknir av.

Sambært viðmerkingum í fíggjarlógini 2017 vórðu sjálvsognarstovnarnir Tekniski skúlin í Tórshavn og Føroya Handilsskúli væntandi tiknir av. Í juli 2019 greiddi landsstýrismaðurin frá, at sjálvsognarstovnarnir ikki vóru tiknir av. Sambært landsstýrismanninum hekk ein endalig avtøka saman við spurninginum um heimildina at flyta møgulig avlop á inntøkufíggjaðum virksemi yvir ár; tað málið var ikki komið víðari.

Orsøkin er, at skúlin hevur ikki fingið loyvi at flyta møguligt avlop yvir um ár, soleiðis sum tað var lovað stýrunum undan samanleggingini.

Sambært landsstýrismanninum eru sjálvsognarstovnarnir enn ikki avtiknir. Orsøkin er, at Uttanríkis- og mentamálaráðið ikki hevur fingið loyvi at flyta møguligt avlop á inntøkufíggjaðum virksemið yvir um ár, soleiðis sum tað er lovað stýrunum fyri sjálvsognarstovnarnar undir samanleggingartilgongdini.

Uttanríkis- og mentamálaráðið heldur ikki at tað er haldbart at bíða longur eftir heimildini at flyta avlop yvir um ár, og hevur ráðið tí ætlanir um at varðveita annan av sjálvsognarstovnunum, ið skal taka sær av inntøkufíggjaða virkseminum. Leisturin fyri umsitingina av inntøkufíggjaða virkseminum verður at líkna við eginraksturin, sum sjálvsogngarstovnarnir høvdu áðrenn Skúladepilin í Marknagili var settur á stovn.

Roknskaparviðurskifti

Glasir hevði gjørt uppskot til roknskaparreglugerð, sum var sent Mentamálaráðnum. Í juli 2019 kunnaði landsstýrismaðurin um, at reglugerðin var viðgjørd, og at viðmerkingarnar í næstum fóru at verða sendar Glasi.

Í august 2020 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at roknskaparreglugerðin hjá Glasi er ikki góðkend, og at arbeitt verður við at fáa hana góðkenda í hesum árinum.

Umsitingin av gjaldkortum var ikki í samsvari við reglurnar. Í juli 2019 greiddi landsstýrismaðurin frá, at málið fór at verða avgreitt saman við roknskaparreglugerðini.

Sambært landsstýrismanninum verður umsitingin av gjaldkortum viðgjørd saman við málinum um roknskaparreglugerðina.

Glasir krevur gjøld fyri hægri útbúgvingar. Sambært landsstýrismanninum var heimild fyri at taka gjøld í § 10 í Ll. nr. 49/2005 “um stuttar framhaldsútbúgvingar”. Mentamálaráðið hevði ikki ásett nærri reglur um gjøld, men fór at taka málið upp við Glasir.

Landsgrannskoðanin vísti á, at Fíggjarmálaráðið kundi geva loyvi til inntøkufíggjað virksemi, og at tað sambært játtanarreglunum skuldi skrásetast á serliga undirkontu í Búskaparskipan landsins. Sambært Glasi var talan um langa siðvenju við inntøkufíggjaðum virksemi. Landsgrannskoðanin mælti til, at inntøkufíggjað virksemi varð viðgjørt sambært játtanarreglunum.

Í august 2020 vísir landsstýrismaðurin á, at ætlanin nú er at varðveita annan sjálvsognarstovnin og geva honum loyvi at hava eginrakstur, eins og sjálvsognarstovnarnir høvdu, áðrenn Glasir var sett á stovn. Sambært landsstýrismanninum verður við hesum leistinum ikki talan um inntøkufíggjað virksemi hjá Glasi, men um eginrakstur hjá einum sjálvsognarstovni hvørs stýri ætlandi verður Depilsráðið. Nærri avtalur skulu gerast við Glasir um, hvat fyri inntøkuvirksemi talan verður um, og hvussu tað skal skipast millum Glasir og sjálvsognarstovnin.

Lønir

Grundarlagið undir lønunum hjá teimum, ið undirvísa eru lønarsáttmálar og virksemisætlanir. Eftir sáttmálanum hjá Tekniska Lærara Felagnum er arbeiðstíðin 2080 arbeiðstímar um árið íroknað feriu og aðrar frídagar, tað svarar til 1790 arbeiðstímar.

Hjá lærarum, ið eru settir sambært YF sáttmálanum, var ásett í virksemisætlanunum, hvussu nógvar tímar hvør lærari undirvísti, og hvussu nógva tíð hvør lærari kundi nýta til aðrar uppgávur. Eitt fult ársverk er 1750 tímar. Tímar, sum lærarar høvdu fingið í virksemisætlanina til umsiting o.a. vóru ikki skjalprógvaðir á annan hátt. Síðani skipanin sambært YF sáttmálanum kom í gildi í 2013, vóru tímarnir hjá teimum lærarunum skrásettir í einum rokniarki.

Arbeiðstíð hjá øðrum starvsfólkum var ikki skrásett.

Landsgrannskoðanin vísti á, at tað kundi tykjast ótrygt at nýta rokniark sum grundarlag undir stórum parti av lønarútreiðslunum hjá stovninum. Rokniark kann ikki sammetast við eina skipan sum t.d. eina forskipan til útrokning av einstøku útgjaldingunum. Leiðslan var samd við Landsgrannskoðanina, og vísti á, at skúlin hevði alla tíðina ynskt eina forskipan.

Landsgrannskoðanin mælti til at styrkja lønarumsitingina.

Landsstýrismaðurin tók undir við Landsgrannskoðanini, at tað kundi vera ein veikleiki fyri lønarumsitingina, at starvsfólk einsamalt avgreiddi lønirnar hjá so stórum parti av undirvísarum og ongan avloysara hevði. Mentamálaráðið fór at heita á Glasir um at styrkja lønarumsitingina.

Mentamálaráðið tók undir við Landsgrannskoðanini, at tað var týdningarmikið, at arbeiðstíðin varð hóskandi skrásett. Ráðið hevði tí heitt á skúlan um at tryggja eina hóskandi skráseting. Hartil fór Mentamálaráðið at kanna, um miðnámsskúlarnir kundu nýta Skúlaforskipanina.

Vit valdu nøkur lønarmál út fyri at kanna, um lønirnar vóru rættar. Sambært Glasi høvdu nógvir lærarar meira enn fult ársverk, serliga lærarar, ið undirvísa í lærugreinum, har trupult var at fáa lærarar.

Vit staðfestu, at tíðarskrásetingin ikki var sambært almennu reglunum. T.d. at tímar hjá undirvísarum til umsiting o.a. vóru ikki skjalprógvaðir. Tímar, ið vóru goldnir út, afturat brøki á 1,3 vóru ikki skjalprógvaðir. Starvsfólk við leiðsluábyrgd skrásettu ikki aðrar tímar enn fráverutímar ella undirvísingartímar. Onnur starvsfólk, t.d. í umsitingini og kantinuni skrásettu ikki arbeiðstíð.

Í juli 2019 segði Mentamálaráðið, at Glasir var farið burtur frá at brúka rokniark sum grundarlag undir lønarumsitingini, og hevði gjørt sær ein dátugrunn við lønarupplýsingum, sum allir lærararnir hava atgongd til at lesa, og sostatt hava møguleika at gera vart við møgulig frávik. Ráðið legði afturat, at Glasir tók trygdaravrit av skipanini hvønn dag. Harafturat vóru starvsfólk í umsitingini farin at skráseta arbeiðstíðina í TotalView, og Glasir arbeiddi við at fáa allar tímar skrásettar í nýggju skipanini.

Stig eru tikin til at betra skrásetingina av arbeiðstíð.

Í august 2020 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at dátugrunnurin er víðkaður til eisini at fevna um yrkisnám og í ávísan mun eisini hægri nám, og tað stuðlar undir effektivari og tryggari lønarumsiting. Sambært skúlanum er skipanin berandi í lønarumsitingini, og gevur lærarum, deildarleiðarum og lønarumsitingini góðar møguleikar at kanna lønarviðurskiftini.

Sambært skúlanum eru fleiri deildir farnar undir at brúka TotalView.

5.6 Lønir á serbreytunum (LG 2018/207-0233)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av lønum á serbreytunum.

Sambært K. nr. 36/2017 “um serliga skipað skúlatilboð”[13] er talan um skúlatilboð eftir loknan fólkaskúla, ætlað næmingum, sum eru tarnaðir at gjøgnumføra miðnám undir vanligum treytum, hóast stuðulsmøguleikarnar, sum eru í vanligu skúlaskipanini. Útbúgvingin tekur í mesta lagi 4 ár, og er ætlað teimum, ið eru ímillum 16 og 25 ár, og sum ynskja at nema sær førleikar í yrkisnámi.

Fyrsta serbreytin varð stovnað á Kambsdali í 2015, og í 2016 vórðu serbreytirnar á Tekniska Skúla í Klaksvík og á Tekniska Skúla í Tórshavn, nú Glasir, settar á stovn.

Mentamálaráðið gjørdi í juni 2016 “Námsskipan fyri serbreytina”, ið lýsir endamál, innihald, førleikamál, eftirmeting og próvtøku og at skipa undirvísing. Undirvísingin byggir á einstaklingslæruætlan, og er skipað eftir OCN-skipanini[14].

Landsgrannskoðanin grannskoðaði lønirnar hjá lærarunum á serbreytunum á Miðnámi á Kambsdali, Tekniska skúla í Klaksvík og á Glasi í Tórshavn. Endamálið var at kanna, um lønirnar vóru rættar, og at samanbera lønirnar á serbreytunum.

[13] Við heimild í Ll. nr. 107/1998 “um støðisútbúgving innan fyrisitingar-, handils- og skrivstovuøkið”.
[14] OCN-skipanin: Open College Network, sum er ein skipan til validering og skjalfesting av óformellari læring.

Landsgrannskoðanin kundi ikki við vissu siga, at løninar vóru rættar, við at samanbera tær. M.a. var ymiskt, hvussu ársverk, skráseting av arbeiðstíð, lønarsáttmálar, flokkingar, starvsaldur o.a. vóru umsitin.

Á Tekniska skúla í Klaksvík og Miðnámi á Kambsdali høvdu øll starvsfólkini ástøðiligar útbúgvingar, og luku førleikakrøvini í K. nr. 36/2017 "um serligt skipað skúlatilboð". Á Glasi høvdu tvey starvsfólk ikki ástøðiligar útbúgvingar.

Hóast talan er um *eina námsskipan*, vóru *tveir* ymiskir lønarsáttmálar brúktir. Setanar- og lønarviðurskiftini hjá lærarunum á serbreytini vóru eftir sáttmálum, sum vóru ætlaðir til miðnám og yrkisnám annars. Eyðkennið við serbreytini er, at hon hevur ikki vanlig upptøkukrøv og miðar ikki eftir vanligum miðnámsprógvi.

Landsgrannskoðanin vísti á, at tað eyðvitað var ein fyrimunur at hava ymiskar undirvísingarførleikar, útbúgvingar og royndir á serbreytini, men helt tó, at tað var ikki nøktandi, at starvsfólk vórðu viðgjørd ymiskt, alt eftir nær tey vóru sett í starv, ella á hvørjum skúla tey vóru sett.

Í juli 2019 greiddi landsstýrismaðurin í mentamálum frá, at frá byrjan var gjørd ein lýsing av førleikum, arbeiðstíð og arbeiðsuppgávum á serbreytini. Viðvíkjandi arbeiðstíð var tikið støði í sáttmálanum millum yrkisfelagið miðnám og Fíggjarmálaráðið, tí hann var galdandi á Kambsdali, har fyrsta serbreytin var sett á stovn, og sum frammanundan hevði fingið góðkenning frá Lønardeildini. Hinir skúlarnir høvdu ikki vent sær til Lønardeildina, áðrenn størvini vóru lýst leys. Síðani vóru serbreytir settar á stovn á tekniska útbúgvingarøkinum, og av tí at fakbólkar og sáttmálar vóru so ymiskir, hevði verið trupult at tryggja javnlík viðurskifti skúlanna millum.

Útbúgvingarkrøv, arbeiðstíð, lønaráseting o.a.

Útbúgvingarkrøvini til starvsfólk á serbreytunum eru sambært § í 7 kunngerðini: *Námsfrøðilig útbúgving, eitt nú læraraútbúgving, námsfrøðingaútbúgving ella hægri útbúgving innan sernámsfrøðiliga økið og hóskandi yrkisfakligar førleikar.* Serbreytin á Kambsdali hevði virkað í tvey ár og hinar í eitt ár, tá ið kunngerðin um serliga skipað skúlatilboð varð sett í gildi 4. apríl 2017.

Spurt, hvørji útbúgvingarkrøv vóru kravd fyri lærararnar á serbreytunum, áðrenn kunngerðin varð lýst, svaraði Mentamálaráðið, at útbúgvingarkrøvini til starvsfólk á serbreytunum vóru lýst í tilmæli og kunngjørd í starvslýsingini, tá søkt varð eftir fólki. Krøvini vóru tey somu, sum seinni komu í kunngerðina um serliga skipað skúlatilboð.

Sambært setanarskrivunum vóru setanartreytirnar eftir:

- Føroya Tekniska Lærarafelag: sum vóru galdandi fyri setan av lærara, sum luku treytirnar fyri at undirvísa á teknisku skúlunum. Sambært sáttmálanum taldi fulltíðarstarv *2080* tímar um árið, og eftir
- Yrkisfelagið Miðnám: sum í høvuðsheitum fevndi um lærarar, sum eftir 1. august 2013 undirvístu sambært Ll. nr. 62/2012 "um gymnasialar miðnámsútbúgving". Ásetingar eru eisini í K. nr. 23/2014 "um fakligan førleika hjá lærarum í gymnasialu miðnámsútbúgvingunum". Sambært sáttmálanum taldi fulltíðarstarv *1750* tímar um árið.

Starvsbólkarnir á miðnámi vóru:

- Á Miðnámi á Kambsdali: ein Cand.pæd.pæd.psyk, tveir námsfrøðingar BA og ein fólkaskúlalærari.
- Tekniski Skúli í Klaksvík: tveir námsfrøðingar BA og ein fólkaskúlalærari.
- Glasir: ein Cand.pæd, ein námsfrøðingur, ein elektrikari og eitt hjálparfólk.

Arbeiðstíð
Ymiskar mannagongdir vóru á skúlunum, fyri t.d. ársverk í tímum sambært setanarbrøvunum, mannagongdir við protokollum, tali av arbeiðstímum á skúlunum og skráseting av arbeiðstíð o.a.

Sambært setanarbrøvunum vóru ársverkini 1750 tímar á Miðnámi á Kambsdali, 1690 tímar á Tekniska Skúla í Klaksvík og 2080 tímar á Glasi í Tórshavn.

Við setan fingu lærararnir á Miðnámi á Kambsdali og á Glasi løn frá 1. august, og lærararnir á Tekniska Skúla í Klaksvík fingu løn frá 15. august.

Miðnám á Kambsdali og Tekniski Skúli í Klaksvík førdu næmingaprotokollir. Á Glasi førdu tey protokoll fyrsta árið, men vegna góða uppmøting góvust tey við tí.

Lærarar skrásettu ikki tímar út yvir skematímar og fráveru. Tekniski Skúli í Klaksvík var í 2018 farin at skráseta allar tímarnar.

Skúlatíðin hjá næmingunum var millum 23 og 24 tímar um vikuna, og arbeiðstíðin hjá lærarunum í skúlanum er millum 32 og 40 tímar um vikuna.

Lønaráseting
Samanumtikið var tað trupult at samanbera lønirnar á serbreytini og at staðfesta, um lønirnar vóru rættar. Skúlaleiðslurnar høvdu tikið støðu til starvsaldurin í hvørjum einstøkum føri. Tað tyktist, sum tær høvdu brúkt somu mannagongdir, sum tá ið lærarastørv á miðnámi og yrkisnámi annars vóru sett, tó at talan var um námsfrøðingar, handverkarar og fólkaskúlalærarar, sum vanliga verða løntir eftir øðrum sáttmálum.

Á Tekniska skúla í Klaksvík vóru lærarar við og uttan bachelorútbúgving og við ymiskum undirvísingarroyndum løntir í sama lønarflokki og á sama stigi. Á hinum skúlunum vóru somu útbúgvingar løntar lægri. Lærarar við handverkaraútbúgving og lærari uttan teoretiska útbúgving fingu eins løn og hægsta starvsaldur, sum var hægri enn hjá nøkrum námsfrøðingum við BA.

Starvsaldurin hjá tveimum kandidatum var roknaður ymiskt; hjá øðrum út frá kandidataldri og hjá hinum vóru arbeiðsroyndir taldar við.

Ætlanir um at rætta skeivleikarnar
Í mai 2019 kunnaði Mentamálaráðið um, at tey høvdu tikið málið upp við Lønardeildina í Fíggjarmálaráðnum, fyri at tryggja, at førleikar, setanartreytir og arbeiðstíð verða handfarin á sama hátt.

Okkum kunnugt, byrjaði samskiftið millum Mentamálaráðið og Fíggjarmálaráðið um lønarviðurskiftini longu í 2016, og enn var ikki komið á mál.

Mentamálaráðið greiddi frá, at í apríl 2019 var semja undirskrivað millum Føroya Tekniska Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið. Partarnir samdust um, at størvini á serbreytunum skuldu flokkast og avtala gerast um arbeiðstíð.

Í samráðingunum við Yrkisfelagið Miðnám hevði Mentamálaráðið eisini kravt, at partarnir samdust um at endurskoða lønirnar á serbreytunum.

Undirvísingarstýrið og Lønardeildin í Fíggjarmálaráðnum vóru í holt við at gera upplegg til samráðingar við partarnar. Arbeitt varð við at flokka størvini skjótast gjørligt, og væntaði ráðið, at tað fór at verða avgreitt í 2019.

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at á sumri 2019 greinaði Undirvísingarstýrið økið. Í juni í 2019 fór umbøn til Lønardeildina um at flokka serbreytirnar. Tað var eitt upplegg

at arbeiða víðari við, men arbeiðið hevur drigið út. 1. oktober 2020 ganga sáttmálarnir á økinum út, og tá fer Lønardeildin at taka málið um lønirnar á Serbreytunum við í lønarsamráðingarnar.

5.7 Tekniski skúli í Klaksvík, løgujáttan (LG 2018/207-0233)

Í seinastu frágreiðing umrøddu vit grannskoðan av løgujáttanini til Tekniska skúla í Klaksvík.

Verklagslógin Ll. nr. 77/2012 "um at útbyggja Tekniska skúla í Klaksvík" kom í gildi í juni 2012, og fór úr gildi aftur 1. januar 2017. Sambært verklagslógini kundi byggikostnaðurin í mesta lagi vera 36 mió.kr. Slakar 37,2 mió.kr. eru játtaðar í fíggjarlógum og eykajáttanarlóg.

Játtanin var veitt sum rentu- og avdráttarfrítt stuðulslán til sjálvsognarstovnin Tekniska Skúla í Klaksvík, við tí treyt, at Mentamálaráðið lýsti veðrætt í skúlanum fyri einum rentu- og avdráttarfríum stuðulsláni, svarandi til byggikostnaðin.

Í juli 2019 greiddi landsstýrismaðurin frá, at í februar 2019 vórðu tvey rentu- og avdráttarfrí lán undirskrivað, og veð lýst í bygninginum, matr. nr. 752b, 14 mió.kr. sum trygd fyri 4. veðrætti fyri umbyggingina í 2006 til 2009, og 36 mió.kr. sum trygd fyri 5. veðrætti fyri umbyggingina í 2012 til 2016.

Landsverk hevur sent høvuðsráðgevanum krav upp á 1,6 mió.kr.

Sambært landsroknskapinum kostaði skúlin 36,6 mió.kr. Tó hevði landið goldið 38,2 mió.kr. fyri byggingina. Munurin stóðst av, at Landsverk í 2016 hevði sent høvuðsráðgevanum ein faktura, 1,6 mió.kr., har Landsverk vísti til, at feilir hjá ráðgevanum høvdu gjørt, at aðrar arbeiðstøkur vórðu vorðnar dýrari. Upphæddin er mótroknað í prosjekteringsútreiðslunum.

Landsgrannskoðanin vísti á, at tað var lítið sannlíkt, at landið fór at fáa peningin frá høvuðsráðgevanum, og at roknskapurin fyri byggingina tí ikki var rættur.

Í desember 2018 hevði høvuðsráðgevin einki goldið. Mentamálaráðið tók undir við Landsgrannskoðanini, at bókingarhátturin gjørdi, at roknskapurin var ikki rættur.

Í juli 2019 segði landsstýrismaðurin, at Landsverk royndi at fáa semju við høvuðsráðgevan, tí at eitt sakarmál var kostnaðarmikið og tíðarkrevjandi.

Málið er latið gerðarrætti.

Sambært landsstýrismanninum hevur Landsverk nú latið gerðarrættinum málið.

5.8 Frítíðarundirvísing (LG 2019/207-0235)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað umsitingina av játtanini til frítíðarundirvísing, sum er á høvuðskontu 7.23.5.07.

Lógargrundarlagið undir frítíðarundirvísingini er:

- Ll. nr. 70 frá 30. juni 1983 "um frítíðarundirvísing",
- Kunngerð nr. 6 frá 18. januar 1988 "um frítíðarvirksemi",
- Rundskriv frá 15. august 1989 "um frítíðarvirksemi",
- Rundskriv nr. 1 frá 20. mars 1984 "um avmarkingar í undirvísingarevnum til almenna frítíðarundirvísing",
- Rundskriv nr. 2 frá 1. september 1989 "um frítíðarundirvísingarleiðara, hjálparfólk og lønir teirra",
- Rundskriv nr. 3 frá 20. mars 1984 "um bólkastøddir til almenna frítíðarundirvísing",

- Rundskriv nr. 4 frá 20. mars 1984 “um tónleikaundirvísing”,
- Rundskriv nr. 5 frá 7. desember 1984 “um serundirvísing vaksnamanna”,
- Rundskriv nr. 1 frá 17. august 1987 “um royndarfyrireikandi undirvísing”,
- Rundskriv nr. 1 frá 5. juli 2001 “um læraraløgnir o.a. til tey, ið undirvísa sambært 2., 3. og 4. tátti í løgtingslóg um frítíðarundirvísing”, og
- Rundskriv nr. 1 frá 6. mars 1986 “ um yrkiskenda undirvísing”.

Fleiri rundskriv áttu at verðið gjørd til kunngerðir.

Mentamálaráðið ásannaði í 2002, at fleiri av rundskrivunum áttu at verðið gjørd til kunngerðir. Í august 2015 kunnaði landsstýrismaðurin um, at kunngerðirnar ikki vóru gjørdar, og at Mentamálaráðið helt, at neyðugt var at dagføra LI. nr. 70/1983 “um frítíðarundirvísing v.m.”

Undirvísingarstýrið hevur í 2019 víst Mentamálaráðnum á, at neyðugt er dagføra lógarverkið. Stýrið hevur spurt um tulkingar av lógini og av fyrisitingarligu mannagongdunum, sum hava verið siðvenjur, áðrenn Undirvísingarstýrið fekk ábyrgdina av at fyrisita lógina.

Undirvísingarstýrið hevði ikki fingið svar, tá ið tímajáttanin skuldi útlutast fyri 2019/2020 á heysti 2019. Undirvísingarstýrið bað tí Mentamálaráðið um loyvi at nýta somu mannagongd, sum ráðið hevði nýtt árini frammanundan. Tað varð játtað teimum.

Sambært Uttanríkis- og mentamálaráðnum hevur Undirvísingarstýrið ikki spurt eftir lógarbroytingum, men hevur víst á, at rundskrivið um læraraløgnir eigur at verða endurskoðað. Ætlanin var at dagføra lógina um frítíðarundirvísing og savna lógirnar um frítíðarundirvísing, háskúla og húsarhaldsskúla í eina lóg, men tann ætlanin er slept. Lógin um frítíðarundirvísing heimilar tí virksemi, sum er skipað, men ætlanin er framvegis at dagføra lógina við atliti at m.a. 3. tátti um serstaka frítíðarundirvísing og 7. tátti um studningsreglur.

Landsstýrismaðurin ætlar at dagføra lógina um frítíðarundirvísing.

Í august 2020 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at hann ætlar at dagføra lógina um frítíðarundirvísing v.m. og hevur sett hana á løglistan í heyst.

Fyrisitingarligur bygnaður o.a.

Á heysti 2018 var Undirvísingarstýrið formliga skipað. Stýrið tekur sær av fyrisitingarligu rakstraruppgávunum í undirvísingarverkinum, herundir játtanini til Frítíðarundirvísing, meðan Uttanríkis- og mentamálaráðið tekur sær av stjórnarráðsuppgávum, herundir lógarverkinum.

Mentamálaráðið hevði eina roknskaparreglugerð, sum eisini fevndi um umsitingina av játtanini til frítíðarundirvísing. Eftir at stovnurin er býttur sundur, hevur Undirvísingarstýrið roknskaparligu ábyrgdina av játtanini. Undirvísingarstýrið arbeiðir við einari roknskaparreglugerð fyri stýrið og stovnar tess.

Roknskapartøl 2015 til 2019:

t.kr.

Heiti	2015	2016	2017	2018	2019
Lønir v.m.	49	86	36	76	145
Keyp av vørum og tænastum	226	5	0	0	2
Stuðul til annað virksemi	102	39	19	52	61
Innanh. flyt. millum alm. stovn. (útr)	0	32	24	60	0
Flyt. frá landi til kommunur (land)	5.687	5.901	6.003	6.069	6.205
Tilsamans	**6.064**	**6.062**	**6.082**	**6.257**	**6.413**

Sambært lógini eru um trý sløg av frítíðarundirvísing, t.e. almenn frítíðarundirvísing, serstøk frítíðarundirvísing og frítíðarvirksemi.

Kommunurnar skulu tryggja, at læararnir hava røttu útbúgvingina.

Kommunurnar seta lærarar, og Undirvísingarstýrið kannar ikki um lærarar hava røttu útbúgvingina til einstøku lærugreinirnar. Undirvísingastýrið vísir á, at sambært § 14 í

lógini um frítíðarundirvísing hava bý-/bygdarráð og skúlanevndir skyldu til at tryggja, at ásetingarnar í lógini verða fylgdar, herundir eisini at undirvísarar lúka treytirnar fyri at undirvísa.

Sambært § 21 í lógini kann landsstýrismaðurin veita leiðarum og lærarum, sum luttaka í útbúgvingarskeiðum við atliti at frítíðarundirvísing v.m. allan ella lutvísan stuðul, og kann eisini skipa fyri, at skeið verða hildin.

Harumframt er ásett fyri bæði almenna- og serstaka frítíðarundirvísing, at lærarar skulu hava neyðuga útbúgving fyri at kunna undirvísa í ávísa evninum.

Í august 2020 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Mentamálaráðið hevur við jøvnum millumbilum skipað fyri skeiði i undirvísingarlæru, sum saman við fakliga førleikanum i ymisku lærugreinunum er fortreyt fyri at undirvísa í frítíðarundirvísingini.

Eftir, at umsitingin av frítíðarundirvísingini frá skúlaársbyrjan skúlaárið 2008-09 varð løgd til kommunurnar at umsita, so er tað kommunan, sum skipar undirvísingina, rindar lønir, setur og góðkennir undirvísarar, sum leiðarin í frítíðarundirvísingini hevur mælt til.

Játtanarviðurskifti

Í januar sendir Undirvísingarstýrið kommununum skriv um studning fyri komandi skúlaár. Kommunurnar senda í apríl heildarætlanir fyri komandi skúlaár, býtt á almenna undirvísing, frítíðarvirksemi og serstaka undirvísing. Í serstakari undirvísing verður viðmerkt, um kommuna søkir um 100% endurgjald til HF, fráfaringarroynd fólkaskúlans, føroyskt fyri útlendingar, skeið fyri lesi- og skriviveik, maritim skeið v.m.

Út frá heildarætlanini ger Undirvísingarstýrið yvirlit, sum vísir tímaynskini í ymisku lærugreinunum.

Við støði í árinum frammanundan og ætlanunum, ið kommunurnar vísa á, játtar Stýrið stuðul. Kvotan verður býtt í mun til ynski frá kommununum og í mun til íbúgvaratalið. Kommunurnar fáa síðani eitt játtanaryvirlit yvir upphæddina, sum tær fáa fyri komandi skúlaár, býtt á heystið og várið, til almenna frítíðarundirvísing, frítíðarvirksemi og serundirvísing.

Endurgjøld til kommunurnar

Undirvísingarstýrið endurrindar kommununum tvær ferðir um árið. Kommunurnar fáa bert endurgoldið fyri tímakostnað til lærarar og løn til leiðara.

Í rundskrivinum frá 5. juli 2001 er ásett, hvussu tímalønin hjá lærarum í frítíðarundirvísingini verður roknað.

Almenn frítíðarundirvísing

Sambært § 2 í rundskrivinum er tímalønin fyri almenna frítíðarundirvísing goldin eftir lønarflokki 23.03. Fyri skúlaárið 2019/20 er hon 279 kr.

Rundskrivið hevur ongar ásetingar um, hvørja lønartalvu ella sáttmála talan er um, um tímalønin er yvirtíðarløn ella hvør lønartalva verður nýtt sum grundarlag fyri tímaløn fyri eitt heilt skúlaár.

Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur víst á, at sum tilskilað er í viðmerkingunum til galdandi lóggávu, hevur lønin í frítíðarundirvísingini øll árini frá 1949 verið grundað á lønirnar hjá fólkaskúlalærarum, og verða læraralønirnar dagførdar samsvarandi sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag. Hetta er framvegis galdandi fyri alla frítíðarundirvísing undantikið HF-stakgreinalestur og yrkiskenda undirvísing.

Rundskriv um læraralønir endurskoðast.

Uttanríkis- og mentamálaráðið er samt við Landsgrannskoðanini, at tað átti at verðið tilskilað í rundskrivinum, og fer at gera tað í sambandi við, at rundskrivið um læraralønir verður endurskoðað.

Serstøk frítíðarundirvísing

Sambært § 3 í rundskrivinum er tímaløn til serstaka frítíðarundirvísing býtt í fýra:

- Fráfaringarroynd fólkaskúlans, har løn er eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag, hækkað við 20%.
- HF-stakgreinaundirvísing, har løn er eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Yrkisfelag Studenta- og HF-lærara, hækkað við 20%.
- Yrkiskend undirvísing, har løn er eftir sáttmála millum viðkomandi yrkisfelag og arbeiðsgevara, hækkað við 20%.
- Serundirvísing, har løn er eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag, hækkað við 20%.

Fyri skúlaárið 2019/20, er tímaløn fyri serundirvísing 334 kr., roknað sum yvirtíð í lønarflokki 29.2, stig 29 í lønartalvuni hjá Føroya Lærarafelag frá 1. oktober 2018, hækkað við 20%.

Løn fyri undirvísing í serstakari frítíðarundirvísing, fráfaringarroynd fólkaskúlans, HF-stakgreinalestri, yrkiskendari undirvísing og serundirvísing, er á tí lønarstigi, viðkomandi lærari er løntur á. Tað er ikki tilskilað í rundskrivinum um læraralønir. Sambært Uttanríkis- og mentamálaráðnum verður tað tikið upp í sambandi við, at rundskrivið um læraralønir verður endurskoðað.

Frítíðarvirksemi

Sambært § 4 í rundskrivinum verður tímaløn til frítíðarvirksemi goldin eftir lønarflokki 18.2. Tímaløn er 241 kr. og samsvarar við yvirtíð í lønarflokki 23.2, stig 20 í lønartalvuni hjá Føroya Lærarafelag frá 1. oktober 2011.

Tá ið lønarflokkur 18.2 varð strikaður í flokkingini hjá lærarum, varð løn ásett í næsta hægri samsvarandi lønarflokki. Uttanríkis- og mentamálaráðið er í holt við at endurskoða rundskrivið um læraralønir, og er lønarásetingin fyri frítíðarvirksemi partur av endurskoðanini.

Næmingagjald

Sambært § 18 í lógini, skulu luttakarar í almennari frítíðarundirvísing og frítíðarvirksemi rinda eitt gjald, sum landsstýrismaðurin hevur góðkent. Kommunurnar áseta sjálvar næmingagjaldið. Næmingagjaldið verður goldið til kommununa ella kvøldskúlan á staðnum, sum sambært viðmerkingunum til lógaruppskotið, er ætlað øðrum rakstrarútreiðslum, so sum høli, ljós, hita og reingerð, sum kommunan fíggjar.

Sambært Undirvísingarstýrinum eru næmingagjøldini ikki góðkend.

Í august 2020 hevur landsstýrismanninum kunnað um, at sambært uppgávubýtinum er tað Undirvísingarstýrið, sum skal góðkenna næmingagjaldið og ein mannagongd má gerast fyri hesa góðkenning.

Undirvísingarstýrið hevur spurt Uttanríkis- og mentamálaráðið, hvussu ymiskar ásetingar í lógini viðvíkjandi luttøkugjøldum skulu tulkast. Skal stuðulin latast av nettoútreiðslum, tá ið luttøkugjaldið er trekt frá ella, sum 50% av útreiðslunum til læraralønir, sum siðvenja hevur verið, uttan mun til hvat luttøkugjald kommunan fær inn.

Í august 2020 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at *"Stuðul bara hevur verður veittur til lønarútreiðslur. Luttøkugjaldið hevur ikki verið drigið frá, áðrenn stuðulin hevur verið veittur, av tí at luttøkugjaldið hevur verið rímiligt í mun til útreiðslurnar hjá kommununum til høli, ljós, hita og reingerð.*

Hóast yrkiskend undirvísing hoyrir til partin serstøk frítíðarundirvísing, so hevur tilmeldingargjald verið goldið í sambandi við dugnaskaparroyndir og landbúnaðarskeið. Í leiðbeining til kommunurnar í bóklinginum fyri 1989, Leiðbeining um ymisk undirvísingarlig og fyrisitingarlig viðurskifti fyri serstaka frítíðarundirvísing sambært § 6, stk. 1, pkt. 3, sum er um serundirvísing, er tilskilað á bls. 12, at næmingar fáa ókeypis undirvísing. Teir skulu bara gjalda innskrivingargjald, ið kommunan ásetur og Landsskúlafyrisitingin góðkennir. Hetta sama er ásett § 10 í rundskrivi um yrkiskenda undirvísing, at undirvísingin er ókeypis, men kommunurnar kunnu krevja eitt innskrivingargjald, ið Landsskúlafyrisitingin skal góðkenna. Tilmeldingargjaldið hevur verið hægri enn til almenna frítíðarundirvísing. Orsøkin er, at aðrar útreiðslur eru til hesar báðar útbúgvingarnar við atliti at høli, útgerð, reingerð og royndarhaldi. Eisini hevur teldukønt fólk verið knýtt at landbúnaðarskeiðnum, tí at undirvísingin verður fyri ein part skipað sum fjarundirvísing, og hevur kommunan hildið hesar útreiðslur."

Undirvísingarstýrið heldur, at tað er stuðulsmóttakarin, sum sambært § 14 í lógini hevur eftirlitsskylduna við øllum treytum í lógini, eisini ásetingunum um at næmingatøl og aldursmørk verða fylgd.

Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur kunnað um, at kommunurnar lata inn næmingayvirlit, og kvøldskúlaleiðararnir søkja vanliga ráðið um undantak, um næmingatalið í einari lærugrein lækkar, ella næmingar undir 14 ár luttaka.

Stakroyndir av umsóknum

At kanna nærri valdi Landsgrannskoðanin Tórshavnar kvøld-, ungdóms- og listaskúla, Klaksvíkar kvøldskúla og Tvøroyrar kvøldskúla.

Í játtanarskrivinum, sum Undirvísingarstýrið hevur sent skúlunum, upplýsir stýrið, hvussu nógv er játtað til frítíðarundirvísing, frítíðarvirksemi, royndarfyrireikandi undirvísing og yrkiskenda undirvísing fyri heystið og várið skúlaárið 2019/2020.

Vit bóðu um avrit av samskiftinum millum Undirvísingarstýrið og 3 kommunur, og kannaðu um umsóknir, játtanarskriv o.o. skjalprógv vóru í málinum, um goldin løn samsvaraði galdandi lóg og rundskrivi, og um lønirnar vóru rættar. Vit høvdu ikki aðrar viðmerkingar, enn tær, ið eru nevndar omanfyri.

5.9 Fróðskaparsetur Føroya (LG 2018/207-0236)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Fróðskaparsetri Føroya.

Endamál, virksemi og uppgávur hjá Fróðskaparsetri Føroya eru lýst í Ll. nr. 58/2008 "um Fróðskaparsetur Føroya", kunngerðum, fíggjarlóg og á heimasíðuni setur.fo.

Roknskaparviðurskifti o.a.

Landsgrannskoðanin mælti til, at greið heimild varð fingin til vega til at áseta gjøld fyri skeið v.m.

Landsstýrismaðurin vísir á, at sambært Játtanarskipanini kann landsstýrismaðurin í fíggjarmálum loyva, at inntøkufíggjað virksemi kann verða framt undir rakstrarjáttan. Á høvuðskontu 7.23.6.16 í fíggjarlógini hevur Fróðskaparsetrið fingið hesa heimild á undirkonto 45. Uttanríkis- og mentamálaráðið sær tað sum eina greiða heimild til at áseta gjøld fyri skeið, og metir ikki at tørvur er á aðrari heimild.

Sambært Setrinum verður áseting fyri skeiðsgjøld gjørd eftir marknaðartreytum, soleiðis at skeiðsvirksemi ikki eru kappingaravlagandi við privatu vinnuna. Setrið er í

holt við at endurskoða roknskaparreglugerðina, og verður tað neyvari útgreinað hvørjar inntøkur Setrið hevur, og hvussu Setrið prísásetur skeiðsgjøld v.m.

Vit vístu á, at samsýningar fyri undirvísing og nevndarsamsýningar til fólk, ið ikki búgva í Føroyum vóru at roknað sum A-inntøka, um arbeiðið var útint í Føroyum, og at tær samsýningarnar tí áttu at verðið goldnar sum løn heldur enn "keyp av tænastum".

Í juli 2019 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Mentamálaráðið hevði vent sær til TAKS fyri at fáa teirra meting av málinum.

Sambært landsstýrismanninum hevur TAKS upplýst fyri Uttanríkis- og mentamálaráðnum, at TAKS er av teirri fatan, at um Fróðskaparsetrið rindar samsýning til útlendskar undirvísarar, er tað at meta sum A-inntøka, um arbeiðið er útint í Føroyum. Um arbeiðið hjá undirvísaranum er gjørt í útlandinum, er talan ikki um A-inntøku, og tískil verður viðkomandi ikki skattskyldugur í Føroyum. Um talan er um A-inntøku sambært § 60 í skattalógini, og persónurin ikki kemur undir § 1 í skattalógini, verður útlendski persónurin avmarkað skattskyldugur sambært § 2, stk. 1, í skattalógini. Viðvíkjandi nevndarsamsýningum, so er talan um A-inntøku sambært § 60, stk. 1 nr. 7, og tískil verður viðkomandi eisini avmarkað skattskyldugur av hesari inntøku. Uttanríkis- og mentamálaráðið fer at taka málið upp við Setrið.

Námsvísindadeildin, Føroyamálsdeildin og Søgu- og samfelagsdeildin høvdu kopikassar, ið vórðu brúktir, tá ið lesandi keyptu kort til kopimaskinurnar. Í roknskaparreglugerðini vóru ongar leiðreglur um kassarnar. Peningur, sum kom í kassan var partvís brúktur til at keypa vørur fyri, og nettoupphæddin var síðani sett inn í peningastovn.

Landsgrannskoðanin mælti til, at leiðslan tók støðu til, um neyðugt var at varðveita kassarnar, og um so var, at skráseta teir í Búskaparskipan landsins.

Sambært landsstýrismanninum er Fróðskaparsetrið í holt við at finna eina loysn, so kassarnir verða færri, ella at taka teir av. Deildirnar á Setrinum hava fingið boð um, at einki útgjald skal fara um kassarnar.

Stuðul frá TF Holding

Fróðskaparsetrið og TF Holding høvdu gjørt avtalu, galdandi frá 1. juli 2015 til 31. juli 2020, um at TF Holding stuðlar Setrinum við 5 mió.kr. til at virka við til at uppbyggja búskaparfrøði sum granskingar- og undirvísingarøki á Setrinum. Treyt fyri stuðlinum var m.a., at Setrið bjóðaði bachelorútbúgving í búskaparfrøði út, lestrarárið 2016/2017.

Sambært avtaluni skuldi TF Holding gjalda eina mió.kr. um árið, fyrstu ferð 1. juli 2015 og seinastu ferð 1. juli 2019. Einki var rindað út í 2015 og 2016.

Í 2016 inntøkuførdi Setrið 1.408 t.kr. frá TF Holding og støðlaði sum ágóða, ið Setrið átti hjá TF Holding.

Í 2017 rindaði TF Holding 2 mió.kr. Av teimum vóru 300 t.kr. mótroknaðar í ágóðanum og 1,7 mió.kr. inntøkuførdar. Um Setrið hevði mótroknað alla upphæddina í ágóðanum hevði meirnýtslan í 2017 verið 1,1 mió.kr. størri, enn hon annars var. 31. desember 2017 stóð 1,1 mió.kr. eftir av støðlaðu upphæddini frá 2016.

Í 2018 rindaði TF Holding 2 mió.kr. Setrið inntøkuførdi 1,5 mió.kr., og mótroknaði 500 t.kr. í ágóðanum. 31. desember 2018 stóðu 598 t.kr. eftir av støðlaðu upphæddini frá 2016.

Landsgrannskoðanin helt, at roknskaparliga viðgerðin av stuðlinum var fløkt og ikki nóg gjøgnumskygd. Roknskapurin 2017 kundi heldur ikki sigast at vera rættur.

Viðgerðin fløkt og ikki nóg gjøgnumskygd.

Í juli 2019 kunnaði landsstýrismaðurin um, at sambært Setrinum hevði roknskaparliga viðgerðin av stuðulsjáttanini verið akkurát tann sama, sum hon hevði verið fyri alt annað stuðulsfíggjað virksemi hjá Setrinum. Mentamálaráðið fór at venda sær til Gjaldstovuna um yvirskipaðu roknskaparligu viðgerðina av stuðulsfíggjaða virkseminum hjá Setrinum, og eftir tað fór málið at verða tikið uppaftur við Setrið.

Sambært landsstýrismanninum er Uttanríkis- og mentamálaráðið ikki komið til nakra niðurstøðu um, hvørt roknskaparliga viðgerðin av stuðulsjáttanum eigur at broytast. Stuðulsfíggjaða virksemið hjá Setrinum verður tí viðgjørt á sama hátt, sum tað hevur verið gjørt.

Yvirlit yvir ognir

Setrið hevði yvirlit yvir teldur í serstakari skipan. Innbúgv o.a. var skrásett í rokniarki, tó bar ikki til at eyðmerkja ognirnar út frá listanum. Setrið ætlaði at útvega onkra einfalda talgilda skipan, har til bar at eyðmerkja ognirnar t.d. við at nýta strikukotur. Innbúgvið til Sjóvinnuhúsið, ið er goldið av løgujáttanini, var ikki skrásett.

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at Fróðskaparsetrið hevur ognað sær eina skipan, fyri á ein betri hátt at kunna skráseta ognirnar. Setrið væntar at hava eitt fullfíggjað yvirlit yvir ognirnar komandi ár.

Leiga av kopimaskinum

Fróðskaparsetrið rindaði 9.311 kr. um mánaðin fyri 9 leigu- og tænastusáttmálar um kopimaskinur. Sambært játtanarreglunum er ikki loyvt at langtíðarleiga. Í serligum førum kann loyvi tó fáast til tað frá Fíggjarmálaráðnum.

Landsgrannskoðanin vísti á, at tað tyktist sum, at talan var um langtíðarleigu-/leasing, sum var komin í lag í staðin fyri keyp. Roknskaparliga áttu avtalurnar tí at viðgerast sum keyp.

Fíggjarmálaráðið skal góðkenna langtíðarleigusáttmálar.

Mentamálaráðið tók undir við, at talan tyktist vera um langtíðarleigu í staðin fyri keyp av kopimaskinum. Mentamálaráðið vísti á, at sambært Fíggjarmálaráðnum hava tey áður noktað øðrum stovnum loyvi at langtíðarleiga kopimaskinur, men hava loyvt tænastusáttmálum um sjálvan raksturin.

Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur víst Setrinum á, at tað er Fíggjarmálaráðið, ið skal góðkenna avtalur um langtíðarleigu. Setrið hevur tikið tað til eftirtektar.

Lønir, vísindalig starvsfólk

Lønirnar hjá vísindaligu starvsfólkunum vóru sambært sáttmála ímillum Akademikarafelag Føroya og Fíggjarmálaráðið. Arbeiðstíðin var býtt í granskingartíð, undirvísingartíð og fyrisiting. Í øllum trimum tættunum var talan um framleiðsluskyldu, sum skuldi skjalprógvast og góðkennast av dekani, sum hevði ábyrgd av, at tað varð gjørt.

Fróðskaparsetrið gjørdi avtalu við hvørt einstakt vísindastarvsfólk um, hvussu stór undirvísingarbyrðan var, og hvussu nógv granskingin skuldi vera. Greiðar starvstreytir og -skyldur skuldu standa í setanarbrævinum. Uppgávurnar vóru býttar í triðingar til undirvísing, gransking og fyrisiting. Einki yvirlit var, sum vísti, hvussu nógvar tímar starvsfólkini brúktu til hvørt økið.

Spurt, um Fróðskaparsetrið helt, at uppbýtið var nøktandi, svaraði Setrið, at *"Tá ið talan er um undirvísing og gransking, so verður í dag miðað eftir, at 50% av samlaðu arbeiðstíðini fer til undirvísing, og hini 50% fara til gransking. Tað er givið, at partur av hesi tíðini verður brúktur til fyrisitingarligar uppgávur, so sum skeið, fundir v.m., men hvussu stórur hesin parturin er, er torført at siga. Skipanin hjá vísindafólkunum er lík tí skipan, sum vit eitt nú kenna á donskum universitetum, og verður hetta mett at vera ein nøktandi skipan."*

Í juli 2019 kunnaði landsstýrismaðurin um, at í búskettgreiningini av Setrinum, frá 2. mai 2018, varð mælt til, at deildirnar, og ikki persónarnir, skráseta arbeiðstíðina eftir einum yvirskipaðum leisti. Sum partur av arbeiðstíðarskrásetingini var skráseting av sjúku og hildnari frítíð, soleiðis at roknskaparhaldið kundi sanna, at tað var rætt.

Skráseting av arbeiðstíð og stakroyndir av lønarmálum

Ásannandi, at lønarútreiðslur eru størsti útreiðsluposturin hjá Fróðskaparsetri Føroya, helt Landsgrannskoðanin, at tað var týdningarmikið, at leiðslan tryggjaði sær, at lønarútgjaldingarnar vóru rættar. Tað kann m.a. verða gjørt við at hava hóskandi tíðarskráseting, tryggar góðkenningarmannagongdir og neyvar ásetingar um arbeiðstíðir.

Tó at Setrið onga veruliga tíðarskráseting hevði, brúktu tey flextíð, og rindaðu nógvum starvsfólkum løn fyri serstaka fríviku. Fróðskaparsetrið ásannaði, at tíðarskrásetingin var ikki nøktandi, og tey arbeiddu við at finna eina loysn.

Einki var at finnast at viðvíkjandi setanarskrivum, prógvum, lønarsatsum v.m., men vit kundu ikki sanna, at tímarnir, ið Setrið rindaði fyri, vóru rættir, tá ið stovnurin onga tíðarskráseting hevði.

Í juli 2019 greiddi Mentamálaráðið frá, at starvsfólk í fyrisitingini áttu at skráseta sína arbeiðstíð, sum vanligt er á øðrum stovnum, og at ráðið fór at taka stig til, at Setrið ger leiðreglur fyri, hvussu hóskandi skráseting av arbeiðstíð verður framd.

Í august 2020 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Fróðskaparsetrið hevur fingið sær eitt innannet, har Setrið m.a. skrásetir feriu og sjúku hjá øllum starvsfólkunum.

Undirvísing, prógvdøming o.a.

Fróðskaparsetrið hevði rindað samsýningar fyri undirvísing, prógvdøming v.m. sum "keyp av tænastum". Í 2017 og 2018 rindaði Setrið 1,1 mió.kr. til 9 móttakarar, t.e. persónar, firma og smápartafeløg. Taksturin var tímaløn eftir AKF sáttmálanum +12% í frítíðarløn. Á nøkrum rokningum var MVG lagt á. Uppgávurnar vóru ikki bodnar út.

Spurt, um talan ikki var um nettoinntøkur, ið skuldu gjaldast um lønarskipanina hjá Gjaldstovuni, svaraði Fróðskaparsetrið, at *"Setrið heldur seg ikki kunna nokta firmaum ella fyritøkum at loysa uppgávur fyri Setrið. Gjaldið fyri tænasturnar fylgir ásetingunum í § 23 í sáttmálanum hjá Akademikarafelag Føroya."*

Landsgrannskoðanin vísti á, at tað er týdningarmikið, at almennir stovnar rinda samsýningar, sum eru løn, um Lønarskipanina hjá Gjaldstovuni. Tá ið arbeiðsgevarar rinda løntakarum frítíðarløn, skal frítíðarlønin rindast á frítíðarlønarkontu avvarðandi løntakarafelags e.a. Viðvíkjandi meirvirðisgjaldi vístu vit á, at sambært meirvirðisgjaldslógini er m.a. undirvísing í skúla ella á fróðskaparsetri undantikið MVG-skyldu.

Í juli 2019 kunnaði Mentamálaráðið um, at ráðið hevði vent sær til TAKS við spurningunum, og at málið fór síðani at verða tikið upp við Setrið.

Sambært landsstýrismanninum hevur TAKS upplýst fyri Uttanríkis- og mentamálaráðnum, at samsýning fyri undirvísing og prógvdøming er at roknað sum A-inntøka sambært § 60 í skattalógini. TAKS sær málið sum, at talan er um móttakara, ið fær samsýning fyri persónligt arbeiði í tænastu fyri Setrið. Arbeiðið er ikki gjørt fyri egna rokning, men fyri rokning hjá Setrinum. Tískil metir TAKS, at hesar lønarinntøkur eiga at verða ávístar um A-skattaskipanina.

Uttanríkis- og mentamálaráðið fer at taka málið upp við Setrið.

Inntøkufíggjað virksemi

Vísandi til ásetingarnar í kunngerðini um rakstrarjáttan mælti Landsgrannskoðanin til, at greitt var frá virkseminum í fíggjarlógini. Sambært landsstýrismanninum verður virksemi neyvari útgreinað í fíggjarlógini fyri 2021.

Stuðulsfíggjað virksemi

Landsgrannskoðanin mælti til at greiða nærri frá virkseminum í fíggjarlógini, soleiðis sum ásett er í kunngerðini um stuðulsfíggjað virksemi. Sambært landsstýrismanninum verður virksemi neyvari útgreinað í fíggjarlógini fyri 2021.

Verkætlanarleiðarar (t.d. Ph.d. lesandi) hava ábyrgd av, at játtanir til stuðulsfíggjað virksemi halda. Dekanur og stjórin góðkenna verkætlanir.

Seinastu 5 árini var óbrúktur granskingarstuðul støðlaður í fíggjarstøðuni:

t.kr.

Heiti	2014	2015	2016	2017	2018	2019
Ikki inntøkuført – granskingarstyrkur, gávur o.t.	11.523	13.113	12.966	11.782	11.305	17.529

Peningur staðið óbrúktur í nógv ár.

Landsgrannskoðanin hugdi nærri at trimum verkætlanum, har peningur hevði staðið ónýttur í nógv ár. Yvirlit yvir tær verkætlanirnar seinastu 10 árini:

t.kr.

Heiti	2010	2011	2012	2013	2014	2015	2016	2017	2018	2019
Menning av kolvetnisverkfrøði	1.058	1.058	1.058	1.058	978	978	978	978	978	978
BOK-2	1.106	1.106	1.106	1.106	1.106	1.106	1.106	1.106	1.598	1.598
Førleikamenning í varandi orku	0	0	0	400	4.300	4.300	4.300	4.110	3.676	3.676
Tilsamans	**2.164**	**2.164**	**2.164**	**2.564**	**6.384**	**6.384**	**6.384**	**6.194**	**6.252**	**6.252**

Menning av kolvetnisverkfrøði

31. desember 2019 stóðu 978 t.kr. støðlaðar til verkætlanina “Menning av kolvetnisverkfrøði”. Tað einasta sum var hent síðani 2004 var, at 80 t.kr. vórðu goldnar inn í 2009, og at 80 t.kr. vóru inntøkuførdar í rakstrinum hjá Fróðskaparsetrinum 2014.

Í juli 2019 kunnaði landsstýrismaðurin um, at sambært Setrinum var eingin verkætlan í gongd innan hetta fakøkið. Ætlanin var at peningurin, sum varð latin til verkætlanina “Menning av kolvetnisverkfrøði”, framhaldandi skuldi verða støðlaður, til gongd aftur kom á verkætlanararbeiðið.

BOK-2

31. desember 2018 stóðu 1,6 mió.kr. støðlaðar til verkætlanina, BOK-2, harav høvdu 1,1 mió.kr. staðið frá 2009 til 2017. Seinasta inngjaldið var í 2008. Í 2018 vóru 492 t.kr. fluttar frá uppgerð av einari aðrari verkætlan (RAD-3).

Í juli 2019 kunnaði landsstýrismaðurin um, at eingin verkætlan var í gongd innan verkætlanarøkið “Geislavirkin umhvørvisdálking”. Ætlanin var at peningurin, sum varð latin til fakøkið, framhaldandi skuldi verða støðlaður, til gongd aftur kom á verkætlanararbeiðið.

Førleikamenning í varandi orku

3,7 mió.kr. vóru støðlaðar til “Førleikamenning í varandi orku”. Setrið fekk 4,3 mió.kr. í 2014 frá Statoil Farøyene AS til gransking og undirvísing. Í 2017 vórðu 190 t.kr. brúktar. Í 2018 eru 434 t.kr. brúktar.

Fyrsta Ph.d. verkætlanin við fígging av hesum stuðlinum var nú í gongd. Ein granskari var settur í tíðaravmarkað starv 1. februar 2018 til 1. februar 2021, til Ph.d. verkætlanina “Greining og myndlan av vindorkutilfeinginum í Føroyum”.

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at sambært Fróðskaparsetrinum er einki nýtt viðvíkjandi verkætlanunum.

Kunningartøkni v.m.

Setrið hevur skipanir, sum eru týdningarmiklar fyri stovnin, lesandi og granskarar.

Politikkur um KT-trygd

Setrið hevði skrivligan KT-trygdarpolitikk við yvirskipaðum ásetingum um KT-trygd, umframt ásetingar um nøkur ítøkilig økir, sum KT-politikkur skuldi gerast fyri.

Tilmæli um at bøta um KT-trygdina.

Setrið hevði ikki skipaða kunning til starvsfólk um KT-trygd, har starvsfólk vórðu biðin um at vátta, at tey vóru kunnað um, hvat tey kundu, og ikki kundu gera á KT-økinum. Landsgrannskoðanin vísti til brúkaraleiðreglurnar og brúkaraváttanina hjá Landsneti, sum eitt dømi, og mæltu vit til at gera meira ítøkiligan KT-politikk við ætlanum um, hvussu Setrið ætlaði at bøta um KT-trygdina í mun til váðametingina. Eisini mæltu vit til, at Setrið gjørdi skrivligar brúkaraleiðreglur til starvsfólkini, og at tey váttaðu, at tey høvdu lisið tær.

Mælt var til, at Setrið skipar váðameting og trygdarpolitikk.

Setrið hevði ikki skrivligar mannagongdir fyri, hvussu váðameting og trygdarpolitikkur verða hildin viðlíka. Landsgrannskoðanin mælti til, at Setrið skipaði ein leist nær, og hvussu váðameting og trygdarpolitikkur vórðu hildin viðlíka.

Sambært váðametingini hevði Setrið ein KT-trygdarbólk, sum var settur saman av KT-leiðaranum, einum dekani og fyrisitingarstjóranum. KT-økið varð umsitið av einum KT-leiðara, sum var settur hálva tíð. Uppgávan hjá KT-leiðaranum var at halda váðameting og trygdarpolitikk viðlíka.

Skipan av KT-trygd

Sambært Setrinum vóru tey í holt við at gera nágreiniligar mannagongdir um KT-trygd, og leiðslan helt, at Setrið fylgdi ásetingunum í rundskrivi frá 21. juni 2007 “um at seta í verk KT trygd.”

Stovnurin átti sjálvur flestu dáturnar, sum lógu á netinum. Harafturat hevði Føroya-málsdeildin eitt bandasavn við upptøkum av samrøðum og myndum.

Skipanir og dátur lógu á servarum hjá veitara, sum eisini skipaði trygdartiltøkini. KT-grannskoðarin hjá veitaranum hevði fyri árið 2017 givið eina ISAE 3402 váttan um almennar KT-eftirlitsskipanir í hýsingartænastuni hjá veitaranum, sum eisini umfataði Setrið.

Mælt varð til at fremja átøk.

Landsgrannskoðanin mælti til at fremja átøkini, ið Setrið sjálvt hevði ábyrgd av sambært grannskoðanarváttanini.

Sambært landsstýrismanninum hevur Fróðskaparsetrið upplýst, at royndarkanningar av trygdaravritum er partur av generellu kanningunum, sum veitarin regluliga ger í hýsingarumhvørvinum. Samskift hevur verið við veitaran um at fáa gjørt penetratións-royndir av egnum skipanum.

Flokking og váðameting

Uttanhýsis KT-grannskoðari hevði gjørt váðameting av KT-nýtslu, og var hon seinast dagførd í november 2014. Dátuflokking er partur av váðametingini. Yvirskipaði KT-trygdarpolitikkurin var seinast dagførdur í desember 2015. Í váðametingini vóru nevndar fleiri hóttanir móti KT-trygdini, og fleiri tilmæli, sum KT-grannskoðarin gav til at bøta um KT-trygdina, vóru ikki avgreidd.

Sambært landsstýrismanninum hevur Setrið upplýst ráðnum, at fleiri av viðmæltu trygdartiltøkunum frá váðametingini eru framd og onnur eru í gerð.

Tilbúgving
Fróðskaparsetrið hevði ikki yvirlit yvir trygdarhendingar. Setrið hevði ikki verið varugt við nakað trygdarbrot. Tey høvdu onkuntíð sæð, at netið var álopið, men trygdarverjan hevði fangað tað. Sambært Setrinum vóru ásetingar um uppitíð o.a. í SLA avtaluni við Formula.

Setrið hevði ikki skipaðar mannagongdir fyri, hvussu trygdarhendingar vórðu handfarnar. Sambært KT-leiðaranum vórðu tær loystar ad-hoc.

Setrið hevði ikki gjørt tilbúgvingarætlan fyri KT-trygdarhendingar. Um fasta netið ikki var tøkt, ella brek var á linjuni til Formula, var møguligt at nýta 4G at fáa samband við servararnar.

Formula tók sær av dagføringum av skipanunum hjá Setrinum. Setrið hevði ongar skipaðar reglur um change management.

Allar broytingar, sum vóru gjørdar, vóru umbidnar av Setrinum frammanundan. Uttanhýsis veitari viðlíkahelt prófvbókina.

Landsgrannskoðanin mælti til, at dagføringar og uppstiganir av Prófvbókini vórðu gjørdar eftir skipaðum skrivligum leisti. Í februar 2019 kunnaði Setrið um, at tey fóru at orða eina tilbúgvingarætlan.

Sambært landsstýrismanninum er arbeiðið við at orða eina tilbúgvingarætlan og leist fyri dagføringar og uppstiganir av Prófvbókini ikki byrjað, men Setrið ætlar at seta sjøtil á arbeiðið í næstum. Setrið er við í einari verkætlan um eina felags KT-skipan fyri alt undirvísingarverkið. Eitt umfatandi fyrireikingararbeiðið er gjørt, sum miðar eftir at loysa KT-trygdarspurningarnar og útbúgvingarfyrisitingina í einari felags skipan fyri alt undirvísingarverkið.

5.10 Vinnuháskúlin (LG 2018/207-0236)

Í seinastu frágreiðing umrøddu vit grannskoðan av Vinnuháskúlanum. Vinnuháskúlin virkar eftir LI. nr. 55/2001 “um útbúgving av manning á skipum o.ø.”

Lønir o.a.
Vinnuháskúlin hevur goldið lærara samsýning fyri verkætlanarleiðslu hjá skipsførara-lesandi. Sambært Vinnuháskúlanum var avtalan um samsýningina gjørd, áðrenn Maskinmeistaraskúlin varð lagdur saman við Føroya Sjómansskúla, men avtalan var ikki at finna.

Undirvísingarstýrið arbeiðir við at gera eina nýggja avtalu, og at fáa hana góðkenda av Fíggjarmálaráðnum.

Eftirlit við innlatan av uppgávum
Vit spurdu, hvussu leiðslan tryggjaði sær, at næmingar lótu inn uppgávur, og at tær vórðu rættaðar. Eisini spurdu vit um skjalprógv ella hagtøl funnust fyri, hvussu nógvar uppgávur áttu at verða givnar, vóru givnar, vóru latnar inn og rættaðar.

Vinnuháskúlin greiddi frá, at lærararnir hava ábyrgd av at føra protokoll yvir innlatnar uppgávur og at stilla inn til prófvtøku. Um næmingur ikki hevði latið í minsta lagi 80% av uppgávunum inn, gav lærarin næminginum boð um, at hann varð ikki innstillaður til prófvtøku. Skúlastjórin hevði ikki eftirlit við, at allar uppgávurnar vóru latnar inn.

Landsgrannskoðanin mælti til, at leiðslan setti í verk innaneftirlit, fyri at tryggja sær, at uppgávur veruliga eru latnar inn, og at treytirnar fyri at verða innstillaður til prófvtøku

eru loknar. Undirvísingarstýrið heitti í juli 2019 á Vinnuháskúlan, um at fylgja tilmælinum frá Landsgrannskoðanini um innaneftirlit.

Sambært landsstýrismanninum er ein skipan fyri innaneftirlit sett í verk, men mannagongdirnar eru ikki førdar inn í dygdarhandbókina hjá skúlanum. Undirvísingarstýrið fylgir málinum.

KT-viðurskifti

Vinnuháskúlin hevði ikki gjørt váðameting sambært rundskrivi frá Vinnumálaráðnum 21. juni 2007 um "at seta í verk KT trygd". Skúlin samskifti við Dátueftirlitið um, hvussu persónupplýsingar skuldu viðgerast. Landsgrannskoðanin mælti til, at viðurskiftini vórðu fingin í rættlag.

Sambært Uttanríkis- og mentamálaráðnum er eingin váðameting gjørd enn. Tillagingar eru gjørdar í núverandi KT-skipan hjá skúlanum, serliga viðvíkjandi persónstrygd.

Eingin váðameting gjørd.

Vinnuháskúlin hevði skjal, nevnt "IT-dokumentatión-sikkerhedspolitik". Skjalið innihelt ásetingar og lýsti stórtsæð øll viðurskifti, sum hava við trygdarpolitikk at gera; tó tyktist skjalið at vera ófullfíggjað. Tað framgekk ikki, hvør hevði gjørt skjalið, nær tað var gjørt, og í skjalinum vórðu fleiri spurningar reistir, sum vit ikki dugdu at síggja vóru svaraðir.

Landsgrannskoðanin mælti til, at skúlin endurskoðaði trygdarpolitikkin, og at øll ivamál vórðu svaraði. Leiðslan greiddi frá, at skúlin var í holt við at endurskoða KT-viðurskiftini, serliga trygdina.

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at sambært Vinnuháskúlanum er trygdarpolitikkurin hjá skúlanum ikki endurskoðaður. Arbeiðið hevur drigið út orsakað av, at KT-starvið ikki er sett í løtuni, og at Undirvísingarstýrið arbeiðir við at gera eina nýggja felags KT-skipan fyri alt undirvísingarverkið. Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur heitt á Undirvísingarstýrið um at fylgja KT-viðurskiftinunum hjá Vinnuháskúlanum upp, soleiðis at tey koma í rættlag skjótast gjørligt. Vinnuháskúlin kemur at verða partur í einari felags skipan fyri alt undirvísingarverkið, sum loysir KT-trygdarspurningin og undirvísingarfyrisitingina. Ein umfatandi greining er gjørd og klárt er at fara undir eina menning, tá ið játtan fyriliggur til tað.

Góðskumeting av sjóvinnuútbúgvingunum

Sambært avtalu við Mentamálaráðið vitjar Søfartsstyrelsen Vinnuháskúlan regluliga. Endamálið við vitjanunum er at meta um, um skúlin:

- greiðir sínar útbúgvingar í tráð við endamálið í lógini,
- fylgir reglunum um góðskustýring av maritimu útbúgvingunum, og
- fylgir øðrum reglum um útbúgvingina, herundir reglum um prógvdøming og eftirmeting.

Í 2012 umrøddu vit, at leiðslan fór at gera eina ætlan fyri innanhýsis skoðan av dygdarmenningarskipan skúlans.
Søfartsstyrelsen vitjaði í apríl 2016. Viðmerkingarnar frá Søfartsstyrelsen í 2016 vóru, at skúlin:

1. har ikke en procedure for registrering af afvigelser og korrigerende handlinger i kvalitetssystemet,
2. det er uklart om undervisningsplaner godkendes af ledelsen forud for registrering i skolens system og præsentation på informationsportalen for eleverne,
3. ledelsesevalueringen følger ikke kvalitetsstandarden, jf. Bekendtgørelse nr. 1373/2009 om godkendelse og kvalitetssikring m.v. af maritime uddannelser,
4. skolens struktur for planlægning og afholdelse af interne audit er uklare, og
5. nødudgang i tavlerum ved DG-genset på den maskintekniske afdeling fører til frit fald på en 1 meter på den anden side af døren.

Í september 2019 lat Mentamálaráðið Landsgrannskoðanini avrit av frágreiðing frá Søfartsstyrelsen frá 21. mai 2019. Sambært frágreiðingini hevði Søfartsstyrelsen noterað 7 frávik og eina "observation". Harumframt vóru tvey frávik í sambandi við audit á Brandskúlanum.

Sambært frágreiðingini í 2019, var lítið og einki hent í hesum týðandi máli síðani 2016. Nýggj frávik og nýggjar fráboðanir vóru løgst afturat. Søfartsstyrelsen mælti til nýggja uttanhýsis audit seinni í 2019.

Vit spurdu Mentamálaráðið, hvussu ráðið metti úrslitið av auditeringini, og hvørji stig ráðið hevði tikið fyri at bøta um viðurskiftini.

Í oktober 2019 hevur Uttanríkis- og mentamálaráðið víst á, at maritimu skúlarnir hava eina altjóða góðkenning at útskriva prógv við STCW-áseting, sum gevur próvánaranum førleikar til at mynstra við øllum skipum, sum eru skrásett í londum, sum eru limir í IMO.

Góðkenningin hevur við sær, at skúlarnir skulu hava eina góðkenda góðskustýringarskipan og eru undir altjóða eftirlitið. Skúlarnir hava fulla ábyrgd av, at virksemið fer fram sambært góðskustýringarskipanini. Eftirlitið er m.a. ein afturvendandi auditering, sum Mentamálaráðið stendur fyri í samstarvið við Søfartsstyrelsen. Auditeringarnar verða vanliga framdar annað ella triðja hvørt ár.

Uttanríkis- og mentamálaráðið greiðir eisini frá, at í frágreiðing frá auditering av Vinnuháskúlanum 13. mai 2019, blivu staðfest 7 frávik og ein staðfesting. Orsakað av hesum úrslitið, avgjørdi ráðið at skipa fyri nýggjari auditering í januar/februar 2020.

Í februar 2020 hevur Vinnuháskúlin kunnað Landsgrannskoðanina um, at úrslitið av uppfylgingini av audit var: *Undirvísingarstýrið foretog en audit af Vinnuháskolens kvalitetssystem i maj 2019. Auditeringen blev udført i samarbejde med Søfartsstyrelsen, som foreskrevet i ligestillingsaftale fra 1999. Ved auditeringen blev der stadfæstet 7 afvigelser og en observation. Vinnuháskolen har efterfølgende lavet en opfølgning på afvigelser og observationer med korrigerende handlinger og en meget vel udført ledelses evaluering. På denne baggrund har Undirvísingarstýrið konstateret, at Vinnuháskolens kvalitetsstyringssystem lever fuldt op til de krav og bestemmelser som foreskrevet i bekendtgørelse nr. 120 fra 11. november 2015, som dermed er godkendt.*

5.11 Granskingarráð Føroya (LG 2014/207-0236)

Í frágreiðingum seinastu árini hevur Landsgrannskoðanin umrøtt roknskaparreglugerðina hjá Granskingarráð Føroya og Granskingargrunninum. Reglugerðin, sum var frá 2012, var send Mentamálaráðnum, men varð ikki góðkend, tí ógreiða var, hvørt avlop av óbrúktari játtan hjá grunninum skuldi fella aftur til landskassan.

Í grannskoðanarprotokollini hjá Granskingargrunninum stóð, at *"í januar 2012 ger stjórin greitt, at til annað svar fyriliggur, verður hildið fram við verandi praksis."* Grannskoðarin mælti enn eina ferð til, at leiðslan skundaði undir at fáa svar frá Mentamálaráðnum.

Í uppskoti til samtyktar (Lm. nr. 37/2016) hildu løgtingsgrannskoðararnir, at tað var ikki nøktandi, at so long tíð gekk, uttan at prinsipiellu spurningarnir frá grunninum vórðu svaraðir og mæltu landsstýrismanninum til skjótast at taka stig til at fáa viðurskiftini í rættlag.

Í august 2017 greiddi landsstýrismaðurin frá, at Mentamálaráðið síðani seinastu frágreiðing m.a. hevði kannað, hvussu Mentanargrunnur landsins umsat sína játtan, og at ráðið fór saman við Fíggjarmálaráðnum at koma til endaliga niðurstøðu í 2017.

Í juli 2019 kunnaði landsstýrismaðurin um, at eingin endalig avgerð er tikin um at broyta verandi praksis.

Ll. nr. 89 frá 7. juni 2020 "um ráðgeving og stuðul til gransking, menning og nýskapan" kemur í gildi 1. januar 2021. Samstundis fer úr gildi Ll. nr. 85/2001 "um gransking". Nýggja lógin hevur m.a. við sær, at allur granskingarstuðul, ið verður umsitin sambært lógini verður lagdur í ein eksternan grunn. Grunnurin skal umsitast av einari fyrisiting, ið virkar sum ein vanligur almennur stovnur.

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at "*Spurningurin um avlop av óbrúktari játtan varð nógv viðgjørdur tá uppskotið til nýggju lógina varð fyrireikað. Niðurstøðan hjá Uttanríkis- og mentamálaráðnum var, at tað var skilagott at halda fast við verandi praksis. Hinvegin var neyðugt at tryggja sær, at eingi løgfrøðilig ivamál vóru um hesa praksis. Avgjørt var tí, sum nevnt omanfyri, at koyra sjálvan stuðulin í ein grunn uttanfyri fíggjarlógina. Undir fyrireikingararbeiðinum var lógaruppskotið sent til allar viðkomandi hoyringspartar. Innkomnu viðmerkingarnar góvu ikki orsøk til stórvegis broytingar, og landsstýrismaðurin legði tí uppskotið við omanfyri nevnda leisti fyri Tingið".*

5.12 Tjóðpallur Føroya (LG 2015/207-0242)

Í undanfarnum frágreiðingum umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðanina av Tjóðpalli Føroya.

Í mars 2016 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Mentamálaráðið fór at tryggja, at roknskaparhaldið á Tjóðpallinum bleiv nøktandi skipað við mannagongdum sambært roknskaparkunngerðini. Sambært landsstýrismanninum fór Mentamálaráðið at tryggja, at greiðar ásetingar fóru at verða í reglugerðini um prísásetingar. Í juni 2018 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Mentamálaráðið hevði fingið uppskot til reglugerð.

Í august 2020 hevur Uttanríkis- og mentamálaráðið kunnað um, at komið er ikki á mál við arbeiðinum at góðkenna roknskaparreglugerðina.

Roknskaparreglu-gerðin ikki góðkend.

5.13 Tjóðsavnið (LG 2019/207-0243)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin hjá Tjóðsavninum og umsiting stovnsins av stuðulsjáttanum. Eisini hava vit kunnað okkum nærri um Koltursætlanina og inntøkufíggjaða virksemið hjá Tjóðsavninum.

Tjóðsavnið virkar sambært Ll. nr. 32/1952 "um fornminnissavn", og Ll. nr. 26/1955 "um Føroya Náttúrugripasavn". Høvuðsuppgávurnar eru at savna inn, varðveita, granska í, miðla og at sýna fram náttúru- og mentanararv Føroya.

Tjóðsavnið umsitur fornminna- og bygningafriðingarlógina, lógina um fornminni í sjónum og hevur fakligt eftirlit við mentanarsøguligum bygdasøvnum. Savnið áteknar mentanarsøgulig skip, ráðgevur í antikvariskum spurningum í sambandi við bygningar fólkakirkjunnar og umsitur loyvir til fuglaveiðu. Tjóðsavnið er umboðað í Yvirfriðingar-nevndini.

Ein partur av játtanini er til at reka friðaðar landsognir, sum álagt er stovninum at umsita, umframt at samsýna fornminnisnevnd og lata stuðul til friðað hús og fornminni, sum ikki eru landsogn. Tjóðsavnið umsitur eisini játtanina til Koltursætlanina.

Roknskaparviðurskifti

Roknskaparreglugerðin er dagførd í 2019, men Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur ikki góðkent hana. Bókhaldið er í Búskaparskipan landsins. Tjóðsavnið skrásetir ognirnar í Búskaparskipanini, og skrásetir savnslutirnar v.m. í aðrari skipan.

Tjóðsavnið fylgir almenna keypspolitikkinum og biður altíð um tilboð.

Vit gjøgnumgingu nakrar ferðauppgerðir fyri 2019, og mæltu til, at frágreiðingar so sum skrá, endamál o.a., ið er viðkomandi fyri endurgjald fyri arbeiðsferðir, verður lagt við ferðauppgerðum.

Inntøkur

Tjóðsavnið hevur inntøkur av arbeiði fyri stovnar og kommunur. Afturat tí selja tey myndir, ljóstøku, atgongugjøld o.a. í savnsbúðini, og kjøt í Koltursætlanini.

Prísásetingin skal ongantíð vera kappingaravlagandi. Arbeiði fyri almennar stovnar og kommunur verða vanliga roknað sum endurgjøld fyri veruligan kostnað ella sum tænastugjøld, ið eru beinleiðis kostnaður og umsitingargjald.

Savnið hevur ásett prísir fyri myndir, ljóstøk og atgongugjøld. Gávulutir verða seldir fyri kostprís pluss 30%. Í 2019 seldi Tjóðsavnið kjøt úr Koltri fyri 80 kr/kg feskt og 88 kr/kg fyri ræst kjøt umframt MVG.

Tjóðsavnið skrásetir søluna í savnsbúðini í kassaskipanina og ferðaskrivstovur kunnu rinda atgongugjald eftir rokning. Aðrar inntøkur frá almennum stovnum ella kommunum verða bókaðar sum innanhýsis flytingar millum almennar stovnar. Í inntøkufíggjaða virkseminum er søla frá útgávuvirksemi t.d. plakatir og bøkur.

Peningastovnskontur, kontantkassar og kort

Peningastovnskonturnar eru skrásettar í Búskaparskipan landsins og verða regluliga stemmaðar av við uttanhýsis skjøl.

Tjóðsavnið hevur fýra forskotskassar, sum eru skrásettir í Búskaparskipan landsins. Í desember 2019 var Landsgrannskoðanin á ófráboðaðum kassaeftirliti og vit høvdu smávegis viðmerkingar. Tjóðsavnið hevur eftirmett tørvin á at hava kassar og hevur gjørt av at minka um talið.

Tjóðsavnið hevur eitt Eurocard. Landsgrannskoðanin vísti á, at heimildarváttan skal gerast til gjaldkort, og at frágreiðing um, hvat eitt gjaldkort kann nýtast til, skal verða í roknskaparreglugerðini. Tjóðsavnið hevur greiðar reglur í roknskaparreglugerðini um, hvørjar heimildir starvsfólk hava viðvíkjandi útreiðslum.

Lønir v.m.

Tjóðsavnið fylgir almenna setanarpolitikkinum. Starvsfólkini skráseta arbeiðstíðina.

Við stakroyndum kannaði Landsgrannskoðanin nakrar lønir. Eisini kannaðu vit tímasaldurnar pr. 31. desember 2019. Einki var at finnast at.

Upplýsingar og KT-viðurskifti

Tjóðsavnið hevur upplýsingar og dátugrunnar v.m., sum hava stóran týdning fyri stovnin sjálvan og samfelagið sum heild. Kassaskipanin letur upplýsingar til Búskaparskipanina, har sølan verður skrásett.

Tjóðsavnið er partur av Landsneti, og Landsnet skipar fyri trygdartiltøkum, firewall, virusverju, back-up og persónligum brúkaranøvnum við loyniorðum, ið javnan verða broytt. Øll starvsfólkini hava atgongd til innanhýsis telduskipanina, meðan bert nøkur fá hava atgongd til Búskaparskipan landsins. Starvsfólk kunnu arbeiða heiman, og tá eru somu reglur galdandi sum á arbeiðsplássinum.

Leiðslan hevur gjørt váðameting viðvíkjandi upplýsingum og KT-nýtslu og hevur orðað trygdarpolitikk.

Stuðulsjáttanir

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað útgjøldini av stuðli, sum Tjóðsavnið letur bygdasøvnum, mentanarsøguligum skipum, Sjósavninum og listasøvnum. Vit kannaðu um útgjøldini fylgja galdandi reglum og mannagongdum, og hvussu Tjóðsavnið hevur tryggjað sær, at móttakararnir lúka treytirnar fyri at fáa stuðul.

Tá ið reglur um eftirlit, roknskap, grannskoðan v.m. ikki eru í serligu heimildarlógunum, eru reglurnar í kunngerðini um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan galdandi.

Stuðul til bygdasøvn og mentanarsøgulig skip hevur heimild í serligari lóg, men tað hevur stuðulin til Sjósavnið og stuðulin til listasøvn ikki.

Landsgrannskoðanin hevur ikki varhuga av, at stuðulin ikki er brúktur til ætlaðu endamálini, tó eru fleiri ivamál um, hvussu roknskapir, grannskoðan og eftirlit annars skulu vera. Umsiting av stuðulsjáttanum kann verða trupul, tá ið fleiri reglur tilskila, nær roknskapur skal latast inn, um hann skal vera grannskoðaður, og eftir hvørjum reglum hann skal grannskoðast. Landsgrannskoðanin mælti til, at Tjóðsavnið saman við Uttanríkis- og mentamálaráðnum fær greiðu á, hvørjar reglur eru galdandi.

Landsgrannskoðanin mælti til at fáa greiðu á, hvørjar reglur eru galdandi.

Landsstýrismaðurin vísir á, at Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur áleið somu avbjóðingar við ymiskum ásetingum fyri umsiting av stuðulsjáttanum, so sum ymiskar freistir, nær roknskapir skulu latast inn og ymiskar ásetingar um, nær roknskapirnir skulu grannskoðast. Ráðið hevur tí tillagað sínar mannagongdir fyri umsitingina av stuðulsjáttanunum, so at umsitingin livir upp til ásetingarnar í kunngerðini um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan.

Uttanríkis- og mentamálaráðið fer at umrøða umsitingina av stuðulsjáttanum við Tjóðsavnið, fyri at fáa greiðu á, hvørjar reglur eru galdandi, og hvussu tær skulu umsitast.

5.14 Kringvarp Føroya, løgujáttan (LG 2019/207-0244)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað høvuðskontu 7.24.4.03 “Kringvarp Føroya, løgujáttan”. Kringvarp Føroya hevði eina løgujáttan frá 2013 til 2016 til um- og útbyggjan av bygningum Kringvarpsins. Sambært viðmerkingunum í fíggjarlógini 2018 var um- og útbyggingin liðug um ársskiftið 2016/2017.

Verklagslóg[15] var gjørd í mai 2013. Útbyggingin skuldi fíggjast við sølu av gomlu bygningunum hjá Kringvarpinum, men tað vísti seg, at upphæddin frá søluni rakk ikki til alla umbyggingina, men bert til 1. byggistig. Verklagslógin fataði tó um fyrsta og annað byggistig.

Tá ið tilboðini komu inn, var kostnaðurin langt oman fyri fíggjarkarmin í verklagslógini. Mentamálaráðið bað tí Løgtingið um eykajáttan.

[15] Ll. nr. 59/2013 “um at um- og útbyggja kringvarpshúsini í Sortudíki”.

Eftir at sparingar vóru funnar fyri 2,1 mió.kr., játtaði Løgtingið 3,87 mió.kr. afturat í 2015. Upphæddin í verklagslógini varð tí hækkað frá 16,68 mió.kr. til 20,55 mió.kr. Gildistíðin varð longd frá at vera til 1. januar 2016 til 31. desember 2016.

Í álitinum til broyting av verklagslógini segði Fíggjarnevndin m.a., at *"Hetta verklag er enn eitt dømi um verkætlanir, ið ikki halda seg innanfyri givnu karmar. Grundin tykist í flestu førum at vera, at verkætlanir verða lagdar fyri Løgtingið uttan neyðuga fyrireiking. Fíggjarnevndin hevur tíðum víst á henda trupulleika og hevur mælt til, at reglurnar viðvíkjandi verklagslógum verða munandi herdar."*

Í hoyringssvari til umbønina um at hækka verklagslógina sigur Kringvarpið m.a., at "*av tí at verkætlanin rendi seg í trupulleikar, bleiv ikki ein króna sett av til innbúgv, útgerð og tøkniligar innstallatiónir. Tað hevði tí verið ynskiligt, at hetta uppskotið tók hædd fyri hesari upphædd, so at Kringvarp Føroya kann fáa gleði av bygninginum beinanvegin. Tí skal KvF fíggja íløguna, fer tað helst at taka drúgva tíð, áðrenn bygningurin verður tikin í brúk."*

Í § 3, stk. 2, í K. nr. 83/2011 "um løgujáttan" er ásett, at samlaða løguupphæddin skal fata um allar útreiðslur fyri, at løgan eftir ætlan kann takast í nýtslu, herundir innbúgv, størri útgerð og uttanumøkið.

Í juni 2020 hevur Fíggjarmálaráðið greitt frá, at ráðið veit ikki, hví útreiðslur til innbúgv, útgerð o.a. ikki vórðu tiknar við í verklagslógina, men kann ráðið bert staðfesta, at tað ikki er í samsvari við játtanarreglurnar um, hvat skal takast við í verklagslógina. Fíggjarmálaráðið leggur afturat, at í pkt. 1.1.9 í rundskrivinum um lógarsmíð stendur, at *"uppskot til løgtingslóg um verklag eiga altíð at verða send til ummælis hjá Fíggjarmálaráðnum"*.

Útreiðslur í 2017

Samlaði kostnaðurin sást ikki í roknskapinum fyri løgujáttanina.

Í 2017 eru 1.602 t.kr. goldnar fyri umbygging, uttan at tað er sjónligt í roknskapinum, harav 1.021 t.kr. eru goldnar av kontuni "Umvæling av almennum bygningum". Landsverk hevur kunnað um, at tær 1.021 t.kr., eru fyri meirveitingar í sambandi við umbyggingina.

Sambært landsroknskapinum vóru 581 t.kr. settar av í fíggjarstøðuni 2016 fyri arbeiðir, sum enn ikki vóru gjørd.

Á ákontuumbønini stendur, at tilboðsupphæddin er 8.866.214 kr., og at áður faktureað er 7.657.938 kr. (munurin er 1.208.276 kr.). 581.020 kr. eru goldnar arbeiðstakaranum í mars 2017, uttan at tað sæst í rakstrarroknskapinum fyri 2017, tí rokningin er bókað í fíggjarstøðuni. Landsgrannskoðanin dugdi ikki at síggja, at restin av tilboðsupphæddini 627.256 kr. var í roknskapinum hjá løgujáttanini.

Sambært roknskapinum fyri Umvæling av almennum bygningum er ein rokning 627.256 kr. frá sama arbeiðstakara. Í Búskaparskipan landsins er viðmerkt, at rokningin skal leysgevast saman við kreditnotu frá 20. apríl 2017. Kreditnotan er 88.958 kr. "KVF 2. byggistig".

Vit hava biðið Fíggjarmálaráðið um viðmerkingar. Í juni 2020 hevur Fíggjarmálaráðið ikki nakra viðmerking til bókingarnar.

5.15 Mentanargrunnur landsins (LG 2015/207-0242)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Mentanargrunninum.

Vanligar mannagongdir vóru ásettar í lóg, kunngerð og starvsskipan fyri grunnin. Aðrar skrivligar mannagongdir vóru ikki. Har lóg ella kunngerð ikki ásetti nærri boð, var tað ein kvalifiserað meting hjá nevndini, ið ásetti, hvør skuldi hava stuðul, og hvat ein hóskandi upphædd var. Landsgrannskoðanin helt, at tað kundi vera ein vansi fyri umsitingina, ella t.d. fyri eina nýggja nevnd, at ongar skrivligar mannagongdir vóru, og mælti til at lýsa mannagongdirnar í t.d. roknskaparreglugerðini.

Grunnurin sendi í januar 2016 eina roknskaparreglugerð til Mentamálaráðið at góðkenna.

Í august 2018 greiddi landsstýrismaðurin frá, at Mentamálaráðið hevði heitt á Mentanargrunnin um at eftirhyggja og dagføra uppskotið til roknskaparreglugerð og senda tað aftur til ráðið at góðkenna.

Landsgrannskoðanin vísti á, at so leingi tað var ásett í skattalógini, at stuðul var A-inntøka, átti stuðulin at verða ávístur um skattaskipanina. Var ætlanin, at stuðulin ikki skuldi vera A-inntøka, máttu reglurnar broytast.

Í uppskoti til samtyktar, Lm. nr. 37/2016, mæltu løgtingsgrannskoðararnir landsstýrismanninum til beinanvegin at fáa tað í rættlag.

Í august 2017 kunnaði landsstýrismaðurin um, at *"Mentamálaráðið hevur arbeitt saman við nýggju leiðslu grunsins at fáa greiðu á øllum teimum spurningum, ið Landsgrannskoðanin hevur víst á. Fundur hevur eisini verið við TAKS um útgjaldsmannagongdina. Enn er ikki komið heilt á mál."*

Í uppskoti til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin 2016 hildu løgtingsgrannskoðararnir, tað ikki var nøktandi og mæltu enn eina ferð landsstýrismanninum til beinanvegin at fáa tað í rættlag.

Í juli 2019 greiddi landsstýrismaðurin frá, at Mentamálaráðið var í samskifti við Mentanargrunnin um ymisku viðurskiftini, sum vóru umrødd í frágreiðingini hjá Landsgrannskoðanini, og at roknskaparreglugerðin hereftir verður góðkend.

Í august 2020 sigur Uttanríkis- og mentamálaráðið, at ráðið er ikki komið á mál við arbeiðinum at góðkenna roknskaparreglugerðina.

5.16 Kirkjugrunnurin og Tiltaksgrunnurin (LG 2019/207-0245)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað Kirkjugrunnin og Tiltaksgrunnin. Játtanin er stuðulsjáttan á høvuðskontu 7.24.5.01.

Lógargrundarlag

Fólkakirkjan er skipað sambært Ll. nr. 60 frá 7. juni 2007 "um fólkakirkjuna í Føroyum" og Ll. nr. 61 frá 7. juni 2007 "um fíggjarviðurskifti fólkakirkjunnar".

Í 2013 umrøddu vit lógargrundarlagið og spurdu, um kunngerðir vóru gjørdar við heimild í lóggávuni. Hesuferð hava vit gjøgnumgingið nakrar heimildir og uppgávur at skipa reglur og virksemi hjá fólkakirkjuni.

Aðrar serstakar lógir eru eisini: Ll. nr. 27/2008 er “um kirkjuráð og próstadømisráð”, og Ll. nr. 107/2009 “um val til kirkjuráð, próstadømisráð og stiftsstjórn”.

Fyri bygningar fólkakirkjunnar er Anordning nr. 888 frá 8. desember 1999 “om ikræfttræden for Færøerne af lov om folkekirkens kirkebygninger” galdandi.

Ll. nr. 42/2008 er “um at brúka kirkju og um limaskap í fólkakirkjuni”, og Ll. nr. 48/2013 er “um embæti og størv í fólkakirkjuni”.

Stiftsstjórnin

Føroyar eru eitt biskupsdømi við stiftsstjórn. Stjórnin hevur tríggjar limir og biskupur er formaður. Landsstýrismaðurin tilnevnir ein lim, sum er embætisfólk í tænastu landsins, og limirnir í kirkjuráðunum velja ein lim. Sambært § 6, stk. 4, í lógini um fólkakirkjuna í Føroyum, ásetir landsstýrismaðurin neyvari reglur um virksemið hjá stiftsstjórnini.

Í 2013 greiddi biskupur frá, at arbeitt varð eftir einum uppskoti til kunngerð “um virksemið hjá stiftsstjórnini”, sum ikki var sett í gildi, hóast uppskotið longu var klárt á ólavsøku 2007.

Í august 2019 kunnaði biskupur um, at enn hevur landsstýrismaðurin ikki ásett neyvari reglur fyri virksemið hjá stiftsstjórnini, og at stiftsstjórnin framvegis arbeiðir eftir uppskotinum til kunngerð.

Kirkjusóknir og prestagjøld

Sambært lógini um fólkakirkjuna í Føroyum skipar landsstýrismaðurin kirkjusóknirnar, prestagjøldini og próstadømini eftir tilmæli frá biskupi og stiftsstjórnini.

Ongar broytingar eru sambært biskupi gjørdar í kirkjusóknum, síðani yvirtøkuna av kirkjuni. Tvey nýggj prestagjøld eru skipað, t.e. Suðurstreymoyar norðara prestagjald og Norðstreymoyar eystara prestagjald.

Í Norðstreymoyar vestara prestagjaldi er normeringin broytt frá at vera hálvtannað starv sum prestur til at vera tveir prestar fulla tíð. Vága prestagjald hevur fingið eitt nýtt embæti, og nú eru tveir sóknarprestar í Vágum. Suðurstreymoyar norðara prestagjald er sprottið úr Suðurstreymoyar eystara prestagjaldi. Tvey nýggj embæti eru komin i Suðurstreymoyar norðara prestagjaldi. Fólkakirkjan hevur fingið 5 nýggj embæti við sóknarprestum síðani á ólavsøku 2007.

Tænastan í prestagjøldunum og kirkjuráðini

Biskupur hevur evstu umsjón og umsorgan við biskupsdøminum, og hevur eisini umsjón við sóknarprestunum, og við kirkjuráðunum. Sambært § 7, stk. 3, í lógini um fólkakirkjuna í Føroyum ger biskupur nærri skipan fyri, hvussu tænastan í prestagjøldunum skal røkjast.

Spurdur, um og hvussu tílík skipan er gjørd, svaraði biskupur, at kirkjuráðini eru rættiliga sjálvstøðug í sínum virki innan fyri lóg og regluverk fólkakirkjunnar. Biskupur hevur regluligt og virkið samskifti bæði úti um landið og við vitjan í biskupsgarði. Talan er um regluligt samskifti við umsitingina, og er um fakliga hjálp og ráðgeving. Eftirlitið er meira formligt t.d. við atliti at roknskapi, umbygging og viðlíkahaldi. Tað arbeiðið er fyri ein stóran part í hondunum á Próstadømisráðnum, meðan biskupur/Stiftsstjórnin er eftirlitsmyndugleiki.

Biskupur hevur greitt frá, at tá um tænastuna og starvsøkið hjá sóknarprestinum ræður, líkist eftirlitið og umsjónin tí oman fyri nevnda. Sóknarpresturin er føddur limur í kirkjuráðnum. Verður hugsað um sóknarprestin sum embætisfólk, er bæði eftirlit og stýring rættiliga neyv.

Í § 19, stk. 3, í lógini “um kirkjuráð og próstadømisráð” stendur, at stiftsstjórnin ásetir neyvari reglur um virksemið hjá kirkjuráðunum. Sambært biskupi venda kirkjuráðini sær til Stiftsstjórnina. Stiftsstjórnin tekur ikki stig til at stýra kirkjuráðnum.

Vendir eitt kirkjuráð sær til umsitingina við ítøkiligum málum, kann Stiftsstjórnin áseta neyvari reglur fyri virkseminum hjá kirkjuráðnum.

Sambært biskupi hevur Stiftsstjórnin ikki skrivliga ásett tílíkar reglur, tí tað er ikki og hevur ikki verið neyðugt ella aktuelt. Eftir § 14, stk. 4, kann kirkjuráðið gera starvsskipan, sum Stiftsstjórnin góðkennir. Samskiftið við kirkjuráðini á hesum øki hevur verið vegleiðandi.

Kirkjukassin

Sambært § 1, stk. 1, í lógini um fíggjarviðurskifti fólkakirkjunnar umsitur kirkjuráðið kassan hjá kirkjuliðnum í kirkjusóknini. Inntøkurnar eru avkast av ogn kirkjunnar, talvupeningur til frama fyri kirkjuna, gjøld fyri at nýta kirkjuna og avlopið í kirkjukassanum árið fyri. Kirkjugrunnurin fíggjar tann partin av góðkendu útreiðslunum, sum inntøkurnar hjá kirkjukassanum ikki røkka til.

Í § 3, stk. 1, eru ásetingar um tær útreiðslur, kirkjukassin fíggjar. Sambært stk. 5 ásetir landsstýrismaðurin eftir tilmæli frá Stiftsstjórnini neyvari reglur um tílík viðurskifti. Ásett verður, hvør samsýning kann vera til hjálparfólk, stødd av tiltøkupeningi og reglur fyri tann pening, sum verður savnaður inn í kirkjuni til at fremja arbeiðið í kirkjuliðnum.

Kirkjukassin kann eisini hava inntøkur av staðbundnum kirkjuskatti til ávís endamál, umframt av talvupeningi til ávís endamál. Til at spara upp hevur kirkjukassin serliga kontu. Sambært § 5, stk. 3, ásetir landsstýrismaðurin í kunngerð, hvussu kontan verður nýtt.

Kirkjuráðini gera fíggjarætlanir fyri inntøkur og útreiðslur og senda próstadømisráðnum tær til góðkenningar í seinasta lagi 1. juni undan fíggjarárinum.

Sambært § 6, stk. 2, í lógini “um fíggjarviðurskifti fólkakirkjunnar” ásetir landsstýrismaðurin reglur fyri, hvussu kirkjuráðini gera fíggjarætlan, og sambært § 9, stk. 3, ásetir hann reglur um roknskap, grannskoðan o.t. Landsstýrismaðurin hevur ikki ásett reglur hesum viðvíkjandi.

Biskupur hevur kunnað um, at arbeiðið hevur drigið út, og fyri umleið tveimum árum síðani fekk stiftsstjórnin málið. Ein nevnd varð sett at gera uppskot til reglugerð, men hon kom ikki á mál. Á vári 2019 setti biskupur ein uttanhýsis ráðgeva at greina tekstin og at gera eitt útkast til reglugerð, ið ætlanin er at fáa Mentamálaráðið at góðkenna, tillaga og staðfesta. Tað arbeiðið skuldi eftir ætlan verða liðugt í oktober 2019.

Kirkjuráðini góðkenna roknskapirnar og senda teir til góðkendan grannskoðara, ið letur kirkjuráðunum roknskapirnar aftur við staðfesting ella átekning. Kirkjuráðini senda roknskapirnar til Próstadømisráðið.

Kirkjuskattur

Landsstýrismaðurin ásetir kirkjuskattaprosentið eftir tilmæli frá stiftsstjórnini. Skattaprosentið kann í mesta lagi vera 0,65%. Landsstýrismaðurin kann eisini loyva staðbundnum kirkjuskatti, sum í mesta lagi kann vera 0,30%. Sambært § 15 í lógini um fíggjarviðurskifti fólkakirkjunnar ásetir landsstýrismaðurin í kunngerð neyvari reglur um landskirkjuskatt og um staðbundnan kirkjuskatt.

Sambært biskupi eru ongar reglur ásettar av politiska myndugleikanum, men mannagongdin er siðvenjan. Arbeiðið virkar væl, bæði at áseta kirkjuskattin og at taka støðu til staðbundnan kirkjuskatt. Fíggjarætlanirnar eru eitt samstarv ímillum kirkjuráðini,

Próstadømisráðið og Stiftsstjórnina. Niðurstøðan verður send landsstýrismanninum sum eitt tilmæli.

Kirkjugrunnurin og Tiltaksgrunnurin
Stiftsstjórnin stjórnar Kirkjugrunninum. Inntøkur grunsins eru landskassastuðul, avkast av ognum grunsins og sjálvboðin gjøld, umframt landskirkjuskattur. Tá ið serligar umstøður tala fyri tí, kann útgjaldast úr Tiltaksgrunninum. Í § 19 í lógini um fíggjarviðurskifti fólkakirkjunnar eru ásetingar um raksturin hjá Kirkjugrunninum, t.d. lønir til sóknarprestar. Grunnurin eigur og rekur prestagarðar og biskupsgarðin.

Stiftsstjórnin kann seta ávísa avmarkaða upphædd av til ávís kirkjulig endamál. Landsstýrismaðurin kann sambært § 21, stk. 2, áseta neyvari reglur um tiltøkupening, m.a. um hvørji endamál peningurin kann fara til.

Stiftsstjórnin hevur ikki brúkt møguleikan við serligum tiltøkupeningi og landsstýrismaðurin hevur ongar reglur gjørt á økinum.

Sambært § 25 í lógini ásetir landsstýrismaðurin í kunngerð reglur um Kirkjugrunnin. Ásett verður, hvussu stiftsstjórnin stjórnar Kirkjugrunninum, og hvussu virksemið hjá Kirkjugrunninum skal vera skipað í mun til próstadømisráðini. Eingin kunngerð er gjørd.

Sambært § 26, stk. 1, í lógini stjórnar Stiftsstjórnin somuleiðis Tiltaksgrunninum. Inntøkurnar eru inngjøld og avlop úr Kirkjugrunninum, og Tiltaksgrunnurin fíggjar serligan útreiðslutørv hjá Kirkjugrunninum. Landsstýrismaðurin kann sambært § 26, stk. 5, áseta neyvari reglur um Tiltaksgrunnin. Ongar neyvari reglur eru gjørdar.

Bygningar fólkakirkjunnar
Fyri bygningar fólkakirkjunnar er galdandi Anordning om lov om folkekirkens kirkebygninger. Biskupur hevur greitt frá, at arbeitt verður við einari nýggjari lóg um kirkjubygningar.

Ímillum kirkjunnar fólk er tað sambært biskupi ein almenn staðfesting, at lógin og reglugerðin um bygningar fólkakirkjunnar er als ikki nøktandi. Lógin er ein fløskuhálsur, tá ið hugsað verður um eldri kirkjur, kirkjur yvir 100 ár og friðaðar kirkjur. Tað er eitt álvarsmál fyri kirkjuna, tí meira enn helvtin av kirkjunum eru í hesum eldra bólkinum.

Kjakið snýr seg um: a) er kirkjan ein halgidómur og bygningur til nýtslu, ella b) er kirkjan mentanararvur. Bæði sjónarmiðini eru í lógartekstinum. Tað er sera torført og viðhvørt ómøguligt at náa bæði sjónarmiðini í einari og somu kirkju. Sambært biskupi meta innankirkjuligu myndugleikarnir, at atlit a) eigur at hava yvirvág. Kirkjuskatturin rindar alt av øllum og alt viðlíkahaldið.

Stiftsstjórnin veit ikki, hvussu langt er ávegis við einari nýggjari lóg um bygningar hjá fólkakirkjuni.

Nýtsla av kirkjuni og um limaskap í fólkakirkjuni
Sambært § 7, stk. 2, § 13 og § 16, stk. 2, í lógini “um at brúka kirkjuna og um limaskap í fólkakirkjuni” kann landsstýrismaðurin áseta neyvari reglur um limaskap og annað.

Í § 26 er ásett, at landsstýrismaðurin ásetir, eftir bindandi tilmæli frá biskupi, í kunngerð neyvari reglur um at brúka kirkjuna.

Biskupur hevur greitt frá, at landsstýrismaðurin hevur ongar neyvari reglur ásett um limaskap og annað, men at økið annars virkar væl.

Val til kirkjuráð
Í lógini um val til kirkjuráð, próstadømisráð og stiftsstjórn eru nakrar heimildir at áseta neyvari reglur. Sambært § 34, § 41, stk. 2, og § 48, stk. 2, kann landsstýrismaðurin áseta gjøllari reglur um val, uppgerð, kunning o.a.

Biskupur hevur greitt frá, at reglur eru ásettar, og mannagongdin er væl lýst. Samskiftið við politisku fyrisitingina er gott og arbeiðið væl skipað. Mentamálaráðið hevur lim í valnevndini til Próstadømisráðið og Stiftsstjórnina. Umsitingin hjá Stiftsstjórnini samskipar valini.

Roknskaparviðurskifti

Roknskapir verða gjørdir fyri kirkjukassarnar, Kirkjugrunnin og Tiltaksgrunnin. Teir eru ikki við í fíggjarlógini. Studningur til Kirkjugrunnin og landskirkjuskatturin eru tó í fíggjarlógini; kirkjuskatturin sum inntøka, ið verður flutt til Kirkjugrunnin. Roknskapirnir fyri Kirkjugrunnin og Tiltaksgrunnin eru skrásettir í Búskaparskipan landsins, men eru ikki við í landsroknskapinum.

Kirkjugrunnurin
§ 23, stk. 1, í lógini "um fíggjarviðurskifti fólkakirkjunnar" ásetir, at stiftsstjórin á hvørjum ári sendir landsstýrismanninum uppskot til fíggjarætlan til góðkenningar. Fíggjarætlanin kann, frároknað sáttmálabundnar lønarhækkingar, ikki vera meira enn 10 prosent hægri enn miðal fíggjarætlanin seinastu 4 árini, stk. 3.

Roknskapartøl fyri Kirkjugrunnin 2015 til 2019:

t.kr.

Rakstur	2015	2016	2017	2018	2019
11. Lønir v.m.	16.005	16.909	17.271	18.828	19.554
14. Keyp av vørum og tænastum	3.345	3.951	4.483	3.386	4.270
15. Keyp av útbúnaði, netto	802	509	466	615	637
16. Leiga, viðlíkah. og skattur	2.850	2.359	2.353	1.889	4.481
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	103	107	79	79	79
21. Søla av vørum og tænastum	-318	-327	-295	-337	-180
32. Útvegan av løgu o.ø.	0	2.664	1.332	0	0
54. Stuðul til annað virksemi	28.849	34.598	35.577	31.007	38.089
61. Skattur og avgjøld	-45.271	-53.015	-55.288	-51.587	-61.393
63. Vanligar flytingarinntøkur	-9.030	-9.000	-9.000	-9.000	-9.300
67. Rentuinnt. og vinningsbýti	-397	-72	0	146	-1.198
71. Innanh. flytingar (útr.)	1.922	349	1.905	4.100	3.477
75. Keyps-mvg	1.140	968	1.117	874	1.483
Tilsamans	**0**	**0**	**0**	**0**	**0**

Úrslitið hjá Kirkjugrunninum verður flutt í Tiltaksgrunnin. Tað sæst aftur á upphæddunum, sum eru skrásettar á St.kontu 71 og 76.

t.kr.

Fíggjarstøða	2015	2016	2017	2018	2019
120. Grundøki	355	355	355	355	355
131. Bygningar	17.600	18.932	17.600	17.600	17.600
139. Samanlagdar avskrivingar	-17.600	-17.600	-17.600	-17.600	-17.600
221. Keyp av virðisbrøvum	2.016	0	0	0	0
330. Persónsskattur	881	928	986	1.053	1.032
360. Tøknilig millumrokning	72	-208	-1.258	-822	1.189
363. Millumrokning við landsk.	-28.264	-25.378	-25.217	-30.212	-36.181
371. Onnur áogn	3	25	0	0	90
416. Kontur í Landsbankanum	0	0	0	19.584	20.798
429. Banka- og girokont. (onnur)	27.920	26.789	28.433	12.791	15.990
888. Skuld, annað	-291	-1.322	-1.180	-307	-1.180
889. Skyldur, ikki endaligar	-2.692	-2.521	-2.119	-2.442	-2.095

Millumrokningin við Tiltaksgrunnin er í útgreining 0330 undir St.Rk. 0363. Við árslok 2019 var upphæddin 34,7 mió.kr.

Ognaryvirlit
Fíggjarleiðarin hevur greitt frá, at arbeitt verður við at gera ognaryvirlit fyri hvønn garð. Sambært § 20 í roknskaparkunngerðini skal tílíkt yvirlit fevna um ognir og útbúnað, hvørs keypsvirði er oman fyri 50 t.kr.

Spurdur, nær arbeiðið verður liðugt, og hvussu skrásett verður, hevur biskupur greitt frá, at allur útbúnaður verður skrásettur í Búskaparskipan landsins og aðrar útreiðslur skrásettar út á hvønn einstakan prestagarð.

Gjaldføri
Stiftsstjórnin hevur ongan kontantkassa, men hevur tvey gjaldkort, sum fíggjarleiðarin og stiftsfulltrúin umsita. Í 2013 ætlaði biskupur at orða eina reglugerð um kort og nýtslu, sum skuldi staðfestast av Stiftsstjórnini. Vit spurdu, um tílík reglugerð er gjørd. Vit fingu einki svar.

Í Búskaparskipan landsins eru skrásettar 23 peningastovnskontur, harav ein donsk. Samlaða upphæddin 31. desember 2018 var 12,8 mió.kr., og rentuinntøkurnar í 2018 vóru 270 t.kr. Stiftsstjórnin hevur eisini gjørt avtalu við Landsbankan um at umsita aðrar 20 mió.kr. Við árslok 2019 var upphæddin 20,8 mió.kr.

Rakstrarútreiðslur
Kirkjugrunnurin rindar fyri útreiðslur av skrivstovum hjá prestunum, herundir internet og fartelefon. Prestarnir rinda 33 kr. um mánaðin fyri egna telefonnýtslu.

Kirkjugrunnurin endurrindar prestunum fyri el og olju, ávikavist 15% av oljuútreiðslunum og 10% og av elútreiðslunum, umframt fasta gjaldið.

Fyri tríggjar garðar, har sóknarpresturin fyribils er loystur frá bústaðarskylduni, tí at garðarnir standa fyri tørni at verða umvældir, hevur Kirkjugrunnurin goldið el- og oljuútreiðslurnar.

Prestar, ið eru løntir eftir sáttmála millum Kirkeministeriet og Den danske præsteforening fáa fast gjald fyri ferðing innanlands, meðan prestar løntir eftir semju millum Prestafelag Føroya og Fíggjarmálaráðið fáa m.a. endurgoldið fyri koyring í egnum bili sambært rundskrivi Fíggjarmálaráðsins frá 28. mars 2007.

Ferðaendurgjald verður latið eftir somu treytum sum hjá tænastumonnum landsins. Tá ið prestar verða bidnir um at halda gudstænastu uttanlands í sambandi við umboðan, ella kirkjuliga hátíð ella stevnu hjá grannalondum, stendur tað prestunum í boði at taka makan við, og siðvenja er, at Kirkjugrunnurin tá rindar fyri ferðing og uppihald. Í 2013 greiddi biskupur frá, at hann fór at taka stig til at gera reglugerð um viðurskiftini.

Spurdur, um tílík reglugerð er gjørd, svaraði biskupur, at Stiftsstjórnin metir málið vera avgreitt við svarinum, ið Landsgrannskoðanin fekk 22. mars 2013, nevniliga, at tað er kirkjulig siðvenja, at Stiftsstjórnin rindar fyri ferðing og uppihald hjá makanum, tá ið makin hjá presti fer við til kirkjuligar tænastur uttanlands. Talan er í høvuðsheitum um gjald fyri ferðaseðilin. Kirkjuligu tænasturnar talan er um, eru gudstænastur og umboðan í sambandi við kirkjuliga hátíð/stevnu hjá grannalondunum. Er prestur uttanlands í embætisørindum so sum fakligum fundi, nevndararbeiði ella á skeiði, er makin ikki við á ferðini.

Tiltaksgrunnurin
Einasta rørsla í rakstrinum hjá Tiltaksgrunninum er, at úrslitið frá Kirkjugrunninum er flutt til Tiltaksgrunnin. Avlopið var ávikavist 1,9 mió.kr. og 4,1 mió.kr. í 2017 og 2018. Við árslok 2019 var samlaða ognin hjá Tiltaksgrunninum 34,7 mió.kr.

Kirkjukassin, fíggjarætlan og roknskapur
Sambært § 7 í lógini um fíggjarviðurskifti fólkakirkjunnar boðar próstadømisráðið umboðum fyri kirkjuráðini til samráð, har fíggjarætlanirnar verða viðgjørdar og raðfestar. Við støði í viðgerðini gevur próstadømisráðið fyri 15. november Stiftsstjórnini boð um, hvussu stór upphæddin verður at krevja inn við landskirkjuskatti.

Viðmerkingar í seinastu frágreiðingunum
Kirkjugrunnurin hevur áður verið umrøddur í frágreiðingum frá Landsgrannskoðanini.

Í fleiri ár hevur Landsgrannskoðanin víst á, at sambært Ll. nr. 60/2007 "um fólkakirkjuna í Føroyum" ásetir landsstýrismaðurin neyvari reglur um virksemið hjá stiftsstjórnini, og sambært Ll. nr. 61/2007 "um fíggjarviðurskifti fólkakirkjunnar" ásetir landsstýrismaðurin reglur fyri, hvussu kirkjuráðini gera fíggjarætlanir.

Í september 2014 kunnaði landsstýrismaðurin um, at ætlanin var at gera kunngerðirnar í 2015, og í august 2017 upplýsti landsstýrismaðurin, at enn varð arbeitt við kunngerðunum.

Í uppskoti til samtyktar at góðkenna landsroknskapin 2016 vóru løgtingsgrannskoðararnir ónøgdir við, at kunngerðirnar enn ikki vóru gjørdar, hóast meira enn 10 ár vóru liðin, síðani lógirnar komu í gildi.

Í august 2018 ásannaði Mentamálaráðið, at gott hevði verið, um kunngerðir vórðu gjørdar; men av tí at virksemið var í hampiliga tryggari legu, hevði Mentamálaráðið fyri ein part valt at raðfesta annað virksemi, og lutvíst høvdu viðurskifti, ið ráðið ikki var harri yvir, kravt stóran part av teirri avmarkaðu orku, ið var til meira yvirskipaða málsviðgerð viðvíkjandi kirkjuøkinum. Tí var arbeiðið ikki gjørt enn.

Í juli 2019 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Mentamálaráðið helt, at virksemið enn var í hampiliga tryggari legu, og hevði ráðið tí ikki raðfest kunngerðirnar.

Í august 2020 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at: *"Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur greiða fatan av, at virksemið hjá Stiftsstjórnini yvirhøvur er í tryggari legu, um enn einki er at taka seg aftur í, at ein hóskandi kunngerð hevði verið ein lætti fyri arbeiðið hjá Stiftsstjórnini. Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur tí ikki raðfest uppgávuna so høgt, men væntar - við fyrivarni fyri, hvørjar meira áleikandi uppgávur fara at koma nú í heyst og vetur - at kunngerð kann verða lýst komandi vár.*

Komið er ikki á mál við reglunum fyri, hvussu kirkjuráðini gera fíggjarætlanir. Uttanríkis- og mentamálaráðið kann tó upplýsa, at Stiftsstjórnin arbeiðir við einum kunngerðaruppskoti, sum er um ein part av hesum. Miðað verður eftir, at kunngerð kann verða lýst komandi vár. Tá arbeiðið er liðugt, fer Uttanríkis- og mentamálaráðið at gera eina aðra kunngerð um teir partarnar av reglunum fyri, hvussu kirkjuráðini gera fíggjarætlanir, sum hendan kunngerðin ikki fer at fevna um".

5.17 Ítróttahøll á Sandoynni (LG 2018-207-0246)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av játtanina til Ítróttahøll á Sandoynni.

Í 2017 vóru 485 t.kr. játtaðar til endaliga avhendan av ítróttahøllini á Sandoynni, harav 289 t.kr. vóru til at rinda kostnaðin at tinglýsa eitt veðskuldarbrævi sum 1. veðrætt í ognini. Veðskuldarbrævið varð ikki lýst í 2017; og Mentamálaráðið bað um at fáa upphæddina støðlaða, tí tinglýsingin fór at verða avgreidd eftir ársskiftið.

Í 2018 eru tær 289 t.kr. inntøkuførdar í roknskapinum, uttan at nøkur útreiðsla er til tinglýsing.

Veðbræv ikki tinglýst.

Í oktober 2019 hevur Uttanríkis- og mentamálaráðið kunnað um, at veðbrævið, sum gevur ráðnum veð í matr. nr. 292b Sandur við ástandandi ítróttahøll, er ikki tinglýst. Ítróttahøllin er heldur ikki avhendað kommununum í Sandoynni. Orsøkin er, at ítróttahøllin er ikki góðkend av Sands kommunu, tí ymiskir manglar eru. Fundur hevur verið við bygginevndina, um hvørji krøv bygginevndin setir til bygningin og ein kostnaðarmeting er gjørd. Uttanríkis- og mentamálaráðið skal gjøgnum samskifti við kommunurnar í oynni, tryggja sær at tær yvirtaka høllina, tá ið staðfest krøv og ynskir eru gjørd. Eftir tað verður ítróttahøllin avhenda kommununum í Sandoynni og veðbrævið tinglýst.

Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur ikki tøka peningin til arbeiðið, sum skal gerast og til tinglýsingina av veðbrævinum. Neyðugt verður tí at biðja um eina játtan til endamálið.

Landsstýrismaðurin hevur kunnað um, at Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur fingið eykajáttan til at gera ítróttahøllina í Sandoynni lidna. Tá seinastu arbeiðini eru gjørd, yvirtekur skúlasambandi í Sandoynni ítróttahøllina móti veð fyri láninum, sum landskassin hevur útvegað.

6. Heilsu- og innlendismál

6.1 Heilsu- og innlendismálaráðið (LG 2016/211-0111)

Í seinastu frágreiðing greiddi Heilsu- og innlendismálaráðið frá, at bíðað var við dagføra roknskaparreglugerðina, sum var frá 2013, til Gjaldstovan og Fíggjarmálaráðið høvdu dagført reglurnar. Roknskaparreglugerðin var ikki dagførd, men ráðið hevði dagført, hvørji starvsfólk høvdu atgongd til rokningarverkgongd og web-løn, og gjørt ískoytisskjal viðvíkjandi sjúklingatryggingini.

Í januar 2020 er roknskaparreglugerðin dagførd og góðkend av aðalstjóranum.

Roknskaparreglugerðin dagførd.

6.2 Fólkaheilsuráðið (LG 2016/211-0201)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Fólkaheilsuráðnum.

Heilsu- og innlendismálaráðið hevði fingið eitt dagført uppskot til roknskaparreglugerð frá stovninum. Landsstýrismaðurin skal sambært § 4, í Ll. nr. 56/2000 “um Fólkaheilsuráð”, áseta starvsskipan fyri stovnin eftir tilmæli frá Fólkaheilsuráðnum.

Í juli 2019 greiddi landsstýrismaðurin frá, at ráðið saman við stovninum hevði gjørt dagføringar í roknskaparreglugerðini, og fór reglugerðin at verða undirskrivað skjótt. Starvsskipanin var orðað og avgreidd í desember 2018.

Í august 2020 er roknskaparreglugerðin dagførd og góðkend av aðalstjóranum.

Roknskaparreglugerðin dagførd.

6.3 Heilsutrygd (LG 2019/211-0202)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað Heilsutrygd. Heilsutrygd umsitur heilsutrygdarveitingar, heilsukanningarskipanina (profylaksir), Kommunulæknaskipanina, Økisheilsuskipanina og Gigni. Eisini umsitur og avroknar stovnurin stuðul til kommunulæknaviðtalur, læknahjálp til serlækna, stuðul til hjálparráð, ískoyti til viðgerð hjá tannlækna, fysioterapeuti, sálarfrøðingi, kiropraktor o.a. Í samstarvi við Apoteksverkið umsitur stovnurin skipanina við heilivágstilskoti.

Roknskaparreglu-gerðin ikki dagført.

Roknskaparviðurskifti

Roknskaparreglugerðin er frá 2010, og ætlar Heilsutrygd at dagføra hana.

Roknskapartøl 2015 til 2019:

t.kr.

Heiti	2015	2016	2017	2018	2019
Lønir v.m.	4.542	4.962	4.402	5.047	5.543
Keyp av vørum og tænastum	958	951	819	1.037	930
Keyp av útbúnaði, netto	424	-1	144	496	560
Leiga, viðlíkahald og skattur	203	170	266	266	266
Ymsar rakstrarútreiðslur	0	0	0	2	1
Innanh. flyt. ml. alm. stovn. (útr)	1.293	1.618	1.734	1.595	1.472
Tilsamans	**7.421**	**7.699**	**7.364**	**8.443**	**8.772**

Lønir eru størsti parturin av útreiðslunum. Undir standardkontu 14 er størsta útreiðslan til KT, í 2019 var hon 297 t.kr.

Fíggjarstøða

Landsgrannskoðanin kannaði flytingar á peningastovnskontu. Einki var at finnast at.

Útistandandi krøv 2019 vóru 5,6 mió.kr. Avsett er vegna virðisleys krøv síðani 2017, og nettoáognin er 4,2 mió.kr. TAKS krevur heilsutrygdargjaldið inn, og Heilsutrygd ger einki við at krevja skuld inn.

Keyp

Í flestu førum biður Heilsutrygd um tilboð, t.d. hevur stovnurin biðið um prísir frá fleiri, tá ið tey hava keypt bilar og telefontænastur.

Í 2019 vóru størstu kreditorarnir:

- Tjaldurs Apotekið 44.725 t.kr.
- Landssjúkrahúsið 20.352 t.kr.
- Eysturoyar Apotek 12.754 t.kr.
- Norðoya Apotek 9.691 t.kr.
- Suðuroyar Apotek 7.931 t.kr.
- Apotekið, framleiðslueindin 7.464 t.kr.

Prísirnir á heilivági eru ásettir í kunngerð[16], og Heilsutrygd hevur ikki ávirkan á upphæddirnar, tey skulu gjalda t.d. fyri heilivág, ið apotek lata til brúkararnar.

Reglurnar um hjálparráð eru ikki serliga væl reguleraðar.

Í heilsutrygdarlógini er ásett, hvat stovnurin skal rinda, men reglurnar viðvíkjandi hjálparráðum eru ikki serliga væl reguleraðar. Í august 2020 hevur landsstýrismaðurin í heilsumálaráðnum kunnað um, at Heilsutrygd hevur roynt at samráðst við kommunur og Almannaverkið um ymisk mál, men tað gera tey ikki nú.

Heilsutrygd rindar fyri hjálparráð, sum er liður í einari viðgerð, ella sum er til persónar, sum ikki hava varandi tørv á hjálparráði. Sambært § 10, stk. 3, í Ll. nr. 178/2009 ásetir landsstýrismaðurin nærri reglur um hjálparráð sambært hesari grein. Landsstýrismaðurin hevur ikki ásett nærri reglur, men Heilsutrygd hevur kunnað um, at Heilsumálaráðið arbeiðir við, hvussu § 10 í lógini um almenna heilsutrygd, skal umsitast.

Í august 2020 hevur landsstýrismaðurin í heilsumálum kunnað um, at arbeitt verður við at áseta nærri reglur fyri umsitingina av hjálparráðum, men ráðið er ikki komið á mál við tí.

[16] Kunngerð nr. 113 frá 1. juli 1992 um áseting av søluprísi á heilivági, sum seinast broytt við kunngerð nr. 10 frá 13. februar 2020.

Leiga
Heilsutrygd hevur leigusáttmála við P/f Palli hjá Mariannu. Leigan er 266 t.kr. um árið. Landsverk og Heilsumálaráðið hava góðkent sáttmálan.

Heilsutrygd leigar bilar til Kommunulæknaskipanina, tí stovnurin hevur skyldu til at halda bilar til kommunulæknaavloysarar.

Umsitingargjald
Heilsutrygd rindaði 1,3 mió.kr. í umsitingargjaldi til TAKS í 2019. Stovnurin hevur ikki formliga avtalu við TAKS um gjaldið.

Spurt, um gjaldið ikki eigur at verða ásett eftir veruligum kostnaði, svaraði Heilsutrygd, at í heilsutrygdarlógini, § 24, stk. 2, er ásett, at TAKS krevur gjaldið inn. TAKS sendir hvønn ársfjórðing rokning fyri kostnaðin, og Heilsutrygd rindar fyri 1,5 starv til bókhald og kundatænastu og 0,75 starv til pantifúta.

Í august 2020 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at ráðið er samt við Heilsutrygd í, at eingin orsøk er at halda, at TAKS sendir rokning fyri annað, enn veruliga kostnaðin av at krevja gjaldið inn.

Heilsutrygd rindaði 171 t.kr. til Klaksvíkar sjúkrahús vegna lønarflytingar. Sambært uppgerð er talan um 1.900 lønarseðlar fyri 2019.

Lønir
Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað nakrar lønir goldnar av ymisku játtanunum, sum Heilsutrygd umsitur. Við stakroyndum kannaðu vit, um lønirnar vóru í samsvari við setanarskriv, prógv og flokkingar. Einki var at finnast at útgjaldingunum.

Heilsutrygd hevur reglur um tíðarskráseting. Starvsfólk kunnu eiga upp til 32 tímar og skylda 16 tímar.

Gigni brúkar skipanina Vaktætlan, tó at starvsfólkini ikki arbeiða í vaktum. Eitt starvsfólk á skrivstovuni í Tórshavn avgreiddi einsamalt lønirnar og ger vaktarætlanir fyri eitt ár ísenn.

Landsgrannskoðanin mælti til, at leiðslan regluliga váttar, at tímarnir, sum stovnurin rindar fyri, eru rættir. Heilsutrygd tekur undir við tilmælinum.

Ferðaendurgjøld
Við stakroyndum kannaðu vit ferðaendurgjøld fyri koyring í arbeiðsørindum og fyri koyring í sambandi við útbúgving. Heilsutrygd roynir at stuðla uppundir førleikamenning, og at starvsfólkini nema sær viðkomandi kunnleika á skeiðum og staklærugreinum. Heilsutrygd valdi at endurrinda fyri koyring eftir takstinum í rundskrivinum frá Fíggjarmálaráðnum. Ofta verða eisini onnur arbeiðsørindi, sum t.d. fundir, avgreidd á sama túri.

Nógv starvsfólk hjá Gigni brúka egnan bil at koyra frá arbeiðsstaðnum út til skúlar og smábarnaheim. Sambært sáttmálanum hjá sjúkrarøktarfrøðingum fáa tey endurgjald fyri ferðing sambært almennu reglunum.

Mælt var til at gera ferðauppgerðirnar eftir almennu reglunum.

Landsgrannskoðanin mælti til, at ferðauppgerðirnar verða gjørdar eftir almennu reglunum, t.e. at tað sæst á uppgerðunum, hvar koyrt er.

KT-viðurskifti
Sambært rundskrivi nr. 9002 frá 29. apríl 2019 “um KT-trygd til stjórnarráðini og stovnarnar undir landinum”, skulu stovnar hava sett í verk KT-trygd, sum byggir á KT-trygdarstandardin ISO/IEC 27001, og sum verður settur í verk eftir ISO/IEC 27002.

Heilsutrygd er partur av Landsneti og flestu skipanirnar, eru innan fyri Landsnet. Fótarøktarskipanin og InfoOrganizer verða hýstar á Elektron. Stovnurin er í holt við at menna aðrar skipanir. Skipanin, Kervi, er tikin í brúk, og útbygd til at fata um avrokning av fótarøktarum. Skipanin Cosmic er hjá Landssjúkrahúsinum, og atgongdin verður stýrd av KT Landsins og Landssjúkrahúsinum í felag.

Trygdarpolitikkurin er dagførdur í 2020 og undirskrivaður av stjóranum.

Váðameting er gjørd í februar 2020.

Váðameting er gjørd í februar 2020, og onkrar penetratiónsroyndir eru gjørdar á skipanirnar. Heilsutrygd hevur gjøgnumgingið standardfrymilin sambært pkt. 5 í rundskrivinum um KT-trygd. Sambært Heilsutrygd fylgir stovnurin reglunum at boða KT Landsins frá, og at brúkararnir vita, hvat teir skulu gera.

Heilsutrygd viðger persónupplýsingar og viðkvæmar persónupplýsingar. Sambært Heilsutrygd fylgir stovnurin trygdarpakkanum hjá Gjaldstovuni og brúkar teirra frymlar.

Skipanin Samlirokning er ein vegur inn í Cosmic. Kommunulæknarnir skráseta rokningar í Cosmic. Dátur í Cosmic eru á netinum hjá Landssjúkrahúsinum.

Einans landsnetbrúkarar hjá Heilsutrygd hava sambært leiðsluni atgongd til journalskipanina 360, og atgongdin verður skipað við áheitan til journalleiðaran, eisini í mun til hvørja uppgávu starvsfólk hava.

Heimasíðurnar heilsutrygd.fo og gigni.fo verða sambært Heilsutrygd hýstar í tryggum umhvørvi hjá Amazon Web Services og Elektron.

Brúkarastýringar eru upp á allar skipanirnar, og Heilsutrygd hevur reglur fyri KT-brúkarar og reglur fyri góðan brúkarasið. Brúkarar verða kunnaðir sambært rundskrivinum um KT-trygd.

Landsnet tekur backup og ger restore. Reglurnar um tað eru lýstar í sáttmálanum um tænastustig av Landsneti grundtænastunum, SLA, millum KT Landsins og Heilsutrygd.

Sambært Heilsutrygd fylgja tey vegleiðingunum frá Landsneti um fjararbeiðspláss.

Starvsfólk hava fartelefonir, sum arbeiðsamboð, og brúkið av telefonunum er regulerað við haldinum.

Landsgrannskoðanin mælti til at gera skrivligar reglur um, hvat stovnurin ger við fartelefonir, tá ið fólk fara úr starvi.

Tilbúgvingin fyri KT-trygdarhendingum er ikki roynd í verki. Skipanirnar eru í mestan mun til avrokningar. Um tær ikki virka, kann stovnurin liva við tí nakrar dagar, men um talan er um longri tíð, ella at vandi er fyri, at tær ikki fara at virka aftur, mugu veitararnir skráseta á pappír og avrokna við Heilsutrygd. Sambært stovninum er skoðan gjørd í februar 2020.

6.4 Gjald til Heilsutrygd, ógreinað j. (LG 2019/211-0202)

Játtanin til heilsutrygdargjald er á høvuðskontu 20.52.1.27 undir “Skattir og avgjøld”. Stjórin á TAKS hevur ræðisrættin.

Í § 24, stk. 1, í lógini um almenna heilsutrygd[17] er ásett, hvør skal gjalda og hvussu nógv. Í stk. 2 er ásett, at TAKS krevur gjaldið inn fyri Heilsutrygd, og at Heilsutrygd rindar kostnaðin av tí.

[17] Ll. nr. 178/2009.

Síðani 1. januar 2016 eru reglurnar, at øll, sum eru fylt 18 ár, skulu gjalda 175 kr. um mánaðin umframt 0,6% av skattskyldugu inntøku sínari til Heilsutrygd.

Í § 24, stk. 3, stendur, at 0,7% verða tilskrivað í rentu fyri hvønn byrjaðan mánað, um persónur ikki rindar innan ásetta freist. Eisini er ásett, at lønareftirhald og panting kann fara fram eftir reglunum í skattalógini.

Inntøkur og eftirstøður seinastu 5 árini:

t.kr.

Inntøkur	**2015**	**2016**	**2017**	**2018**	**2019**
Skattur og avgjøld	127.286	140.194	144.187	147.831	153.269
Rentuinnt. og vinningsbýti	243	244	246	285	321
Inntøkur tilsamans	**127.529**	**140.438**	**144.433**	**148.116**	**153.589**

Skuld					
Gjald til heilsutrygd, lønmóttak.	2.670	2.910	3.542	3.771	3.919
Debitorar í bíðistøðu, heilsutrygd	1.630	1.626	1.592	1.721	1.668
Skuld tilsamans	**4.300**	**4.536**	**5.134**	**5.492**	**5.588**
Avseting av virðisleysum krøvum	0	0	-1.098	-1.169	-1.372
Tilsamans	**4.300**	**4.536**	**4.035**	**4.323**	**4.216**

Eftirstøðurnar eru hækkaðar støðugt úr sløkum 2,7 mió.kr. í 2015 í 3,9 mió.kr. í 2019.

Eftirstøðurnar eru støðugt hækkaðar.

Í mars 2020 hevur TAKS kunnað um, at tey stovna krøvini, sum borgarar skulu gjalda í einum mánað. So hvørt, sum persónar fáa inntøku um A-skattaskipanina, verður gjaldið til Heilsutrygd eftirhildið.

Annanhvønn mánað, tá ið komið er til 20. til 25. í mánaðinum eftir, sendir TAKS krøv um heilsutrygdargjald til teir persónar, ið ikki hava goldið gjaldið um A-skattaskipanina.

Renta verður roknað av øllum falnum krøvum. TAKS veit ikki, hvussu nógv er goldið í rentu, tí krøv og rentur verða goldin hvørt um annað. TAKS hevur ikki býtt skuldararnar eftir stødd og aldri á skuld.

Sambært TAKS kunnu tey við vissu siga, at fá dømi eru um, at tey hava avsett heilsutrygdargjøld, uttan at skuldarin eisini skyldar annað, og at aðrar avsetingar eru gjørdar hjá viðkomandi. Tá ið TAKS setir av ímóti tapi, hyggja tey m.a. eftir:

- hvørja inntøku skuldarin hevur,
- ognarviðurskiftunum,
- aldur á skuld, og
- um skuldarin er fluttur til land, ið Føroyar ikki hava avtalu við.

Harafturat metir TAKS um framtíðarútlitini at fáa skuldina inn.

Landsgrannskoðanin spurdi Heilsutrygd, um tað er nøktandi, at stovnurin ikki veit, hvussu nógv hvør debitorur skyldar, og hvussu gomul skuldin er.

Í juni 2020 hevur Heilsutrygd svarað, at sambært lógini krevur TAKS gjaldið inn fyri Heilsutrygd. Heilsutrygd heldur, at ábyrgdarbýtið her er greitt, og hevur ongar ábendingar um, at TAKS ikki røkir sínar skyldur.

Heilsutrygd heldur ikki, at tað hevði minkað um eftirstøðuna, um tey sjálvi eisini fylgdu við eftirstøðunum. Leiðslan heldur tað vera skilagott, at TAKS stendur fyri, og hevur ábyrgd av at fáa skuldina inn, júst tí at TAKS ger tað á so mongum øðrum økjum, og at vandin fyri at peningurin ikki kemur inn, tí er minni, enn hann annars hevði verið.

Í juni 2020 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Heilsumálaráðið tekur undir við viðmerkingini frá Heilsutrygd.

Øll, sum eru fylt 18 ár og hava bústað í Føroyum, rinda heilsugjald.

Spurt, hvussu TAKS tryggjar sær, at øll, ið skulu rinda heilsutrygdargjald, verða skrásett at rinda gjaldið, hevur TAKS svarað, at øll, ið eru fylt 18 ár og hava bústað í Føroyum verða sjálvvirkandi skrásett við skyldu at rinda heilsutrygdargjald; skráin hjá Landsfólkayvirlitinum stýrir skrásetingini. TAKS heintar skuld til Heilsutrygd inn á sama hátt, sum tey heinta alla aðra skuld inn, t.e.:

- mótrokna í útgjøldum,
- afturhalda í løn,
- panta, og
- rykkja annars og gera avtalur um afturrindan.

Skyldan at rinda Heilsutrygdargjald

Heilsutrygd hevur onga ávirkan á, hvussu eftirstøðurnar av heilsutrygdargjaldi verða viðgjørdar. Tó áliggur tað Heilsutrygd at viðgera mál, har borgarar halda seg ikki hava skyldu til at rinda, t.d. um teir rinda heilsutrygdargjald í einum øðrum landi, tí teir arbeiða har.

Rættarmál um heilsutrygdargjald.

Heilsutrygd hevur gjørt av at royna eitt mál í Føroya rætti, um at borgarar, ið eru búsitandi í Føroyum og arbeiða í øðrum norðurlandi, vísandi til norðurlendska sáttmálan um sosiala trygd, vilja sleppa undan at rinda heilsutrygdargjald í Føroyum.

Málið hevur verið viðgjørt leingi í almennu skipanini, og kærunevndin hevur gjørt av, at borgarar, sum lúka treytirnar í norðurlendska sáttmálanum um sosiala trygd, ikki hava skyldu at rinda heilsutrygdargjald í Føroyum.

Landsgrannskoðanin hevur spurt TAKS:

- hvussu nógvir persónar talan er um,
- um TAKS hevur yvirlit yvir, hvussu stóra upphædd talan er um, og
- um TAKS krevur persónarnar eftir heilsutrygdargjaldi.

TAKS svaraði, at tey vita ikki, hvussu nógvir persónar talan er um, ella hvussu stórar upphæddirnar eru. TAKS vísir á, at tey rykkja eftir øllum krøvum, ið eru í innheintingarskipanini. Um persónur ger vart við, at hann ikki skal rinda eitt krav, ið er til innheintingar, vísir TAKS viðkomandi til Heilsutrygd.

Heilsutrygd vísti á, at Løgmansskrivstovan hevur gjørt greitt, at í slíkum førum kann ein tilvildarligur stovnur sum Heilsutrygd ikki tulka eina løgtingslóg til ikki at vera galdandi. Tað má rætturin taka støðu til. Heilsutrygd hevur tí avgjørt at leggja okkurt av málunum fyri rættin at taka støðu til. Stovnurin veit um 133 kærumál av hesum slag.

Landsgrannskoðanin hevur víst á, at tað má vera *ein* myndugleiki, ið syrgir fyri, at øll, ið sambært lógini skulu rinda heilsutrygdargjald, rinda. Sambært lógini er Heilsutrygd myndugleikin, ið umsitur lógina. Landsgrannskoðanin mælti til, at Heilsutrygd ger formliga avtalu við TAKS um innheintingina av heilsutrygdargjaldinum.

Í august 2020 hevur landsstýrismaðurin í heilsumálum víst á, at í § 24 og í viðmerking til lógina er ásett, at tað er TAKS undir Fíggjarmálaráðnum, sum stendur fyri innkrevjingini av gjaldinum til Heilsutrygd. Landsstýrismaðurin leggur afturat, at av tí at tað er ásett í heilsutrygdarlógini, at tað er TAKS, sum stendur fyri innkrevjingini av gjaldinum til Heilsutrygd, heldur Heilsumálaráðið ikki, at tað í hesum førinum er neyðugt at gera eina formliga avtalu millum Heilsutrygd og TAKS.

6.5 Heilsutrygdarveitingar (LG 2019/211-0202)

Persónar, ið eru búsitandi í Føroyum, hava rætt til veitingar. Allir persónar, ið lúka treytirnar í lógini, hava rætt til ókeypis viðgerð hjá kommunulækna.

Heilsutrygd kann veita endurgjald fyri flutning til og frá kommunulækna, serlækna, jarðarmóðir v.m. eftir reglunum í K. nr. 115/2012 "um endurgjald fyri ferðing til og frá serlækna, kommunulæknavaktini og ljósmóður".

Stuðul verður latin til uppihald til góðkent eftirbataheim. Ískoyti kann verða veitt til viðgerð hjá tannlækna, kiropraktori og tannrøktara; og eftir ávísing frá lækna kann ískoyti veitast til viðgerð hjá fysioterapeuti, ergoterapeuti, sálarfrøðingi og fótterapeuti. Eftir ávísing frá kommunulækna kann verða veitt ókeypis viðgerð hjá serlækna. Nærri reglur eru í K. nr. 93/2018 "um gjald fyri serlæknaviðgerð, sum Heilsutrygd rindar fyri". Eisini verður ískoyti veitt til brillur.

Heilsutrygd kann rinda fyri hjálparráð, sum er liður í einari viðgerð, ella sum er til persónar, sum ikki hava varandi tørv á hjálparráði.

Landsstýrismaðurin kann sambært § 11 í lógini gera sáttmálar við onnur lond um sínámillum viðgerð, barnsburðar- og gravarhjálp til persónar, sum fyribils eru staddir uttanlands.

Landsapotekarin viðger umsóknir um heilivág; og sambært lógini verður tilskot veitt til keyp av heilivági, fyriskipaðum á forskrift.

Útgjøld av veitingum
Roknskapartøl seinastu 5 árini:

t.kr.

Heiti	2015	2016	2017	2018	2019
Lønir v.m.	0	239	0	0	51
Keyp av vørum og tænastum	2	2	0	0	0
Tilskot til einstaklingar	152.913	158.650	162.107	173.303	188.930
Innanh. flyt. ml. alm. stovn. (útr)	3.094	3.158	3.346	3.081	2.659
Tilsamans	**156.009**	**162.050**	**165.453**	**176.384**	**191.640**

Innanhýsis flytingar millum almennar stovnar (útr.) eru til Kommunulæknaskipanina fyri grundgjald til kommunulæknaavloysarar.

Útreiðslur á Standardkontu 52 "Tilskot til einstaklingar" býttar á endamál:

t.kr.

Endamál	2015	2016	2017	2018	2019
Ógreinað.	111	60	255	-61	111
Læknahjálp	43.381	44.271	45.392	49.870	54.878
Endurgjald fyri brillur	1.157	1.222	1.254	1.231	1.336
Endurgj. fyri jarðarferðarhjálp	1.707	1.797	2.035	1.848	1.728
Endurgj. fyri flutningsútr.	4	2	2	1	1
Tulking	8	7	6	11	9
Serlæknahjálp	2.102	2.053	1.708	1.694	719
Tannviðgerð	17.759	17.490	17.734	18.509	19.864
Fysiurgisk viðgerð	6.830	7.025	7.111	7.736	8.647
Kiropraktor	145	154	151	89	111
Ergoterapi	475	530	494	642	873
Sálarfrøðingar	989	944	1.229	1.327	1.568
Eftirbataheim	499	549	469	467	419
Fótarøkt	2.655	2.789	2.814	2.881	3.217
Hjálparráð	10.270	12.356	13.080	15.220	18.267
Heilivágur	63.816	66.376	67.320	70.762	76.000
Eftirútbúgving og gransking	1.004	1.025	1.053	1.078	1.182
Tilsamans	**152.913**	**158.650**	**162.107**	**173.303**	**188.930**

Av teimum 188 mió.kr., ið eru goldnar í 2019, eru 185 mió.kr. goldnar sum "Heilsutrygdarveitingar – rokning". Størstu upphæddirnar eru:

- Heilivágur 76 mió.kr.,
- Læknahjálp 55 mió.kr.,
- Tannviðgerð 20 mió.kr. og
- Hjálparráð 18 mió.kr.

Semja um basisgjald

Basisgjaldið er komið í fasta legu.

Heilsutrygd hevur í fleiri ár sett pening av vegna ógreiðu um basisgjald til kommunulæknar, og bókað upphæddirnar í fíggjarstøðuna. Í 2018 er støðlaða upphæddin, 1.533 t.kr., inntøkuførd, og í sáttmálasemjuni frá mai 2018 er basisgjaldið komið í fasta legu.

Eftirútbúgving og gransking

Í 2019 eru 328 t.kr. goldnar til Efteruddannelsesfonden. Upphæddin er roknað út frá ávísari upphædd fyri hvønn borgara yvir 18 ár + gjald fyri borgarar undir 18 ár. 633 t.kr. eru goldnar til Administrationsudvalget, svarandi til 1,27% av læknahjálp 2018.

Dygdarskipan[18]

Sambært Heilsutrygd eiga kommunulæknarnir grunnin, og stjórin á Heilsutrygd ger roknskapin og hevur umsitingina.

Gjald til eftirútbúgving og gransking.

Seinastu 5 árini hevur Heilsutrygd goldið til eftirútbúgving og gransking:

t.kr.

St.Rk. 5240-0500	2015	2016	2017	2018	2019
Eftirútbúgving og gransking	1.004	1.025	1.053	1.078	1.182
Býtt til:					
Adminstr.udvalget og Efterudd. fonden	808	825	846	865	962
Dygdargrunnurin	63	64	66	68	71
BE-skipanin	133	136	141	144	150

Til BE-skipanina eru goldnar 3,90 kr. og til Dygdargrunnin 1,84 kr. fyri hvønn borgara yvir 18 ár.

31. desember 2019 eru 298 t.kr. á peningastovnskontu hjá Dygdargrunninum og 399 t.kr. hjá BE-skipanini. Allar inntøkurnar eru frá Heilsutrygdarveitingum.

Sambært Heilsutrygd hevur nevndin givið stjóranum á Heilsutrygd og einum fulltrúa heimild at flyta pening av kontu hjá BE-skipanini. Eftir áheitan frá nevndini bókar stjórin og umbiður flyting, og fulltrúin góðkennir. Roknskapirnir hava ikki verið grannskoðaðir.

Í juni 2020 hevur Heilsutrygd kunnað um, at tað stendur einki í reglugerðini fyri Dygdarskipanina um, at roknskapurin skal grannskoðast, og at Heilsutrygd fer at leggja uppskot fyri nevndina, um at roknskapirnir hereftir verða grannskoðaðir.

Heilsutrygd hevur ikki tikið støðu til, um grunnurin kemur undir landsins almenna roknskaparhald, og veit heldur ikki, um leiðslan í Dygdarskipanini hevur tikið støðu til tann spurningin.

Heilsutrygd leggur afturat, at talan er ikki um pening, sum beinleiðis er játtaður í fíggjarlóg, men um gjald, sum er ásett í sáttmála ímillum Meginfelag Sjúkrakassa Føroya og Kommunulæknafelag Føroya, og at talan tí er um vunnin rættindi hjá kommunulæknum í einari sáttmálasamráðing.

Í august 2020 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Heilsumálaráðið fer at viðgera málið saman við Heilsutrygd.

[18] Samanløgd skipan, sum hevur avloyst BE-skipanina (Bólka-Eftirútbúgvingarskipan) og Dygdargrunnin.

Dygdarskipanin verður sambært reglugerðini umsitin av nevnd, sett saman av tveimum umboðum fyri Heilsutrygd og tveimum umboðum fyri Kommunulæknafelagið.

Sambært Heilsutrygd var seinasta samskiftið í nevndini á vári 2020. Heilsutrygd kunnaði um, at sambært nevndini í Dygdargrunninum hava tveir fundir verið seinastu 5 árini.

Í august 2020 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Heilsumálaráðið fer at viðgera málið saman við Heilsutrygd.

Sambært reglugerðini verður óbrúktur peningur fluttur til eftirfylgjandi ár, og um peningur hópar seg upp, verður málið lagt fyri Samstarvsnevndina.

Spurd, um Samstarvsnevndin hevur viðgjørt málið, nú 700 t.kr. eru í grunninum, svaraði Heilsutrygd, at málið ikki er lagt fyri Samstarvsnevndina enn, men at tað væntandi verður gjørt í næstum.

Í august 2020 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Heilsumálaráðið fer at viðgera málið um Dygdarskipan og BE-skipan saman við Heilsutrygd, og fer síðani at svara Landsgrannskoðanini.

6.6 Kommunulæknaskipanin (LG 2019/211-0202)

Lógargrundarlagið er Ll. nr. 28/1999 “um kommunulæknaskipanina”.

Roknskapartøl seinastu 5 árini:

t.kr.

Heiti	2015	2016	2017	2018	2019
Lønir v.m.	12.095	11.433	12.494	12.876	13.743
Keyp av vørum og tænastum	1.298	1.415	1.748	1.556	1.358
Keyp av útbúnaði, netto	25	27	0	0	40
Innanh. flyt. ml. almennar stovn. (útr)	0	2	2	2	2
Innanh. flyt. ml. almennar stovn. (innt)	-3.094	-3.157	-3.343	-3.079	-2.657
Tilsamans	**10.323**	**9.721**	**10.900**	**11.356**	**12.486**

Lønarútreiðslurnar eru til fastar samsýningar til kommunulæknar og til endurgjøld fyri starvsfólk hjá læknum í avloysarastørvum.

Vit stakroyndum kannaðu vit ferðaendurgjøld. Einki var at finnast at.

Heilsutrygd mannar kommunulæknaviðtalurnar, har eingin lækni er í føstum starvi, við avloysarum. Í teimum førum stovnurin ikki fær mannað viðtalurnar við avloysarum, sum tey sjálvi hava samband við, brúka tey tríggjar vikarstovur, har tvær teirra kosta 4.000 kr. um vikuna og ein 2.900 kr. um vikuna. Í 2019 eru tænastur keyptar fyri 245 t.kr.

Kommunulæknaskipanin eigur tól, ið standa í viðtaluni hjá læknavaktini, m.a. teldur, telefonir og typanometur. Í 2019 keypti skipanin EKG-apparat frá Landssjúkrahúsinum fyri 40 t.kr. í sambandi við flytingina av 1870.

Á kontuni “Innanhýsis flytingar millum almennar stovnar (innt)” eru endurgjøld frá Heilsutrygdarveitingum fyri grundgjaldið til kommunulæknaavloysarar.

6.7 Økisheilsuskipanin (LG 2019/211-0202)

Á stovninum arbeiða kostfrøðingar, sum hava høli til viðtalu o.a. hjá ymisku kommunulæknunum.

Roknskapartøl seinastu 5 árini:

t.kr.

Heiti	2015	2016	2017	2018	2019
Lønir v.m.	1.092	1.264	1.380	1.087	1.607
Keyp av vørum og tænastum	153	166	173	161	119
Keyp av útbúnaði, netto	17	5	16	126	12
Leiga, viðlíkahald og skattur	0	0	0	0	58
Tilsamans	**1.261**	**1.436**	**1.569**	**1.375**	**1.796**

Stovnurin varð stovnaður í 2014. Tá vórðu m.a. keyptar vektir frá Landssjúkrahúsinum fyri 160 t.kr. Teldlar og snildfonir eru keypt í 2017 og 2018, og í 2018 hevur stovnurin keypt ein bil.

Sambært ognaryvirliti hevur Økisheilsuskipanin skrivstovuinnbúgv í fleiri læknaviðtalu-hølum. Sambært Heilsutrygd er innbúgvið og útgerðin á støðunum.

6.8 Gigni – heilsufrøði fyri børn og ung (LG 2019/211-0213)

Lógargrundarlagið undir arbeiðinum hjá heilsufrøðingum er Ll. nr. 63/2005 “um fyribyrgjandi heilsutænastur til børn og ung”.

Síðani 2018 hevur Gigni ráðgivið foreldrum, ið ættleiða. Sambært fíggjarlógini 2018 verða útreiðslurnar til tað endamálið 200 t.kr. um árið. Í 2019 er játtanin hækkað við 300 t.kr. til at heilsukanna børn við inn- og útskúling. Játtanin er harafturat hækkað við 300 t.kr. til at víðka tænastuna til 2 til 5 ára gomul børn.

Gigni hevur skrivstovu í Tórshavn og høli til heilsufrøðingarnar. Á skrivstovuni starvast tvey fólk, sum m.a. umsita skrásetingarskipanina Vaktplan.

Roknskapartøl fyri seinastu 5 árini:

t.kr.

Heiti	2015	2016	2017	2018	2019
Lønir v.m.	10.555	10.724	11.151	10.771	11.052
Keyp av vørum og tænastum	1.616	1.623	1.119	1.363	1.632
Keyp av útbúnaði, netto	61	263	489	220	661
Leiga, viðlíkahald og skattur	225	230	240	179	192
Avskrivingar o.a.	0	0	56	0	0
Ymsar rakstrarútreiðslur	67	67	69	64	57
Søla av vørum og tænastum	-18	-19	-19	-17	-17
Innanh. flyt. ml. almennar stovn. (innt)	0	0	0	-34	0
Tilsamans	**12.507**	**12.888**	**13.106**	**12.546**	**13.577**

Gigni leigar skrivstovuhøli frá Realinum. Leigan er 12.600 kr. um mánaðin fyri 162 m^2. Sáttmálin kom í gildi 1. juni 2009 og kann sigast upp við 12 mánaða freist av báðum pørtum. Landsverk hevur góðkent leigusáttmálan.

Í sambandi við keyp av fýra bilum fyri 569 t.kr. sendi Heilsutrygd tilboðsfyrispurningar til tríggjar bilasølur.

6.9 Koppsetingar (LG 2019/211-0201)

Játtanin til koppsetingar er ein av lógarbundnu játtanunum, ið Heilsutrygd umsitur. Heimildin er í Ll. nr. 118/2007 “um ókeypis koppseting móti ávísum smittandi sjúkum”, og K. nr. 126/2015 um sama.

Í 2019 eru 4 mió.kr. goldnar sum “flytingar til einstaklingar annars”, og 395 t.kr. sum “Tilskot til einstaklingar, heilsuøkið”. Tær 395 t.kr. eru lønir.

Samsýningar til kommunulæknar verða goldnar sum keyp av tænastum, tá ið tað eru læknar í føstum starvi. Læknar, sum eru avloysarar, fáa samsýningarnar goldnar um lønarskipanina og um A-skattaskipanina. Sambært Heilsutrygd hava tey bókað lønirnar á henda hátt eftir avtalu við Gjaldstovuna.

6.10 Ílegusavnið (LG 2018/211-0202)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðanina av Ílegusavninum. Roknskaparreglugerðin hjá stovninum var frá 2010.

Roknskaparviðurskifti o.a.

Sambært landsstýrismanninum var roknskaparreglugerðin dagført og undirskrivað í juni 2020.

Roknskaparreglugerðin er dagført.

Lønir

Landsgrannskoðanin vísti á, at sambært roknskaparkunngerðini skal stovnsleiðari skipa fyri hóskandi skráseting av arbeiðstíð, fráveru, frítíð o.t., fyri at tryggja, at lønarútgjaldingarnar eru rættar.

Í august 2020 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at sambært Ílegusavninum er skipað skráseting sett í verk. Starvsfólkini skráseta arbeiðstíð, feriu, sjúku o.t.

Ferðaútreiðslur

Útreiðslur fyri gisting uttanlands vóru onkuntíð hægri enn mest loyvdu upphæddir. Landsgrannskoðanin mælti til at skjalfesta grundgevingarnar fyri, hví ikki bar til at halda seg innan fyri ásettu upphæddirnar. Eisini mæltu vit til at lýsa ørindi við ferðum neyvari, og at hava betri eftirlit við ferðauppgerðum.

Í august 2020 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Ílegusavnið hevur kunnað starvsfólkini um “Rundskriv um tænastuferðir” frá Fíggjarmálaráðnum, og givið boð um, at útreiðslurnar skulu hava neyvari lýsing.

Umboðan

Stovnurin hevði í 2019 goldið 42 t.kr. fyri fitnesshald, og latið starvsfólk venja 2 tímar um vikuna í arbeiðstíðini. Landsgrannskoðanin vísti á, at gjøld til fitness vanliga eru privatar útreiðslur, og at tað ikki kann sigast at hoyra til arbeiðið at íðka fitness í arbeiðstíðini, uttan lønarmiss.

Heilsu- og innlendismálaráðið var samt við Landsgrannskoðanini, og heitti á stovnin um at fáa viðurskiftini í rættlag.

Í august 2020 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Ílegusavnið beinanvegin tók áheitanina frá Heilsumálaráðnum til eftirtektar, og goldið verður ikki longur fyri fitnesshald, og fitness verður ikki íðkað í arbeiðstíðini.

Søla av tænastum
Í roknskaparreglugerðini vóru ongar reglur um umsitingargjøld. Stovnurin brúkti danskar takstir, sum "Undervisnings- og Forskningsministeriet" hevur ásett. Ílegusavnið helt tað vera torført at áseta umsitingargjald í roknskaparreglugerðini. Sambært Heilsu- og innlendismálaráðnum fóru reglur um umsitingargjald at verða í dagførdu roknskaparreglugerðini.

Í august 2020 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at í dagførdu roknskaparreglugerðini verður overhead, ella umsitingargjald, ásett sum inntøka frá stuðulsfíggjaðum virksemi, men takstirnir eru ikki ásettir. Heilsumálaráðið hevur biðið Ílegusavnið gera eitt ískoytisskjal til roknskaparreglugerðina viðvíkjandi umsitingargjaldinum.

Gjaldkort
Landsgrannskoðanin mælti til at rinda allar rokningar um Búskaparskipan landsins, sum til ber at avgreiða tann vegin.

Ílegusavnið hevði útvegað sær Eurocard í 2016. Í august 2020 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at heimildarváttan er undirskrivað, og at stovnurin nú fylgir ásetingunum í rundskrivinum "um nýtslu av gjaldskorti og kredittkorti fyri andsstovnar" hjá Fíggjarmálaráðnum.

KT-trygd, skoðan o.a.
Ílegusavnið hevur ásett ein KT-politikk. KT-trygdarpolitikkurin, sum byggir á ISO 27001, er dagførdur 2. mars 2017. Tað er í tráð við tágaldandi rundskriv frá Vinnumálaráðnum frá juni 2007 "um at seta í verk KT-trygd".

Nýggja rundskrivið um KT-trygd frá 29. apríl 2019 ásetir, at tær skipanir og skráir, sum liggja uttan fyri Landsnet skulu eisini verða skoðaðar av KT-grannskoðara, sum Fíggjarmálaráðið hevur góðkent.

Stovnurin vísti á, at tey vita, at Ílegusavnið kemur undir høg KT-trygdarkrøv, og at stovnurin hevur SLA avtalur við veitarar, sum hýsa dátum uttan fyri Landsnet.

Sambært stjóranum skoðar Gjaldstovan fyrisitingarkervið, og skoðan hevði verið fyri stuttum.

Landssjúkrahúsið hýsir hinum partinum, sum fevnir um Progeny-skipanirnar, og tær verða umsitnar av einum smápartafelag, og mentar av einum øðrum smápartafelag. Skipanirnar sjálvar vóru ikki skoðaðar, men umstøðurnar kring servararúm og fysiska trygdin á Landssjúkrahúsinum vóru skoðaðar av Elektron í 2018.

Í august 2020 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at skoðan av KT-trygdini hjá Ílegusavninum varð framd fyrst í 2020.

6.11 Elveiting, umsiting (LG 2017/211-0321)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin Elveiting, umsiting á høvuðskontu 11.32.1.06. Umhvørvisstovan umsitur játtanina.

Roknskaparviðurskifti
Kostnaðurin av umsitingini seinastu 5 árini:

t.kr.

Heiti	2015	2016	2017	2018	2019
Lønir v.m.	1.178	1.371	1.536	1.267	1.375
Keyp av vørum, tæn. og útbúnaði	332	798	1.755	1.095	585
Leiga, viðlíkahald og skattur	10	152	0	2	5
Eftirlits- og umsjónaravgjøld	-1.799	-2.322	-3.291	-2.463	-2.020
Inn. flyt. millum alm. stovn (útr)	286	0	0	376	55
Inn. flyt. millum alm. stovn (innt)	0	0	0	-277	0
Tilsamans	**7**	**0**	**0**	**0**	**0**

Allar fyritøkur, ið hava fingið framleiðsluloyvi, skulu rinda gjald til fígging av útreiðslunum til umsitingina av elveitingarlógini[19]. Almennar og privatar fyritøkur og kommunur rinda fyri kostnaðin, ið Umhvørvisstovan hevur í tí einstaka málinum[20].

Fimm fólk starvaðust á deildini Orka, harav tvey vóru lønt av Elveiting burturav. Elfeløgini rindaðu tilsamans 3,3 mió.kr. í 2017, harav lønir vóru 1,5 mió.kr. Elveiting rindaði 2/43 av felagsútreiðslum, umframt 152 t.kr. at umbyggja hølir í 2016.

Sambært Umhvørvisstovuni stóðst meginparturin av umbyggingini av, at orkudeildin varð flutt til Umhvørvisstovuna. Elveiting skuldi gjalda sín part, t.e. 2/5 av samlaðu umbyggingini í 2016, sum svarar til 152 t.kr.

Í august 2018 vísti Heilsu- og innlendismálaráðið á, at tá ið felags rakstur og umsitingarfólk fevndu um fleiri høvuðskontur, átti tað at verða gjørt upp soleiðis, sum tað var lýst í kontuskipanini undir høvuðsslagi 7.

Umhvørvisstovan tók viðmerkingarnar til eftirtektar. Í august 2020 hevur Umhvørvis- og vinnumálaráðið kunnað um, at møguligt býti av útreiðslum millum høvuðskontur hereftir verður bókað sambært Kontuskipan landsins.

Keyp og útbjóðing
Elveiting bað ikki um tilboð frá fleiri, tá ið stovnurin keypti tænastur. Sambært Umhvørvisstovuni valdu tey ráðgevar eftir uppgávuslagi, og í summum førum fór rokningin upp um 50 t.kr. Elveiting bað um tilboð frá trimum veitarum til pumpukraftverk í Vestmanna.

Vísandi til reglurnar um at bjóða keyp av vørum og tænastum hjá tí almenna út ímillum fleiri veitarar og til rundskrivið um at taka búskaparlig atlit, mælti Landsgrannskoðanin til, at størri keyp vórðu boðin út.

Í juli 2019 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Umhvørvisstovan hevði tikið viðmerkingarnar frá Landsgrannskoðanini til eftirtektar, og fór í størri mun at bjóða út, hóast stovnurin metti, at tað í onkrum førum ikki var mest skynsamt at bjóða út.

Í august 2020 hevur Umhvørvis- og vinnumálaráðið greitt frá, at um talan ikki er um heilt serligar vørur og tænastur, verður altíð biðið um tilboð frá tveimum ella fleiri veitarum. Størri keyp og verkætlanir verða bodnar út. Eitt útboð liggur í løtuni á Keypsportalinum.

[19] Sambært K. nr. 121/2008 "um gjald fyri umsitingina av elveitingarlógini".
[20] Sambært K. nr. 102/2012 "um gjøld hjá Umhvørvisstovuni fyri umsiting og eftirlit sambært lóggávuni á umhvørvisøkinum".

6.12 Ferð á grøna orku (LG 2017/211-0321)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av "Ferð á grøna orku".

Í 2016 rindaði "Ferð á grøna orku" slakar 160 t.kr. fyri borihol til Búnaðardepilin og til Fiskaaling við Áir. Boriholið til Búnaðardepilin varð borað í januar/februar 2017. Í 2018 var boriholið til Fiskaaling við Áir enn ikki borað.

Sambært Umhvørvisstovuni vóru boriholini, ið vóru goldin av "Ferð á grøna orku", ogn hjá landinum, og fór stovnurin at bóka tey á støðisogn hjá Gjaldstovuni.

Landsgrannskoðanin vísti á, at roknskapirnir 2016 og 2017 hjá "Ferð á grøna orku" vóru skeivir, tá ið 160 t.kr. vóru útreiðsluførdar, uttan at nøkur vøra ella tænasta var fingin afturfyri. Eisini undraðust vit á, at ein stovnur skuldi rinda so langt forút fyri eina tænastu. Um ein stovnur av onkrari góðari orsøk rindar forút fyri arbeiði, skal tað vísast greitt í roknskapinum.

Í juli 2019 kunnaði Heilsu- og innlendismálaráðið um, at ráðið hevði mint Umhvørvisstovuna á, at útreiðslur og inntøkur, sum stava frá vørum og tænastuveitingum skulu verða skrásettar, tá ið tær eru latnar, og at ráðið hevði biðið Umhvørvisstovuna um at fáa hesi viðurskifti á beint. Umhvørvisstovan fór at venda sær til veitaran at fáa eina kreditnotu upp á veitingina, sum ikki varð latin. Stovnurin tók annars viðmerkingarnar til eftirtektar, og fór at syrgja fyri, at hesi viðurskifti eru í lagi frameftir.

Kreditnota komin upp á veiting, sum ongantíð var latin.

26. august 2020 fekk Umhvørvisstovan eina kreditnotu upp á 79.800 kr. fyri veitingina, sum ikki varð latin.

6.13 Stuðul til útoyggjamenning (LG 2019/211-0372)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað høvuðskontu 11.37.2.19 "Stuðul til útoyggjamenning". Játtanin er ætlað til at stuðla tiltøkum í útoyggjum, sum eru mennandi fyri útoyggjarnar.

Í 2019 eru 1,1 mió.kr. játtaðar. Umhvørvis- og vinnumálaráðið umsitur játtanina og hevur rindað stuðulin sambært reglugerð "fyri veiting av stuðulsjáttan til útoyggjamenning" frá 23. februar 2016.

Í sambandi við grannskoðanina kannaðu vit útgjøld til 5 persónar/feløg, ið hava fingið stuðul í 2019.

Nøvn	*kr.*
Útoyggjafelagið	260.000
Dímunargarður	70.000
Eyðanstovugarðurin í Mykinesi	60.000
Uppistovugarður í Hattarvík	50.000
Jóhannus Kallsgarð, Trøllanesi	50.000

Tá ið ein verkætlan er liðug, skal stuðulsmóttakarin lata ráðnum skrivliga frágreiðing um úrslitið. Móttakarin skal lata ráðnum grannskoðaðan ársroknskap fyri veittan stuðul í seinasta lagi 1. apríl árið eftir. Roknskapurin skal lúka treytirnar sambært § 21 ella § 22 í K. nr. 125/2011 "um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan.

Allir stuðulsmóttakararnir hava latið inn frágreiðingar um tær verkætlanir, stuðulin er ætlaður til.

Útoyggjafelagið hevur ikki latið inn roknskap fyri 2019, tó at umsøkjari skal lata ráðnum grannskoðaðan roknskap, tá ið stuðulsupphæddin er oman fyri 100 t.kr.

Sambært Umhvørvis- og vinnumálaráðnum er roknskapurin hjá Útoyggjafelagnum ikki liðugur enn, orsakað av skerdari arbeiðsorku hjá grannskoðarafyritøkuni, vegna koronafarsóttina. Roknskapurin verður sendur Landsgrannskoðanini, tá ið ráðið hevur móttikið hann.

Sum skjalprógv fyri at stuðulin er nýttur sum ætlað, hava hinir 4 stuðulsmóttakararnir latið Umhvørvis- og vinnumálaráðnum avrit av kvittanum ella rokningum, og í onkrum føri eru myndir sendar við, sum skulu prógva at stuðulin er nýttur til ætlaða endamálið. Sambært Umhvørvis- og vinnumálaráðnum er tað nøktandi skjalprógv, fyri at stuðulin er nýttur til endamálið.

6.14 Umhvørvisstovan (LG 2017/211-0374)

6.14.1 Stuðulsfíggjað virksemi

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað stuðulsfíggjað virksemi hjá Umhvørvisstovuni.

Stuðulsfíggjað virksemi skal sambært játtanarreglunum vera sprottið úr vanliga virkseminum, og stovnurin skal greiða neyvari frá stuðulsfíggjaða virkseminum í viðmerkingunum til fíggjarlóg.

Roknskaparligur skilnaður skal vera ímillum stuðulsfíggjað virksemi og vanligt virksemi hjá stovninum, eisini viðvíkjandi lønum.

Landsgrannskoðanin kannaði eina verkætlan, nevnd Secure. Samlaða kostnaðarætlanin var 13,8 mió.kr. Føroyski parturin var 1,8 mió.kr. og varð fíggjaður við 1,2 mió.kr. frá Northern Periphery and Arctic Programme, stytt NPA, og 634 t.kr. í eginfígging frá Umhvørvisstovuni.

Pengarnir til verkætlanina eru brúktir til m.a. sólselluútbúnað á bygningunum hjá Umhvørvisstovuni og Dugna, útskifting av sirkulatiónspumpum í 32 húsum í Nólsoy og til ráðstevnur.

Roknskaparviðurskifti o.a.

Verkætlanin var frá 1. mai 2016 til 30. apríl 2019. First level controller hevur váttað hálvárligu roknskapirnar til NPA, og NPA rindar bert stuðul fyri goldnar rokningar.

Stuðulin frá NPA er goldin soleiðis:

2018:	263.000 kr.
2019:	197.000 kr.
2020:	697.000 kr.
Tilsamans	1.157.000 kr.

Í 2016 og 2017 er eingin stuðul móttikin, og 79 t.kr. eru støðlaðar í fíggjarstøðuni.

Í 2018 hevur verkætlanin goldið 277 t.kr. fyri lønir til “Elveiting” og 57 t.kr. til Umhvørvisstovuna, sum “flytingar millum almennar stovnar”. Í 2018 eru 334 t.kr. støðlaðar, og ágóðin í fíggjarstøðuni var 414 t.kr.

Í 2019 hevur verkætlanin goldið 152 t.kr. fyri lønir, har skjalprógvið er “yvirlit yvir rættingar í bókhaldinum”. Verkætlanin hevur goldið Landsverki 46 t.kr. fyri elinstallatiónir og samskipan v.m. fyri sólselluútbúnað til Dugna.

Í 2019 eru 419 t.kr. lagdar afturat støðlaðu upphæddini og 136 t.kr. drignar frá. Skjalprógvini er listi við umbókingum og yvirlit yvir rættingar í bókhaldinum. Ágóðin 31. desember 2019 var 697 t.kr.

Í juli 2020 hevur Umhvørvis- og vinnumálaráðið kunnað um, at restin av stuðlinum er goldin Umhvørvisstovuni í februar og apríl 2020.

Arbeiðstíð ikki skrásett.

Landsgrannskoðanin hevur vísst á, at vantandi skráseting av arbeiðstíð ger, at tað ber ikki til at sanna, at upphæddirnar, ið verkætlanin rindar fyri arbeiðstímar, eru rættar. Umhvørvisstovan er samd í, at støðan higartil viðvíkjandi tímaskráseting ikki er nøktandi, og hevur boðað frá, at hon fer at fáa hesi viðurskifti í eina fasta legu.

Í juli 2020 hevur Umhvørvis- og vinnumálaráðið kunnað um, at Umhvørvisstovan hevur broytt mannagongdina soleiðis, at tímanýtslan til ymiskar verkætlanir verður gjørd upp á vikufundum á deildini og verður førd í eitt rokniark. Ráðið heldur tað vera eina skilagóða loysn, sum eisini er ódýr.

Samanumtikið

Landsgrannskoðanin vísti á, at tað gruggar roknskapin, tá ið goldið verður fyri sólselluanleggið av tveimum játtanum, umframt av stuðulsfíggjaðum virksemi.

Í juli 2020 hevur Umhvørvis- og vinnumálaráðið greitt frá, at ráðið tekur undir við, at stovnar og ráð samstarva, og í so máta er hetta eitt fyrimyndarligt samstarv, sum er til fyrimuns fyri báðar partar og í tráð við endamál hjá stovnunum báðum.

Sambært Umhvørvis- og vinnumálaráðnum er tað óheppið, at samstarvið ikki hevur verið nóg greitt, tá ið rokningarnar skuldu bókast, og hevur gjørt tað trupult hjá grannskoðanini at síggja samlaðu útreiðslurnar. Umhvørvis- og vinnumálaráðið fer at mæla Umhvørvisstovuni til at hugsa bókhald inn í verkætlanir til tess at tryggja gjøgnumskygni.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið heldur, at rættast hevði verið, at ein stovnur bókaði allar útreiðslurnar á verkætlanina og síðani avgreiddi tann partin, sum aðrir stovnar skuldu gjalda, við “innanhýsis flyting millum stovnar”.

Landsgrannskoðanin heldur, at tað er ikki nøktandi, at Umhvørvisstovan ikki kann skjalprógva bókingarnar í Búskaparskipan landsins, og at roknskapurin fyri stuðulsfíggjaða virksemið ikki kann samanhaldast við roknskapin/uppgerðirnar til NPA. Tað sæst heldur ikki av roknskapinum fyri stuðulsfíggjaða virksemi, hvussu stóra upphædd Umhvørvisstovan hevur goldið til verkætlanina.

Landsgrannskoðanin kann ikki sanna, at roknskapurin fyri stuðulsfíggjað virksemi er rættur.

Niðurstøðan hjá Landsgrannskoðanini er, at vit kunnu ikki siga, at roknskapurin fyri verkætlanina Secure er rættur, tí eingin verulig tíðarskráseting hevur verið, og tí at nógvar bókingar eru gjørdar uttan skjalprógv.

Í juli 2020 hevur Umhvørvis- og vinnumálaráðið greitt frá, at ráðið heldur, at hóast NPA hevur egna skipan (eMS) at skráseta roknskapir og skjøl í, er tað ein sjálvfylgja, at roknskapurin í Búskaparskipan landsins samsvarar við tað, sum er skrásett í eMS.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið undrast yvir, at tað ber til at bóka í Búskaparskipan landsins uttan skjalprógv, og leggur afturat, at tað eigur ikki at bera til at fremja bókingar í Búskaparskipan landsins uttan skjalprógv, og harafturat er tað ikki í tráð við ásetingarnar um bókhald landsins, sí roknskaparkunngerðina, har ásett er í kapittul 6 hvørji krøv eru til roknskaparligu skrásetingina. Í § 11, stk. 2, er ásett, at hvør einstøk skráseting skal verða prógvað við einum skjali, og við eitt skjal verður skilt eitt og hvørt neyðugt prógv fyri viðurskifti, sum koma frá øðrum enn stovninum. Onnur skjøl eru innanhýsisskjøl. Er eitt uttanhýsisskjal til taks, skal tað verða nýtt.

Sambært Umhvørvis- og vinnumálaráðnum hevur ráðið umrøtt málið við Umhvørvisstovuna, og hevur Umhvørvisstovan broytt mannagongd til tess at tryggja, at ásetingarnar um roknskaparverk landsins verða fylgdar, tað er m.a. gjørt í roknskaparreglugerðini, sum er gjørd fyri stovnin.

6.14.2 Umhvørvisstovan, stovnsrakstur

Í seinastu frágreiðing umrøddu vit grannskoðan av Umhvørvisstovuni.

Ferðakostnaður og starvsfólkakostnaður

Tað gekk upp til eitt ár, til starvsfólk gjørdu tænastuferðir innanlands upp. Vit mæltu til at gera upp oftari, t.d. eina ferð um mánaðin, sum reglurnar frá Fíggjarmálaráðnum áseta. Umhvørvisstovan helt, at talan var um so smáar upphæddir, at tað als ikki var proportionalt at fylgja tilmælinum hjá Landsgrannskoðanini og gera upp eina ferð um mánaðin. Í juli 2019 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Umhvørvisstovan fór at bøta um hesi viðurskifti.

Í august 2020 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at reglurnar um ferðing eru settar í starvsfólkahandbókina. Kravt verður, at starvsfólkini gera innanlands ferðir upp hvønn mánað.

Kassaeftirlit hjá Skógrøktini

Landsgrannskoðanin mælti til, at kassin hjá Skógrøktini varð gjørdur upp regluliga og bókaður so hvørt í Búskaparskipan landsins.

Sambært Umhvørvisstovuni varð arbeitt við at leggja mannagongdirnar á Gróðurstøðini í fasta legu, herundir handfaringina av kassaskipanini.

Í august 2020 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at tiltøk eru sett í verk fyri at fáa kassan gjørdan upp regluliga. Í fyrsta umfari verður tað gjørt vikuliga. Innanhýsis kassaeftirlit var 6. juli 2020.

7. Almannamál

7.1 Almannamálaráðið (LG 2016/212-0111)

Roknskaparreglugerðin dagførd.

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin, at Almannamálaráðið bíðaði við at dagføra roknskaparreglugerðina frá 2013, til Gjaldstovan og Fíggjarmálaráðið høvdu dagført reglurnar. Í august 2020 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at roknskaparreglugerðin er dagførd, og verður undirskrivað í næstum.

7.2 Familjufyrisitingin (LG 2019/212-0141)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin hjá Familjufyrisitingini. Familjufyrisitingin varð sett á stovn á ólavsøku 2018, í sambandi við at Føroyar sama dag yvirtóku familju-, persóns- og arvarættin. Familjurættarliga økið fevnir m.a. um lóg um foreldramyndugleika og samveru, hjúnabandslógina, arvalógina, lóg um ættleiðing og verjumálslógina. Áðrenn yvirtøkuna umsótu Ríkisumboðið og Føroya Landfúti uppgávurnar.

Á heysti 2018 var stovnurin fluttur frá heilsu- og innlendismálum til almannamál. Bókhaldið er flutt til Gjaldstovuna, og stjórin leysgevur og góðkennir mánaðarroknskapirnar.

Roknskaparviðurskifti o.a.
Játtanar- og roknskapartøl 2018 og 2019.

t.kr.

	J 2018	R 2018	J 2019	R 2019
Lønir v.m.	3.919	2.189	6.220	5.269
Keyp av vørum og tænastum	1.000	969	770	901
Keyp av útbúnaði, netto		804	70	60
Leiga, viðlíkahald og skattur		797	400	388
Flytingarinntøkur úr útlandinum		-141	0	-172
Tilsamans	**4.919**	**4.618**	**7.460**	**6.447**

Lønirnar eru størsti útreiðslupostur hjá stovninum. Av rakstrarútreiðslunum 2018 eru størstu útreiðslurnar til at seta leigaðu hølini í stand og til keyp av innbúgvi o.l.

Í fíggjarstøðuni hevur stovnurin støðlað 174.882 kr. til lønarhækkingar og frítíðarløn, og 19.655 kr. til keyp av reolum. Stovnurin hevur onga peningastovnskontu ella kontantkassa.

Stjórin hevur kunnað um, at tey arbeiða við at gera egna roknskaparreglugerð. Reglur, so sum setan av starvsfólki, skráseting av arbeiðstíð v.m. eru ásettar í Starvsfólkahandbókini og í Trygdarhandbókini hjá stovninum.

Stovnurin hevur dagført ognaryvirlit.

Lønarútreiðslur
10 fólk starvast á Familjufyrisitingini, harav 5 eru sett í starv eftir føroyskum sáttmálum, eftir at Familjufyrisitingin var yvirtikin. 5 starvsfólk, sum fluttu frá Ríkisumboðnum hava danskar setanartreytir.

Sambært Ll. nr. 81/2005 "um rættindi løntakaranna í sambandi við, at landsstýrið yvirtekur mál og málsøki frá ríkismyndugleikunum" varðveita starvsfólkini síni sáttmálarættindi til sáttmálaskeiðið er runnið, t.e. til 21. apríl 2021. Eftir tað eru setanartreytirnar ein samráðingarspurningur ímillum Fíggjarmálaráðið og Almannamálaráðið.

Vit kannaðu nøkur lønarmál, og høvdu einki at finnast at.

Aðrar útreiðslur o.a.
Sambært rundskrivi frá 23. november 2018 frá Fíggjarmálaráðnum "um tænastuferðir uttanlands" skal ferðaavrokningarskipanin hjá Gjaldstovuni nýtast til uppgerð av útreiðslum til uttanlandsferðir. Stjórin tók undir við tilmælinum hjá Landsgrannskoðanini um at brúka ta skipanina.

Landsgrannskoðanin mælti til, at endamálið við umboðanarútreiðslum, og hvør hevur luttikið, er sjónligt í roknskapinum.

Leiga av høli og keyp av útbúnaði
Familjufyrisitingin hevur leigusáttmála við Sp/f Undir Bryggjubakka, galdandi frá 1. apríl 2018 til 1. apríl 2021. Enn hevur stovnurin ikki gjørt avtalu um at leingja leigumálið.

Sambært sáttmálanum leigar stovnurin 288 fermetrar fyri 1.199 kr./m^2. Í leigusáttmálanum er avtalað, at innrættingar, tillagingar, flytingar og uppsetingar av veggum standa eftir, tá ið leigumálið heldur uppat.

Í 2018 eru 797 t.kr. bókaðar á standardkontu 16 "Leiga, viðlíkahald og skattur". Húsaleiga fyri 9 mánaðir er 263 t.kr. og fyri umvælingar og umbyggingar av leigaðu hølunum eru goldnar 529 t.kr.

Leigutíðarskeiðið er 3 ár, og verður umvælingarkostnaðurin lagdur afturat húsaleiguni tað tíðarskeiðið, verður leigukostnaðurin 611 kr. hægri fyri hvønn m^2. Samlaði fermetraprísurin verður tá góðar 1.800 kr.

Landsstýrismaðurin hevur kunnað um, at Landsverk ráðgav, samskifti og samráddist við útleigaran. Sambært innanhýsis frágreiðing frá fundi ímillum Landsverk og Heilsumálaráðið, kannaði Landsverk ymisk høli, harav tvey leigumál vóru mett at vera egnað. Hølini undir Bryggjubakka luku flestu fyrilitini út frá einari ítøkiligari meting.

Keyp av útbúnaði
Í 2018 hevur stovnurin keypt útbúnað fyri 566 t.kr., harav møblar fyri 502 t.kr. og listaverk fyri 59 t.kr.

Familjufyrisitingin hevur bjóðað keyp av innbúgvi út í 2018, og hevur í samráði við Landsverk tikið av besta tilboðnum sum var 129 t.kr.

Keypið av stólum fyri 94 t.kr. varð ikki boðið út, men fyrispurningar vóru sendir fleiri veitarum. Tikið var av dýraru loysnini, tí talan var um dygdarstólar við betri ergonomi.

Felags fjarsavn
Familjufyrisitingin og Arbeiðs- og brunaeftirlitið hava felags fjarsavn í Mjørkadali. Stovnarnir hava skrivliga avtalu, sum skal tryggja greiðar mannagongdir í sambandi við nýtsluna av savninum. Í mai 2020 kunnaði landsstýrismaðurin um, at nú hava bert starvsfólk hjá Familjufyrisitingini atgongd til mál hjá Familjufyrisitingini í fjarsavninum.

KT-viðurskifti

Familjufyrisitingin hevur sínar upplýsingar í skipanum hjá KT Landsins. Stovnurin hevur gjørt trygdarpolitikk og leiðreglur fyri brúkarar. Stovnurin samskiftir við Dátueftirlitið um eftirlit sambært persónupplýsingarlógini.

Familjufyrisitingin er samd við Landsgrannskoðanini, at trygdarpolitikkurin og leiðreglurnar eiga at verða dagførd javnan, og í minsta lagi eina ferð um árið.

KT-trygdarpolitikkur skal dagførast regluliga.

Skipanirnar eru fyri stuttum skoðaðar av Gjaldstovuni.

7.3 Almannaverkið (LG 2017/212-0211)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Almannaverkinum.

Trivnaðartænastur rinda Almannaverkinum endurgjald fyri fyrisitingarútreiðslur o.a.:

t.kr.

	2014	2015	2016	2017	2018
Fyrisitingargjald o.a.	4.374	4.519	9.892	10.302	10.657

Í fyrisitingarbygninginum húsast stovnar við trimum játtanum, t.e. Almannaverkið, Trivnaðardepilin og Endurmenning. Allar fyrisitingarútreiðslurnar vóru bókaðar á játtanina hjá Almannaverkinum á høvuðskontu 12.21.1.02.

Almannaverkið roknaði fyrisitingargjaldið út eftir einum býtislykli, sum var ein samanrenning av ymiskum viðurskiftum við útgangsstøði í 2012 og eftir, hvar útreiðslurnar í gamla Nærverkinum vóru bókaðar. Reguleringar vóru gjørdar seinni. Almannaverkið helt, at býtislykilin gav eina rættvísandi mynd av veruligu útreiðslunum. Býtislykilin varð javnaður hvørt ár, tá ið samráðingar vóru millum Almannaverkið og Trivnaðartænastur um býtið av útreiðslunum.

Landsgrannskoðanin mælti Almannaverkinum til at skjalfesta neyvt, hvussu tey vóru komin til býtislykilin.

Mælt var til at skjalfesta býtislykilin.

Í august 2019 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Almannaverkið hevði gjørt býtislykil fyri 2019 saman við einari frágreiðing, og at býtislykilin fór at verða eftirhugdur hvørt ár í mun til broytingar í virkseminum.

Roknskaparviðurskifti

Roknskaparreglugerðin var frá 2010. Almannaverkið hevði bíðað við at gera nýggja reglugerð, tí Gjaldstovan hevði arbeitt við at gera nýtt roknskaparrundskriv. Almannaverkið helt, at galdandi vegleiðing hóskaði ikki til ein so samansettan stovn sum Almannaverkið.

Í august 2020 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Almannaverkið er komið væl ávegis at dagføra roknskaparreglugerðina, og væntar at arbeiðið verður liðugt við árslok.

Roknskaparreglugerðin ikki dagførd.

Almannaverkið hevði tvær peningastovnskontur, sum fyri tað mesta vóru brúktar til lógarbundin útgjøld um Viðskiftafólkaskipanina (VFS). Sambært Almannaverkinum minkaðu útgjøldini av peningastovnskontunum, so hvørt sum útgjøld vórðu flutt yvir í Heildarskipanina.

Í august 2019 greiddi landsstýrismaðurin frá, at VFS verður ikki brúkt longur, og útgjøldini fóru umvegis skipanina hjá Gjaldstovuni. Peningastovnskonturnar vórðu eisini brúktar til ymiskt annað, og Almannaverkið fór at samla øll viðurskifti undir eina peningastovnskontu og niðurleggja hina.

Í august 2020 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at komið er ikki á mál við ætlanini. Arbeiðið er fyribils steðgað, tí uppgerðin av kontuni vísti, at niðurleggingin fór at hava ávirkan á onnur viðurskifti hjá Almannaverkinum.

KT-viðurskifti

Almannaverkið hevur tikið nýggju Heildarskipanina í nýtslu, sum hevur stóran týdning fyri stovnin og landið sum heild. Heildarskipanin skuldi eftir ætlan verða latin Almannaverkinum í 2018. Skipanin skuldi avgreiða veitingarnar, sum Almannaverkið umsat. VFS[21] fór í eina tíð at virka sum søguligur dátugrunnur. Allar dáturnar skuldu flytast í nýggju skipanina.

Í august 2019 kunnaði landsstýrismaðurin um, at frá 20. juni 2019 hevur bara verið atgongd til at lesa úr VFS, og at allar dátur eru fluttar yvir í Heildarskipanina.

Dáturnar vóru sambært stovninum klassifiseraðar eftir leisti frá Gjaldstovuni. Almannaverkið hevði gjøgnumgingið og klassifiserað yvirlit yvir servarar frá Landsneti. Landsgrannskoðanin mælti til at leggja dagføringina av klassifiseringunum í fasta legu.

Almannaverkið hevði gjørt váðameting av øllum skipanunum, men var ikki komið á mál at lýsa, hvussu váðarnir skuldu handfarast. Landsgrannskoðanin mælti til, at váðametingin varð gjørd liðug, og at dagføringin varð løgd í fasta legu. Í august 2019 segði landsstýrismaðurin, at tað nú var komið í fasta legu, og ábyrgdari var settur innan KT-trygd. Klassifiseringin varð seinast dagførd 18. mars 2019.

Persónupplýsingar verða viðgjørdar í Heildarskipanini, og útgangsstøðið er, at allir málsviðgerar hava atgongd til allar upplýsingar í skipanini. Allar gerðir verða loggaðar, og starvsfólk hava ikki loyvi til at leita fram upplýsingar, sum ikki eru neyðugar fyri teirra arbeiði.

Í august 2020 hevur landsstýrismaðurin vísst á, at tað eru ikki øll starvsfólk í Almannaverkinum, sum hava atgongd til Heildarskipanina. Tað eru einans tey starvsfólk, sum arbeiða við málsviðgerð, sum hava atgongd til Heildarskipanina. Hvørjaferð eitt starvsfólk hyggur eftir onkrum upplýsingum, so verður tað loggað. Almannaverkið hevur eina skipan, sum tryggjar, at regluligt eftirlit verður framt við, hvør hyggur hvar í Heildarskipanini. Gjørdar verða stakroyndir eftir fastari mannagongd.

Almannaverkið hevði ikki roynt at endurskapa dátur frá trygdaravritum av Heildarskipanini í síni heild, men bert av einstøkum fílum. Almannaverkið hevði ikki formligar mannagongdir um tilbúgving. Stovnurin hevði havt eina einstaka trygdarhending, sum varð avgreidd og skjalfest.

Mælt var til at gera mannagongdir um tilbúgving.

Landsgrannskoðanin mælti til, at gera mannagongdir um tilbúgving.

Í august 2019 greiddi landsstýrismaðurin frá, at Almannaverkið hevði gjørt avtalu við veitara um at endurskapa dáturnar.

Sambært Almannaverkinum er veitarin enn ikki komin á mál við at endurskapa dátur í august 2020.

7.4 Kassaeftirlit á Almannaverkinum (LG 2018/212-0211)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin kassaeftirlit á Almannaverkinum. Almannaverkið hevði ein forskotskassa til smærri útreiðslur og kassaáfyllingar hjá Eindunum. Spurt, um stovnurin framvegis hevði tørv á at hava forskotskassa, svaraði

[21] Viðskiftafólkaskipan hjá Almannaverkinum

Almannaverkið, at tey eftirfylgjandi høvdu mett um tørvin, og gjørt av at niðurleggja forskotskassan.

Í august 2020 hevur Almannamálaráðið kunnað um, at kassin er niðurlagdur.

Almannaverkið brúkti oyðublaðið fyri ferðauppgerðir hjá landinum. Sambært rundskrivi frá 23. november 2018 "um tænastuferðir uttanlands", sum kom í gildi 1. februar 2019, skal ferðaavrokningarskipanin hjá Gjaldstovuni nýtast til at avrokna ferðir uttanlands. Landsgrannskoðanin mælti Almannaverkinum til at brúka nýggju ferðaavrokningarskipanina.

Í august 2020 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Almannaverkið er farið undir at brúka ferðaavrokningarskipanina.

7.5 Barnapeningur veittur í forskoti (LG 2015/212-0213)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av barnapeningi, m.a. innheinting av barnagjøldum móttikin av órøttum. Í august 2016 var eftirstøðan 445 t.kr. Almannaverkið krevur eftirstøðuna inn, og tey roknaðu við, at meginparturin fór ikki at verða goldin.

Heimild átti at verði veitt TAKS at heinta inn.

Í august 2017 greiddi landsstýrismaðurin frá, at hóast tað var óvist, hvussu nógv veruliga kundi krevjast inn, helt Almannamálaráðið, at heimild helst átti at verða veitt TAKS at fremja innheintingina, tá ið ikki bar til at fáa gjaldsavtalu við gjaldskylduga.

Fyrireikingar vóru farnar í gongd til møguligar lógarbroytingar. Sambært landsstýrismanninum varð arbeiðið gjørt í samráð við TAKS og Almannaverkið.

Í august 2019 og aftur í august 2020 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at einki nýtt er hent í málinum.

7.6 Einkjubarnastyrkur (LG 2014/212-0213)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av umsitingini av játtanini til einkjubarnastyrk.

Ásetingarnar um einkjubarnastyrk eru í §§ 15-19 í Ll. nr. 71/1996 og fevna um gjøld til børn, hvørs faðirskapur ikki er staðfestur og til børn, har annað ella bæði foreldrini ikki eru á lívi. Landsstýrismaðurin hevur heimild at áseta nærri reglur um fyrisitingina av lógini. Landsstýrismaðurin hevði ikki ásett nærri reglur, tí tørvur hevði ikki verið at áseta tær.

Sambært § 21, stk. 2, í lógini skal barnagjald, sum umsøkjari hevur móttikið av órøttum, gjaldast aftur. Tað framgekk ikki av lógini, hvørji amboð Almannaverkið kundi ella skuldi brúka at krevja gjaldið aftur.

Mælt var til at styrkja um eftirlitið.

Landsgrannskoðanin vísti á, at við hesum í huga átti Almannaverkið at styrkt um eftirlitið, sum skuldi forða fyri, at barnagjald varð móttikið av órøttum.

Viðvíkjandi reglum um innkrevjing av útgjøldum, helt Almannamálaráðið tað vera neyðugt at umrøða málið nærri saman við TAKS og Almannaverkinum.

Í august 2019 og aftur í august 2020 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at einki nýtt er hent í málinum.

7.7 Barnaískoyti (LG 2015/212-0213)

Landsgrannskoðanin hevur vístá, at ivi var um innheintingarheimildirnar hjá Almannaverkinum. Sambært § 21, stk. 2, í Ll. nr. 71/1996 skal tann, sum hevur móttikið barnaískoyti móti betri vitan, gjalda upphæddina aftur. Tað framgongur ikki av lógini, hvørji amboð Almannaverkið kann ella skal brúka at krevja peningin aftur.

Heimild átti at verði veitt TAKS at heinta inn.

Í august 2017 kunnaði landsstýrismaðurin um, at hóast tað var óvist, hvussu nógv gjøld, ið vóru móttikin av órøttum og ímóti betri vitan, veruliga kundu krevjast inn, metti Almannamálaráðið, at heimild helst átti at verði veitt TAKS at fremja innheintingina, tá ið tað ikki bar til at fáa í lag gjaldsavtalu við gjaldskylduga. Fyrireikingar vóru farnar í gongd til møguligar lógarbroytingar.

Í august 2018 greiddi Almannamálaráðið frá, at fundur hevði verið um málið ímillum TAKS, Almannaverkið og Almannamálaráðið. Eingin niðurstøða var gjørd, tí talan var m.a. um fíggjarlig, teknisk og løgfrøðilig atlit, sum støða skuldi takast til.

Í august 2019 og aftur í august 2020 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at einki nýtt er í málinum.

7.8 Bústovnar o.a., løgujáttan (LG 2019/212-0216)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað løgujáttanina, Bústovnar o.a. á høvuðskontu 12.21.6.02. Vit hava umrøtt verkætlanir, ið eru nevndar í viðmerkingum í fíggjarlógunum 2017, 2018 og 2019.

Almannamálaráðið hevur einar 70 bygningar.

Almannamálaráðið hevur einar 70 bygningar tilsamans. Stovnarnir hava onga játtan til viðlíkahald av bygningunum í sínum rakstri.

Ráðið ger saman við Landsverki av, hvørjar útreiðslur skulu haldast av játtanini. Landsverk ger eina ætlan viðvíkjandi bygningunum, hvat kemur undir viðlíkahald og verður goldið av játtanini "Umvæling av almennum bygningum", og hvat kemur undir umbygging og verður goldið av játtanini "Bústovnar o.a."

Landsgrannskoðanin spurdi Almannamálaráðið, hvørjar raðfestingar eru gjørdar 2017-2022, og hvussu býtið er ímillum viðlíkahald og umbyggingar í 2019. Í juni 2020 hevur Almannamálaráðið svarað, at játtanin á høvuðskontu 12.21.6.02 "Bústovnar" er til nýbygging, umvæling og dagføring av bygningum hjá Almannamálaráðnum og stovnum undir ráðnum. Almannamálaráðið hevur latið ræðisrættin víðari til Landsverk. Játtanin verður raðfest í samstarvi við Landsverk og stovnar undir Almannamálaráðnum, og í mun til viðmerkingarnar í fíggjarlógini.

Almannamálaráðið vísti á, at sambært Landsverki er tað týdningarmikið, at tað er neyvt samstarv um nýtslu av játtanum, soleiðis at sleppast kann undan dupultarbeiði, og at játtanirnar verða nýttar so skilagott sum møguligt. Almannamálaráðið og Almannaverkið eru umboðað í bygginevndum, har verkætlanir eru settar í verk við verklagslóg. Bygginevndirnar verða settar, áðrenn verklagslógin er gjørd. Í smærri verkætlanum hava tey stýrisbólkar. Bygginevndirnar hava regluligar fundir, alt eftir tørvi. Eina ferð um mánaðin ella annanhvønn mánað var fundur ímillum landsstýrismannin og Landsverk. Sambært Almannamálaráðnum høvdu eingir regluligir fundir verið ímillum Landsverk og landsstýrismannin seinasta hálva árið.

Roknskaparviðurskifti v.m.

Landsverk umsitur bókhaldið viðvíkjandi bygging og umvæling av bústovnum o.a. Stovnurin váttar mánaðarroknskapirnar mótvegis Almannamálaráðnum. Ráðið fær ikki kunning frá Landsverki t.d. úr skipanini SEYF. Spurd, um Almannamálaráðið ger

nakað eftirlit t.d. í sambandi við mánaðarroknskapirnar, svaraði ráðið, at tey gera stakroyndir, eins og tey gera hjá øðrum stovnum, og onkuntíð spyr ráðið Landsverk.

Roknskapartøl 2015 til 2019:

t.kr.

Heiti	2015	2016	2017	2018	2019
Lønir v.m.	648	0	13	1	0
Keyp av vørum og tænastum	775	5	5	13	0
Ymsar rakstrarútreiðslur	-1.423	-1.482	-1.920	-2.010	-2.038
Bygging og løguframleiðsla	21.871	20.368	6.106	10.165	14.722
Útvegan av løgu o.ø.	0	-192	0	2.527	0
Innanh. flyt. ml. alm. stovn. (útr)	0	1.477	1.902	1.997	2.038
Tilsamans	**21.871**	**20.176**	**6.106**	**12.692**	**14.722**

Útveganin av løgu o.ø. í 2018 er keyp av bygningi frá Tórshavnar Privata Vistarheimi. Upphæddirnar á Standardkontu 71 “Innanh. flyt. ml. alm. stovn. (útr)” eru flytingar til Landsverk.

Í 2017 og 2018 eru ávikavist 223 t.kr. og 58 t.kr. goldnar av játtanini vegna Hamragarð í Vági, fyri advokat- og verkfrøðingauppgávur frá desember 2015 til mai 2017.

Í juni 2020 hevur Almannamálaráðið kunnað um, at sambært Landsverki hevur verið vanlig mannagongd, at Landsverk bókar útreiðslur, ið hava beinleiðis samband við verkætlanir, út á verkætlanirnar undir játtanini til Bústovnar o.a. Tann mannagongdin er eftirsíðan broytt. Í 2018 gjørdi Almannamálaráðið Landsverk vart við, at ráðið metti ikki, at útreiðslurnar til Hamragarð skulu bókast á játtanina, ella at bert partar av útreiðslunum kundu bókast á ta játtanina.

Búeind Eystan Heyg

Í 2017 var ætlanin at byggja eina búeind afturat Eystan Heyg í Tórshavn við 6-8 búplássum. Byggingin kom ongantíð í gongd. Lendið, sum ætlanin var at byggja á, hoyrir til samlaða matrikkulin, sum Landssjúkrahúsið liggur á. Semja fekst ikki um at frámatrikulera neyðuga partin.

Byggingin Eystan Heyg fór ongantíð í gongd.

Eitt sakarmál hevur verið í sambandi við sambýlið Eystan Heyg, sum endaði við semju um, at arbeiðstakarin skuldi gjalda ein part og landið ein part av at umvæla sambýlið.

Í 2018 og 2019 eru 3 mió.kr. brúktar til verkætlanina. 2.914 t.kr. eru goldnar arbeiðstakaranum og 86 t.kr. eru goldnar Landsverki.

Spurt, hvussu nógv arbeiðstakarin hevur goldið fyri at umvæla sambýlið, og hvør orsøkin var til, at sambýlið mátti umvælast so stutt eftir, at tað varð tikið í nýtslu, hevur Almannamálaráðið svarað, at í 2016 varnaðist Landsverk ein leka í einari íbúð í Sambýlinum Eystan Heyg. Lekin hevði ein saltan smakk, og grundað á søgur úr Danmark um vandan við MgO-plátum, setti Landsverk seg í samband við serfrøðing í Danmark, at kanna bygningin. Serfrøðingurin staðfesti, at talan var um MgO-plátu, sum vindtetningsplátu, og at plátan var ávirkað av veðrinum í Føroyum. Um plátan ikki varð útskift við annan vindtetning vildi rot koma í bygningin og skaðin gerast størri.

Sambýlið umvælt stutt eftir, at tað var tikið í nýtslu.

Vísandi til tilmæli um brúk av MgO-plátu í Føroyum gjørdi Landsverk avtalu við arbeiðstakaran um at skifta MgO plátuna út við annan vindtetning. Landsverk gjørdi semju um at býta útreiðslurnar millum partarnar.

Umvælingar-útreiðslurnar býttar millum Landsverk og arbeiðstakaran.

Eirargarður og Sambýli í Reynstúni

Sambært Almannamálaráðnum er gjørt av ikki at umbyggja Eirargarð, og ístaðin at byggja í Reynstúni á Argjum. Uppskot til verklagslóg var lagt fyri Løgtingið í 2019, men fall, burtur tá ið tingárið endaði. Ætlanin er at gera nýggja verklagslóg, men hon er ikki komin í Tingið enn.

Ll. nr. 79/2017 “um at dagføra ognina Eirargarður 14/16” fyri í mesta lagi 30 mió.kr. kom í gildi 30. mai 2017 og fór úr gildi 31. desember 2019.

Roknskapartøl fyri umvælingar av Eirargarði 14-16 og bygging av Sambýli í Reynstúni:

t.kr.

Heiti	2016	2017	2018	2019
Eirargarður 14 og 16	2.141	1.732	688	0
Samb.í Reynstúni/Høvuðsumv. Eirargarði 14-16	0	517	385	943
Umvæling av Eirargarði 14-16	0	0	0	2.264
Tilsamans	**2.141**	**2.249**	**1.073**	**3.207**

8,7 mió.kr. eru brúktar til umvælingar av Eirargarði og til bygging í Reynstúni 2016 til 2019. Góðar 7,1 mió.kr. eru goldnar til privatar veitarar og 1,5 mió.kr. til Landsverk.

Í oktober 2018 skrivaði Landsverk á heimasíðuni, at landsstýrismaðurin hevði slept ætlanini um at heildarumbyggja Eirargarð 14-16, og at Landsverk ístaðin ger ábøtur fyri at bøta um inniumhvørvið. Í juli 2019 er, sambært Landsverki, fígging fingin til vega at umbyggja og dagføra tríggjar hæddir, t.e. dagføring av 16a og b, og umbygging og dagføring av 14a. 30. september 2019 kunngjørdi Landsverk, at fýra fyritøkur høvdu bjóðað upp á umbygging og dagføring av Eirargarði 14a.

Í 2019 eru 2,1 mió.kr. goldnar fyri renovering o.a. Í januar 2020 kunnaði Landsverk á heimasíðuni um, at játtanin til Eirargarð 14a var 3,8 mió.kr. í 2019, og at byggingin byrjaði í oktober 2019 og helt á til januar 2020.

4,6 mió.kr. verða brúktar til at umvæla Eirargarð 14-16.

Spurt, um renoveringin á Eirargarði 14-16 er liðug, svaraði Almannamálaráðið, at tilsamans 4,6 mió.kr. verða brúktar til endamálið. Økingin frá 3,8 mió.kr. til 4,6 mió.kr. er m.a. útreiðslur fyri lyftur, ABA-skipan og keyp av innbúgvi fyri 300 t.kr. Umvælingin av Eirargarði 14b (Fjálgulon) og 16a og 16b er ikki farin í gongd. Kostnaðurin av tí arbeiðinum verður umleið 4,9 mió.kr. Umvælingin er partur av Lm. nr. 89/2019 “um dagføring av vardum bústøðum”, ið júst er samtykt.

Heimið í Reynstúni á Argjum

Sambært viðmerkingunum í fíggjarlógini 2019 vóru fyrireikingarnar at byggja ein nýggjan vardan bústað til húsfólkini á Eirargarði settar í gongd.

Í desember 2019 boðaði landsstýrismaðurin í almannamálum Fíggjarnevndini frá, at skipanaruppskotið viðvíkjandi heiminum í Reynstúni var liðugt. Landsstýrismaðurin kunnaði eisini um, at bygningurin møguliga verður dýrari enn mett. Grundstykkið fór møguliga at kosta 750 t.kr., og bygningurin verður 1.314 m^2 til støddar. Jørðarbeiðið kann byrja í juni 2020 og byggingin í mars 2021. Heimið kann verða liðugt í oktober 2022.

Í januar 2020 kunnaði Landsverk á heimasíðuni um, at arbeiðið at prosjektera Sambýlið í Reynstúni varð boðið út í 2018, og MAP arkitektar vunnu uppgávuna. Landsverk fekk skipanaruppskotið í mars 2019, síðani er ikki meira hent í málinum. Eingin játtan var, og tí kundi Landsverk ikki undirskriva ráðgevaraavtaluna.

Í juni 2020 hevur Almannamálaráðið greitt frá, at grundstykkið er ikki keypt, men Tórshavnar kommuna hevur í november 2018 samtykt at selja øki til at byggja sambýli á. Tó er málið ikki endaliga avgreitt frá kommununi.

Prosjekteringin steðgaði á í februar 2019, tá ið uppskot til verklagslóg varð lagt fyri Løgtingið. Uppskotið fall burtur, tá Løgtingið fór í summarfrí.

Í januar 2020 fekk Landsverk boð frá Almannamálaráðnum um at prosjektera Sambýlið við Reynstún liðugt. Landsverk bað ráðgevan um at eftirkanna kostnaðarmetingina fyri

at tryggja betri grundarlag fyri víðari arbeiði. Ráðgevin metti, at av tí at kostnaðarmetingin var vorðin 1 ára gomul, var neyðugt at hækka hana við 10%. Ætlanin er at fara í gongd við víðari prosjektering, tá ið málið um grundøkið er avgreitt frá Tórshavnar kommunu. Tórshavnar býráð samtykti 25. juni 2020 at selja Almannamálaráðnum økið í Reynstúni til sambýli til fólk við menningartarni og fjølbreki.

Barnaheim í Tórshavn

Sambært fíggjarlógini 2019 var ætlanin at byggja nýtt barnaheim í Tórshavn. Í 2019 eru góðar 300 t.kr. goldnar til Landsverk og 2 mió.kr. til arkitekt fyri skipanaruppskot. Tilsamans eru um 3,4 mió.kr. brúktar.

Sambært Almannamálaráðnum er nýggjasta kostnaðarætlanin sambært skipanaruppskoti 135 mió.kr. Eingin játtan er í fíggjarlógini 2020 til bygging av barnaheimi.

Kostnaðarætlan 135 mió.kr. Eingin játtan í fíggjarlógini 2020.

Bú- og umlættingarheim í Tórshavn til børn og ung við autismu

Sambært Ll. nr. 60/2018 kunnu í mesta lagi 29 mió.kr. brúkast til at byggja bú- og umlættingarheim í Tórshavn til børn og ung við autismu. Lógin er galdandi til 31. desember 2024. Heimið skal byggjast í Kvíggjartúni á Argjum.

Sambært Búskaparskipan landsins eru higartil brúktar 3,1 mió.kr. til verkætlanina.

Í skrivi til Fíggjarnevndina í desember 2019 kunnaði landsstýrismaðurin um, at bygningurin er 1.192 fermetrar til støddar, at høvuðsprosjekt fyrilá, og at metti kostnaðurin varð møguliga hægri enn heimildin í lógini. Arbeiðið var boðið út og tilboðini skuldu koma inn í februar 2020. Sambært landsstýrismanninum fór, um neyðugt, broytingaruppskot til galdandi lóg at verða lagt fyri Løgtingið í mars 2020, har biðið varð um hægri játtan. Byggingin kundi eftir ætlan verða liðug í mars 2022.

Í juni 2020 hevur Almannamálaráðið kunnað um, at lisitatión var 20. februar 2020, men av tí at innkomnu tilboðini vóru munandi hægri enn kostnaðarmetingin, gjørdi landsstýrismaðurin av at ógilda lisitatiónina. Arbeitt verður nú við at gjøgnumganga prosjektið við tí fyri eyga at gera uppskot til sparingar, og eftir ætlan verður prosjektið fylgjandi boðið út av nýggjum.

Lisitatiónin í februar 2020 ógildað.

Vardir bústaðir í Tórshavn (Á Mýrini í Hoyvík)

Sambært Ll. nr. 59/2018 “um at byggja tveir vardar bústaðir í Tórshavn”, kunnu tveir bústaðir byggjast í Tórshavn fyri í mesta lagi 58 mió.kr. Lógin fer úr gildi 31. desember 2024.

Sambært Almannamálaráðnum eru tvær byggiskráir gjørdar í 2018 til sambýli til fólk við menningartarni. Annað sambýlið verður staðsett á Mýrini og hitt eftir ætlan í Klingruni í Hoyvík.

Í desember 2019 hevur landsstýrismaðurin í almannamálum kunnað Fíggjarnevndina um, at byggikostnaðurin møguliga verður hægri, enn upprunaliga mett. Fyrri bygningurin verður 1.222 fermetrar og skipanaruppskotið er liðugt. Bygningurin kann verða liðugur á sumri 2022. Fyrireikingin til seinna bústaðin var ikki byrjað.

Almannamálaráðið vendi sær til Fíggjarmálaráðið við fyrispurningi, um prosjekteringin kundi halda áfram, hóast kostnaðurin møguliga varð hægri enn upprunaliga mett.

Í juni 2020 hevur Almannamálaráðið greitt frá, at sambært byggiskránni skulu nýggju sambýlini ikki avloysa gomlu sambýlini, men staðsetingin av tí eina verður á samanløgdu matr. nr. 1au, 1aw og 1ax, har tvey minni sambýli, sum ikki vóru tíðarhóskandi og í rættiliga ringum standi, vóru. Hesi sambýli á Mýrini eru tikin niður og burturbeind.

Sambært Almannamálaráðnum hevur Fíggjarmálaráðið 20. desember 2019 boðað frá, at ráðið metir, at heimild er at arbeiða víðari við at fyrireika verkætlanina til eitt prosjekt-uppskot er gjørt. Samstundis mælir Fíggjarmálaráðið til, at uppskot um at broyta verklagslógina verður lagt fyri Løgtingið, soleiðis at lógin bert fevnir um prosjekterða bústaðin og ikki um tveir bústaðir. Almannamálaráðið leggur afturat, at ráðið í januar hevur boðað Landsverki frá, at Landsverk kann undirskriva sáttmálan við ráðgevan um at prosjektera Sambýlið á Mýrini sambært leistinum, sum Fíggjarmálaráðið stingur út í kortið í skrivinum 20. desember 2019.

Aðrar útveganir av bústøðum

2. apríl 2018 ráðførdi landsstýrismaðurin í almannamálum seg við Fíggjarnevndina um at keypa ognina Torfinsgøta 41 og umvæla hana, soleiðis at hon kundi hýsa 9 fólkum. Keypsprísur var 2,5 mió.kr., og ætlanin var at umvæla fyri 5 mió.kr. Hølini skuldu koma í staðin fyri hølini á Mýrini 4 og 6 í Hoyvík.

Í 2018 og 2019 eru ávikavist 3.878 t.kr. og 3.452 t.kr. brúktar upp á ognina, ella tilsamans 7,3 mió.kr.

Í juni 2020 hevur Almannamálaráðið kunnað um, at talan er um eina misskiljing. Torfinsgøta er ikki keypt til at koma ístaðin fyri sambýlið á Mýrini 4-6, men er ætlað sum ein fyribilsloysn, m.a. tí at neyðugt var at finna hóskandi høli til partar av búfólkunum á Mýrini, tí bygningarnir vóru í so vánaligum standi.

Ætlanir um bústaðarbyggingar

Í viðmerkingunum í fíggjarlógini 2017 stendur m.a., at tilgongdin, sum landsstýrismaðurin hevur sett í verk, um at útvega fleiri bústaðir í Suðurstreymoy og nútímansgera fleiri av verandi bústøðum, heldur fram í tíðarskeiðnum 2018-2024.

Fíggjarnevndin viðgjørdi í apríl 2017 Lm. nr. 94/2016 “Uppskot til løgtingslóg um at dagføra ognina Eirargarður 14/16” og Lm. nr. 121/2016 “Uppskot til løgtingslóg um at byggja og høvuðsumvæla bústaðir í Tórshavn til menningartarnað og fjølbrekað”. Í álitinum skrivaði nevndin m.a.:

Støðan viðvíkjandi bústøðum til fólk við fjølbreki og menningartarni í Suðurstreymi er serstakliga vánalig

“Nevndin ásannar, at støðan viðvíkjandi bústøðum til fólk við fjølbreki og menningartarni í Suðurstreymi er serstakliga vánalig, og at tað er neyðugt at fara til verka beinanvegin fyri at bøta um støðuna. Avbjóðingin er, at umframt, at Eirargarður hevur tørv á stórum ábótum, standa eisini nógvir borgarar á bíðilista. Neyðugt er tessvegna bæði at umvæla Eirargarð og at byggja nýggjar bústaðareindir í Suðurstreymi, so at bíðilistin fæst burtur sum skjótast. Nevndin heldur tað hava alstóran týdning at fara miðvíst til verka at loysa henda samansetta trupulleika. Meirilutin er samdur við landsstýrismannin og við eitt nú Javna, at loysnin er at menna eitt so fjølbroytt bústaðartilboð sum møguligt til borgarar við serligum tørvi, við hóskandi stødd og vavið á ymiskum bústaðareindum, og við atliti at tryggja so góða integratión sum møguligt. Samlaða verkætlanin skal tryggja hesum yvirskipaða endamáli. Og til tess eru 200 milliónir settar av í fíggjarkørmum landsins næstu fimm árini til útvegan av bústøðum innan almannamál. Í løtuni eru 83 fólk á bíðilista í Suðurstreymoy. Nevndin metir, at umvælingin av Eirargarði fer at gera tað møguligt at koma nærri hesum yvirskipaða máli skjótari og smidligari. Nevndin fegnast um, at tað loksins verður farið undir at loysa hetta átrokandi mál.”

Í viðmerkingunum í fíggjarlógini 2018 er m.a. ásett, at í tráð við bústaðarætlanina fyri Suðurstreymoy fyri árini 2017 til 2022, har avsettar eru 200 mió.kr. til bygging og útvegan av bústovnum, verður hildið áfram við dagføringum av verandi bygningum, samstundis sum farið verður undir at byggja nýggjar stovnar.

Í apríl 2018 spurdi Fíggjarnevndin, hvørjar ætlanirnar vóru við samlaða kostnaðinum av Barnaheiminum, vardum bústøðum og bú- og umlættingarheimi. Landsstýrismaðurin svaraði við at vísa til yvirlit yvir íløgur 2017 til 2022, har játtanin var 200 mió.kr., og at 14 mió.kr. vórðu fluttar frá 2016, tilsamans var upphæddin 214 mió.kr.

Sambært yvirlitinum frá landsstýrismanninum skuldu játtanirnar brúkast til:

Eirargarður 14/16 (bráðfeingis viðlíkahald)	4.000 t.kr.
Eirargarður 14/16 (dagføring)	30.000 t.kr.
2 sambýli til fólk við menningartarni í Tórshavn	58.000 t.kr.
Nýtt barnaheim í Tórshavn	60.000 t.kr.
Bústovnar í Tórshavn til børn og ung við autismu	29.000 t.kr.
Sambýli í Torfinsgøtu 41, Tórshavn	7.500 t.kr.
Vardur bústaður til fólk við sálarsjúku	9.500 t.kr.
Sambýlið Eystan Heyg	3.000 t.kr.
Sambýlið í Garðsgøtu	3.000 t.kr.
Ábøtur v.m.	6.000 t.kr.
Dugniskúlin	4.000 t.kr.
Tilsamans	214.000 t.kr.

Viðmerkt varð, at Dugniskúlin er fluttur á høvuðskontu 12.21.1.09.

Ll. nr. 60/2018 “um at byggja eitt búheim og umlættingarheim í Tórshavn til børn og ung við autismu”, og Ll. nr. 59/2018 “um at byggja tveir vardar bústaðir í Tórshavn”, eru samtyktar.

Sambært fíggjarlógini 2019 var lógaruppskot í Løgtinginum um at byggja Barnaheim í Tórshavn, Lm. nr. 32/2018. Fyrireikingar at byggja ein nýggjan vardan bústað til húsfólkini á Eirargarði vóru settar í gongd, og farast skuldi undir fyrireikingar til nýtt heim til fólk við seinheilaskaða.

Játtanir og nýtsla

Almannamálaráðið hevur í sambandi við fíggjarlógarviðgerðir seinastu árini fleiri ferðir víst á ætlanina at byggja bústaðir fyri 200 mió.kr. frá 2017 til 2022.

Játtað og brúkt frá 2017 til 2019:

t.kr.

	2017	2018	2019
Flutt frá síðsta ári	13.869	19.763	36.071
Játtan	12.000	29.000	0
Játtað í árinum tilsamans	25.869	48.763	36.071
Nýtsla	6.106	12.692	14.722
At flyta til næsta ár	19.763	36.071[22]	21.349[23]

Árini 2017 til 2019 eru 110,7 mió.kr. játtaðar í fíggjarlógum og 32,8 mió.kr. brúktar.

Játtanirnar til Bústovnar o.a. geva lítla ábending um, hvør aktiviteturin fer at verða í fíggjarárinum. Árini 2017 til 2019 eru ávikavist 24%, 26% og 39% av játtaðu upphæddunum brúktar.

Játtaðu upphæddirnar ikki brúktar.

Politiska stýringin av búskapinum liggur m.a. í íløgukarminum. Har er møguleiki hjá politiska myndugleikanum at seta út í korti, hvørjar íløgur skulu gerast og samstundis ávirka virksemið í landinum. Tá ið stórar játtaðar upphæddir ikki verða nýttar, men verða fluttar til seinni ár, er ikki samsvar ímillum tað, sum fíggjarlógin sigur virksemið at skula verða og tað, sum virksemið verður.

[22] Upphæddirnar “at flyta til næsta ár” standa aftarlaga í prentaða landsroknskapinum. Í 2018 eru tølini at finna á síðu 206.
[23] Síða 200 í landsroknskapinum 2019.

Upphæddir, ið verða fluttar til seinni ár, verða støðlaðar í landsroknskapinum, og eru tí við í grundarlagnum undir fíggjarlógarviðgerðini, men av tí at landsroknskapurin ikki verður uppgjørdur og kunngjørdur fyrr enn árið eftir, ber illa til hjá Løgtinginum at fylgja við í, hvat virksemi er. Løgtingið sær ikki, fyrr enn roknskapurin er gjørdur, hvat virksemi varð.

Í juni 2020 hevur Almannamálaráðið greitt frá, at í 2017 vórðu 9,2 mió.kr. av játtanini á 12 mió.kr. settar av til at byggja eina búeind afturat Eystan Heyg. Málið varð fyrireikað í 2017, og játtanin varð síðani støðlað til 2018 til at fremja verkætlanina. Ætlanin varð slept í 2018, tí neyðuga lendið varð ikki fingið, játtanin varð tí ikki brúkt.

Sambært Almannamálaráðnum vóru í 2018 játtaðar 29 mió.kr. afturat, harav skuldu umleið 8 mió.kr. brúkast til at dagføra Eirargarð við heimild í verklagslóg, sum varð samtykt í 2017. Ætlanin varð eftirsíðani slept, og ístaðin varð farið undir fyrireikingar at byggja ein nýggjan vardan bústað. Umleið 6 mió.kr. skuldu brúkast til nýtt barnaheim, vísandi til uppskot um løgtingslóg, sum varð lagt fyri Løgtingið í desember 2017. Tað málið datt burtur.

Til bú- og umlættingarheim til børn og ung við autismu skuldu sambært Almannamálaráðnum brúkast 5 mió.kr., og til bygging av vardum bústaði (Mýran) skuldu brúkast 5 mió.kr. Tað tekur drúgva tíð at fyrireika eina byggiverkætlan og seinkingar hava verið.

Almannamálaráðið heldur, at tað hevur verið avsett í fíggjarlógini í mun til tær verkætlanir, sum skuldu fremjast. Broytt støðutakan og seinkingar hava verið við til, at játtanirnar ikki hava verðið brúktar sum ætlað.

24 av 71 bygningum bólkaðir í ringasta bólk.

Sambært almennu viðmerkingunum til lm. nr. 94/2016 “Uppskot til løgtingslóg um at dagføra ognirnar Eirargarður 14/16” frá februar 2017, hevði Almannaverkið saman við Landsverki í mars 2015 útvegað eina frágreiðing um støðuna á 71 bygningum, har Almannaverkið hevur virksemi kring landið. 24 av bygningunum vóru bólkaðir í ringasta bólk, harav 22 í Suðurstreymoy.

Havandi í huga serliga vánaligu støðuna á bústøðunum, heldur Landsgrannskoðanin tað vera undranarvert, at játtanirnar at byggja fyri ikki eru brúktar.

Í juni 2020 hevur Almannamálaráðið, vísandi til frágreiðing sína omanfyri, greitt frá, at seinkingar, broytt støðutakan o.a. hava verið orsøkin til, at játtanirnar hava ikki verið brúktar til nýbygging. Nýtt landsstýri tók við á heysti 2019.

Í fíggjarlógini 2020 eru 20 mió.kr. Sambært viðmerkingunum í fíggjarlógini eru nakrar smærri verkætlanir í gongd og halda fram í 2020, og arbeitt verður við teimum størru verkætlanunum sambært verklagslógunum Ll.nr. 59/2018 og Ll.nr. 60/2018.

Í skrivi til Fíggjarnevndina í desember 2019 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Almannamálaráðið, í sambandi við byggingina av heiminum í Reynstúni, í løtuni kannar, um tað er mest skynsamt, at verklagslógir ikki verða lagdar fyri Løgtingið, fyrr enn verkætlan er liðug prosjekterað, boðin út og tilboð komin inn.

Spurt, um nøkur niðurstøða var gjørd, hevur Almannamálaráðið í juni 2020 svarað, at:

Heimild er at arbeiða víðari við verkætlanum til prosjektuppskot er gjørt.

Almannamálaráðið hevur í sambandi við verkætlanina “Vardir bústaðir í Tórshavn” vent sær til Fíggjarmálaráðið við spurningi um, hvussu arbeiðið skal halda fram, tá ið vitan fyriliggur um, at verkætlanin er vorðin dýrari, enn viðmerkingarnar í lógini leggja upp til, men samtíðis er innan fyri ásetingina í lógini um samlaða fíggjarkarmin.

Sambært skrivi 20. desember 2019 til Almannamálaráðið, heldur Fíggjarmálaráðið, at heimild er til at arbeiða víðari við at fyrireika verkætlanir, til eitt prosjektuppskot er gjørt.

Við einum prosjektuppskoti ber til at gera eina meira nágreinaða meting av tíðarbili og kostnaði av verkætlanini, sum tó ikki er "løst fast" og latin myndugleikum til góðkenningar.

Almannamálaráðið er ikki vitandi um, at ein niðurstøða er gjørd, sum er galdandi fyri allar verkætlanir.

Almannamálaráðið hevur greitt frá, at *"núverandi mannagongd í sambandi við bygging av vardum bústøðum hevur verið, at fyrst verður ein virknislýsing gjørd, sum lýsir hvat slag av virksemi skal vera á bústovninum, hvussu nógv fólk skulu búgva har ella vera til umlætting á stovnunum, hvussu tey skulu búgva, og hvussu sjálvstøðug ella røktarkrevjandi tey eru, hvat slag av virksemi annars skal vera á stovninum, hvussu nógv starvsfólk o.a.*

Tá ið virknislýsingin er gjørd og góðkend av landsstýriskvinnuni, verður bygginevnd sett, sum ger eina byggiskrá, sum fer meira í smálutir við, hvat bygningurin skal innihalda.

Byggiskráin er grundarlag fyri útbjóðingartilfari, og er tað, sum ráðgevararnir gera uppskot út frá. Ofta er fyrst ein undangóðkenning í sambandi við, at ráðgevarar kunnu bjóða seg fram, og síðan gera eitt útval av ráðgevum uppskot til, hvussu teir kunnu loysa uppgávuna. Ein ráðgevi verður síðani valdur at prosjektera bygningin, og verður bygginevndin við í tilgongdini at fáa prosjektera ein bygning, sum samsvarar við ynski og tørv hjá teimum, sum skulu búgva og arbeiða á stovninum.

Prosjekteringin hevur fýra stig – fyrst verður skipanaruppskot framleitt, og við tí er tekning av bygninginum og ein kostnaðarmeting. Skipanaruppskotið skal góðkennast av landsstýriskvinnuni. Síðani verður farið undir at gera eitt prosjektuppskot. Tá tað er gjørt, verður myndugleikaprojekt framleitt, sum skal brúkast til at søkja um byggiloyvið o.a., og at enda verður høvuðsprosjektið gjørt.

Høvuðsprosjektið verður boðið út til arbeiðstakarar, sum bjóða uppá hvat handverkaraútreiðslurnar fara at vera (HVÚ).

Landsverk hevur í sambandi við bygging vegna Almannamálaráðið verkætlanarleiðsluna, er byggiharri og ráðgevi hjá Almannamálaráðnum og granskar í øllum stigum, at prosjekteringin lýkur tey krøv, sum eru sett.

Í sambandi við byggiverkætlanirnar, sum vórðu settar í gongd í 2017 og 2018, vóru kostnaðarmetingarnar til verklagslógirnar gjørdar út frá eini byggiskrá ella eini virknislýsing. Tá ið farið varð undir prosjekteringina, hevur tað víst seg, at kostnaðarmetingin ikki heldur."

7.9 Almannaverkið, Trivnaðartænastur (LG 2018/212-0216)

7.9.1 Trivnaðartænastur

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av felagsrakstrinum fyri Trivnaðardepilin og roknskapin hjá Eind 1 í Trivnaðartænastunum.

Roknskapurin á høvuðskontu 12.21.6.09 er greinaður á staðartátt eftir sama leisti, sum Trivnaðartænasturnar eru býttar í eindir.

Reglur um vardar bústaðir

Heimild at seta á stovn sambýli er í Forsorgarlógini, Lbk. nr. 100/1988, har heitið er "Vardir bústaðir". Í Eind 1 eru sambýlini "Kelduskákið" og "á Mýruvegi".

Landsstýrismaðurin góðkennir staðseting, fysiskar karmar í mun til málbólk, fígging, kostnað og ábyrgdarbýti hjá vardum bústøðum. Landsstýrismaðurin hevur ásett nærri reglur um upptøku, leigurættindi, virksemi og gjøld sambært K. nr. 3/2005 "um skipan av bústovnum" og við rundskrivi nr. 9003 frá 1. januar 2009 "um skipan av sambýlum".

Kunngerðin ásetir, at búfólk skulu rinda fyri húsaleigu og til felags útreiðslur. Gjaldið kann tó ikki fara upp um ta upphædd, sum svarar til veruligu útreiðslurnar av at reka sambýlið. Rundskrivið frá 2009 ásetir nærri reglur um, hvat búfólkini vanliga skulu rinda fyri, og hvat felagskontan skal brúkast til.

Í einum skjali hjá Almannaverkinum, nevnt "Trivnaðardepilin - Eind 1: Fólk við autismu í Norðoyggjum", er upplýst, hvør býr á sambýlunum, og hvussu nógv tey skulu rinda. Búfólkini rinda húsaleigu, el og olju til raksturin hjá Trivnaðardeplinum, og afturat tí rinda tey til felagskassan hjá sambýlinum. Av teimum 6.500 kr., tey rinda um mánaðin, er húsaleiga 2.500 kr., el 250 kr., olja 250 kr. og felagskassin 3.500 kr.

Samsvar er ikki við ásetingarnar um, at gjaldið ikki kann fara upp um veruligu útreiðslurnar.

Landsgrannskoðanin hevur fyrr gjørt vart við, at samhaldsfasta gjaldið, sum borgararnir rindað fyri el og olju, samsvarar ikki við ásetingarnar í kunngerðini og rundskrivinum um skipan av sambýlum, um at gjaldið ikki kann fara upp um ta upphædd, sum svarar til veruligu útreiðslurnar.

Almannaverkið hevur ásett eins gjald fyri orkunýtsluna hjá øllum sambýlum fyri at javnseta borgararnar, tí orkunýtslan er ymisk, vegna ójøvnu bjálvingina av bústøðunum. Borgarar hava ikki møguleika at velja bústað, men fáa tilboð, har pláss er.

Arbeiðið við kunngerðini er farið í gongd.

Í august 2020 hevur landsstýrismaðurin víst á, at 1. januar 2021 kemur Ll. nr. 72 frá 25. mai 2020 "um almannatrygd og tænastur" í gildi. Sambært § 48 í lógini ásetir landsstýrismaðurin reglur um áseting av húsaleigu. Arbeiðið við kunngerðini er farið í gongd og verður væntandi liðugt til ársskiftið.

Roknskaparviðurskifti

Almannaverkið hevur fyrr boðað frá, at stovnurin arbeiddi við einari felags roknskaparreglugerð fyri alt virksemið.

Roknskaparreglugerðin ikki dagført.

Í august 2020 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Almannaverkið væntar, at dagføringin av roknskaparreglugerðini hjá Trivnaðartænastum, sum er partur av reglugerðini hjá Almannaverkinum, verður liðug við árslok 2020.

Lønir

Við stakroyndum kannaðu vit lønir hjá nøkrum starvsfólkum. Landsgrannskoðanin hevði ikki aðrar viðmerkingar enn, at í einum føri var skeiv viðbót latin fyri tænastubúnar.

Sambært Almannaverkinum er feilurin nú rættaður, og Almannaverkið hevur sent umbøn til Gjaldstovuna við áheitan um at rinda munin í eftirgjaldi.

7.9.2 Felagsrakstur í Trivnaðardeplinum

Í seinastu frágreiðing greiddi Landsgrannskoðanin eisini frá grannskoðanini av felagsrakstrinum í Trivnaðardeplinum.

Keyp av vørum og tænastum

Týdningarmikið at kontera neyvt.

Landsgrannskoðanin vísti á, at tað er týdningarmikið, at Almannaverkið konterar neyvt, ikki minst tí at stovnurin virkar við nógvum stovnsnummurum á fleiri høvuðskontum. Skulu einstøku roknskapirnir undir staðar- og endamálstátti brúkast sum álítandi amboð, mugu konteringarnar vera rættar.

Almannaverkið tók undir við týdninginum av røttum konteringum, og ætlaði at fara at skipa fyri at tær fylgja einum felags leisti. Í 2019 og 2020 hevur Almannaverkið gjørt eitt serligt átak at betra um viðurskiftini.

Keyp av útbúnaði og ognaryvirlit

Í roknskapinum hjá Trivnaðardeplinum var nógv goldið, sum var til stovnarnar úti í eindunum. Okkurt var eisini keypt saman við Almannaverkinum og bókað eftir einum býtislykli.

Yvirlit yvir KT-útbúnað hjá Trivnaðardeplinum var í rokniarki. Tað framgekk ikki av rokniarkinum, nær tað seinast var dagført, men á onkrum stóð, nær KT-útgerðin var latin starvsfólki.

Landsgrannskoðanin hevur áður gjørt vart við, at støðisognin í Búskaparskipanini er ikki dagførd. Vit dugdu ikki at síggja, at húsaognin Kelduskákið var skrásett, og eingin av bilunum hjá Trivnaðardeplinum, sum vóru keyptir, árini 2016 til 2018, var skrásettur.

Almannaverkið greiddi frá, at tey í juni 2018 sendu Gjaldstovuni skjøl at skráseta fyri bygningar og akfør keypt í 2017 og áðrenn. Í juli 2019 vóru skjølini fyri akfør, keypt í 2018, send Gjaldstovuni.

Ognaryvirlitið dagført.

Í august 2020 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Almannaverkið hevur fingið atgongd at skráseta ognir í Búskaparskipan landsins. Ognaryvirlitið yvir bygningar og akfør er dagført við árslok 2019.

Merking av akførum

Í rundskrivi frá Fíggjarmálaráðnum 21. februar 2011 er ásett, at øll akfør hjá landinum skulu verða týðiliga merkt við navninum á tí stovni, sum akfarið hoyrir undir ella við búmerki stovnsins. Akstovan hevur eftirlit við, at bilarnir verða merktir, og kann í heilt serligum førum loyva undantøkum.

Ikki øll akfør merkt.

Ikki allir bilarnir hjá Almannaverkinum vóru merktir, og tey høvdu søkt um nøkur undantaksloyvi. Við árslok 2018 hevði Almannaverkið 97 akfør. Til tey var bert eitt undantaksloyvi givið, meðan fýra lógu til endaliga avgerð. Akstovan hevði skotið upp, at Fíggjarmálaráðið útgreinar krøvini til undantaksloyvi, tí var avgerðin ikki tikin.

Søla av vørum og tænastum

Inntøkurnar hjá Trivnaðardeplinum í 2018 vóru 13,9 mió.kr. Samlaðu inntøkurnar frá húsaleigu og gjøldum fyri umlætting vóru 8,2 mió.kr.

Vit samanhildu inntøkurnar frá húsaleigu við húsaleigugjaldið, sum var í yvirlitinum “Trivnaðardepilin – Eind 1: Fólk við autismu í Norðoyggjum”.

Trivnaðardepilin fær inntøkur frá lógarbundnu játtanini, § 16 í forsorgarlógini. Sambært Almannaverkinum verður kostnaðurin ásettur í samráð við eindarleiðaran, og er m.a. grundaður á, hvussu nógvir tímar verða settir av til borgaran. Kostnaðurin er ikki givin frammanundan, og kann broytast gjøgnum árið.

Í einum rokniarki, Almannaverkið hevur gjørt í sambandi við fíggjarlógararbeiðið 2018 fyri lógarbundnu játtanina á § 16, eru væntaðar útreiðslur til fyriskipanir sambært § 16 í forsorgarlógini.

Spurt, um Almannaverkið hevði eina endauppgerð, sum vísir, hvat inntøkurnar frá § 16 í forsorgarlógini í 2018 hava verið, svaraði Almannaverkið, at tað høvdu tey ikki, men inntøkurnar frá § 16 í forsorgarlógini svaraðu til ta tænastu, sum Trivnaðardepilin hevur veitt í 2018 til teir borgararnar.

Almannaverkið gjørdi fleiri rættingar í Búskaparskipanini við árslok 2018. Landsgrannskoðanin helt, at ein endauppgerð hevði bøtt um gjøgnumskygnið, tá ið stovnurin eisini umsitur lógarbundnu játtanina, sum rindar fyri § 16 fyriskipanirnar.

Endauppgerð hevði bøtt um gjøgnumskygnið.

Almannamálaráðið tekur undir við Landsgrannskoðanini, at ein endauppgerð hevði bøtt um gjøgnumskygnið.

Í august 2020 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at Almannaverkið hevur styrkt um mannagongdina, soleiðis *"at rokningar nú verða sendar talgilt til stovnsnummar 148517 Trygdarskipanir, mánaðarliga (frá juli mánað 2020).*

Rokningin er grundað á eina meting, sum eindarleiðarin hevur gjørt. Um broytingar eru í tørvinum hjá borgaranum, er tað eindarleiðarin, sum boðar fíggjardeildini frá, soleiðis at rokningarnar svara til tað, sum borgarin fær av tænastu.

Almannaverkið vil við ársenda gera eina avstemman, soleiðis at rokningarnar fyri borgararnar, sum eru skuldskrivaðar á stovnsnummar 148517 Trygdarskipanir, svara til ta tænastu, borgarin hevur fingið í árinum.

Um broytingar hava verið í tænastuni til borgaran, sum fíggjardeildin ikki hevur verið vitandi um, verður hetta reguleraðið ársenda."

7.9.3 Eind 1

Skipan av arbeiðstíð - at leggja vaktætlanir

Eindarleiðarar leggja vaktætlanir fyri sína eind, og torført kann vera at taka atlit at hvílutíðum, tí starvsfólk kunnu arbeiða í fleiri eindum. Sambært Almannaverkinum áttu hvílutíðarreglurnar at verði hildnar, men verandi skipan til vaktir megnaði ikki at handfara setanir, sum vóru í fleiri støðum. Arbeitt varð við einari loysn.

Verandi skipan til vaktir ikki nóg góð.

Stórur partur av meirtíðini eru vaktir, har fulltíðarsett starvsfólk sjálvi bjóða seg fram at taka eykavaktir, fyri vanliga tímaløn. Kallar leiðslan starvsfólk inn til eykavaktir, so rindar stovnurin yvirtíð fyri tað. Tað hevur verið vanlig mannagongd. Tá ið Landsgrannskoðanin grannskoðaði lønir í Eind 4 í 2017, vístu vit eisini á hesi viðurskifti.

Almannaverkið greiddi frá, at síðani grannskoðanina av Eind 4 hevði eitt fakfelag stevnt eftir yvirtíðargjaldi. Sambært Almannamálaráðnum var tað eitt mál millum samráðingarpartarnar, og spurningurin varð viðgjørdur millum Føroya Pedagogfelag, Lønardeildina í Fíggjarmálaráðnum og Almannaverkið.

Málið lagt fyri gerðarrætt.

Sambært landsstýrismanninum er málið nú lagt fyri Gerðarrættin.

KT-nýtsla og persónupplýsingar

Eindin skrásetir persónupplýsingar og viðkvæmar persónupplýsingar. Starvsfólkarúm við teldum eru á sambýlunum, og búfólkini hava ikki atgongd til rúmini.

Bæði sambýlini hava vakjandi náttarvakt, sum má ferðast millum felagsøkini. Náttarvaktin situr ikki inni hjá búfólkunum. Sum hjálp til at síggja ella hoyra, um onkur vaknar ella fer upp, hava tey keypt smábarnaalarmar, harav ein hevur myndatól. Myndirnar verða ikki goymdar, og avvarðandi hava givið munnligt loyvi.

Smábarnaalarmar við video tiknir úr nýtslu.

Síðani Landsgrannskoðanin var á vitjan hevur Almannaverkið sett seg í samband við Dátueftirlitið fyri at fáa greiðu á, um smábarnaalarmar, serliga við myndatóli, eru fevndir av persónsdatalógini. Niðurstøðan var, at slíkir smábarnaalarmar við videotóli ikki skuldu nýtast. Alarmarnir vóru alt fyri eitt sløktir og tiknir úr nýtslu.

7.9.4 Uppfylging av grannskoðan, Eind 4

Í seinastu frágreiðingum umrøddu vit grannskoðan av Trivnaðartænastum, serliga Eind 4.

Vardir bústaðir

Forsorgarlógin er broytt gjøgnum tíðirnar. Í 2013 varð heimildin at skipa bústovnar sambært § 16 broytt, og § 27 um bú- og viðgerðartilboð varð sett í lógina. § 27 heimilar at veita persónum við ávísum brekum ella víðfevndum sosialum trupulleikum tilboð á bú- og viðgerðarstovnum og á stovnslíknandi fyriskipanum. Um einki nøktandi tilboð kann veitast í Føroyum, kann persónur fáa tilboð uttanlands.

Í § 32 er heimild at veita persónum, ið bera ávís brek ella hava víðfevndar sosialar trupulleikar, vardan bústað, eisini nevnd sambýli.

Sambært § 16, stk. 2, í forsorgarlógini ásetir landsstýrismaðurin "*nærri reglur um trygdarfyriskipanir á nevndu stovnum og skyldu at veita hesi tilboð til persónar*,

1. *sum sambært rættarúrskurði skulu sinniskannast,*
2. *sum sambært rættarúrskurði ella dómi skulu setast í vardan bústað ella vera undir eftirliti, undir hesum við møguleika fyri fyrisitingarliga at verða settir í vardan bústað, ella*
3. *sum treyt fyri ákæruafturtøku ella royndarleysgeving verða settir í vardan bústað, ella vera undir eftirliti, undir hesum við møguleika fyri fyrisitingarliga at verða settir í vardan bústað."*

Eingin kunngerð var lýst sambært § 16, stk. 2.

Eingin kunngerð lýst.

Almannaverkið helt tað vera átrokandi, at reglur vórðu gjørdar viðvíkjandi trygdarfyriskipanum í vardum bústøðum og viðvíkjandi skyldu at veita tilboð til persónar, sum verða dømdir at vera undir eftirliti av Almannaverkinum ella at verða settir í vardan bústað.

Í august 2017 greiddi landsstýrismaðurin frá, at Almannamálaráðið var í holt við at gera nýggja lóggávu um almannahjálp, tænastur, rættartrygd og tvingsil. Landsstýrismaðurin ætlaði at leggja lógaruppskotið fyri Løgtingið í tingsetuni, og at lóggávan skuldi fáa virknað frá 1. januar 2019.

Sambært landsstýrismanninum var endamálið við nýggju lóggávuni m.a. at tryggja rættindini hjá borgarum, sum bera brek. Í sambandi við nýggju lóggávuna skuldu kunngerðir, heimilaðar í verandi forsorgarlóg, endurskoðast og nýggjar kunngerðir skuldu orðast.

Nýggj lóg um almannatrygd og tænastur er samtykt.

Í august 2020 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at 1. januar 2021 kemur Ll. nr. 72/2020 "um almannatrygd og tænastur" í gildi. Sambært § 49, stk. 1, hevur Almannaverkið skyldu til at veita sosialnámsfrøðiliga viðgerð og fyribils bústað sambært § 45 ella vardan bústað sambært § 46 til persónar, ið lúka somu treytir, ið vóru nevndar í omanfyrinevndu § 16, stk. 2, í áður galdandi forsorgarlógini (móttøkuskylda). Sambært § 49, stk. 3, ásetir landsstýrismaðurin nærri reglur um sosialnámsfrøðiliga viðgerð, ætlan, samstarv og samskipan við aðrar myndugleikar o.a. Hetta arbeiðið er farið í gongd og verður eftir ætlan liðugt til ársskiftið.

Sambært § 50, stk. 1, í lógini kunnu fyribils bústaðir sambært § 45 og vardir bústaðir sambært § 46 skipast sum tryggjað búfyriskipan. Sambært § 51, stk. 4, ásetir landsstýrismaðurin nærri reglur um skipan og góðkenning av tryggjaðum búfyriskipanum, umframt nærri reglur um treytir, gildistíð, uppihald og karmar kring tryggjaðar búfyriskipanir. Sambært landsstýrismanninum er arbeiðið farið í gongd og verður eftir ætlan liðugt til ársskiftið.

Skipan av bústovnum

Áðrenn 2013 vórðu bústovnar skipaðir eftir kunngerð, sum hevði heimild í § 16, stk. 2 og 3 í forsorgarlógini. Í 2013 varð § 16 orðað av nýggjum, og § 27 sett í lógina. Landsstýrismaðurin skuldi sambært stk. 5 áseta nærri reglur um virksemi, upptøku og gjald,

og um treytir fyri at veita tilboð uttanlands. Eingin kunngerð var lýst. Almannaverkið helt tað vera átrokandi, at reglur vórðu ásettar.

Kunngerðin frá 2005 um bústovnar hevði heimild í tágaldandi reglum í § 16, stk. 2, í lóg "um skipan av bústovnum". Íbúgvarnir á bústovnunum bera víttfevnandi brek, og sambært Almannaverkinum fylgir stovnurin kunngerðini, tó at hon treingir til dagføringar.

Í august 2017 greiddi landsstýrismaðurin frá, at umskipanin av bústovnum til sambýli hekk ikki saman við broytingum í forsorgarlógini, men saman við, at løgtingslóg "um uppihald á stovni" varð sett úr gildi. Broytingar eru síðani gjørdar í forsorgarlógini. Verandi kunngerðir vórðu ikki dagførdar, men nýggjar kunngerðir fóru sambært landsstýrismanninum at verða settar í gildi samstundis, sum nýggj lóggáva varð sett í gildi.

Í august 2019 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Almannamálaráðið hevði raðfest arbeiðið við vælferðarpakkanum, og hevði í sambandi við lógarsmíðið lagt seg eftir at hava greiðar og neyvar reglur í lóggávuni. Uppskotið til løgtingslóg um almannatrygd og vælferð hevði neyvari ásetingar um ymisk bústaðartilboð, endamálið við bútilboðunum, hvussu bútilboð kunnu skipast og um innihald og skipan av tænastum á bústaðnum.

Við uppskotinum skuldi landsstýrismaðurin fáa heimild til at áseta nærri reglur um m.a. áseting av húsaleigu, nær húsaleigan kann lækkast, grundað á inntøkuviðurskifti leigarans, felags útreiðslur, foreldragjald, leigureglur og reglur um skilhald. Sambært landsstýrismanninum var arbeiðið við reglunum byrjað, men fór at verða raðfest, tá lóggávan var samtykt. Vælferðarpakkin datt burtur, tá ið tingárið endaði.

Nýggj lóg um almannatrygd og tænastur er samtykt.

Í august 2020 hevur landsstýrismaðurin víst á, at 1. januar 2021 kemur Ll. nr. 72/2020 "um almannatrygd og tænastur" í gildi. Sambært § 48 í lógini ásetir landsstýrismaðurin reglur um áseting av húsaleigu. Arbeiðið við kunngerðini er farið í gongd og verður væntandi liðugt til ársskifti.

Sambýli

Í august 2017 ásannaði Almannamálaráðið, at tað vóru ikki nóg nágreiniligar ásetingar um eftirlitsskyldu í verandi regluverki, og at kunngerðirnar vóru ikki dagførdar samsvarandi samanleggingunum av stovnum o.ø. Sambært landsstýrismanninum fóru reglur um eftirlit at verða settar í nýggju lóggávuna, soleiðis at tað bleiv greitt, hvør hevði eftirlitsskylduna, og hvat eftirlitið skuldi fevna um. Kærumøguleikar fóru eisini at verða í nýggju lóggávuni.

Arbeiðið við kunngerðini er farið í gongd.

Í august 2020 hevur landsstýrismaðurin víst á, at 1. januar 2021 kemur Ll. nr. 72/2020 "um almannatrygd og tænastur" í gildi. Sambært § 69 í lógini hevur landsstýrismaðurin eftirlit. Sambært stk. 2, kann landsstýrismaðurin áseta nærri reglur um eftirlit. Arbeiðið við kunngerðini er farið í gongd og verður væntandi liðugt til ársskifti.

7.10 Kassaeftirlit á Vón og Virkni (LG 2019/212-0216)

Landsgrannskoðanin hevur verið á ófráboðaðum kassaeftirliti á verkstaðnum Vón og Verkhúsinum Virkni.

Verkstaðið Vón

Landsgrannskoðanin hevði onkrar smávegis viðmerkingar til umsitingina av kassunum, og Almannaverkið hevur boðað frá, at tey fara at heita á leiðsluna um at skráseta allar hendingarnar í kassunum rættstundis. Almannaverkið hevur dagført skrivligu mannagongdirnar.

Sølan í kantinuni er kontant ella við gjaldkorti, og í handlinum er eisini møguligt at keypa upp á rokning. Sølan hevur verið vaksandi, í 2019 var hon oman fyri 900 t.kr., og størstu inntøkurnar eru av jólasøluni.

Á eftirlitsdegnum samsvaraði upptaldi peningurin ikki við kontantsøluna sambært kassastrimlinum. Sambært Almannaverkinum kemur tað fyri, at bland kemur ímillum skrásetingina av kontantsølu og sølu við gjaldkorti. Fyri at finna kontantsøluna, draga tey tí inngjøldini við gjaldkortum frá samlaðu søluni. Í kassanum lá eisini ein seðil við óskrásettum søluupphæddum.

Landsgrannskoðanin heldur, at hátturin at gera søluna upp kann geva óvissur í mun til rættleikan av kontantsøluni. Vit mæltu til, at sølan verður tøppað í kassaapparatið sohvørt, og at øll søla verður skrásett rættstundis og neyvt. Sambært landsstýrismanninum hevur Almannaverkið viðgjørt málið innanhýsis og víst á týdningin av, at øll søla skal tøppast inn beinanvegin og neyvt fyri at minka um møguligar feilir.

Verkhúsið Virkni
Landsgrannskoðanin taldi kontanta peningin og samanhelt hann við kontantsølu sambært kassastrimli. Einki var at finnast at.

Verkhúsið Virkni hevur skrivligar mannagongdir fyri umsiting av kassanum. Havandi í huga, at sølan í handlinum ikki er høvuðsuppgávan hjá Virkni, og at sølan ikki ber virksemið hjá stovninum, heldur Landsgrannskoðanin, at umsitingin er nøktandi.

7.11 Felagskassar (LG 2019/212-0216)

Almannamálaráðið heitti í 2019 á Landsgrannskoðanina um at grannskoða felagskassarnar hjá sambýlum undir Trivnaðartænastum. Endamálið við felagskassunum er, at búfólkini skulu rinda tað, sum vanligi raksturin av sambýlinum kostar. Størstu útreiðslurnar eru til mat og drykkjuvørur. Nærri reglur um hvussu felagskassarnir skulu skipast eru í kunngerð og rundskrivi. Peningurin skal nýtast við skili, og vanlig krøv eru til roknskap og grannskoðan.

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapirnar fyrstu ferð fyri roknskaparárið 2019. Frágreiðing um grannskoðanina er í serstakari frágreiðing, ið er latin Almannaverkinum og Almannamálaráðnum.

Sum heild eru útreiðslur og inngjøld røtt, men feilir eru, sum Almannaverkið hevur rættað ella fer at rætta í 2020. Landsgrannskoðanin hevur mælt til, at Almannaverkið skipar soleiðis fyri, at feilir ikki koma fyri, ella verða rættaðir í røttum ári. Roknskaparligir feilir og konteringsfeilir minka um virðið av upplýsingunum, sum rakstrarroknskapirnir kunnu og skulu geva.

Fíggjarstøðurnar helst ikki rættar.

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað fíggjarstøðurnar hjá felagskassunum við at spyrja Almannaverkið um upphæddirnar eru rættar, og vit bóðu um kontuavrit fyri peningastovnskontur pr. 31. desember 2019. Flestu upphæddirnar í fíggjarstøðuni eru óbroyttar frá tí, at roknskapirnir hjá felagskassunum vóru lisnir inn í Búskaparskipan landsins. Landsgrannskoðanin hevur ikki fingið øll kontuavritini fyri peningastovnskonturnar, og avritini, sum vit fingu, stemma ikki við upphæddirnar í roknskapunum. Vit kunnu tí ikki sanna, at fíggjarstøðurnar hjá felagskassunum pr. 31. desember 2019 eru rættar.

7.12 Vanlig forsorg (LG 2014/212-0217)

Síðani nítiárini hava skiftandi landsstýrismenn í almannamálum boðað frá, at teir arbeiddu við nýggjari lóggávu, og at øll almannalóggávan fór at verða lagað til føroysk nútíðarviðurskifti.

Nýggj lóg um almannatrygd og tænastur er samtykt.

Løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2020 "um almannatrygd og tænastur" kemur í gildi 1. januar 2021. Samstundis fer lov nr. 56 af 15. marts 1967 for Færøerne om offentlig forsorg úr gildi.

7.13 Forsorgarhjálp vegna arbeiðsloysi (LG 2019/212-0217)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað Arbeiðsloysisforsorg á høvuðskontu 12.21.7.01, undirkontu 07 við grundarlagi í forsorgarlógini við tilhoyrandi kunngerðum og innanhýsis mannagongdum hjá Almannaverkinum.

Endamálið við at veita fyribils fíggjarliga hjálp er at forða fyri, at lívskorini hjá persóni og familju hansara versna munandi, tá ið tey í eitt skifti ikki eru før fyri at vinna sær og sínum til uppihalds. Treytirnar eru tær somu, bæði tá ið søkt verður um hjálp vegna eina almannahending og arbeiðsloysi.

Við stakroyndum kannaðu vit nøkur útgjøld í 2018. Vit kannaðu, hvussu Almannaverkið tryggjar sær, at móttakarar lúka treytirnar at fáa fyribilsveitingar, og um útgoldnu upphæddirnar eru rættar sambært lóg og kunngerð.

Lógargrundarlag

Ásetingar fyri fyribilshjálp til uppihald eru í forsorgarlógini Lbk. nr. 100/1988. Almannaverkið hevur gjørt vegleiðingar og mannagongdir til viðgerð av umsóknum um forsorgarhjálp.

Fyribilsveiting er heimilað í § 9 í forsorgarlógini, og í stk. 2, nr. 1-6 eru ásetingar um, hvussu stuðulin verður veittur, t.e. eftir: forsyrgjaraskyldu mótvegis børnum, um persónur býr einsamallur ella er sambúgvandi og eftir aldri á persóni. Hevur umsøkjari fleiri enn 2 børn at uppihalda, kann hann fáa hægri veiting í avmarkað tíðarskeið. Eisini er møguligt at fáa bústaðarískoyti til hægri bústaðarútreiðslur, um persónur hevur tørv á bústaði av ávísum slagi vegna djúptøknar sálarligar trupulleikar, sosialar trupulleikar ella likamligt brek. Støddin á hækkaðu veitingini verður ásett við heimild í K. nr. 13/2013 "um ískoyti til høgar bústaðarútreiðslur".

Fyribilsveiting er ein føst upphædd, sum er skattskyldug, og er ætlað til mat, klæði og fastar útreiðslur. Hægra veitingin til forsyrgjarar av børnum skal eisini nøkta tørvin hjá børnunum til mat, klæði, frítíðarítriv o.t.

Fyri at umsøkjari skal kunna fáa fyribilshjálp, skulu hann og hjúnafelagin hava troytt sínar arbeiðsmøguleikar. Nærri útgreiningar um tað eru í § 10 í forsorgarlógini. Talan kann m.a. vera um vantandi arbeiðsmøguleikar ella tiltøk sambært lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk, læknaváttan um at viðkomandi er óarbeiðsførur ella vantandi barnaansing.

Útbúgving

Høvuðsreglan er, at forsorgarhjálp kann ikki veitast fólki, sum eru undir útbúgving, men undantøk eru heimilað. Sambært K. nr. 139/1997 "um forsorgarhjálp til fólk undir útbúgving" kann fyribilshjálp veitast, um persónur: 1) tørvar stuðul orsakað av sjúku, barnsburði, føðing, hjúnaskilnað, arbeiðsloysi ella aðrari almannahending, 2) hevur fingið játtað farloyvi frá útbúgvingarstaðnum, ella 3) sum áðrenn arbeiðsloysi hevur

havt fulltíðararbeiði, og hevur útbúgvið seg í frítíð sínari. Afturat tí skal umsøkjari lúka vanligu treytirnar fyri at móttaka forsorgarhjálp.

Virknisvenjing
Virknisvenjing verður sett í verk eftir Ll. nr. 63/2012 "um arbeiðsfremjandi tiltøk". Lógin fevnir um tiltøk, sum stuðla undir einum virknum arbeiðslívi hjá persónum, sum hava ella kunnu fáa trupulleikar við at varðveita tilknýtið til arbeiðsmarknaðin. Lógin fevnir eisini um tiltøk, sum fyribyrgja avleiðingar av langtíðarfráveru frá arbeiði vegna arbeiðsloysi, sjúku e.ø. Persónar, sum sambært § 9 í forsorgarlógini fáa veiting vegna arbeiðsloysi, sjúku ella aðrar trupulleikar eru fevndir av lógini.

Persónur, sum fær fyribilsforsorg vegna arbeiðsloysi, hevur skyldu til at taka av tilboði um virknisvenjing e.ø. Persónur, sum fær fyribilsforsorg vegna sjúku ella aðrar broytingar í sínum viðurskiftum, hevur skyldu at taka av tilboði, um tað kann sameinast við sjúku ella aðrar trupulleikar hjá viðkomandi.

Virknisvenjing er eitt arbeiðstilboð á einum almennum ella privatum arbeiðsplássi ella eitt styttri arbeiðsrættað skeið. Tilboðið kann verða játtað í mesta lagi 6 mánaðir í senn, men vanliga ikki longri enn 3 mánaðir, og skal verða sett í verk í seinasta lagi, tá ið persónur hevur fingið forsorg vegna arbeiðsloysið í 6 samanhangandi mánaðir.

Ogn av týdningi
Ein fyritreyt fyri fíggjarligari hjálp eftir forsorgarlógini er, at hvørki umsøkjari ella hjúnafelagi eiga ogn av týdningi. Undantaksvís kann síggjast burtur frá minni ogn, sum kann varðveitast við atliti at bústaðar-, vinnu- ella útbúgvingarendamáli. Persónar, sum eiga ogn, ið kann nøkta fíggjarliga tørvin, skulu brúka ognina, áðrenn hjálp verður veitt eftir forsorgarlógini.

Tíðarskeið
Sambært § 12 í forsorgarlógini skal ein meting gerast av, um onnur hjálp skal veitast, í seinasta lagi tríggjar mánaðir eftir at fyribilshjálpin var játtað. Tá verður atlit tikið at, um persónurin lýkur treytirnar fyri fyriskipan sambært lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk.

Sambært leiðbeiningini um "fyribilsveiting – ásetan av veiting", eigur fyribilshjálp at halda uppat, so skjótt sum til ber. Um orsøkin er arbeiðsloysi, steðgar veitingin, tá ið persónurin er komin í arbeiði, ella hevur fingið ávíst arbeiði av ALS ella Almannaverkinum. Høvuðsreglan er, at fyribilshjálp í mesta lagi kann veitast í 12 mánaðir, tó eru tað framtíðarútlitini hjá tí einstaka, sum gera av, hvussu langt tíðarskeiðið verður.

Roknskapartøl
Almannaverkið skrásetir alla málsviðgerð í Heildarskipanini, og rindar peningin tann vegin. Upplýsingarnar verða lisnar beinleiðis úr Heildarskipanini í Búskaparskipan landsins.

Roknskapartøl fyri útgjøld og prosentvís minking frá 2017 til 2018:

Heiti	2017 *t.kr.*	2018 *t.kr.*	Minking *í %*
Einsamallur forsyrgjari (ei aldurstreyt)	6.972	5.012	28%
Sambúgvandi forsyrgjari (ei aldurstreyt)	6.873	3.194	54%
Einsamallur ikki-forsyrgjari > = 25 ár	5.548	4.037	27%
Sambúgvandi ikki-forsyrgjari > = 25 ár	2.934	2.246	23%
Ikki-sambúgvandi við foreldur < 25 ár	592	407	31%
Sambúgvandi við foreldur < 25 ár	541	481	11%
Hækkað veiting (ískoyti) > 2 børn	162	67	59%
Tilsamans	**23.622**	**15.444**	**35%**

Minkingin í útgjøldum samsvarar við hagtøl frá Hagstovu Føroya, sum ger arbeiðsloysið upp út frá skráum hjá Arbeiðsloysisskipanini og Almannaverkinum. Sambært

Hagstovuni var ársmiðaltalið fyri arbeiðsleys í 2017 og í 2018 ávikavist 790 og 623. Tað er ein minking á 21%.

Stuðul sambært § 9, stk. 2, í forsorgarlógini er ein fast ásett skattskyldug veiting. Hægsta dagpeningaupphæddin í 2018 var 4.022 kr. um vikuna til 1. mai, og 4.126 kr. eftir 1. mai.

Frá 2019 verður eftirlønargjald goldið.

Frá 2019 skulu 5% leggjast afturat upphæddini til bundna eftirløn. Eftirlønargjaldið verður ikki rindað til móttakaran, men um skattaskipanina verður tað flutt til ein góðkendan eftirlønarveitara, samstundis sum veitingin verður goldin.

Grannskoðan við stakroyndum

Sambært Heildarskipanini fingu 326 móttakarar tilsamans 15,3 mió.kr. í forsorgarhjálp vegna arbeiðsloysi.

Heildarskipanin er ein útgjaldsskipan, og kann tí ikki samanberast beinleiðis við roknskapin. Í Búskaparskipan landsins koma t.d. eisini inngjøld. Landsgrannskoðanin fekk eina avstemman, sum Almannaverkið hevur gjørt millum Heildarskipanina og Búskaparskipan landsins fyri roknskaparárið 2018. Einki var at finnast at.

Til nærri grannskoðan valdu vit 20 stakroyndir. Vit kannaðu um:

- umsókn er í málinum,
- málið er væl lýst/neyðugar upplýsingar eru í Heildarskipanini,
- útgoldna upphæddin er rætt,
- borgarin hevur fingið játtanarskriv,
- viðgerðin fylgir vegleiðingunum hjá Almannaverkinum, og
- um Almannaverkið hevur eftirkannað, at borgarin ikki eigur ogn samstundis, sum hann ella hon fær forsorg.

Játtan um fyribils forsorgarhjálp er ein fyribilsveiting, og skal sambært § 12 í forsorgarlógini takast upp til eftirmeting í seinasta lagi tríggjar mánaðir eftir, at hjálpin í fyrstu atløgu varð veitt. Í stakroyndunum sóu vit, at játtanirnar vara í ein til tríggjar mánaðir, at málsviðgerararnir hava støðugt samskifti við borgararnar, og at teir sum heild skjalprógva arbeiðið væl. Virknisvenjing sambært lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk, verður eisini bjóðað umsøkjarunum stutt eftir, at tey hava fingið játtað fyribils forsorgarhjálp.

Í Heildarskipanini eru upplýsingar tøkar um inntøku, ogn, hjúnalagsstøðu v.m. Um borgari fær inntøku, samstundis sum hann fyribils móttekur forsorgarhjálp, verður inntøkan mótroknað.

Flestu umsøkjararnir hava fingið játtanarskriv bæði í sambandi við játtan fyrstu ferð, og tá ið tíðarskeið eru longd. Almannaverkið sendir avrit av lógarreglunum, sum eru viðkomandi fyri móttakara, saman við fyrsta játtanarskrivinum. Samanumtikið halda vit, at málsviðgerðin og skjalfestingin av henni er góð.

7.14 Serligur stuðul sambært § 15a (LG 2019/212-0217)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað útgjald av serligum stuðli sambært § 15a í forsorgarlógini. Endamálið við grannskoðanini var at kanna, um útgjøldini vóru rætt, t.v.s. heimilað í lóg og kunngerð, og at málsviðgerðin var nøktandi skjalfest.

Forsorgarlógin § 15a ásetir, at landsstýrismaðurin kann áseta reglur um fíggjarligan stuðul til:

1) persónar, sum heilt ella partvíst eru í fyriskipan hjá tí almenna eftir §§ 27 og 32 í forsorgarlógini ella eftir aðrari lóggávu, og
2) persónar, sum eru varðhaldsfongslaðir ella settir í varðhaldslíknandi fyriskipan, sita dóm ella eru undir øðrum frælsisskerjandi fyriskipanum sambært dómi.

Við K. nr. 89/2016 "um fíggjarligan stuðul" hevur landsstýrismaðurin ásett nærri reglur um, hvat kann latast í fíggjarligum stuðli sambært §15a og til hvønn.

Stuðulsupphæddir

Persónar, sum eru í fyriskipan hjá tí almenna sambært § 27 ella § 32 í forsorgarlógini, fáa 22% av dagpeningaupphæddini, og persónar, sum eru í varðhaldi, sita dóm e.l. fáa 13%. Frá 1. mai 2019 vóru upphæddirnar ávikavist 4.031 kr. og 2.382 kr. um mánaðin. Fíggjarligur stuðul kann eisini veitast til heilsutrygdargjald og kringvarpsgjald.

Ein persónur í fyriskipan hjá tí almenna eftir § 27 ella § 32 kann eisini fáa stuðul til útreiðslurnar, ið standast av uppihaldinum, herundir útreiðslur til húsaleigu, egingjald o.a. Somuleiðis kann fíggjarligur stuðul veitast til rímiligar bústaðarútreiðslur hjá fólki í varðhaldi e.l., um persónurin ikki á annan hátt hevur møguleika at halda útreiðsluna. Sambært Almannaverkinum er tankin, at persónur skal ikki missa sín bústað, meðan hann ella hon er í varðhaldi ella situr dóm. Heimild er at veita fíggjarligan stuðul til verandi bústaðarútreiðslur, men ikki til avdráttir av húsalánum. Stuðulin verður tó ikki veittur, um dómurin er longri enn 12 mánaðir.

Fíggjarligur stuðul kann eisini veitast til eitt vanligt barnagjald, um persónur, sum verður settur í varðhald ella varðhaldslíknandi fyriskipan sambært dómi v.m., hevur uppihaldsskyldu mótvegis barni og veruliga uppiheldur tí.

Roknskapartøl

Serligur stuðul sambært § 15a verður goldin út um Heildarskipanina. Í Búskaparskipan landsins verður útreiðslan útgreinað, so skiljast kann ímillum § 15a, stk. 1, nr. 1 og § 15a, stk. 1, nr. 2. Eisini verður skilt ímillum stuðul til persónligan tørv og annan stuðul.

Roknskapartøl:

t.kr.

	2016	2017	2018	2019
§ 15a, nr. 1: stuðul til persónligan tørv 22%	39	772	1.279	1.334
§ 15a, nr. 1: annar stuðul	62	873	1.745	1.947
§ 15a, nr. 2: stuðul til persónligan tørv 13%	0	99	223	230
§ 15a, nr. 2: annar stuðul	0	156	103	0
Tilsamans	**101**	**1.899**	**3.350**	**3.511**

Úrslit av stakroyndum

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað útgjøld til fólk, ið vóru í fyriskipan e.a. hjá tí almenna og fólk, ið vóru varðhaldsfongslað e.l.

Í stakroyndunum kannaðu vit, um:

- málið er væl lýst, t.v.s. at neyðugar upplýsingar eru í Heildarskipanini,
- borgarin hevur fingið játtanarskriv,
- upphæddin er rætt sambært lóg ella kunngerð, og
- viðgerðin fylgir vegleiðingunum hjá Almannaverkinum.

Samanumtikið eru málsviðgerðirnar væl skjalfestar, tó vóru játtanarskriv ikki í øllum málunum. Almannaverkið hevur greitt frá, at umsóknir eru ikki kravdar fyri at fáa veiting eftir § 15a, tí Almannaverkið ger eina meting av, um borgarar, ið kunnu koma undir hesa fyriskipanina, hava tørv á hjálp til uppihald v.m.

Landsgrannskoðanin hevur eftirroknað upphæddirnar til persónligan tørv, og vit hava einki at finnast at.

Stuðul verður ikki veittur til rímiligar bústaðarútreiðslur, um persónur fær dóm, ið er longri enn 12 mánaðir. Annars ger Almannaverkið eina tørvsmeting, har tey taka atlit at tørvinum hjá borgarum, og um útlit eru fyri, at støðan hjá viðkomandi kann broytast eftir eina tíð. Almannaverkið vísti á, at tey hava gott samstarv við Kriminalforsorgina, sum kunnar persónar, ið fáa dóm, um møguleikan at søkja um serligan stuðul. Í teimum stakroyndunum vóru bæði umsóknir og játtanir í málunum.

7.15 Hjálparamboð v.m. § 18 (LG 2019/212-0217)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað játtanina til hjálparamboð v.m. Heimild til hjálparamboð er í § 18 í forsorgarlógini. Vit kannaðu um roknskapurin er rættur, t.v.s. at útreiðslurnar hava heimild í lóg og kunngerð, um málsviðgerðin er nøktandi skjalfest, og kunnaðu okkum nærri um skipanina við hjálparamboðum v.m.

Játtanin er á høvuðskontu 12.21.7.01, undirkontu 06. “Hjálparamboð v.m. § 18” og er til stuðul til persónlig hjálparráð og hjálparamboð til láns sambært § 18b, keyp av bili sambært § 18d og broytingar í heiminum sambært § 18e.

Í 2019 vóru 31 mió.kr. brúktar.

Hjálparamboð v.m.

Í hugtakinum hjálparamboð verður vanliga skilt ímillum persónlig hjálparráð, hjálpartól, bilar v.m. og bústaðarbroytingar. Hjálpartól kunnu endurnýtast, og tí lænir Hjálpartóla-miðstøðin tey út til borgarar.

Almannaverkið kann játta persónum, ið hava varandi niðursettan førleika, ið er til munandi ampa viðvíkjandi samferðslu, arbeiði ella útbúgving, stuðul til bil.

Almannaverkið kann veita stuðul til neyðugar bústaðarbroytingar, sum gera ein bústað betur egnaðan hjá borgara. Neyðugar broytingar eru serlig atkomuviðurskifti og at laga umstøðurnar til hjálpartól so sum lyftur, koyristólar o.l.

Lógargrundarlag o.a.

Hjálparráð og -tól

Almannaverkið letur persónum við virkistarni stuðul til hjálparráð, sum eru neyðug fyri at kunna vera í arbeiði, fyri munandi at bøta um varandi avleiðingar av sjúku/breki, ella at lætta munandi um gerandisdagin í heiminum.

Persónar, ið eru 18 ár og eldri, kunnu fáa stuðul til hjálparráð, meirútreiðslur til serkost og til serlig klædnapløgg. Vanligt innbúgv ella brúkslutir eru ikki at rokna sum hjálparráð. Stuðul verður ikki veittur til innbúgv og útgerð til persónar á stovni ella sambýli, undantikið persónlig tillagað hjálparráð, sum vanliga fylgja við borgaranum og einans verða brúkt av viðkomandi sjálvum.

Landsstýrismaðurin hevur ásett nærri reglur í K. nr. 18/2010 um, hvørji hjálparráð stuðul kann veitast til, nær hjálparráð verður veitt sum útlán, til rakstur, viðlíkahald, umvælingar og til endurnýggjanir av hjálparráðum. Eisini eru reglur um egingjøld og minstuupphæddir fyri hjálparráð.

Almannaverkið viðger allar umsóknir, og letur stuðul til bíligasta nøktandi hjálparráðið. Hjálpartólamiðstøðin umsitur útlánini, og skal skráseta øll hjálpartól, ið verða lænt út.

Tann, ið lænir hjálpartól, hevur skyldu at fara væl um tað og at lata tólið aftur til Hjálpartólamiðstøðina, tá ið tað ikki longur verður brúkt. Stovnurin hevur goymslustýring til skrásetingina.

Stuðul til bilar

Stuðul verður játtaður til nýggjan bil og bíligasta nøktandi bilin. Stuðul kann í ávísum førum veitast til meirútreiðslur fyri vektgjald o.a.

Stuðulin verður veittur sum rentufrítt lán, og er sambært K. nr. 16/2007 í mesta lagi 180 t.kr. Sambært kunngerðini verður upphæddin javnað hvørt ár. Í 2020 er lánsupphæddin, sambært Almannaverkinum, 205.764 kr. Lánini eru partvíst afturgjaldsskyldug og verða tryggjað við tinglýstum veðbrævi í bilinum.

Hevur persónur heilt serligt brek, sum ger, at tørvur er á dýrari bili, kann Almannaverkið veita rentu- og avdráttarfrítt lán til at gjalda munin ímillum hámarkið og dýrara bilin.

Tann, ið fær lán rindar lánið aftur eftir førleika. Er inntøka hansara ikki hægri enn tríggjar ferðir grundupphæddina fyri ein stakan fyritíðarpensjónist, rindar hann helvtina av lánsupphæddini aftur. Er inntøkan hægri, verður afturgjaldsskyldugi parturin hækkaður við 20% av tí, sum er oman fyri markið. Lánsparturin, ið verður niðurskrivaður minkar tá tilsvarandi. Afturgjaldsupphædd og niðurskriving eru 1/96 av lánsupphæddini um mánaðin. Soleiðis er lánið fult aftur- ella niðurgoldið eftir 8 árum.

Innrættan av bústaði

Heimild er at veita stuðul til innrættan av bústaði, um ein persónur hevur munandi og varandi avmarkaðan likamligan ella sálarligan førleika, og tá ið innrættanin er neyðug fyri at gera bústaðin betur egnaðan sum tilhald fyri viðkomandi.

Í heilt serligum førum, har stuðul til innrættan ikki er nøktandi, kann stuðul veitast til at gjalda útreiðslurnar av at útvega ein annan bústað. Hesin stuðulin kann tó bert veitast, um annar bústaður ikki kann ávísast, ið nøktar tørvin hjá viðkomandi.

Í K. nr. 15/2007 hevur landsstýrismaðurin ásett nærri reglur um at stuðul, sum virðisøkir ein bústað munandi, skal veitast sum rentu- og avdráttarfrítt lán, sum fellur til gjaldingar við eigaraskifti. Sama er galdandi, tá ið stuðul verður veittur til nýggjan bústað, og nýggi bústaðurin hevur hægri virði enn tann gamli. Lánini kunnu vera yvir 20 ár, um virðisøkingin minkar í tíðarskeiðnum. Sum trygd, skal veðbrævi tinglýsast í ognini.

Roknskapartøl

Roknskapartøl fyri høvuðskontu 12.21.7.01, undirkontu 06:

t.kr.

	2015	2016	2017	2018	2019
Hjálparamboð v.m.	21.782	25.589	27.327	28.223	31.079

Játtanin fyri 2019 var 28.742 t.kr., talan er tí um meirnýtslu á 2,3 mió.kr

Í roknskapinum hevur Almannaverkið ikki skilt ímillum sløg av hjálparamboðum. Undirkonta 06 fevnir um nettoútreiðslurnar av øllum hjálparamboðunum eftir § 18 í forsorgarlógini. Inngjøld fyri billán vera bókað inn á kontuna.

Roknskapartølini fyri játtanina á § 18 eru sundurgreinað í útgreining, sum er lagað til slag av hjálparamboði, t.e. 1) persónlig hjálparráð, 2) hjálpartól, 3) stuðul til bilar og 4) stuðul til broytingar í heiminum.

Landsgrannskoðanin hevur víst Almannaverkinum á nakrar konteringsfeilir. Feilirnir gera ikki samlaða roknskapin skeivan, men teir minka um virðið av upplýsingunum á útgreiningini. Við fyrivarni fyri skeivum konteringum, hava vit bólkað útgreinaðu roknskapartølini í tey 4 sløgini av hjálparamboðum v.m.:

t.kr.

Útgreiningar	Heiti	2019
3000-3027, 3030	Persónlig hjálparráð	9.959
3110-3130, 3160-3176	Hjálpartól	9.629
3029, 3153-3158	Stuðul til bilar, íroknað inngjøld fyri lán	6.130
3151	Broytingar í heiminum	2.353
3177, 3179	Tollur og MVG	3.008
	Tilsamans	**31.079**

Afturat hesum útreiðslunum eru bókaðar 23 t.kr., ið hoyra til stakútreiðslur á § 15 í forsorgarlógini.

Almannaverkið málsviðger allar umsóknir um hjálpartól v.m. í Heildarskipanini, og rindar útreiðslurnar til persónlig hjálparráð tann vegin.

Umsóknir um hjálpartól verða eisini málsviðgjørdar í Heildarskipanini, men tær játtanirnar hava ikki altíð eina útreiðslu við sær, tí játtaða tólið kann vera á goymslu. Tilsvarandi er ein útreiðsla til hjálpartól ikki neyðturviliga knýtt at einari játtan. Er tørvur á tólum at hava á goymsla, keypir Hjálpartólamiðstøðin tey.

Stuðul til bilar v.m. og útreiðslur til broytingar í heimum verða goldnar ígjøgnum Búskaparskipan landsins. Í báðum førum eigur játtan at vera knýtt at útreiðsluni.

Grannskoðan

Hjálparráð

Í 2019 vóru útreiðslurnar til persónlig hjálparráð oman fyri 9 mió.kr. Upphæddin er partvíst við MVG. Stakroyndirnar vístu, at tá ið hjálparráð eru keypt í Føroyum, er MVG íroknað og bókað saman við vøruni. Sambært Almannaverkinum innihalda útlendsku fakturarnir ikki MVG, og tað verður tí goldið fyri seg.

Ímillum útgjøld til hjálparráð valdu vit 20 stakroyndir til nærri kanning. Vit kannaðu, um umsóknir og játtanarskriv vóru í málunum, um tólini vóru hjálparráð sambært kunngerðini, og at málsviðgerðin fylgdi fyrisitingarlógini, t.d. greitt svar og kæruvegleiðing fyri partvíst játtaða umsókn.

Vit høvdu ikki stórvegis viðmerkingar, men í tveimum málum vóru ivamál í mun til vegleiðingarnar. Almannaverkið fer at kanna, hvussu slíkir feilir kunnu fyribyrgjast.

Hjálpartól

Hjálpartólamiðstøðin keypir vørur til goymsluna, tí er hvørt einstakt keyp av hjálpartóli ikki knýtt at einari játtan. Goymslan er ikki skrásett í Búskaparskipan landsins, men stovnurin brúkar Navision til goymslustýring.

Vit valdu nakrar stakroyndir á goymslulistanum, og saman við starvsfólkum á Hjálpartólamiðstøðini kannaðu vit rættleikan av listanum. Vit kannaðu eisini nøkur keyp av hjálpartólum, um tey vóru á goymsluni og førd á goymslulistan. Hjálpartólamiðstøðin skrásetir ikki øll keyp á goymsluna, serliga tá ið talan um vøru, ið er at meta sum nýtsluvøra, tí livitíðin er stutt. Tilhoyr til hjálpartól verða heldur ikki skrásett. Vit fingu ikki heilt greitt svar, hvørjar vørur verða skrásettar á goymsluni og hvørjar ikki verða skrásettar.

Starvsfólkini á goymsluni sýntust at hava gott skil á, hvar hjálpartólini vóru ella áttu at vera, tó staðfestu vit fleiri feilir. Onkur vøra varð ikki funnin, tí fakturin var ikki skrásettur, og onnur vøra á goymsluni stóð ikki á listanum. Í fleiri førum vóru vørumongdir í minus, tí hjálpartól vóru farin av goymsluni, uttan at keypini vóru førd í goymslulistan.

Goymslustýringin ikki nóg neyv.

Landsgrannskoðanin vísti á, at goymslustýringin er ikki nóg neyv til at tryggja virðini og hava greiðu á, hvar hjálpartólini eru. Treytað av, at konteringarnar eru rættar, hevur Hjálpartólamiðstøðin keypt hjálpartól fyri um 10 mió.kr. um árið seinastu árini.

Landsgrannskoðanin mælti til, at goymslan og goymslulistarnir vórðu dagførdir regluliga og í minsta lagi eina ferð um árið, og at Almannaverkið orðaði vegleiðing um, hvat skal skrásetast á goymslulistanum. Almannaverkið tekur undir við tilmælinum og fer at eftirhyggja skipanina, soleiðis at goymslustýringin verður neyvari. Tey meta, at arbeiðið kemur at vara til seint í 2021.

Landsgrannskoðanin bað um lista yvir hjálpartól, sum pr. 31. desember 2019 vóru úti hjá borgarum. Sambært Almannaverkinum kundi listin útvegast, men hann er nærum 1000 síður langur, og ivasamt er, hvussu neyvur hann er, tá ið goymslustýringin ikki er fullfíggjað. Landsgrannskoðanin hevur tí ikki eftirkannað rættleikan av listanum yvir hjálpartól, ið eru lænt út til borgarar.

Stuðul til bil v.m.

Í 2019 eru um 6 mió.kr. latnar í stuðli til bilar v.m. Sum skjalprógv fyri keypi av nýggjum bilum eru tinglýst pantibrøv løgd við bókingunum í Búskaparskipan landsins. Stuðul til keyp av bili er ikki altíð játtaður til eigaran, tí talan kann vera um játtan til barn, ið ber brek, og at annað av foreldrunum tí stendur fyri bilinum.

Landsgrannskoðanin kannaði 5 mál í Heildarskipanini. Øll málini vóru at finna, og vóru væl lýst við umsóknum, læknaváttanum, tilboðum upp á bilar, samskifti við borgararnar um bilin o.s.v.

Landsgrannskoðanin mælti til, at allir umsøkjarar, ið fáa játtað stuðul, fáa játtanarskriv. Sambært Almannaverkinum er fasta mannagongdin, at øll fáa játtanarskriv. Í teimum dømunum, har eingi játtanarskriv vóru, var talan um ein feil og eitt mál, ið ikki var endaliga liðugt.

Pantibrøv og annað viðkomandi er lagt við í Búskaparskipan landsins, tó at somu skjøl vóru í málinum í Heildarskipanini. Landsgrannskoðanin ivaðist í, um neyðugt var at leggja allar upplýsingarnar í Búskaparskipanina, tá ið somu upplýsingar eru í málinum í Heildarskipanini. Almannaverkið er samt við Landsgrannskoðanina, at tað er óneyðugt, og fer at hyggja nærri eftir mannagongdunum við tí fyri eyga at fyribyrgja hesum og samstundis varðveita sporføri.

Í 2019 vóru 863 t.kr. goldnar aftur fyri billán. TAKS heintar gjøldini inn og hevur heimild at panta, um ikki verður goldið til tíðina. Við árslok 2019 høvdu 87 persónar billán frá Almannaverkinum, tilsamans 10,5 mió.kr.

Broytingar í heimum

Útreiðslurnar til “Broytingar í heiminum” eru 2,4 mió.kr. Vit kannaðu 10 tær størstu upphæddirnar í 2019 í Heildarskipanini.

Landsgrannskoðanin heldur, at ein útreiðsla eigur at kunna knýtast at einari játtan við málsnummarið e.l. Har málsnummar var viðmerkt á rokningini, var skjótt at finna játtanina til útreiðsluna. Fleiri rokningar vístu til nummur, ið ikki funnust í Heildarskipanini. Sambært Almannaverkinum er tað tí, at Hjálpartólamiðstøðin brúkti journalskipanina Scanjour fram til 2019, tá ið alt var lagt um til Heildarskipanina. Flestu málini, sum Landsgrannskoðanin ikki fann í Heildarskipanini, vóru at finna í Scanjour.

Landsgrannskoðanin vísti á, at tað kann vera óheppið, at navnið á stuðulsmóttakara verður viðmerkt á einum bókingarskjali í Búskaparskipan landsins, tá ið talan er um stuðul vegna munandi og varandi avmarkaðan likamligan ella sálarligan førleika. Málsnummar ella persónnummar kann eisini eyðmerkja viðkomandi, men er tó meira

dulnevnt enn navnið, ið kann finnast aftur í almennum skráum. Almannaverkið er samt við Landsgrannskoðanina, og ætlar at tillaga mannagongdirnar soleiðis, at einans málsnummar verður viðmerkt.

Landsgrannskoðanin spurdi, hvussu nógvur stuðul er veittur sum lán í 2019, hvussu nógv lán eru veitt í tíðarskeiðnum 2015 til 2019, og hvat roknskaparliga virðið á lánunum var pr. 31. desember 2019. Almannaverkið svaraði, at tey hava ikki veitt rentufrí lán orsakað av virðisøking ella til skiftan av bústaði í mong ár. Nýggjasta dømi er frá 2006.

7.16 Arbeiðsfremjandi tiltøk (LG 2017/212-0217)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av høvuðskontu 12.21.7.02 "Arbeiðsfremjandi tiltøk".

Avtalað løn sambært § 24 í LI. nr. 63/2012
Landsgrannskoðanin kannaði nøkur mál viðvíkjandi løn, sum arbeiðstakarar kunnu avtala við fyritíðarpensjónistar, og sum er lægri enn sáttmálalønin. Nøkur mál snúðu seg um persónar í starvi í royndartíð, uttan løn. Landsgrannskoðanin ivast í, um heimild er fyri tí í fyriskipanini.

Tá ið ásett er í lógini, at avtala skal gerast í samráði við viðkomandi fakfelag, helt Landsgrannskoðanin tað vera umráðandi, at fakfeløg verða kunnað í hvørjum einstøkum føri.

Ógreitt, hvør skal kunna fakfeløgini.

Landsstýrismaðurin var samdur við Landsgrannskoðanina, at tað hevði týdning, at fakfeløg vórðu kunnað í hvørjum einstøkum føri. Men lógin fyriheldur seg ikki til, hvør hevur ábyrgd av at kunna fakfelagið í sambandi við eina avtalu. Landsstýrismaðurin fór at taka málið upp við Almannaverkið, soleiðis at fakfeløgini á ein smidligan hátt verða kunnað um einstøku avtalurnar.

Í august 2019 og aftur í 2020 segði landsstýrismaðurin, at einki nýtt er hent í málinum.

7.17 Fólkapensjón (LG 2018/212-0218)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av fólkapensjón og viðbøtur til ávísar pensjónistar fyri 2018.

Stakroyndir av fólkapensjón
Landsgrannskoðanin kannaði við stakroyndum útgjøld av fólkapensjón í Heildarskipanini, herundir um útgjaldið av pensjón og møguligum viðbótum er rætt, og hvussu long málsviðgerðartíðin er. Vit høvdu einki at finnast at útgjøldunum, men mæltu til, at øll skjøl eru í skipanini, soleiðis at málini kunnu lýsast til fulnar. Almannaverkið vísti á, at enn vóru øll skjølini í gomlu skipanini ikki flutt í Heildarskipanina.

Tó at hagtølini hjá Almannaverkinum vístu, at miðal viðgerðartíðin var 10 dagar, gekk ofta væl longri tíð, frá tí at umsókn um fólkapensjón var móttikin, til hon varð játtað. Almannaverkið greiddi frá, at ein orsøk var, at summir borgarar senda umsókn inn, langt áðrenn tey hava rætt til fyrstu veitingina. Í teimum førunum setir Almannaverkið umsóknirnar í bíðistøðu.

Heildarskipanin kann ikki senda fólkapensjónistum játtanarskriv fyrr, enn hon ger nú, av tí at upplýsingarnar í skrivinum hanga neyvt saman við útgjaldskoyringini av fyrsta útgjaldinum hjá viðkomandi pensjónisti.

Landsgrannskoðanin vísti á, at hóast borgari sendir umsókn inn, væl áðrenn hann fyllir 67 ár, nýtist stovnurin ikki at bíða við at svara. Almannaverkið eigur, sambært góðum fyrisitingarsiði at svara skjótast gjørligt.

Viðgerðartíðin viðhvørt upp í 3 mðr.

Vanliga má roknast við, at málsviðgerðartíð byrjar, tá ið borgari letur umsókn til myndugleikan, og endar, tá ið myndugleikin hevur svarað borgaranum. Eftir tí er veruliga viðgerðartíðin av fólkapensjón longri enn teir 10 dagarnir; viðhvørt upp í 3 mánaðir.

Í oktober 2019 greiddi Almannamálaráðið frá, at Almannaverkið heldur at tað ber til at broyta mannagongdina soleiðis; Almannaverkið sendir bræv og umsóknarskjal til borgaran og kunnar hann um, at hann hevur rætt til fólkapensjón mánaðin eftir, at hann fyllir 67 ár, treytað av at Almannaverkið hevur móttikið umsóknina áðrenn hann fyllir 67 ár. Samstundis verður borgarin kunnaður um, at hann fær skrivligt svar upp á móttikna umsókn mánaðin frammanundan, pensjónin verður útgoldin.

Í august 2020 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Almannaverkið er ikki komið á mál við at fremja hesa broyting.

Brotviðbót

Brotviðbót verður rindað teimum, ið vóru í skipanini áðrenn 28. desember 2015, og sum ikki fingu fulla upphædd frá Samhaldsfasta, tá ið fólkapensjónin varð skerd. Um tey fingu minni útgoldið, eftir at grundupphæddin til fólkapensjónina varð lækkað, høvdu tey rætt til brotviðbót.

Útgjaldið frá Samhaldsfasta hækkaði til 4.145 kr. frá 1. januar 2018, harumframt hækkaði útgjaldið aftur í mai 2018, afturvirkandi frá 1. januar 2018. Tí fingu pensjónistar eftirgoldið 2.000 kr., t.e. 400 kr. fyri hvønn mánað í fimm mánaðir.

Afturvirkandi broytingin kann hava havt við sær ávirkan á brotviðbótina hjá nøkrum pensjónistum, tí tað ávirkar útrokningargrundarlagið, umframt at viðbótin sambært Ll. nr. 164/2015, § 3, stk. 4, fellur burtur, tá ið árliga viðbótin er minni enn 1/40 av grundupphæddini.

Millum stakroyndirnar vit kannaðu, fingu tveir fólkapensjónistar brotviðbót. Hjá øðrum steðgaði útgjaldið av brotviðbót 1. oktober 2018. Spurt, hvussu tey ætla at viðgera málið, tá ið pensjónin fyri 2018 verður eftirroknað, svaraði Almannaverkið, at brotviðbótin verður ikki eftirroknað. Grundgevingin er, at hækkaða útgjaldið er viðurlag, sum Almannaverkið skuldi gjalda út, tó at TAKS umsitur Samhaldsfasta.

Í oktober 2019 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at av misgáum steðgaði útgjaldið ikki í mai. Tá ið Almannaverkið varnaðist tað í september 2018, vóru allar viðkomandi útgjaldingar steðgaðar beinanvegin. Samlaða kravið var tá 90 t.kr. Kravt varð tó ikki inn aftur afturvirkandi, tí at talan var um feil hjá Almannaverkinum.

7.18 Fyritíðarpensjón (LG 2019/212-0218)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað fyritíðarpensjónir fyri 2019.

Fyritíðarpensjónir verða goldnar við heimild í Ll. nr. 48/1999 “um almannapensjónir o.a.”

Roknskapartøl 2014 til 2019, býtt á hægstu, miðal og lægstu fyritíðarpensjónir, avlamisveitingar og læknaváttanir:

t.kr.

	2014	2015	2016	2017	2018	2019
Hægsta fyritíðarpensjón	148.685	149.772	160.504	166.745	167.813	178.836
Miðal fyritíðarpensjón	76.775	70.139	66.277	61.833	59.302	53.069
Lægsta fyritíðarpensjón	34.445	32.027	29.482	26.637	27.473	25.814
Avlamisveiting	3.657	4.008	3.926	3.656	3.572	3.799
Læknaváttanir	1.119	1.089	952	1.018	588	1.058
Tilsamans	**264.682**	**257.034**	**261.141**	**259.888**	**258.749**	**262.576**

Tal av fyritíðarpensjónistum 2014 til 2019, sambært fíggjarlógum:

	2014	2015	2016	2017	2018	2019
Hægsta fyritíðarpensjón	901	931	986	1032	1134	1050
Miðal fyritíðarpensjón	737	711	651	591	554	563
Lægsta fyritíðarpensjón	338	330	309	276	270	290
Avlamisveiting	113	119	118	110	104	110
Tilsamans	**2089**	**2091**	**2064**	**2009**	**2062**	**2013**

Avstemman av skipanum

Almannaverkið hevur stemmað av millum Búskaparskipan landsins og Heildarskipanina viðvíkjandi hægstu fyritíðarpensjón, miðal fyritíðarpensjón og lægstu fyritíðarpensjón. Einki var at finnast at.

Stakroyndir

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað, um pensjónsupphæddirnar v.m. eru rættar. Eisini kannaðu vit, um viðgerðartíðirnar eru innan fyri tær freistir, ið Almannaverkið hevur sett sær.

Vit høvdu einki at finnast at útrokningunum av pensjónum, tó vístu vit á, at málsviðgerðartíðin hevur ikki verið í samsvari við reglurnar hjá Almannaverkinum.

Viðgerðartíð

Almannaverkið hevur sum mál at svara umsóknum um fyritíðarpensjón innan tríggjar mánaðir. Hagtølini hjá Almannaverkinum vísa, at miðal viðgerðartíðin er 45 dagar.

Long viðgerðartíð.

Okkara stakroyndir vístu, at í nógvum málum ganga væl fleiri enn 45 dagar, frá tí at umsókn er móttikin, til hon er játtað. Í fleiri førum var viðgerðartíðin væl longri enn 3 mánaðir, og í miðal var hon yvir eitt ár.

Almannaverkið er samt við Landsgrannskoðanini, at málsviðgerðartíðin byrjar, tá ið borgari letur myndugleikanum umsókn og endar, tá ið myndugleikin hevur svarað. Almannaverkið hevur tó ikki ávirkan á viðgerðartíðina, tá ið neyðugt er at fáa læknaváttanir og aðrar frágreiðingar frá myndugleikum, sum kunnu taka langa tíð.

Í sambandi við at Landsgrannskoðanin hevur reist málið um viðgerðartíðir, hevur Almannaverkið gjørt av at kanna, um tað er møguligt at upplýsa neyvari svartíðir, sum geva borgarunum betri hóming av, hvat tann samlaða málsviðgerðartíðin er.

Almannaverkið vísir á, at stovnurin hevur ta yvirskipaðu meginreglu, at borgarar fáa bræv við kunning, um munandi seinkingar eru í viðgerðartíðini, eitt nú vegna viðurskifti inni á Almannaverkinum.

Í mai 2020 hevur landsstýrismaðurin í almannamálum greitt frá, at mannagongdir hjá Almannaverkinum í fyritíðarpensjónsmálum eru broyttar við tí endamáli at stytta málsviðgerðartíðina. Í nøkrum málum hevur tað víst seg, at bíðitíðin eftir heilsulýsing frá kommunulækna hevur verið ov long.

Sambært landsstýrismanninum verður tað soleiðis í framtíðini, at tá ið kommunulækni ikki heldur sínar skyldur mótvegis borgara og mótvegis Almannaverkinum, fer Almannaverkið at senda fráboðan til landslæknan, ið er eftirlitsmyndugleiki hjá kommunulæknum og hevur ábyrgd av at tryggja, at læknar halda sínar lógarfestu skyldur at skriva læknaváttanir innan ásetta freist.

Almannaverkið fer at kunna borgarar um seinking.

Landsstýrismaðurin leggur afturat, at Almannaverkið fer samstundis at geva borgaranum neyvari kunning um orsøkina til eina møguliga seinking og nærri kunning um, nær eitt mál kann væntast at verða avgreitt. Higartil hevur tað verið soleiðis, at borgarin er kunnaður, tá ið ein lækni hevur fingið áminningarskriv.

8. Uttanríkis- og vinnumál

8.1 Uttanríkis- og vinnumálaráðið (LG 2016/213-0111)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin m.a. tímaskráseting hjá starvsfólkum í Uttanríkis- og vinnumálaráðnum. Ráðið arbeiddi tá við at bøta um mannagongdina.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið greiddi í september 2019 frá, at ráðið hevði arbeitt miðvíst fyri, at allar saldur vóru innanfyri ásettu mørkini. Av og á hendir tó, at onkur salda kemur út um ásettu mørkini. Tá avtalar ráðið við starvsfólk, hvussu saldan skal avviklast.

Í august 2020 hevur Uttanríkis- og vinnumálaráðið greitt frá, at seinasta ár var arbeitt við at endurskoða roknskaparreglugerðina, men neyðugt er at endurskoða reglugerðina enn eina ferð eftir, at málsøkjabýtið er broytt. Ætlanin er, at hetta arbeiðið skal vera liðugt í heyst (2020).

8.2 Jarðfeingi (LG 2017/213-0321)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Jarðfeingi.

Roknskaparreglugerðin var ikki góðkend. Fyri tænastur, ið stovnurin ger fyri feløg og stovnar í Føroyum, var samsýningin tímaløn hjá starvsfólki +110%. Taksturin fyri granskingararbeiðið er 890 kr./tíman. Landsgrannskoðanin mælti til at áseta í roknskaparreglugerðini, hvussu prísásetingin verður gjørd.

Roknskaparreglugerðin er enn ikki góðkend.

Í august 2018 kunnaði Uttanríkis- og vinnumálaráðið um, at ráðið hevði umrøtt málið við Jarðfeingi, og Jarðfeingi tók undir við at seta takstirnar í roknskaparreglugerðina.

Í uppskotinum um roknskaparreglugerð, sum ráðið fekk, stóð: "*Samsýningar fyri veittar tænastur verða í høvuðsheitum ásettar við støði í tímalønum hjá starvsfólkum, ið veita tænasturnar, og einum gjaldi til felags útreiðslur hjá stovninum. Samsýningarnar kunnu tó vera hægri, t.d. í summum granskingarverkætlanum, har ein felags tímasatsur verður avtalaður fyri allar partarnar í verkætlanini".*

Í august 2020 hevur Umhvørvis- og vinnumálaráðið boðað frá, at ráðið fer at taka málið uppaftur við Jarðfeingi.

KT-viðurskifti
Jarðfeingi hevði gjørt eina váðameting, ið ikki var heilt liðug, og var í holt við at verkseta hana. Sambært stjóranum var dátusavnið tað mest kritiska. Dáturnar viðvíkjandi boringum liggja hjá KT Landsins. Savnið av lutum var í kjallaranum hjá Jarðfeingi.

Upplýsingarnar hjá Jarðfeingi eru viðkvæmar, men tey hava ongar viðkvæmar persónupplýsingar.

Í september 2019 kunnaði Uttanríkis- og vinnumálaráðið um, at arbeitt hevði verið við váðametingini, men verksetingararbeiðið hevði verið tarnað.

Í august 2020 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Jarðfeingi í 2020 hevur innlimað seg í Trygdarpakkan hjá Landsneti, sum m.a. umfatar KT-grannskoðan. Landsnet hevur í juli 2020 framt KT-skoðan hjá Jarðfeingi. Jarðfeingi fekk nøkur tilmæli og avtalað var, at tey verða avgreidd innan november í ár, tá ið uppfylgjandi KT-skoðan verður.

8.3 Sjóvinnustýrið (LG 2015/206-0351)

Í 2018 kunnaði Uttanríkis- og vinnumálaráðið um, at Sjóvinnustýrið húsaðist nú í skrivstovuhølum í Tórshavn. Ætlanin var at byggja nýggj skrivstovuhøli til stovnin í Vágum. Verklagslóg var samtykt, og 5 mió.kr. vóru játtaðar í 2018 og eftir ætlan 4,9 mió.kr. í 2019, tilsamans 9,9 mió.kr. Landsverk stóð fyri byggiverkætlanini, og eftir ætlan varð bygningurin klárur at flyta inn í á heysti 2019.

Byggingin av nýggjum hølum í Vágum hevur drigið út.

Sambært Uttanríkis- og vinnumálaráðnum var upprunaliga ætlanin, at Sjóvinnustýrið skuldi flyta inn í nýbygd hølir í Vágum á heysti 2019. Landsverk hevði í samstarvi við Vága kommunu og Sjóvinnustýrið funnið eina hóskandi staðseting av skrivstovubygninginum. Yvirtøkan av økinum dróg út, m.a. tí, at kommunan átti ein part, og ein privatur ánari átti ein part av økinum, sum ætlanin var at nýta til staðsetingina av bygninginum til Sjóvinnustýrið. Kommunan fór tí undir at ognartaka henda partin av økinum, og tók tað drúgvari tíð enn fyrst mett.

Í august 2020 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at í vár umrøddu Landsverk og Vága kommuna at gera eitt gerðabýti soleiðis, at landið yvirtekur grundøkið, har bygningurin til Sjóvinnustýrið skal staðsetast, og kommunan yvirtekur grótbrotið í Sandavági frá Landsverki. Umbýtið verður væntandi avgreitt í heyst (2020).

Umhvørvis- og vinnumálaráðið kunnar eisini um, at ætlanin er at bjóða verkætlanina út í heyst.

8.4 Loyvisnevndin (LG 2019/213-0371)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað Loyvisnevndina. Nevndin umsitur skeinkiloyvi til rúsdrekka o.a., og játtanin er á høvuðskontu 13.37.1.08.

Roknskapartølini seinastu 5 árini:

t.kr.

Heiti	2015	2016	2017	2018	2019
Lønir v.m.	94	87	84	113	106
Keyp av vørum og tænastum	92	99	102	73	81
Tilsamans	**186**	**186**	**186**	**186**	**186**
Játtan	*186*	*186*	*186*	*186*	*186*

Inntøkurnar frá loyvisgjøldum eru á § 20, á høvuðskontu 20.52.3.10 “Aðrar inntøkur”. Inntøkutølini 2015 til 2019:

t.kr.

Heiti	2015	2016	2017	2018	2019
Rakstrarinntøkur	-170	-135	-260	-210	-320

Lógargrundarlag og heimildir
Loyvisnevndin virkar eftir § 8 í Ll. nr. 183/2018 “um matstovuvirksemi og gistingarhús-virksemi (Matstovulógin)” og kunngerð nr. 3/2020.

Í Loyvisnevndini eru 5 limir, ið landsstýrismaðurin í vinnumálum tilnevnir. Nevndin hevur fund áleið eina ferð um mánaðin og eftir tørvi, t.e. tá ið umsóknir koma inn; serliga nógvar umsóknir um hissiniloyvi koma um jólini og um summarið.

Við nýggju matstovulógini frá 2018, varð skilnaður gjørdur ímillum uppgávurnar hjá Loyvisnevndini og uppgávurnar hjá Løgregluni. Rúsdrekkalógin fevnir nú bert um inn-flutning, avgjøld og framleiðslu, meðan matstovulógin fevnir um skeinkiloyvi. Sambært matstovulógini savnar Loyvisnevndin saman upplýsingar, metir um málini og tekur avgerðir.

Journal
Skrivarin hevur einsamallur atgongd til talgildu journalina, og skjøl frá tíðini undan talgildu journalskipanini eru goymd í læstum arkivskápi. Skjølini frá tíðarskeiðnum áðrenn talgildu journalina eru ikki øll at finna, tí tá vórðu skjølini flutt frá formanni til formann. Harímillum eru eisini skjøl, ið eru grundarlag undir loyvum. Nevndin hevur roynt at byrgt fyri misskiljingum og ivamálum, tá ið loyvini eru endurnýggjað, við at gera alt av nýggjum. Øll nýggj skjøl verða útvegað talgilt.

KT
Loyvisnevndin hevur ikki orðaðan KT-politikk, og hevur ikki gjørt ætlan fyri, hvussu nevndin skal lúka krøvini í nýggju persóndátulógini.

Eingin KT-politikkur orðaður.

Landsgrannskoðanin vísti á, at allir stovnar landsins skulu lúka treytirnar í rund-skrivinum um KT-trygd frá 29. apríl 2019, umframt ásetingar í trygdarkunngerðini og mælti til, at Loyvisnevndin setir í verk KT-trygd eftir galdandi reglum.

Samsýningar
Nevndarlimirnir verða løntir sambært semju millum Tænastumannafelagið og Fíggjar-málaráðið. Forkvinnan fær dupulta fundarsamsýning, umframt tímaløn fyri at fyrireika mál, skriva fundarfrágreiðing o.s.fr. Landsgrannskoðanin hevur samanborið skrásetta tímatalið við avroknaða tímatalið 30. oktober til 11. desember 2018. Einki var at finnast at.

Ein annar nevndarlimur fær eisini dupulta fundarsamsýning fyri at hyggja at og meta um roknskapirnar hjá feløgum, sum søkja. Løgregluumboðini í nevndini fáa ikki fundar-samsýning.

Eitt starvsfólk hjá Rúsdrekkasøluni er skrivari hjá nevndini. Virksemið hjá nevndini er ikki nóg nógv til at hava sín egna skrivara. Samsýningin til skrivaran verður goldin, við at Loyvisnevndin rindar Rúsdrekkasøluni tað, ið við ársenda er eftir av játtanini, tá ið alt virksemið hjá nevndini er goldið.

Rúsdrekkasølan fær tað, ið er eftir av játtanini við ársenda.

Sambært Vinnumálaráðnum varð í 2011 avtalað munnliga, at Rúsdrekkasøla Landsins skuldi umsita játtanina til Loyvisnevndina, og at avlopið skuldi latast Rúsdrekkasøluni sum samsýning. Í 2020 hevur Umhvørvis- og vinnumálaráðið við skrivi formliga lagt umsitingina av Loyvisnevndini til Rúsdrekkasølu landsins.

8.5 Vinnustovnurin (LG 2017/213-0371)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Vinnustovninum.

Vinnustovnurin hevði ikki formligt loyvi frá Fíggjarmálaráðnum at nýta egna búskaparskipan, men hevði í februar 2018 søkt um loyvi.

Sambært Uttanríkis- og vinnumálaráðnum hevði Vinnustovnurin ikki frætt frá Gjaldstovuni enn. Ráðið legði afturat, at skipanin hjá landinum megnar ikki at umsita allar skrásetingarnar hjá Vinnustovninum, og var tað upprunaliga í samstarvi við Gjaldstovuna, at Vinnustovnurin hevði egna búskaparskipan til debitorar. Tó var eingin formlig avtala gjørd tá.

Í august 2020 hevur Umhvørvis- og vinnumálaráðið greitt frá, at samskifti hevur verið við Gjaldstovuna, men Gjaldstovan hevur ikki vent aftur um eina niðurstøðu.

8.6 Skráseting Føroya (LG 2017/213-0371)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Skráseting Føroya. Sambært § 159 í ársroknskaparlógini[24] hevur Skráseting Føroya skyldu, í ávísan mun, at gera kanningar av teimum ársfrásagnum, sum vinnufeløg lata inn.

Landsgrannskoðanin spurdi Skráseting Føroya, hvørjar mannagongdir stovnurin hevði í sambandi við, at feløg lata ársfrásagnir inn og í sambandi við gjøgnumgongd av ársfrásagnum. Eisini kannaðu vit, hvussu viðgerðin fór fram, tá ið eitt felag hevur frávalt grannskoðan sambært § 135 í ársroknskaparlógini.

Talgilding hevði ikki fingið ta positivu ávirkan á tænastustøðið, sum Vinnustovnurin væntaði í 2013, tí at Skrásetingin hevði nýtt nógva arbeiðsorku at fáa skipanina XBRL at virka eftir ætlan. Tað hevði havt við sær, at aðrar uppgávur vóru útsettar.

Skrivligu mannagongdirnar hjá Skrásetingini til roknskapareftirlit vóru enn mangulfullar og vórðu tí heldur ikki brúktar í sambandi við eftirlitsarbeiðið. Sambært Skrásetingini vóru mannagongdirnar gjørdar lidnar í 2017.

Í 2019 vórðu somu mannagongdir enn nýttar.

Í august 2020 hevur Umhvørvis- og vinnumálaráðið kunnað um, at skrivligu mannagongdirnar til roknskapareftirlit eru gjørdar. Mannagongdirnar eru brúktar til eftirlitið av ársfrásagnunum 2018 og eru brúktar síðan.

Kanning av ársfrásagnum

Sambært § 161 í ársroknskaparlógini kann Skráseting Føroya taka ymisk stig mótvegis feløgum, hvørs ársfrásagnir ikki lúka allar treytir. Skráseting Føroya hevur valt ein fyribyrgjandi leist, har stovnurin luttekur á aðalfundum hjá grannskoðarunum, har stovnurin tekur manglarnar í innlatnu ársfrásagnunum upp undir einum og eisini vegleiðir um krøv o.a. Sambært Uttanríkis- og vinnumálaráðnum tók ráðið undir við hesum leistinum.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið vísti á, at í sambandi við at farið varð undir arbeiðið at talgilda umsitingina (Talgildu Føroyar), var tað eitt ynski/krav frá ráðnum, at Skrásetingin fór undir miðvísa talgilding av sínum tænastum. Tað skuldi lætta um hjá vinnulívi og borgarum, tí tey frameftir kunnu avgreiða síni viðurskifti á netinum sum t.d. at stovna feløg og lata inn ársfrásagnir.

[24] Anordning nr. 1355/2007

Uttanríkis- og vinnumálaráðið helt, at Skrásetingin sjálvsagt átti at hava neyðuga arbeiðsorku at fremja lógarkravda eftirlitið, men viðurkendi, at játtanarhátturin møguliga eisini hevði verið ein forðing fyri tí, við tað at stovnurin var 100% inntøkufíggjaður, og nógv arbeiðsorka og peningalig orka var í hesum tíðarskeiðnum farin til talgildingararbeiðið.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið harmaðist um, at arbeiðið, sum í veruleikanum skuldi rationalisera umsitingina og frígeva orku, hevði verið so arbeiðskrevjandi, at orkan til eftirlit viknaði heldur enn at styrkna. Tá ið XBRL-innlatingin fór at virka, skuldi eftirlitið blivið meira automatiserað og harvið effektivari, umframt at orka varð frígivin til betri uppfylging.

Í august 2020 hevur Umhvørvis- og vinnumálaráðið greitt frá, at arbeiðið við virkisskránni, ið er partur av Talgildu Føroyum-verkætlanini, tíverri liggur stilt vegna vantandi fígging.

Skráseting Føroya heldur, at XBRL-innlatingin hevur virkað nøktandi síðani á sumri 2019, og ynskir at arbeiða víðari við upplýsingartilfarinum. Í juli 2020 var fundur millum TAKS, Hagstovuna, Landsbankan og Skráseting Føroya um XBRL. Fasa 1 í verkætlanini um XBRL er komin so gott sum á mál, við tað at virkir nú lata roknskap inn umvegis XBRL.

Hildið verður, at klárt er at fara undir fasu 2, sum er at góðskutryggja dáturnar. Avgjørt er at seta ein verkætlanarbólk, sum kann føra fasu 2 á mál. Bólkurin verður væntandi kallaður inn til ein forfund síðst í august, har umboð fyri Grannskoðarafelagið eisini luttekur.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið kunnar eisini um, at Skráseting Føroya hevur harumframt sett gongd á arbeiðið at fáa nakrar teigar í XBRL-fílunum valideraðar við innlating av ársroknskapum og XBRL-fílum, soleiðis at fílur kunnu steðgast sjálvvirkandi, um teigarnir vísa seg at vera skeivir ella samsvar ikki er ímillum upplýsingar í ársfrásøgnini og XBRL-fíluna. Teir teigar, arbeitt verður við í fyrstu atløgu, eru, at roknskaparárið er rætt, at dagfesting fyri aðalfund er útfylt, at navn á fundarstjóra er upplýst, at ogn og skuld samsvara, umframt møgulig leiðsluátekning. Arbeiðið er í gongd og verður eftir ætlan liðugt í oktober 2020.

Frával av grannskoðan

Síðani 1. januar 2009 kunnu smærri vinnufeløg, sum uppfylla ávísar treytir, frávelja grannskoðan. Í viðmerkingunum til lógarbroytingina stendur m.a., at tað kann lætta um byrðarnar hjá íverksetarum og smáum feløgum, og áhugin fyri hesum hevur verið vaksandi seinastu árini.

Í 2016 kom møguleikin at stovna íverksetarafeløg (ÍVF), t.e. feløg við lægri krøvum til stovnsfæ. 97 tílík feløg vóru stovnað í 2017. Nógv bendi á, at fleiri valdu at stovna íverksetarafelag heldur enn smápartafelag.

Skrásetingin helt tað vera sannlíkt, at góðskan á ársfrásagnum, sum ikki vórðu grannskoðaðar, var verri enn á teimum, ið vórðu grannskoðaðar. Einsæris vóru tær frásagnirnar smáar, og tí var váðin helst lítil. Vert var tó at leggja til merkis, at fleiri feløg nú frávaldu grannskoðan, og tí var samanlagdi váðin ikki heilt ótýðandi.

Samlaða talið av skrásettum feløgum og talið av teimum, ið hava frávalt grannskoðan:

Ár	Skrásett feløg tilsamans	Feløg, sum hava frávalt grannskoðan
2013	2720	577
2016	2795	1268
2020	3399	1750

Lutfalsliga nógvar viðmerkingar vóru hjá feløgum, sum høvdu frávalt grannskoðan. Skrásetingin valdi at kanna 60 feløg; av teimum vóru viðmerkingar til 40 ársfrásagnir um júst tey viðurskifti, ið viðvíkja frávali.

Landsgrannskoðanin vísti á, at svenska ríkisgrannskoðanin í 2017 gjørdi eina kanning av feløgum, ið høvdu valt grannskoðan frá, og kom til ta greiðu niðurstøðu at mæla myndugleikunum til at seta grannskoðanarskyldu aftur í gildi fyri øll feløg. Í Svøríki hava reglurnar um frával av grannskoðara verið galdandi síðani 2010.

Ein av grundgevingunum fyri at slaka í krøvum til m.a. grannskoðan, hevur verið, at tað skal vera lættari og bíligari hjá feløgum at virka. Tað er ivasamt, um sparingin hjá smærru feløgunum av at frávelja grannskoðan stendur mát við versnaðu góðskuna av innlætnu ársfrásagnunum, tá ið kanningin hjá grannskoðanarvirkinum vísir, at tað vóru lutfalsliga nógvir feilir í ársfrásagnum, har feløg hava frávalt grannskoðan.

Í juli 2018 greiddi Uttanríkis- og vinnumálaráðið frá, at Føroyar hava, á sama hátt sum onnur lond, arbeitt við at lætta um umsitingarligu byrðarnar hjá vinnuni. Eitt av tiltøkunum var at sleppa smærri vinnufyritøkum undan kravinum um grannskoðan.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið vísti á, at tey høvdu ov lítið av royndum til at staðfesta, um tað sama ger seg galdandi í Føroyum, sum í okkara grannalondum, har eftirlitið hevur víst á ónøgd við hesi feløg. Sambært ráðnum varð fylgt við gongdini, og um grannalondini fóru at herða lóggávuna fyri hesi feløg var sannlíkt, at vit eisini fóru at herða krøvini.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið fór at taka málið upp við Skrásetingina fyri at finna ein leist, har eftirlitið við hesum roknskapum og við íverksetarafeløgum varð styrkt. Samanumtikið helt Uttanríkis- og vinnumálaráðið, at tær avbjóðingar, sum hava verið við eftirlitinum av ársfrásagnum, vóru við at koma í rættlag.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið hevur í august 2020 greitt frá, at Skráseting Føroya gjørdi í 2018 eftirlit við 106 ársfrásagnum, harav 43 uttan grannskoðaraátekning. Av hesum 43 vóru 30, sum høvdu feilir, tað vil siga uml. 70%. Talan er um minni og størri feilir. Eftirlitið í 2018 varð gjørt av starvsfólki á Skrásetingini, sum tá vóru tvey í tali, umframt einum cand.merc.aud. lesandi, sum gjørdi uppgávu á økinum. Í 2019 gjørdi Skrásetingin eftirlit við 35 ársfrásagnum, harav 16 uttan grannskoðaraátekning. Sjey av hesum høvdu feilir, tað vil siga umleið 44%.

Úttrekk úr skipanini hjá Skráseting Føroya pr. 25. august 2020 vísir, at 3.399 feløg eru skrásett og 1.750 feløg hava frávalt grannskoðara.

Skrásetingin avmarkaða orku til eftirlit

Umhvørvis- og vinnumálaráðið leggur afturat, at Skráseting Føroya áður hevur miðað eftir at gera skipaðar stakroyndir av umleið 100 ársfrásagnum árliga, men avmarkað arbeiðsorka viðførir, at Skráseting Føroya hevur tikið avgerð um at taka um 30 ársfrásagnir árliga út til eftirlit. Tað svarar til áleið 1% av samlaðu innlatnu ársfrásagnunum árliga. Tað er eisini í tráð við praksis hjá danska Erhvervsstyrelsen. Í eftirlitinum verður roynt at raka so breitt, sum gjørligt. Mest sannlíkt er, at stakroyndirnar fara at fevna um 50% við grannskoðanarskyldu og 50% uttan grannskoðanarskyldu.

8.7 Rúsdrekkasøla landsins (LG 2018/213-0373)

Roknskaparreglugerðin frá 2007 er ikki dagførd.

Í august 2018 kunnaði Uttanríkis- og vinnumálaráðið um, at Rúsdrekkasølan arbeiddi við at dagføra roknskaparreglugerðina, sum var frá 2007.

Roknskaparreglugerðin er ikki dagførd.

Landsgrannskoðanin mælti til, at Rúsdrekkasølan steingir tíðarskeiðini í búskaparskipanini Navision samstundis, sum stovnurin rapporterar til Búskaparskipan landsins. Stovnurin svaraði, at tey vóru sjáldan klár at rapportera og lata tíðarskeiðini aftur, tá ið Gjaldstovan lat aftur fyri bókingum í Búskaparskipan landsins ímillum 8. og 10. í mánaðinum. Stovnurin legði afturat, at alt, sum skuldi skrásetast, var ikki avgreitt um tað mundi.

Landsgrannskoðanin mælti til at steingja tíðarskeiðini í Navision samstundis sum í Búskaparskipan landsins.

Í august 2018 greiddi Uttanríkis- og vinnumálaráðið frá, at tað var ein avbjóðing fyri fleiri stovnar, at Gjaldstovan lat mánaðarroknskapirnar aftur ov tíðliga. Rúsdrekkasølan hevði nógvar bókingar og hevði stóran tørv á at hava "rættar" mánaðir í bókhaldinum. Ein av stóru postunum var tolling, og uppgerðirnar/rokningarnar frá TAKS komu somikið seint, at Gjaldstovan hevði latið aftur fyri bókingum, tá ið uppgerðirnar komu. Tí rapporteraði Rúsdrekkasølan ein mánað afturút. Ráðið fór at umrøða nærri við Gjaldstovuna, hvørjir møguleikar vóru fyri, at mánaðarroknskapirnir kundu verða rættir hjá Gjaldstovuni og hjá Rúsdrekkasøluni.

Kassa- og goymslueftirlit

Seinasta árið hevur Landsgrannskoðanin verið á ófráboðaðum kassa- og goymslueftirlitum á nøkrum deildum hjá Rúsdrekkasølu landsins. Vit stemmaðu dagligu søluna av við bókhaldið og peningastovnskonturnar. Vit stemmaðu goymslurnar á sølustøðunum av við goymsluyvirlitið á høvuðskrivstovuni. Um ársskiftið gjørdu vit eftirlitisteljingar av høvuðsgoymsluni á Hjalla.

Kassarnir stemmaðu stórtsæð eftirlitsdagin, meðan nakrir munir vóru á goymslunum úti á deildunum.

8.8 Heilsufrøðiliga starvsstovan (LG 2017/213-0375)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur ásett í roknskaparreglugerðini, at keyp av størri lutum og tænastum skulu viðgerast í leiðslubólkinum. Einki størri keyp má gerast uttan við samtykki frá stjóranum, og stovnurin skal miða ímóti, at størri keyp byggja á tilboð.

Heilsufrøðiliga starvsstovan keypir sjáldan vørur ella tænastur, sum kosta meira enn 500 t.kr. Størri keyp eru ofta knýtt at vanligu veitarunum, og stovnurin hevði nýtt Keypsportalin einaferð.

Landsgrannskoðanin mælti til at fylgja reglunum um at bjóða størri keyp út á Keypsportalinum, at bjóða keyp út ímillum fleiri veitarar og at taka neyðug búskaparlig atlit.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið umrøddi málið við Heilsufrøðiligu starvsstovuna. Heilsufrøðiliga starvsstovan nýtir ymisk tól, sum eru verifiserað frá einum veitara. Tað er alt ov orkukrevjandi at skifta veitara og fáa alla útgerðina verifiseraða av nýggjum. Uttanríkis- og vinnumálaráðið fer at umrøða møguleikan at biðja um undantak frá reglunum um útboð við Heilsufrøðiligu starvsstovuna.

Í august 2020 hevur Umhvørvis- og vinnumálaráðið greitt frá, at ráðið hevur umrøtt málið við Heilsufrøðiligu starvsstovuna um at taka málið upp við Keypsportalin.

Aliskipanin
Heilsufrøðiliga starvsstovan hevði upprunaliga serstaka játtan til at gera og viðlíkahalda aliskipanina. Tann menningin er sprottin úr einari royndarverkætlan, sum var ein farsóttarfrøðilig kanning og økiskoppseting móti ILA í Føroyum. Verkætlanin, sum byrjaði í 2005, varð framd í samstarvi millum Landsdjóralæknan, Heilsufrøðiligu starvsstovuna og útlendskar kanningarstovur.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið greiddi frá, at tá ið farið varð undir verkætlanina "Basan av fiskasjúkum", varð eisini farið undir at menna eina skipan, sum skuldi taka ímóti upplýsingum frá alarum. Skipanin var vorðin so týðandi fyri eftirlitsarbeiðið í alivinnuni, at hon var vorðin kritisk. Skipanin er víðariment og útbygd til m.a. eisini at rapportera lúsatøl í aliringunum.

Sambært Uttanríkis- og vinnumálaráðnum hevði eingin serstøk játtan verið til økið síðani 2012. Eftir tað høvdu dagføringar verið gjørdar, tá ið Heilsufrøðiliga starvsstovan hevði havt fíggjarligt rásarúm til tess. Fortreytirnar gjørdu tað trupult at dagføra skipanina á skynsaman hátt. Aliskipanin er ein av hornasteinunum undir alivinnuni og er so mikið týðandi fyri umsitingina og eftirlitið av alivinnuni, at skipanin ikki má gerast óvirkin ella hava feilir.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið var av teirri áskoðan, at keypið kom undir undantøkini í rundskrivi um keyp av vørum og tænastum frá juli 2016, petti 6 *"tó ikki, um veitingin er størri enn 500 t.kr. u/MVG. Um veitingin er størri enn 500 t.kr. u/MVG, og mett verður, at uppgávan ikki er egnað til útboð, eigur at verða biðið um undantak, sí eisini petti 6."*

Uttanríkis- og vinnumálaráðið fór at mæla Heilsufrøðiligu starvsstovuni til at biðja Fíggjarmálaráðið um undantak og tók annars undir við, at farið varð undir samráðingar við fyritøkuna um lægri tímaprís.

Í september 2019 vísti Uttanríkis- og vinnumálaráðið á, at Heilsufrøðiliga starvsstovan er bundin at veitaranum, sum hevur ment aliskipanina. Higartil hevði ikki verið mett, at tað bar til og ei heldur loysti seg fíggjarliga at skifta veitara.

Heilsufrøðiliga starvsstovan nýtir framvegis sama veitara.

Inntøkur
Heilsufrøðiliga starvsstovan nevnir í roknskaparreglugerðini, hvørji inntøkusløg stovnurin hevur, men ikki nærri reglur um prísáseting v.m.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið var samt við Landsgrannskoðanini, at tað var ikki samsvar ímillum ásetingina í rundskrivinum og uppskotið til roknskaparreglugerð. Ráðið fór saman við Heilsufrøðiligu starvsstovuni at broyta ásetingina um inntøkur í samsvari við rundskrivið.

Í august 2020 hevur Umhvørvis- og vinnumálaráðið greitt frá, at Heilsufrøðiliga starvsstovan tekur gjøld fyri ymiskar tænastur og veitingar. Prísurin er ásettur í kunngerð. Tó áttu tey ymisku inntøkusløgini at framgingið av roknskaparreglugerðini. Hetta eigur at verða tikið við, tá ið roknskaparreglugerðin verður endurskoðað.

Søla millum deildir hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni
Heilsufrøðiliga starvsstovan helt tað vera greiðast at skráseta allar inntøkur sum sølu, serliga nú privat kanningarstova kappast við stovnin. Landsgrannskoðanin vísti á, at ov stórur umsetningur verður í landsroknskapinum, tá ið stovnurin bókar innanhýsis sølu og keyp, sum um talan var um sølu til onnur. Sambært kontuvegleiðingini skal innanvirkissøla og -keyp skrásetast á ávísa standardkontu fyri at eliminera innanhýsis

umsetning. Heilsufrøðiliga starvsstovan kunnaði um, at tað bar ikki til hjá teimum at bóka innanhýsis sølu og keyp, soleiðis at tann kontan kundi vera nullstillað hvønn mánað.

Landsgrannskoðanin mælti til, at stovnurin fann eina loysn, soleiðis at roknskapurin varð rættur, tá ið árið er av, t.d. við at regulera sølu og keyp við ársenda.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið helt, at eftirsum talan var um 1 mió.kr. av 10,8 mió.kr. í árligari sølu, var talan um eina lutfalsliga týðandi upphædd. Ráðið fór at taka upp við Heilsufrøðiligu starvsstovuna og Gjaldstovuna, hvussu tey á ein skynsaman hátt kundu fáa roknskapin rættari.

Í september 2019 greiddi Uttanríkis- og vinnumálaráðið frá, at innanhýsis søla verður framvegis faktureræd sum søla. Skipanin hjá Gjaldstovuni er ikki ment til tørvin at gera innanhýsis fakturar. Skuldi tað sæð rætt út, áttu hesir fakturar at verið bókaðir á t.d. 71 “Innanhýsis flyting millum almennar stovnar”. Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur gjørt sær eina mannagongd, sum er praktisk og skynsom í mun til arbeiðsorku.

9. Samferðslumál

9.1 Umvæling av almennum bygningum (LG 2019/217-0111)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað høvuðskontu 17.11.1.56 “Umvæling av almennum bygningum, løgujáttan”. Játtanin verður brúkt til at umvæla, viðlíkahalda og bjálva landsins bygningar.

Landsverk raðfestir umvælingar av almennum bygningum hvørt ár í mun til tørvin. Tá ið aðalráðini hava gjørt viðmerkingar til raðfestingarnar, setir Landsverk arbeiðini í verk. Í 2018 gjørdi Landsverk vegleiðingina um Markamót og viðlíkahaldsbýtið ímillum Landsverk og landsins stovnar.

Landsverk hevur gjørt vegleiðing um markamót.

Í juni 2020 hevur Fíggjarmálaráðið kunnað um, at ráðið heldur tað vera skilagott, at Landsverk hevur gjørt vegleiðingina, og at tað er týdningarmikið, at stovnar eru greiðir yvir, hvørjar viðlíkahaldsskyldur teir hava, og sum eiga at verða hildnar av teirra játtan.

Flytingar millum nærstandandi partar

Landsgrannskoðanin hevur fyrr reist spurningin um at spjaða fyrisitingarútreiðslur, og hevur eisini gjøgnum árini gjørt stovnar varugar við, at tað er ikki rætt at blanda fyrisitingarútreiðslur hjá einum stovni saman við øðrum játtanum, ið stovnurin umsitur.

Í ársfrágreiðingunum 2015 og 2016 umrøddi Landsgrannskoðanin undir almennu viðmerkingunum m.a., at flytingar frá løgujáttanum til Landsverk kundu roknast fyri at vera flytingar millum nærstandandi partar, og mælti til at gera reglur um hvørjar útreiðslur viðvíkjandi starvsfólkum hjá Landsverki kundu játtast av løgujáttanini.

Flytingar frá løgujáttanum til Landsverk eru flytingar millum nærstandandi partar.

Umframt játtanina til sjálvan stovnin umsitur Landsverk pengar, sum aðrir stovnar hava fingið játtaðar. Harvið kann Landsverk játta sær sjálvum pening, og er í tí høpinum nærstandandi partur.

Landsverk er samt við Landsgrannskoðanina, at leiðreglur eiga at verða gjørdar fyri, hvørjar útreiðslur kunnu takast við, og Landsverk fer at gera leiðreglur og seta tær í roknskaparreglugerðina.

Mælt til at gera reglur.

Fíggjarmálaráðið tekur undir við, at neyðugt er at gera leiðreglur fyri, hvørjar útreiðslur hjá Landsverki kunnu takast við í løgujáttanir, og hevur í juni 2020 kunnað um, at ráðið hevur fingið uppskot frá Landsverki til nýggja roknkskaparreglugerð, og at ráðið fer at tryggja sær, at nøktandi leiðreglur um tílíkar flytingar eru við í reglugerðini.

Útbjóðing

Arbeiðini eru ikki altíð boðin út, og Landsverk hevur m.a. víst á, at viðlíkahald er ikki sum nýbygging. Í gomlum bygningum koma oftast ókendar útreiðslur, sum kunnu verða 50% ella meira av kostnaðinum. Í slíkum førum heldur Landsverk, at tað sigur seg sjálvt, at arbeiðstakarar eru ikki áhugaðir í at bjóða. Óvissan, hvussu bygningar síggja út, eftir at umvæling er byrjað, er alt ov høg bæði fyri arbeiðstakarar og Landsverk.

Dýrari at umsita eitt útboð enn eitt arbeiði, sum er fyri tímatakst.

Royndirnar hjá Landsverki eru, at tað kostar nógv meira at umsita eitt útboð enn eitt arbeiðið, sum er fyri tímatakst, og at tað, sum Landsverk vildi spart, við at bjóða arbeiði út, fer út aftur í eykakostnaði og umsiting.

Landsverk vísir á, at eftirspurningurin eftir arbeiðsmegi er stórur fyri tíðina, tí velja veitarar sær tað, sum best loysir seg, t.e. sum oftast størri arbeiði. Viðlíkahaldsdeildin hjá Landsverki umsitur smærri verkætlanir, og deildin hevur ongantíð merkt ta gongdina meira enn nú. Í fleiri førum hava tey avlýst útboð og arbeiði vegna vantandi arbeiðsmegi.

Í juni 2020 hevur Fíggjarmálaráðið greitt frá, at sum meginreglu heldur ráðið, at verkætlanir eiga at verða bodnar út fyri at tryggja prís og kapping. Tað er serliga galdandi fyri størri viðlíkahaldsverkætlanir. Tað kemur tó meira enn so fyri, at t.d. verkætlanin er lítil, ella at hon er torfør at lýsa uttan órímiligan kostnað.

Fíggjarmálaráðið vísir á, at sambært frágreiðingini frá Landsgrannskoðanini og teimum fundum, sum ráðið hevur havt við Landsverk, er tað ráðsins fatan, at Landsverk við valdu arbeiðshættunum í stóran mun hevur tryggjað sær, at verkætlanirnar eru framdar til hóskandi dygd og kostnað.

Roknskaparviðurskifti v.m.

Roknskapartøl 2015 til 2019:

t.kr.

Heiti	2015	2016	2017	2018	2019
Lønir v.m.	2.569	0	125	0	3
Keyp av vørum og tænastum	931	9	5	5	4
Ymsar rakstrarútreiðslur	-3.500	-3.347	-4.298	-4.571	-4.439
Søla av vørum og tænastum	-1.873	0	-18	0	0
Bygging og løguframleiðsla	23.363	22.188	21.316	21.045	20.925
Innanh. flyt. ml. alm. stovn. (útr)	63	3.338	4.169	4.566	4.432
Tilsamans	**21.552**	**22.188**	**21.298**	**21.045**	**20.925**

Innanhýsis flytingar millum almennar stovnar (útr.) eru lønir og umsitingargjøld til Landsverk.

Trupult at fylgja bókingunum frá vøggu til grøv.

Skjalprógvini, sum Landsverk brúkar, ger tað sera trupult fylgja bókingunum frá vøggu til grøv. Landsverk er samt við Landsgrannskoðanini, at viðskiftaslóðin er ikki nóg gjøgnumskygd, og ætlar at bøta um tað, so lættari verður at knýta skjølini til bókingarnar.

Útreiðslur, býttar ímillum privat og alment, árini 2015 til 2019:

t.kr.

Bygging og løguframleiðsla	2015	2016	2017	2018	2019
Bygningar, privat	19.807	18.846	17.142	16.474	16.487
Bygningar, alment	3.545	3.343	4.174	4.427	4.437
Vegir, tunnl., havnir o.a., privat	6	0	0	0	0
Vegir, tunnl., havnir o.a., alment	5	0	0	144	2
Tilsamans	**23.363**	**22.188**	**21.316**	**21.045**	**20.925**

Samsýningarnar til Landsverk eru hækkaðar støðugt frá 2015 til 2019 í mun til samlaðu útreiðslurnar.

Landsverk hevur greitt frá, at afturat tí at lønirnar eru hækkaðar í tíðarskeiðnum, hevur stovnurin tilvitað uppraðfest prosjektleiðsluna. Nógvir smáir bygningar gera, at umsitingin gerst lutfalsliga kostnaðarmikil.

Verkætlanir

Vit kannaðu nakrar verkætlanir. Har tilboð ella sáttmálar vóru, samanbóru vit teir við roknskapartølini. Niðanfyri hava vit viðmerkingar til einstøku verkætlanirnar.

Føroya Fornminnissavn

Roknskapartøl 2015 til 2019:

t.kr.

Heiti	2015	2016	2017	2018	2019	Tilsamans
Bygningar, privat	97	1.438	432	1.070	485	3.522
Bygningar, alment	58	62	76	97	62	355
Tilsamans	**155**	**1.499**	**508**	**1.167**	**548**	**3.877**

Uppgávur ikki bodnar út.

Umvælingarnar, sum eru gjørdar eftir 2012 eru ikki bodnar út. Sambært Landsverki valdu tey út frá einum váðasjónarmiði at brúka sama arbeiðstakara við royndum við júst hesum arbeiðinum, av tí at talan er um gomul og óbøtilig virðir, og tann arbeiðstakarin hevur nomið sær serfrøði innan bygging á júst hesum stað.

Skúlaheimið í Klaksvík

Roknskapartøl 2015 til 2019:

t.kr.

Heiti	2015	2016	2017	2018	2019	Tilsamans
Bygningar, privat	674	1.975	1.141	1.249	1.064	6.102
Bygningar, alment	-67	80	76	37	110	236
Tilsamans	**607**	**2.055**	**1.216**	**1.286**	**1.174**	**6.338**

Landsgrannskoðanin fekk einans útbjóðingartilfar o.a. fyri 2013 og 2014 til grannskoðanina. Í 2014 var kostnaðurin væl hægri enn tilboðini.

Sambært Landsverki var umvælingararbeiðið partur av størri umvæling, og tey hava gjørt mest møguligt fyri at fáa tað avgreitt skjótast gjørligt. Arbeiðini vóru meira umfatandi, enn av fyrstantíð hildið. Avtalur um meirveitingar eru gjørdar munnliga á staðnum.

Landsgrannskoðanin fekk ikki skjalprógv fyri útbjóðing.

Sambært Landsverki hevur arkitektavirkið Fuglark bjóðað uppgávurnar 2016 til 2018 út, og skuldi Landsverk útvega útbjóðingartilfarið frá teimum. Landsgrannskoðanin hevur ikki fingið skjalprógv fyri útbjóðanina.

Í juni 2020 hevur Fíggjarmálaráðið greitt frá, at ráðið heldur, at allar avtalur um arbeiðstøkur, meirveitingar o.a. skulu skjalfestast. Ráðið heldur tað ikki vera í lagi, at Landsgrannskoðanin ikki hevur fingið skjalprógv fyri nevndu útbjóðing og fer at kanna málið nærri.

Suðuroyar sjúkrahús og røktarheim

Roknskapartøl 2015 til 2019:

t.kr.

Heiti	2015	2016	2017	2018	2019	Tilsamans
Bygningar, privat	705	1.988	551	776	1.273	5.293
Bygningar, alment	105	165	99	109	183	661
Tilsamans	**810**	**2.154**	**650**	**885**	**1.456**	**5.954**

Í 2016 og 2017 eru arbeiðini ikki boðin út alment, men sambært Landsverki royndu tey at fáa arbeiðsgevarar at geva bindandi boð. Tað var trupult, men tey, sum fingu uppgávurnar, játtaðu at gera arbeiðini eftir meting og annars eftir tímanýtslu.

Í 2018 góvu tveir arbeiðstakarar tilboð at leggja nýtt asfalt á parkeringsøkið. Ein fyritøka gav tilboð/meting av el-arbeiði.

Prosjekteringin er ikki boðin út. Landsverk helt tað var skynsamast fyri landskassan, at persónur búsitandi í Suðuroy tók arbeiðið og eftirlitið.

Mjørkadalur

Roknskapartøl fyri Mjørkadal 2015 til 2019:

t.kr.

Heiti	2015	2016	2017	2018	2019	Tilsamans
Bygningar, privat	1.264	1.014	696	1.054	471	4.499
Bygningar, alment	165	151	225	187	188	916
Tilsamans	1.429	1.165	921	1.241	658	5.415

Roknskapartøl fyri Kuplarnar á Sornfelli:

t.kr.

Heiti	2015	2016	2017	2018	2019	Tilsamans
Bygningar, privat	103	577	4	0	501	1.185
Bygningar, alment	81	96	143	4	88	412
Tilsamans	185	673	147	4	589	1.597

Landsverk yvirtók bygningarnar í 2014, og kendi einki til bygningarnar frammanundan.

Landsverk hevur brúkt somu fyritøku nógv í Mjørkadali og á Sornfelli, tí starvsfólk hjá fyritøkuni kendu bygningarnar. Fyritøkan raðfestir bygningarnar høgt, og er nóg stór til at taka teir framum, tá ið okkurt átrokandi er; góðskan er góð, og kostnaðurin rímiligur. Landsverk vísir á, at arbeiðini høvdu ikki verðið gjørd beinanvegin, um mannagongdin við forkanningum, prosjekti at bjóða út eftir, at rokna tilboð, taka støðu til tilboðini, góðkenningarskriv, og at arbeiðstakarin fyrst tá kundi sett tilfar í ordra, skuldi verið fylgd. Harvið hevði verðið neyðugt við útflyting, og upptakið av fylgiskaðum hevði verið stórt.

Tá ið arbeiðir, ið hava stórar óvissur, verða boðin út, verður sambært Landsverki lagt upp fyri hesum óvissum, umframt at eykaarbeiðini verða dýr. Alt í alt velja tey ta loysn, ið tey halda gevur mest fyri skattaborgarans pening.

Kringvarp Føroya

Roknskapartøl 2015 til 2019:

t.kr.

Heiti	2015	2016	2017	2018	2019	Tilsamans
Bygningar, privat	835	107	1.019	475	200	2.636
Bygningar, alment	0	26	2	125	89	242
Tilsamans	836	133	1.021	600	289	2.878

Í 2015 eru 835 t.kr. goldnar av hesari játtanini fyri ventilatión, sum er partur av tilboði frá arbeiðstakara um at um- og útbyggja Kringvarpshúsið, sum hevði egna løgujáttan.

Í 2017 eru 1.021 t.kr. goldnar fyri meirveitingar í sambandi við um- og útbygging av Kringvarpshúsinum. Sambært Landsverki eru arbeiðini ikki boðin út av nýggjum, tí tey eru framhald av verandi tilboðsarbeiði. Mentamálaráðið vildi ikki gjalda fyri hesar meir-útreiðslurnar, og tí valdi Landsverk at rinda tær av kontuni til umvæling av almennum bygningum.

Landsverk er samt við Landsgrannskoðanini, at tað er óheppið at brúka pening av hesari játtanini, tá onnur løgujáttan er til endamálið. Sambært Landsverki var talan um eina eldri ventilatiónsskipan, sum stóð til at skiftast út, og tí varð hildið skynsamast at skifta hana út, tá ið arbeiði við nýbygging alíkavæl var í gongd.

Í 2018 eru slakar 1,3 mió.kr. brúktar til tekjubelegning. Av teimum hevur Landsverk fakturerað góðar 680 t.kr. til Kringvarpið og mótroknað upphæddina í útreiðslum á Umvæling av almennum bygningum, tí er nettoupphæddin 600 t.kr.

Í oktober 2019 hevur Landsverk greitt frá, at avtalað var við Kringvarp Føroya um, at "Umvæling av almennum bygningum" skuldi rinda 600 t.kr., og at Kringvarpið skuldi rinda restina fyri at umvæla tekjuna.

Fíggjarmálaráðið er samt við Landsgrannskoðanina, at tað gruggar landsroknskapin, at útreiðslur viðvíkjandi einari og somu verkætlan verða spjaddar á ymiskar játtanir. Ráðið heldur, at sum meginregla skulu allar útreiðslur av einari verkætlan haldast av somu játtan. Er verklagslóg galdandi, skulu allar útreiðslur verða tiknar við í játtanina.

Tað gruggar landsroknskapin, at útreiðslur til somu verkætlan verða spjaddar á fleiri játtanir.

Samanumtikið um verkætlanir

Ein høvuðskonta er avgerandi parameturin í landsroknskapinum. Farið má ikki verða út um upphæddina, sum er játtað á høvuðskontu. Øðrvísi er t.d. við dimensjónini "verkætlan" í Búskaparskipan landsins.

Á høvuðskontuni "Umvæling av almennum bygningum" hevur Landsverk brúkt dimensjónina "verkætlan" í roknskapinum. Endamálið við at bóka á verkætlan er, at roknskaparlesarin veit, hvat hvør verkætlan kostar, tá ið hon er liðug. Um ein verkætlan kostar meira, enn budgetterað, skal meirútreiðslan kortini bókast á verkætlanina. Annars er meiningsleyst at nýta dimensjónina.

Roknskaparligu upplýsingarnar vísa, hvussu játtaði peningurin verður brúktur. Eisini kunnu upplýsingarnar samanberast við aðrar upplýsingar og geva roknskaparlesaranum neyva mynd av virkseminum, sum stovnurin hevur havt, og hvønn kostnað tað hevur havt við sær.

Landsgrannskoðanin hevur áður vístá, at tá ið útreiðslur til somu verkætlan verða bókaðar á ymisk verkætlanarnummur og á ymiskar játtanir, ber ikki til at siga, hvat ein umbygging/umvæling hevur kostað.

Tað ber ikki til at siga, hvat ein umvæling ella umbygging hevur kostað.

Avgerandi fyri at fáa ein rættan roknskap er, at alt, sum hoyrir til verkætlanina og einans tað, verður bókað á verkætlanina við røttum upphæddum og til rætta tíð. Annars er eingin nytta í verkætlanarroknskapum.

T.d. eru útreiðslur til at um- og útbyggja Kringvarpshúsini goldnar av trimum ymiskum játtanum, t.e. "Umvælingar av almennum bygningum", løgujáttan til Kringvarpið og rakstrarjáttan til Kringvarpið.

Landsgrannskoðanin hevur fleiri ferðir fyrr gjørt vart við, at tað forðar fyri gjøgnumskygni í landsroknskapinum, tá ið útreiðslur til umvælingar av bygningum landsins verða spjaddar á fleiri ymiskar játtanir.

Landsverk eru samt við Landsgrannskoðanina, at tað er ikki gott fyri gjøgnumskygnið at brúka játtanir frá fleiri stovnum, undir fleiri ráðum, men vísir samstundis á, at Landsverk hevur ikki nakra loysn upp á trupulleikan.

Í juni 2020 hevur Fíggjarmálaráðið boðað frá, at ráðið er samt við Landsgrannskoðanina, at tað gruggar landsroknskapin, at útreiðslur viðvíkjandi einari og somu verkætlan verða spjaddar á ymiskar játtanir. Fíggjarmálaráðið hevur tikið tílík mál upp við Landsverk, og er semja um, at útreiðslur sum meginregla ikki skulu haldast á fleiri játtanum. Ráðið fer at meta um, hvussu reglur kunnu ásetast, tá ið tað snýr seg um viðlíkahald og játtanir.

Niðurstøða

Arbeiðini, at umvæla almennar bygningar, eru í stóran mun ikki boðin út, og avtaluseðlar eru ikki altíð gjørdir. Viðskiftaslóðin er ikki nóg góð, tá ið samsýningarnar, sum Landsverk fær frá løgujáttanum, verða bókaðar eftir rokniørkum. Tað gruggar roknskapin, tá ið umvælingar/umbyggingar av einum bygningi verða goldnar av fleiri játtanum. Rokningar verða sendar frá einari verkætlan til aðra, ella til annan stovn.

9.2 Landsverk (LG 2019/217-0381)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað Landsverk. Landsverk hevur dagført roknskaparreglugerðina og sent hana til Fíggjarmálaráðið til góðkenningar.

Sambært Landsverki verða avtalur gjørdar um allar veitingar frá arbeiðstakarum, og tær verða goymdar í journal. Um avtala ikki fyriliggur, verður rokningin ikki goldin. Verkætlanirnar hjá Deildini fyri infrakervið verða nú stýrdar á sama hátt, sum verkætlanirnar hjá Byggideildini.

Fíggjardeildin gjøgnumgongur skuldarar, ognarar, peningastovnskontur o.l. hvønn mánað og váttar á kekklistar. Í mánaðarligu góðkenningini váttar stovnurin, at samsvar er ímillum egnu búskaparskipanina og Búskaparskipan landsins.

Roknskapartøl 2016 til 2019 fyri høvuðskontu 17.38.1.02 "Landsverk" og flytingar frá løgujáttanunum:

t.kr.

Heiti	2016	2017	2018	2019
Landsverksskrivstovan	8.160	8.027	6.581	7.764
Byggi- og bygningsumsiting landsins	2.619	3.454	3.064	7.430
Royndarverkætlan v. orkusp. í landsins bygn.	0	-20	26	30
Landsvegahald	46.394	45.078	44.934	44.704
Havnir	5.167	4.878	4.830	5.365
Flogferðsla	1.182	1.089	1.284	1.472
Inntøkufíggjað virksemi	340	-39	676	-6.525
Rakstur Landsverk tilsamans	**63.862**	**62.466**	**61.395**	**60.241**
Lønir+umsiting flutt frá løgujáttanum	*10.847*	*12.689*	*16.232*	*11.028*
Lønir+umsiting flutt frá Nýggir landsvegir og Havnir	*0*	*2.111*	*1.200*	*1.634*
Fluttar lønir+umsiting tilsamans	*10.847*	*14.800*	*17.432*	*12.662*
Rakstur + flyting løn og umsiting	***74.709***	***77.266***	***78.827***	***72.903***

Landsgrannskoðanin hevur víst á, at roknskapurin fyri 2019 er ikki rættur, tí 2 mió.kr. eru avsettar og útreiðsluførdar fyri 2 bilar, sum ikki eru latnir. Fyrri bilurin skuldi latast í juli og tann seinni í august 2020.

Fíggjarmálaráðið ásannar, at tað er ein avbjóðing, tá ið størri rakstrargøgn skulu útvegast av rakstrarjáttan, har long veitingartíð hevur við sær, at keypsavtala og veiting eru í hvør sínum fíggjarári. Fíggjarmálaráðið fer at taka hesa avbjóðingina við í arbeiðið at endurskoða játtanarreglurnar.

Byggiverkætlanir

Landsverk arbeiðir við at gera eina nýggja skipan at stýra bygging eftir. Ein stýrisbólkur skal vera til hvørja byggiverkætlan. Í sambandi við H-bygningin eru stjórin á Landsverki og stjórin á Landssjúkrahúsinum í einum stýrisbólki.

Bygginevndir ikki havt fíggjarliga ábyrgd.

Higartil hava bygginevndir ikki havt fíggjarliga ábyrgd av viðkomandi verkætlanunum, tí hevur tað komið fyri, at bygginevndir hava eftirlíkað ynskjum frá nógvum áhugabólkum, uttan at noyðast at taka atlit at kostnaðinum.

Landsverk ætlar yvirskipað at flyta seg frá at vera ein prosjektorganisatión til at verða ein byggiharri. Eisini vil stovnurin broyta mannagongdir, soleiðis at gjøgnumskygnið verður betri, eisini í roknskapinum.

Byggideildin og fíggjardeildin hava eftirlit við verkætlanum; á mánaðarligum fundum kannar eitt forum fíggjarliga skynsemið í verkætlanunum. Fíggjardeildin ger mánaðarroknskapir fyri hvørja verkætlan og journaliserar teir. Fíggjarstýringsskjalið verður dagført og goymt hvønn mánað.

H-bygningurin
Játtanin til H-bygningin er framvegis ein "rullandi játtan". Peningurin á játtanini hevur verið brúktur til annað á Landssjúkrahúsinum, enn til byggingina. Partur av játtanini kundi tí sambært Landsverki eins væl verið rakstrarjáttan. 1. januar 2020 hevur Landsverk gjørt skrivliga avtalu við Landssjúkrahúsið um byggingina av nýggja H-bygninginum.

Lønir

Lønarútreiðslurnar hjá Landsverki seinastu 5 árini:

t.kr.

Heiti	2015	2016	2017	2018	2019
Landsverksskrivstovan	7.282	7.770	8.105	7.687	9.023
Landsvegahald	17.243	16.498	19.043	21.300	22.701
Havnir	2.629	2.921	3.491	3.081	3.311
Flogferðsla	931	1.218	1.220	1.152	1.242
Inntøkufíggjað virksemi, LV	21.215	22.479	21.256	21.863	22.916
Royndarverkætl. v. orkuspar. alm. bygn.	0	0	0	0	590
Byggi- og bygningsums. landsins	1.815	11.629	10.794	12.602	10.626
Tilsamans	**51.115**	**62.515**	**63.909**	**67.685**	**70.408**

Lønarútreiðslurnar hjá Landsverksskrivstovuni 2019 eru 11.594 t.kr., av teimum eru 2.570 t.kr. fluttar til aðrar undirkontur, harav 623 t.kr. eru partur av fráfaringarsamsýningini til undanfarna stjóran. Landsgrannskoðanin vísti á, at flytingin av fráfaringarsamsýningini ger ikki samlaða roknskapin skeivan, men gevur skeiva mynd av kostnaðinum av Landsverksskrivstovuni.

Samsýning til stjóran flutt til aðrar undirkontur.

Í 2019 eru 8.494 t.kr. endurgoldnar Landsverki frá løgujáttanunum, 6.973 t.kr. til Byggideildina og 1.521 t.kr. til Landsvegahald.

Við støði í lønarútgjaldingum fyri apríl 2020 kannaði Landsgrannskoðanin, um lønirnar hjá 6 nýsettum starvsfólkum vóru rættar við at samanhalda setanarskrivini, prógvini o.a. við galdandi lønarsáttmálar. Vit kannaðu eisini, um lýsingar og umsóknir vóru í málunum. Einki var at finnast at.

Starvsfólkini skráseta arbeiðstíðina í TotalView. Tímalønt fáa lønina útgoldna eftir skrásettu tímunum. Í mai 2020 áttu 11 starvsfólk ímillum 37 og 268 tímar á, og nøkur skyldaðu ímillum 19 og 54 tímar. Landsverk hevur kunnað um, at avtalur eru gjørdar við starvsfólkini um tímarnar.

Lønir hjá Deildini fyri infrakervi
Við ársbyrjan gera starvsfólk á Deildini fyri infrakervi eina ætlan, hvussu nógvar tímar tey fara at brúka til tær ávísu verkætlanirnar/løgujáttanirnar. Deildarleiðarin góðkennir býtið.

Starvsfólk býta arbeiddu tímarnar út á verkætlanir eina ferð um ársfjórðingin og senda rokningar til Høvuðsskrivstovuna, sum bókar tímarnar á ymisku verkætlanirnar. Tímarnir verða ikki váttaðir av t.d. deildarleiðara.

Reglur eru ikki fyri, nær tímarnir skulu verða skrásettir á verkætlanir, og allir verkætlanarleiðarar skráseta ikki tímarnar á sama hátt. Verkætlanarleiðararnir eru tó samdir um, at lønarútreiðslan er røtt og umboðar veruliga tíðarbrúkið.

Landsgrannskoðanin vísti á, at vit kunnu ikki sannað, at upphæddirnar, sum t.d. løgujáttanirnar "Nýggir landsvegir" og "Havnir" rinda Landsverki, eru rættar, tá ið tímauppgerðirnar verða gjørdar sambært meting 3 mánaðir aftur í tíð og ofta fyri longri tíðarskeið.

Tímauppgerðir verða gjørdar eftir meting, tríggjar mánaðir aftur í tíð ella longri.

Sambært Landsverki fara tey at gera mannagongdir, sum tryggja, at tímauppgerðirnar verða gjørdar mánaðarliga og eins fyri øll.

9.2.1 Flytingar frá løgujáttanum

Landsverk fær lønir pluss umsitingargjald frá løgujáttanunum, sum stovnurin hevur ræðisrætt á.

Upphæddirnar, sum Landsverk seinastu 5 árini hevur fingið frá øllum løgujáttanunum, uttan "Nýggir landsvegir" og "Havnir", eru:

t.kr.

Heiti	2015	2016	2017	2018	2019
Húsaleiga og íbúðargjald, (lands.ognir)	0	0	0	0	6
Miðnám á Kambsdali, løga	0	190	0	336	200
Bústovnar o.a. (Bústovnur, serforsorg)	0	1.477	1.902	1.997	2.038
Fróðskaparsetur Føroya, løga	0	448	609	143	0
Skúladepil við Marknagil	0	2.984	3.577	5.560	1.062
Landssjúkrahúsið, útbygging	0	2.033	2.136	2.192	2.304
Umbygging í Tinganesi	0	203	118	60	181
Skúlatilboð til ung við breki (Rásin)	0	0	0	0	68
Klaksvíkar Sjúkrahús, løga	0	0	0	731	13
Savnshús	0	0	0	0	43
Tjóðleikhús, løga	0	83	53	206	109
Ítróttahøll á Sandoynni	0	0	117	72	0
Umvæling av almennum bygningum	63	3.338	4.169	4.566	4.432
Apoteksverkið, løgujáttan	0	36	0	3	0
Dugni - skúlin, løga (Alv-skúlin)	0	0	0	304	179
Yvirtiknar ognir (frá danska hervaldinum)	0	54	9	5	0
Sjóvinnustýrið, bygningur	0	0	0	56	394
Tilsamans	**63**	**10.847**	**12.689**	**16.232**	**11.028**

Í upphæddunum eru lønirnar 64% og umsiting 36%.

Flytingarnar til Landsverk frá "Nýggir landsvegir" og "Havnir" seinastu 5 árini:

t.kr.

Heiti	2015	2016	2017	2018	2019
Lønir, millum løgur og rakstur	0	1.543	1.015	1.196	1.521
Annar rakstur, ml. løgur og rakstur	0	568	185	438	855
Tilsamans	**0**	**2.111**	**1.200**	**1.634**	**2.376**

Landsgrannskoðanin hevur áður vístá, at flytingar frá løgujáttanum til Landsverk eru at meta sum flytingar ímillum nærstandandi partar.

Landsgrannskoðanin vísti á, at tað er týdningarmikið, at Landsverk kann sanna, at tær upphæddir, sum verða goldnar stovninum av løgujáttanum fyri lønir og umsiting eru rættar.

Sambært Landsverki fara tey at gera mannagongdir, sum tryggja, at tímauppgerðirnar verða gjørdar mánaðarliga og eins fyri øll.

9.2.2 Landsverksskrivstovan, rakstur

Útreiðslur og inntøkur hjá Landsverksskrivstovuni:

t.kr.

Heiti	2016	2017	2018	2019
Útreiðslur	17.669	18.984	17.159	18.204
Søla av vørum og tænastum	-173	-1.070	-1.051	-1.052
Innanh. flyt. millum alm. stovn. (innt)	-9.336	-9.887	-9.527	-9.388
Nettoútreiðslur	**8.160**	**8.027**	**6.581**	**7.764**

Í 2019 eru inntøkurnar 1.052 t.kr., harav eru 902 t.kr. leiga av hølum til Mentamálaráðið og ALS og 149 t.kr. kantinusøla.

Inntøkur og útreiðslur av húsaleigu
Í mai 2019 hevur Landsverk gjørt leigusáttmála við Mentamálaráðið um at leiga 587 m^2 av hølunum, ið Landsverk leigar frá Havnar Arbeiðsmannafelag, fyri 1.250 kr./m^2. Árliga leigan er 734 t.kr. Leigumálið er galdandi til 30. apríl 2024.

Sambært leigusáttmálanum ímillum Landsverk og ALS skuldi ALS lata hølini aftur í sama standi, tá ið stovnurin flutti út. Í 2019 hevur ALS víðarifakturerað 57 t.kr., sum er helvtin av samlaðu upphæddini fyri at mála kjallaran.

Keyp
Landsverk bjóðar sum høvuðsregla alt keyp út, og sigur seg leggja dent á at brúka játtanina skynsamt. Landsverk heldur tað vera trupult at brúka Keypsportalin. Stovnurin hevur ofta brúk fyri serligari vøru, t.d. at kunna keypa stórar maskinur av einum ávísum merki, tí tey frammanundan hava góðar royndir av slíkum, serliga tá ið ræður um trygd. Landsgrannskoðanin vísti á, at møguleiki er at søkja um undantaksloyvi frá at nýta Keypsportalin í ávísum førum.

Landsverk heldur tað vera trupult at brúka Keypsportalin.

Í nøkrum førum hevur Landsverk goldið útlendskum fyritøkum forút fyri keyp av maskinum, keyp av útgerð til umvælingar av Asfaltverkinum á Sundi o.a.

Spurt, um Landsverk á nakran hátt tryggjar sær, at vøran er ogn hjá Landsverki, tá ið peningurin er goldin, svaraði Landsverk, at tað gera tey ikki. Landsverk ætlar at kannað spurningin nærri.

Innanhýsis flytingar millum almennar stovnar (útr.), standardkonta 71
Felagsútreiðslur eru útreiðslur, sum stjórnardeildin í fyrstu syftu heldur fyri hinar deildirnar fyri tænastur, t.e.: leiga av høli, el/olja, aðrir kostnaðir, Landsnet og annað KT. Býtið skal góðkennast av stjóranum á hvørjum ári.

Í 2019 eru útreiðslurnar:

Infrakervi	3.574.206,30 kr.
Byggideildin	3.399.622,45 kr.
Framleiðsludeildin	1.154.262,25 kr.
	8.128.091,00 kr.
Eyka Byggideildin SEYF	250.000,00 kr.
Eyka Framleiðsludeild buffari	500.000,00 kr.
Eyka Infrakervi buffari	500.000,00 kr.
Tilsamans	9.378.091,00 kr.

Býti av innanhýsis útreiðslum.

Sokallaði buffarin er flyting frá Framleiðsludeildini og Infrakervi til Landsverksskrivstovuna, sum tá ið árið er av, verður flutt aftur til deildirnar, um avlop er hjá skrivstovuni. Í 2020 er einki sett av til buffarar.

Skuldarar
Landsverk stemmar av hvønn mánað ímillum skuldarakonturnar og høvuðsbókhaldið. 31. desember 2019 var ágóðin sambært avstemmanini 23,3 mió.kr., sambært Búskaparskipan landsins var saldan 25,1 mió.kr.

Landsverk hevur kunnað um, at munurin stendst av, at tey hava stemmað skuldararnar av eina ferð í januar 2020, har partur av tíðarskeiði 13 er við, alt tíðarskeið 13-16 er tí ikki við í avstemmanini, og sambært Landsverki verður tað broytt til komandi ársskifti.

30. juni 2020 var ágóðin 27,5 mió.kr.

Í roknskaparreglugerðini eru reglur um sølu til kontantkundar og kredittkundar. Kontantkundar kunnu antin gjalda fyri vøruna frammanundan ella við veiting. Í Hundsarabotni kann gjaldast við gjaldkorti.

Kredittkundar:

- Skulu venda sær til Framleiðsludeildina og gera skrivliga avtalu við Landsverk, áðrenn søla fer fram.
- Er rokning ikki goldin innan inniverandi mánað + 15 dagar, ella eftir at boðað er frá, at skuldin er størri enn kreditthámark, skal kontan sperrast, og kundin hava boð um tað sum skjótast.
- Kredittur verður ikki latin aftur til viðkomandi kunda, fyrr enn skuldin er goldin, ella at nýggj skrivlig avtala er gjørd við kundan.
- Trygd skal setast fyri kredittkeypi, ið fer upp um 50 t.kr. Trygdin skal verða undirskrivað av kunda og peningastovni uttan aðra átekning.
- Tá ið arbeitt verður fyri Landsverk, mótroknar Landsverk.

Sambært reglugerðini er ein innkrevjingarfunktión knýtt at kredittsøluni, sum fylgir við hvønn dag. Kredittseðil skal undirskrivast av tí, sum keypir, keypini verða skrásett í skipanini, og upphædd ásett, hvussu nógv kann keypast upp á kreditt.

Trygdin, sum keyparin setir, er avgerandi. Um kundi hevur nátt kreditthámarkið, skal skuldarabókhaldarin seta seg í samband við leiðaran fyri stjórnardeildini ella leiðaran fyri inntøkufíggjaðum virksemi, so teir kunnu taka støðu til, um meira skal latast í teimum einstøku førunum.

Víkjast kann frá hesum reglunum, tá ið størri arbeiðir eru í gongd og vandi stendst av, at arbeiðið ikki kann gerast liðugt. Tá kann antin leiðarin fyri stjórnardeildina ella leiðarin fyri inntøkufíggjaða virksemið taka avgerð um tað.

Sambært Landsverki boðar skuldarabókhaldarin deildarleiðaranum frá, hvørja ferð skuld fer upp um hámarkið, men svarið er oftast, at tað ber ikki til at steðga latingini.

Ringt at fáa fyritøkur at seta bankatrygd.

Sambært Landsverki er ringt at fáa fyritøkur at seta bankatrygd, tí sambært fyritøkunum kostar tað nógv at hava bankatrygd.

Landsgrannskoðanin vísti á, at um Landsverk ikki krevur bankatrygd, átti stovnurin á annan hátt at tryggja sær, at keyparin hevur kredittvirði.

Í juli 2020 hevur Landsverk kunnað um, at *"nýggj roknskaparreglugerð liggur á FMR til undirskrivingar. Mannagongdir og orðingar á júst hesum økinum eru broyttar. Samskift verður nú skrivliga millum debitorfulltrúan og leiðaran fyri Virkisdeildina um ítøkilig mál, har kundin fer upp um kreditmaks. Tá virksemi er stórt innan lendisarbeiði, fara saldurnar stundum upp um kreditmaks. Landsverk hevur góðar royndir við at fáa peningin inn fyri vøruna og torført er at sperra kundar, sum standa á grótbrotunum við fullum lastbili, tá virksemi er stórt. Tí verður aloftast avtalað við kundan at lastbilurin sleppur avstað við vøruni um goldið verður sum skjótast. Debitorfulltrúin fylgir dagliga við saldunum fyri at tryggja at alt verður goldið."*

Spurdur, um roknskaparreglugerðin er góðkend, og um landsstýrismaðurin heldur, at skipanin viðvíkjandi sølu upp á borg er forsvarlig, svarar landsstýrismaðurin, at í tilgongdini at góðkenna roknskaparreglugerðina hjá Landsverki fer Fíggjarmálaráðið at meta um skipanina viðvíkjandi sølu upp á borg, soleiðis at stovnurin ikki tekur á seg óneyðugan váða.

Samanumtikið um áogn

Landsgrannskoðanin hevur gjøgnumgingið skuldaralistan pr. 31. desember 2019 og 30. apríl 2020.

Fimm keyparar hava gjørt kredittavtalur við Landsverk. Nakrir aðrir skuldarar skyldaðu meira enn 50 t.kr., men talan var um skuld, har gjaldsfreistin ikki var farin.

Keyparar skyldaðu væl meira enn kreditthámarkið.

Tríggir teir størstu keypararnir, ið hava kredittavtalur upp á ávikavist 1 og 2 mió.kr. skyldaðu væl meira enn hámarkið í avtalunum.

Landsverk hevur ikki mist pening av kredittkundunum, og skuldarabókhaldið ger sítt til at minna á skuldina og rykkir javnan. Ásannast má tó, at tað er ein váði, at gjaldingarnar hjá trimum teimum størstu kredittkundunum ikki eru í samsvari við tað kreditthámark, ið er avtalað.

Tvær fyritøkur skylda ávikavist 155 t.kr. og slakar 2 mió.kr.; hjá teimum er ikki talan um keyp frá Landsverki, men um krøv, sum Landsverk hevur reist ímóti teimum í 2016 fyri arbeiðstøkur, sum Landsverk ikki góðtók.

Í juli 2020 hevur Landsverk greitt frá, at kravið um slakar 2 mió.kr. er latið gerðarrætti og Landsverk hevur góðar vónir um at fáa viðhald.

Peningastovnskontur

Landsverk hevur peningastovnskontur í øllum peningastovnunum til tess, at kundar kunnu rinda sítt keyp forút. Konturnar verða undantaksvís nýttar til at rinda rokningar, har serliga skjót avgreiðsla er neyðug.

Sambært roknskaparreglugerðini hevur Fíggjarmálaráðið givið Landsverki loyvi at brúka sjálvstøðugar peningastovnskontur fyrst og fremst til sølu av skervi og asfalti. Gjaldstovan tømir konturnar síðst í hvørjum mánað.

Vit kannaðu, um konturnar stemmaðu við salduna í fíggjarstøðuni 31. desember 2019, og um óvanlig útgjøld vóru av kontunum. Einki var at finnast at.

Skyldur, ið ikki eru endaligar

Í fíggjarstøðuni 31. desember 2019 standa 150 t.kr. Landsverk hevur sett upphæddina av í 2018 vegna “oljuspill í Froðba”. Í juli 2020 hevur Landsverk kunnað um, at sektar-uppskotið áljóðandi 150 t.kr. er ikki komið fyri í rættinum enn, og advokatur stovnsins veit ikki, nær tað kemur fyri.

Gerðarrættarmál

Landsverk hevur kunnað um, at gerðarrættarmálið viðvíkjandi Hamragarði í Vági, sum skuldi koma fyri í juni 2020, er útsett til seinni í ár.

9.3 Nýggir landsvegir (LG 2019/217-0381)

Í 2019 eru 100,4 mió.kr. brúktar av játtanini á høvuðskontu 17.38.1.07 “Nýggir landsvegir” og 18,6 mió.kr. eru fluttar til 2020.

Í juni 2020 eru 4,9 mió.kr. av framfluttu upphæddini fluttar á aðrar løgujáttanir. 2,8 mió.kr. til høvuðskontu 3.38.1.06 “Innkomuvegur, Runavík” og 2,1 mió.kr. til høvuðskontu 3.38.1.05 “Innkomuvegur, Tórshavn”.

Sambært Landsverki vórðu ávikavist 2,1 mió.kr. og 2,8 mió.kr. av teimum 18,6 mió.kr. á høvuðskontuni “Nýggir landsvegir” ætlaðar til Innkomuvegin og Fjørðuvegin.

Í fíggjarlógini 2020 eru 2 nýggjar høvuðskontur, sum eru til Innkomuvegin og Fjørðuvegin, 11 mió.kr. hvør. Fíggjarmálaráðið helt, at Landsverk ikki kundi arbeiða við vegastrekkjunum bæði á játtanini til “Nýggjar landsvegir” og á nýggju játtanunum, og valdi tí at flyta støðlaða peningin til nýggju játtanirnar. Landsverk tekur undir við Fíggjarmálaráðnum.

Roknskapur v.m.

Roknskapartøl 2015 til 2019:

t.kr.

Heiti	2015	2016	2017	2018	2019
Lønir v.m.	1.382	83	1	175	89
Keyp av vørum og tænastum	823	612	470	1.072	828
Ymsar rakstrarútreiðslur	-2.205	-2.636	-4.758	-8.102	-8.675
Søla av vørum og tænastum	0	75	-7	0	0
Bygging og løguframleiðsla	95.041	64.632	12.232	28.632	97.277
Útvegan av løgu o.ø.	319	30	148	715	3.118
Innanh. flyt. ml. almennar stovn. (útr)	48	1.941	4.855	6.854	7.758
Innanh. flyt. ml. alm. stovn. (innt)	0	0	-569	0	0
Tilsamans	**95.409**	**64.737**	**12.373**	**29.347**	**100.395**

Frá 2016 broytti Landsverk mannagongdina at bóka lønir á løgujáttanirnar til at verða flytingar millum almennar stovnar, kontuslag 7.

Sambært roknskapinum hevur "Nýggir landsvegir" goldið Landsverki hesar upphæddir:

t.kr.

Heiti	2015	2016	2017	2018	2019
Bygningar, alment	736	259	748	341	269
Vegir, tunnlar, havnir o.a., alment	9.872	8.872	4.787	8.183	30.060[25]
Innanh. flyt. m. alm. stovn. - útr.	48	1.941	4.855	6.854	7.758
Tilsamans	**10.657**	**11.071**	**10.390**	**15.378**	**38.087**

Býtið ímillum privat og alment keyp:

t.kr.

Heiti	2015	2016	2017	2018	2019
Bygningar, privat	1	43	13	0	1
Bygningar, alment	736	259	748	341	269
Vegir, tunnlar, havnir o.a., privat	84.432	55.459	6.684	20.108	66.947
Vegir, tunnlar, havnir o.a., alment	9.872	8.872	4.787	8.183	30.060
Tilsamans	**95.041**	**64.632**	**12.232**	**28.632**	**97.277**

Í 2019 er upphæddin á kontu "Vegir, tunnlar, havnir o.a., alment" skeiv, tí rokningar fyri 20 mió.kr. frá Articon í sambandi við Hvalbiartunnilin eru bókaðar har. Upphæddin eigur tí at vera um 10 mió.kr. og kontan "Vegir, tunnlar, havnir o.a., privat" 87 mió.kr.

Landsverk hevur víst á, at tað henda skeivar konteringar, og at fíggjardeildin roynir at rætta tær, áðrenn roknskaparlok, men at tað hendir seg eisini, at tey rætta bókingarnar í seinni árum, soleiðis at samlaði byggiroknskapurin er rættur.

Amboð, goldin av løgujáttanini

Landsverk hevur keypt nakað av amboðum, sum eru goldin av løgujáttanini, Nýgerð av landsvegum.

Stovnurin hevði fingið álagt at keypa amboð, sum tunnilsliðið skuldi brúka til at bora smærri tunlar. Eisini hevur stovnurin keypt onnur amboð, t.d. ein persónbil til Hvalbiartunnilin. Sambært Landsverki hava tey brúk fyri bilinum fyri at gera bæði internt og eksternt eftirlit í Hvalbiartunlinum. Tá ið verkætlanin er liðug, er ætlanin at selja bilin.

Í 2019 hevur løgujáttanin goldið fyri eina høll til starvsfólkarúm v.m. og fyri eitt telt at brúka til verkstað. Høllin stendur í Dali, har eisini er planerað fyri at seta verkstaðið.

Nýggir landsvegir hava goldið 795 t.kr. fyri eina lyftimaskinu, sum sambært Landsverki serliga er ætlað til at brúka í teimum minnu og smølu tunlunum.

[25] Upphæddin eigur at vera um 10 mió.kr.

Amboðini, sum verða goldin av løgujáttanum, verða sambært Landsverki, eins og onnur amboð, keypt av maskindeildini í Kollafirði, sum skrásetir tey í sínum ognaryvirliti.

Keyp av útbúnaði eru bókað á Standardkontu 31 “Bygging og løguframleiðsla”. Landsverk vísti á, at tey brúka dimensjónina, útgreining 9558 “Tól”, har tað altíð ber til at finna keypið aftur.

Keyp av bili til Hvalbiartunnilin er bókað á útgreining 9501 “Arbeiðspláss”.

Í 2019 og 2018 eru ávikavist goldnar 2.645 t.kr. og 6.690 t.kr. fyri keyp av amboðum, sum eru bókað á St.Rk. 3141 “Vegir, havnir, tunlar o.a. privat”, útgreining 9558.

Sambært Kontuskipan landsins skal keyp av tólum og útbúnaði bókast á St.Rk. 1510 ella St.Rk. 1540. Um talan er um leigu/sølu ímillum tveir partar, skuldi hon verðið bókað á Standardkontu 21.

Sambært Kontuskipan landsins er ein trupulleiki í almenna roknskapinum at kortleggja ikki realbúskaparligu streymarnar, soleiðis at hesir ikki fleiri ferðir verða tiknir við sum inntøka og útreiðsla. Fyri at halda stýr á tí verður høvuðsslag 7 “Flytingar millum almennar myndugleikar” brúkt.

Landsgrannskoðanin vísti á, at løgujáttanir verða vanliga ikki brúktar til at reka t.d. útleigan av amboðum, heldur ikki er tað góður bókhaldssiður at bóka inntøkur sum negativar útreiðslur undir løguútreiðslum.

Landsverk tekur undir við at rakstur ikki eigur at liggja í løgujáttanum.

Í juli 2020 hevur Landsverk svarað, at stovnurin er samdur við Landsgrannskoðanina, at rakstur ikki eigur at liggja í løgujáttanum. Hesin leisturin hevur tó verið valdur fyri at fáa veruliga virksemið á Landsverki at passa inn í Búskaparskipan landsins. Landsverk leggur afturat, at tey fara at leggja allar maskinurnar aftur til Virkisdeildina, og at hinar deildirnar skulu leiga maskinur frá tí deildini.

Fíggjarmálaráðið fer í sambandi við góðkenning av roknskaparreglugerðini fyri Landsverk at taka upp spurningin um rakstrargøgn og løgujáttanir.

MVG vegna útlendska fyritøku

Av løgujáttanini hevur Landsverk goldið 184.586 kr. fyri MVG av einum anleggið, sum danska fyritøkan Colas Danmark A/S hevur innflutt til Føroya til at vaska skerv í.

Sambært Landsverki stendur anleggið í Hundsarabotni, og danska fyritøkan brúkar tað til at reinsa skerv, sum hon leverar til Landsverk, kommunur o.o. Anleggið skal vera í Føroyum í 2 ár.

Sambært Landsverki, fær stovnurin MVG’ið endurrindað, tá ið anleggið verður flutt av landinum aftur.

Landsverk kunnaði um, at tað hendir seg javnan, at stovnurin rindar fyri MVG av maskinum, ið verða fluttar til Føroyar í styttri tíðarskeið, fyri síðani at verða fluttar av landinum aftur.

Rokningar uttan MVG

Landsverk hevur goldið Colas A/S fyri asfaltering við emulsjón og fyri forsegling til Kirkjubøarvegin og Vatnavegin. Spurt, hví einki MVG er á rokningunum, hevur Landsverk svarað, at tað er tí at fyritøkan er ikki skrásett í Føroyum.

Landsgrannskoðanin skal vísa á, at sambært MVG-lógini skulu fyritøkur, ið reka MVG-skyldugt virksemi í landinum, skrásetast og rinda MVG til landskassan av øllum MVG-skyldugum sølum.

Fíggjarmálaráðið er samt við Landsgrannskoðanina um, at útlendskar fyritøkur skulu fylgja MVG-lógini, tá ið tær reka virksemið í Føroyum. Ráðið fer at taka málið upp við Landsverk, herundir um heimild at leggja út fyri MVG av amboðum, sum verða brúkt í Føroyum í avmarkað tíðarskeið.

9.3.1 Hvalbiartunnilin

Samlaði kostnaðurin sambært verklagslógini Ll. nr. 56/2018 "um nýggjan Hvalbiartunnil við tilhoyrandi vegum", er 272 mió.kr. Lógin fer úr gildi 31. desember 2024. Sáttmáli er ímillum Landsverk og Articon um at gera tunnilin fyri 236 mió.kr. Sambært Landsverki hevur stovnurin gjørt sáttmála við 6 aðrar arbeiðstakarar.

7 mió.kr., sum eru brúktar áðrenn verklagslógin kom í gildi, eru eisini partur av kostnaðinum sambært verklagslógini, tí verða 265 mió.kr. játtaðar í fíggjarlógum til Hvalbiartunnilin. Arbeiðstakarasáttmálararnir eru seinni reguleraðir til 256,7 mió.kr.

Prís- og lønarindeksregulering verður vanliga gjørd leypandi í árinum við ávísum millumbilum, men avtalast kann eisini ein fastur prísur fyri prís- og lønarvøkstur fyri alt tíðarskeiðið. Í januar 2020 hevur Landsverk gjørt avtalu við Articon um, at Landsverk keypir seg burturúr prís- og lønarvøkstri í øllum byggitíðarskeiðnum við at rinda 13 mió.kr. til endaliga avgreiðslu av prís- og lønarvøkstri (indeksreguleringar).

Sáttmálin, sum Landsverk hevði við P/f El-service er broyttur; nú er El-service undirarbeiðstakari hjá Articon. P/f LBF fær 64 t.kr. um mánaðin fyri byggileiðslu. LBF váttar rokningar frá Articon upp á eykaavtalur.

Fíggjarstýringsskjal

Deildin fyri infrakervi brúkar, eins og Byggideildin hjá Landsverki, SEYF og Fíggjarstýringsskjalið sum stýringsamboð til verkætlanir.

23. juni 2020 vísti Fíggjarstýringsskjalið fyri Hvalbiartunnilin, at disponerað var:

Handverkaraútreiðslur	256.166.616 kr.
Prosjekteringsútreiðslur	4.359.527 kr.
Fakeftirlit og byggileiðsla	3.600.000 kr.
Intern ráðgeving og leiðsla	2.372.500 kr.
Málsettar útreiðslur	7.325.942 kr.
Tilsamans	273.824.585 kr.

Orsøkin, til at disponeraða upphæddin er størri, enn tær 265 mió.kr., sum eru játtaðar, er, at inntøkur frá t.d. SEV og Føroya Tele eru ikki settar í Fíggjarstýringsskjalið. SEV skal rinda um 5 mió.kr. fyri at leggja kápul í tunnilin.

Tølini í Fíggjarstýringsskjalinum 2019 og til mai 2020 stemma við tølini í Búskaparskipan landsins fyri hvørt verkevni. 23. juni 2020 eru 151.434.391 kr. goldnar sambært Fíggjarstýringsskjalinum.

Roknskapur

Á verkætlanini, Hvalbiartunnilin, eru stórar rokningar frá privatum bókaðar sum keyp frá tí almenna í 2019. Roknskapurin er tí misvísandi.

t.kr.

Heiti	2019
Bygningar, alment	-144
Vegir, tunnlar, havnir o.a., privat	42.978
Vegir, tunnlar, havnir o.a., alment	20.783
Tilsamans	**63.617**

Av talvuni sæst, at 20,7 mió.kr. eru goldnar fyri keyp frá tí almenna. 20 mió.kr. av hesari upphæddini eru rokningar frá Articon.

Í 2018 eru 4,6 mió.kr. brúktar til Hvalbiartunnilin. 1,7 mió.kr. eru goldnar P/f LBF fyri prosjektering og eftirlit. 2,2 mió.kr. eru goldnar til Sp/f BKE fyri lendisarbeiði, 1 mió.kr. sambært sáttmála og 1,2 mió.kr. fyri meirarbeiði.

9.3.2 Funningsfjørð, víkipláss

Ein entreprenørfyritøka hevur bjóðað 1,7 mió.kr. upp á arbeiðið. Sambært ákonto-umbøn nr. 3 eru 10% løgd afturat fyri fastprís, og tilboðið er hækkað til 1,87 mió.kr. Goldnar eru 2.198 t.kr.

Spurt, hví útgoldna upphæddin ikki svaraði til tilboðið, hevur Landsverk svarað, at fyrsta avtalan ljóðaði upp á 139 t.kr. fyri tvey pláss. Seinni varð meira peningur játtaður, og tá gjørdi Landsverk avtalu við fyritøkuna um 1.876 t.kr., umframt eykaavtalu um nakrar tvørrennur fyri 183 t.kr., tilsamans gevur tað 2.198 t.kr.

9.3.3 Elduvíkarvegurin v.m.

Í 2019 eru 1.059 t.kr. brúktar til Elduvíkarvegin.

Av játtanini “Nýggir landsvegir” hevur Landsverk goldið 1,5 mió.kr. til Colas A/S vegna “Kunoyarvegin og Elduvíkarvegin (overfladebehandling og lapning)”.

Í 2018 hevur Landsverk goldið 648 t.kr. til Colas A/S fyri forsegling av Kirkjubøar-vegnum og Vatnavegnum.

Spurt, hví summar rokningar verða goldnar av “Nýggjum landsvegum” og aðrar av “Landsvegahaldi”, svaraði Landsverk, at stovnurin áður helst hevur mett, at arbeiðið á rakstrinum er at meta sum viðlíkahald, og arbeiðið á íløgunum er at meta sum nýgerð. Landsverk heldur, at játtanirnar til trygdartiltøkini, dagføringarnar og viðlíkahaldið, sum eru á løgukontuni “Nýggir Landsvegir”, høvdu ligið betur á rakstrinum. Tá hevði eingin ivi verið um, hvat er íløga og hvat er rakstur.

9.4 Havnir, løgujáttan (LG 2019/217-0381)

Í 2019 eru 370 t.kr. fluttar frá løgujáttanini “Havnir” til Landsverk. Útreiðslurnar eru bókaðar sum “Innanhýsis flytingar millum almennar stovnar, útreiðslur”.

Skjalprógvini eru rokniørk við hjáløgdum fakturum. Á einum faktura eru 522 tímar faktureraðir fyri 302 t.kr. í desember 2019 fyri eitt starvsfólk.

Spurt, hvussu tímarnir eru skrásettir, svaraði Landsverk, at starvsfólkini skráseta tímarnar í Navision, og at tað er trupult at tryggja sær, at tímarnir eru rættir. Eingin annar persónur kannar ella váttar, at tímarnir eru rættir.

Útreiðslurnar eru ikki nóg væl skjal-prógvaðar

Landsgrannskoðanin heldur, at útreiðslurnar eru ikki nóg væl skjalprógvaðar, eisini sað í ljósinum av, at tímar fyri eitt heilt ár verða bókaðir í einum. Í slíkum føri kann vandi verða fyri, at útreiðslur verða fluttar frá Landsverki til løgujáttanina.

Landsverk er samt við Landsgrannskoðanina um, at skjalprógvið er ov vánaligt. Tað skal strammast upp, vísandi til nýggjar mannagongdir, sum skulu tryggja at tíma-uppgerðirnar hereftir verða gjørdar eins fyri øll eina ferð um mánaðin.

9.5 Strandfaraskip landsins (LG 2019/217-0382)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað Strandfaraskip landsins. Vit hava eisini tikið afturíaftur onkur viðurskifti, ið vórðu umrødd í frágreiðingini til løgtingsgrannskoðararnar í 2018.

Innaneftirlit, leiðslukunning og roknskapargóðkenning

Landsgrannskoðanin hevur fyrr víst á, at innaneftirlitið á Strandferðsluni tykist at vera veikt, men at batar eru. Fíggjarleiðarin greiddi frá, at Strandferðslan hevur útvegað eina elektroniska kekklistaskipan, sum skal verða grundarlagið undir roknskaparliga innaneftirlitinum hjá stovninum, og fer í næstum at seta eina nýggja slepping av skipanini í verk.

Strandferðslan hevur greitt frá, at skipanin áhaldandi verður ment, og at tá ið nýggjara sleppingin av kekklistaskipanini verður sett í verk, fara listarnir við kontrolpunktum at verða dagførdir. Landsgrannskoðanin hevur gingið ígjøgnum kekklistarnar í gomlu skipanini, men hevur ikki sæð nakra skjalfesting av, at eftirlitini verða framd. Landsgrannskoðanin mælti til at skjalfesta eftirlitini í kekklistaskipanini og at brúka skipanina við neyðugum nærlagni.

Strandferðslan hevur greitt frá, at ein manglandi dagføring av skipanini ikki loyvdi viðhefting av skjølum, men at dagføringin nú er gjørd. Viðmerkingar um, hvussu kontrolpunktini eru útførd, er ein mannagongd, sum Strandferðslan fer at gera.

Roknskaparviðurskifti

Strandferðslan hevur egna búskaparskipan til m.a. skráseting av sølu. Eftir galdandi reglum eigur Fíggjarmálaráðið at geva formligt loyvi til at stovnar hava egna búskaparskipan. Landsgrannskoðanin hevur fyrr spurt eftir hesum loyvi. Strandferðslan hevur greitt frá, at ein fundur var millum Strandferðsluna og Gjaldstovuna í februar 2019, men at tað hendi ikki meira tá. Í juni í ár setti fíggjarleiðarin Gjaldstovuni nakrar spurningar í sambandi við NAV og tær hugsanir Strandferðslan hevði um tað.

Gjaldstovan beindi Strandferðsluna til Fíggjarmálaráðið, tí Gjaldstovan helt at Strandferðslan hugsaði eina víðkaða nýtslu í mun til fundin í februar 2019.

Fíggjarmálaráðið hevur greitt frá, at ráðið fer at taka málið um egna búskaparskipan upp við Strandferðsluna og Gjaldstovuna.

Meirvirðisgjald

Strandferðslan er MVG-skyldug sambært § 3, stk. 1, litra c. í Ll. nr. 136/1992 “um meirvirðisgjald”, tí stovnurin selur vørur og avgjaldsskyldugar tænastur í kapping við onnur virkir. Meirvirðisgjald skal rindast av sølu í kantinu og kioskum. Eisini skal MVG rindast av flutningi av frakt.

Strandferðslan hevur eisini inntøkur, sum MVG ikki skal roknast av. Sambært § 2, stk. 3, litra f. í MVG-lógini skal MVG ikki rindast av fólkaflutningi og flutningi av akførum við skipum hjá Strandferðsluni innanoyggja.

Sambært Strandferðsluni verður MVG ikki roknað, tá ið trailarar við frakt koma umborð á skipini. MVG verður bert roknað av frakt, og tá ið skipini sigla frakttúrar.

Fíggjarmálaráðið er samt við Strandferðsluna um, at undantakið í § 2, stk. 3, litra f í MVG-lógini fevnir um flutning av øllum akførum við skipum hjá Strandferðsluni innanoyggja, eisini vinnulig akfør.

Landsgrannskoðanin hevur gingið ígjøgnum MVG-uppgerðirnar fyri 2019. Vit høvdu nakrar spurningar til uppgerðirnar, sum vit hava fingið nøktandi svar upp á.

Peningastovnskontur
Strandferðslan hevur 11 peningastovnskontur skrásettar í Búskaparskipan landsins. Landsgrannskoðanin hevur kannað, um samsvar er ímillum Búskaparskipan landsins og saldurnar í peningastovnunum tann 31. desember 2019. Einki var at finnast at.

Kassaeftirlit
Landsgrannskoðanin hevur gjørt kassaeftirlit á tveimum skipum hjá Strandferðsluni.

Landsgrannskoðanin vísti á nøkur viðurskifti viðvíkjandi kassunum, sum ikki vóru nøktandi. Strandferðslan hevur fingið viðurskiftini í rættlag.

Lønarumsiting

Landsgrannskoðanin hevur í fleiri umførum vísst á veikleikarnar við, at lønaravgreiðsla verður gjørd mest sum við hond ella við einum rokniarki. Strandferðslan hevur eftirsíðani sett í verk lønarskipanina Vaktætlan til avrokning av lønum hjá teimum starvsfólkum, sum arbeiða í vaktum.

Vaktætlan
Í 2018 byrjaði Strandferðslan at seta skipanina Vaktætlan í verk á stovninum, og ætlandi skuldu øll skipini vera komin í skipanina á sumri 2019. Strandferðslan hevur greitt frá, at øll skipini uttan Teistin eru komin í Vaktætlan, men orsakað av skeivum arbeiðsætlanum umborð á Teistanum steðgaði arbeiðið at fáa Teistan við í Vaktætlan nærum upp. Sambært Strandferðsluni kemur arbeiðið við arbeiðsætlanini á Teistanum kortini at verða liðugt 1. oktober, og Vaktætlan verður komin endaliga upp á pláss 1. november í ár.

Strandferðslan hevur sett Vaktætlan í verk fyri øll skipini, uttan Teistan.

Gjaldstovan umsitur Vaktætlan og ger broytingar í rættindum til skipanina eftir umbøn frá Strandferðsluni. Eitt starvsfólk á Gjaldstovuni, sum umsitur skipanina, hevur eftirlit við, at skipanin ger lønirnar rætt upp út frá galdandi sáttmálum.

Allir sáttmálar við fakbólkarnar, sum hava avtalur við Fíggjarmálaráðið, eru lagdir inn í Vaktætlan.

Arbeiðsætlan, Vaktætlan og tímaseðlar
Tá ið ferðaætlanin hjá skipunum hjá Strandferðsluni er løgd, ger starvsfólkaleiðarin eina arbeiðsætlan fyri manningina, sum liggur innan fyri sáttmálarnar við yrkisfeløgini og krøvini frá MLC[26] um t.d. hvílitíðir. Lønarumsitingin leggur arbeiðsætlanina í Vaktætlan og letur skipunum hana. Tímarnir í gingnu vaktunum gerast tá grundarlagið undir lønarútgjaldingunum.

Um broytingar eru í arbeiðstíðunum í mun til tað, sum er lagt í Vaktætlan, verða tær skrásettar sum meirtíð. Skipararnir, maskinstjórarnir og tænastuleiðararnir skráseta broytingarnar fyri síni starvsfólk.

Skrásettu tímarnir í Vaktætlan, vanlig tíð og meirtíð, verða uppgjørdir og avroknaðir í skipanini og lønin send til útgjaldingar.

Skipanin við Teistanum
Teistin er ikki í Vaktætlan og arbeiðstíðin hjá manningini verður skrásett í tímaseðlar.

Strandferðslan greiddi frá, at í 2017 hevði arbeiðsætlanin fyri Teistan ikki verið dagførd síðani 2014 og siglt hevur verið eftir einari gamlari ætlan, men at arbeiðsætlanin hevur ikki verið tann sama síðani 1. mai 2018.

Arbeiðsætlanin hjá Teistanum er ikki dagførd síðani 2014.

Tá ið vaktirnar á Teistanum skuldu leggjast inn í Vaktætlan, kundi tað ikki gerast í mun til vaktarskipanina, sum manningin arbeiddi eftir, tí manningatalið var ov stórt.

[26] Maritime Labour Convention

Rakstrarleiðarin greiddi frá, at Teistin er settur at sigla 18 tímar um samdøgrið, men skipið er einans innrættað til at sigla 13 tímar um samdøgrið, um reglurnar um hvílutíð skulu haldast. Møguleikarnir at halda hvílutíðina eru ikki tilstaðar; t.d. eru eingi kømur at halda hvílutíðina í.

Sambært Strandferðsluni er avleiðingin, at fyri at halda altjóða sáttmálar um trygd á sjónum, er neyðugt at hava størri manning umborð. Tann parturin av manningini, sum eigur at hava frí, kann ikki fara av skipinum, tí tey eru partur av trygdarrulluni. Hinvegin kunnu tey heldur ikki vera til arbeiðis umborð, tí so bróta tey reglurnar um hvílutíð.

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað nøkur lønarmál á Teistanum.

Vit hava kannað, um lýsingar, umsóknir, prógv og setanarsáttmálar vóru í málunum. Landsgrannskoðanin hevði einki at finnast at tí.

Útgjøld av lønum

Við støði í lønarútgjaldingini í januar og februar 2020 kannaðu vit, um útgoldnu lønirnar vóru í samsvari við innplaseringina í lønartalvur, og at útgoldna lønin samsvarar við setanarbrøkin, og at lønarupphæddin er tann sama sum í avtalaðu lønartalvuni. Landsgrannskoðanin hevði einki at finnast at tí.

Skrásett arbeiðstíð

Manningarnar á Teistanum eru ikki skrásettar í Vaktætlan enn, tí er arbeiðstíðin skrásett í rokniørkum, sum verða send til avrokningar á skrivstovuni.

Sambært sáttmálanum er arbeiðstíðin løgd soleiðis, at hon í tveir mánaðir ikki er oman fyri 2 ferðir 197,5 tímar, sum byggir á eina 45,5 tíma arbeiðsviku. Á Teistanum er manningin, undantikið skiparan og kokkin, tó sett við 0,958 starvsbrøkið, sum svarar til eina 43,59 tíma arbeiðsviku.

Landsgrannskoðanin hevur hildið arbeiðsætlanina fyri Teistan saman við tímaseðlarnar, sum liggja til grund fyri lønini og borið saman við manningarlistan fyri sama tíðarskeið.

Ov nógvir tímar í arbeiðsætlanini, og tímaskrásetingin er mangulfull.

Strandferðslan hevur greitt frá, at ov nógvir tímar eru í arbeiðsætlanini umborð á Teistanum og tað sæst aftur í hvørjum vaktarskifti, har manningin umskarast frá kl. 11 til kl. 19. Harumframt er tímaskrásetingin mangulfull, so ikki er gjørligt at eftirkanna lønarútgjaldið frá skrásetta lønarseðlinum.

Út frá skjalfestingunum av arbeiddum tímum umborð á Teistanum kann Landsgrannskoðanin tí ikki sanna, at samsvar er ímillum útgoldnu lønirnar og tal av arbeiddum tímum.

Samanumtikið

Skipanin av lønarumsitingini er ikki nøktandi.

Sum Landsgrannskoðanin og onnur grannskoðan fyrr hava víst á, hevur hátturin at skipa lønarumsitingina eftir verið ónøktandi. Leiðslan hevur ikki havt nóg góðar møguleikar at fingið útskriftir frá lønarumsitingini til eftirlit av lønargjaldingum, og tað kann vera ein atvold til, at feilir nústani eru funnir.

Landsgrannskoðanin hevur einki at finnast at setanarviðurskiftunum í kannaðu málunum, og útgoldna lønarupphæddin er í tráð við galdandi sáttmálar.

Vit kundu tó staðfesta at tímarnir, Strandferðslan hevur goldið fyri, eru ikki allir arbeiddir, og at arbeiðsnormurin fyri fulla arbeiðstíð er ikki í samsvari við tað, sum er ásett í manningarsáttmálunum.

Órógvandi, at eingin tyktist hava evstu ábyrgd av, at lønirnar eru rættar.

Landsgrannskoðanin heldur, at tað er órógvandi, at eingin tykist hava evstu ábyrgd av, at lønirnar eru rættar. Uppgávan at manna skipini er umsitingarliga býtt ímillum tveir ábyrgdarpersónar, harav annar umsitur krøvini um trygd og hvílutíð, og hin umsitur avløning av arbeiddum tímum.

Uppbýtið ger, at ábyrgdin av røttum lønarútgjaldi fellur niður ímillum. Tá ið vit royndu at fáa fatur á skjølum, sum kundu sanna, at lønirnar eru rættar, upplivdu vit at verða send frá einum ábyrgdarpersóni til annan, uttan at nakar endaliga kundi siga okkum, hvussu lønarumsitingin hongur saman.

Strandferðslan hevur greitt frá, at fyri at tryggja betri samband millum manningarsamskiparar og lønarumsitara og harvið tryggja, at lønarútgjøld ikki detta niður ímillum, er ætlanin at flyta lønarøkið undir starvsfólkadeildina 1. oktober 2020.

9.6 Stuðul til útoyggjar (LG 2019/217-0382)

Útjavningarstuðul til útjaðaraøki kann gjaldast sambært Ll. nr. 86/1998. 1,5 mió.kr. eru játtaðar til "Stuðul til útoyggjar". Umframt Strandfaraskip landsins fáa Atlantic Airways og Posta eisini part av játtanini. Heimilað er at javna ein part av meirkostnaðinum av at flyta olju og annan farm til fastbúgvandi í útjaðaraøkjunum, t.e. í Fugloy, Svínoy, Kalsoy, Mykines, Nólsoy, Hestur, Koltur, Skúvoy og Stóra Dímun.

Samferðslumálaráðið gjørdi í 2006 reglugerð um útgjald av stuðli, sum var broytt í mai 2016.

Samferðslumálaráðið gjørdi í 2011 innanhýsis vegleiðing um, at flutningur av olju til ikki fastbúgvandi er partur av stuðlinum, um upphæddin ikki fer upp um 20 t.kr. Landsgrannskoðanin undrast á ta tulkingina.

Strandfaraskip landsins, Posta og Atlantsflog umsita skipanina, og Fíggjarmálaráðið skal, eftir lokið fíggjarár, hava útgreinaðan roknskap við grannskoðaraváttan.

Fíggjarmálaráðið hevur goldið peningin út, eftir at hava fingið váttan frá P/f Januar um upphæddirnar til Atlantsflog og Posta, og frá Landsgrannskoðanini um upphæddina til Strandferðsluna. 825 t.kr. eru goldnar til Atlantsflog, 146 t.kr. til Posta og 525 t.kr. til Strandferðsluna; 1,5 mió.kr. tilsamans.

9.7 Akstovan (LG 2019/217-0384)

KT-viðurskifti

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av KT-viðurskiftum hjá Akstovuni.

Í oktober 2018 hevur Akstovan klassifiserað Akfarsskipanina, Koyrikortskipanina, Sýnsskipanina og Navnaskránna eftir trúnaði, atgeingi og rættleika.

Í juni 2019 greiddi Samferðslumálaráðið frá, at Akstovan á vári 2018 gjørdi avtalu við KT-veitara um at flyta ambætaraútbúnaðin í trygg ambætarahøli, og at útgerðin varð flutt í mars 2018. Akstovan hevur í desember 2018 undirskrivað avtalu við veitaran um rakstur, viðlíkahald og trygd av útgerðini.

Sambært Samferðslumálaráðnum ætlaði Akstovan at endurskoða váðametingina og KT-trygdarpolitikkin í 4. ársfjórðingi á hvørjum ári, fyrstu ferð í september 2019.

Sambært landsstýrismanninum er Akstovan KT-grannskoðað í juni 2020 sambært rundskrivi um KT-trygd. Grannskoðarin hevur gjørt vart við fleiri viðurskifti. Fíggjarmálaráðið fer saman við Akstovuni at gera eina ætlan fyri, hvussu tilmælini kunnu røkkast.

Kassaeftirlit
Landsgrannskoðanin var á ófráboðaðum kassaeftirliti á Akstovuni í oktober 2019. Einki var at finnast at.

9.8 Semingsmannaskipanin (LG 2018/217-0391)

Landskassin ber útreiðslurnar av Semingsstovninum; partarnir bera sjálvir egnar útreiðslur samsvarandi starvsskipan.

Semingsfólk fáa 4 t.kr. um mánaðin og varasemingsfólk 3 t.kr. um mánaðin í føstum samsýningum eftir galdandi siðvenju. Tá ið seming er, rindar stovnurin 500 kr. um tíman til hvørt semingsfólkið, umframt at hann rindar fyri fundarhøli, gisting, skeið o.a. hjá semingsfólkunum. Spurt, hvussu Samferðslumálaráðið tryggjaði sær, at tímarnir, goldið varð fyri, vóru rættir, svaraði ráðið, at tað var ein spurningur um álit.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið hevur havt fund við semingsmenninar í juli 2020 og avtalað varð, at frameftir verður útgreining av tímanýtsluni send við tímauppgerðini.

9.9 Barsilsskipanin (LG 2017/217-0394)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Barsilsskipanini. Árliga gjaldið fyri persónliga teknaða trygging var 500 kr. Í 2013 vísti Landsgrannskoðanin á, at í mun til tað, A-skattgjaldarar rinda, var tann upphæddin í lægra lagi. Í august 2017 greiddi landsstýrismaðurin frá, at Samferðslumálaráðið arbeiddi við málinum um at hækka sjálvbodna tryggingargjaldið.

Í uppskoti til samtyktar mæltu løgtingsgrannskoðararnir landsstýrismanninum í samferðslumálum til at dagføra gjaldið.

TAKS hevur umsitið reglurnar um persónliga teknaða trygging, sum at tryggingarnar galda fyri eitt kalendaraár. Landsgrannskoðanin vísti á, at sambært lógini er gjaldið fyri eitt ár. Í apríl 2017 boðaði TAKS frá, at stovnurin hevði sent áheitan til Samferðslumálaráðið um at broyta ásetingina soleiðis, at kunngerðin samsvaraði við praksis.

Í august 2017 kunnaði landsstýrismaðurin um, at lógarbroytingin eisini skuldi fata um, at tryggingargjaldið skuldi galda fyri eitt kalendaraár.

Gjaldið fyri sjálvbodna trygging er ikki broytt.

Í september 2018 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Samferðslumálaráðið hevði ikki hækkað sjálvbodna tryggingargjaldið ella ásett, at tryggingargjaldið skal galda fyri eitt kalendaraár (sum var praksis). Tryggingargjaldið er ásett í § 1 í K. nr. 59/2002 “um gjald til sjálvbodnu barsilspeningatryggingina”. § 2 ásetir, nær tryggingargjaldið skal vera galdandi. Sostatt var tað bert neyðugt at broyta kunngerðina sjálva, og fór tað at verða gjørt í næstum.

Í juni 2019 kunnaði landsstýrismaðurin um, at kunngerðin var gjørd og send til hoyringar. Eftir ætlan verður hon lýst í næstum.

Í august 2020 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at arbeitt verður við at endurskoða gjaldið til Barsilsskipanina. Endamálið er at fáa javnvág ímillum útgjøld og kostnað. Ætlanin er at bera Tinginum uppskot um broyting í løgtingslóg um barsilsskipan í heyst.

Áogn hjá Barsilsskipanini

Í 2010 hækkaði áognin hjá Barsilsskipanini frá 1,3 mió.kr. til 5,1 mió.kr. Áognin var støðugt hækkað síðani, við undantaki av 2014. Sambært TAKS var orsøkin til hækkingina, at tá ið peningastovnarnir fluttu frá Elektron til SDC í 2010, misti TAKS møguleikan at krevja inn barsilsgjald samstundis, sum lønir vórðu fluttar. Tá var ikki longur tekniskt møguligt at fáa gjaldið inn sjálvvirkandi.

Í september 2018 boðaði landsstýrismaðurin frá, at TAKS hevði upplýst, at arbeitt varð við at fáa gomlu skipanina at virka aftur. Komið var fram til, at tænastan ikki hvarv, tá ið peningastovnarnir fluttu frá Elektron til SDC í 2010. TAKS arbeiddi saman við øðrum grunnum við at fáa gomlu gjaldsavtaluna at koma í gildi aftur.

Seinastu 5 árini hevur áognin hjá Barsilsgrunninum verið:

t.kr.

StRk	Gjald til barsilsskipanina	2015	2016	2017	2018	2019
0332-0800	Barsilsgjald, arbeiðsgevarar	6.240	7.347	7.580	7.717	8.207

Í juni 2019 greiddi landsstýrismaðurin frá, at tað er staðfest, at ikki ber til at seta gomlu skipanina í verk aftur. Peningastovnarnir kunnu ikki lata triðja persón skráseta gjaldsavtalu.

Í august 2020 hevur landsstýrismaðurin vístá, at saldan omanfyri er skuld til Barsilsgrunnin, tað vil siga eisini fallin skuld. Fallin skuld, sum er farin til innheintingar 31. desember 2018, var 542 t.kr. og 31. desember 2019 var hon 675 t.kr, so fallin skuld er hækkað við 133 t.kr., meðan inngjaldið til grunnin er hækkað við 8,2 mió.kr.

TAKS hevur áður greitt frá, at áðrenn føroysku peningastovnarnir fluttu KT-virksemi sítt av landinum, bleiv gjaldið frá arbeidsgevarunum trekt sjálvvirkandi, tá ið lønir vórðu avgreiddar. Sambært landsstýrismanninum hevur TAKS kannað, um tað aftur ber til at trekkja gjaldið sjálvvirkandi, men tað hevur víst seg, at tað ikki letur seg gera.

Innheinting av ov nógv goldnum barsilspeningi

TAKS kravdi ikki upphæddir inn, ið vóru undir 2.500 kr. TAKS hevði gjørt eina meting av, hvat tað kostaði at krevja inn eftirstøður, og helt, at tað loysti seg ikki at seta arbeiðsorku av til at heinta upphæddir inn, ið vóru undir 2.500 kr.

Landsgrannskoðanin helt, at ein tílík regla átti at verið heimilað í lóg, og samanbar við regluna í skattalógini um, at írestandi skattur, sum er 100 kr. ella minni, verður ikki kravdur.

Í august 2017 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Samferðslumálaráðið fór at gera eina áseting í barsilslógini um, at upphæddir undir 2.500 kr. ikki skuldu krevjast inn.

Í uppskoti til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin 2016 hildu løgtingsgrannskoðararnir, at TAKS hevði ikki heimild at lata vera við at krevja inn, og mæltu til, at lógarheimild varð fingin til vega.

Í september 2018 kunnaði landsstýrismaðurin um, at lógin var ikki dagførd. TAKS hevði í verki broytt markið til 500 kr., og tað hevði leingi verið mannagongdin. 2.500 kr. markið varð brúkt í sambandi við stóra upprudding, tá ið TAKS yvirtók Barsilsskipanina frá ALS.

Fleiri upphæddir “hingu” sum skuld í skipanini, bæði munir í sambandi við lógarbroytingina og eisini upphæddir, ið persónar høvdu rindað aftur, tí teir høvdu fingið ov nógv goldið út. TAKS kundi ikki bóka upphæddirnar burtur, tí KT-skipanin var ikki gjørd til tað, og TAKS hevði ikki raðfest uppgávuna.

Landsgrannskoðanin helt, at tað átti at borið til at gjørt neyðugu dagføringarnar av KT-skipanunum, soleiðis at bókhaldið kundi virka eftir galdandi reglum. Samferðslumálaráðið tók undir við Landsgrannskoðanini.

Í september 2018 kunnaði landsstýrismaðurin um, at stórar broytingar vóru á KT-økinum hjá TAKS, og upplýsti TAKS, at Elektron ikki hevði havt orku til menningaruppgávur. Seinast í árinum skuldi arbeiðið verða liðugt, og fór TAKS at raðfesta sínar menningaruppgávur, herímillum eisini bókhaldsskipanina. Sigast kundi tó ikki við vissu, nær hon varð gjørd.

Í juni 2019 kunnaði Samferðslumálaráðið um, at bókingarmyndin er á uppgávulistanum hjá TAKS, og verður raðfest frammarlaga.

Í august 2020 hevur landsstýrismaðurin í umhvørvis- og vinnumálum aftur kunnað um, at uppgávan er á raðfestingarlistanum hjá TAKS. Barsilsskipanin hevur fingið upplýst, at bókingarmyndin verður gjørd í heyst. Bókhaldsdeildin hjá TAKS kann tó bóka munir burtur, sum hanga í skipanini. Er talan um skuld hjá persónum og arbeiðsgevarum, sum av eini ella aðrari orsøk hava fingið barsilspening út av óróttum, er avtala gjørd við Elektron um at bóka skuldina burtur úr skipanini, tá ið hon er goldin.

10. Fíggjarstøða

10.1 Fíggjarstøða (LG 2019/300-0000)

Fíggjarstøðan í landsroknskapinum er ein samandráttur av fíggjarstøðuni hjá øllum "vanligum" landsstovnum, sum eru við í fíggjarlógini. Harafturat eru nakrir postar, sum eru felags, t.d. størsti parturin av tøka peninginum og skuldini. Fíggingargrunnurin frá 1992 er við undir "kapitalinnskot". Partafeløg, sum landið eigur, eru tikin við undir "virðisbrøv".

Landsgrannskoðanin hevur í stóran mun bygt grannskoðanina av postum í fíggjarstøðuni 2019 á tey eftirlit og tær avstemmanir, ið Gjaldstovan støðugt fremur.

Í talvuni niðanfyri eru samandráttir úr fíggjarstøðuni við árslok 2015 til 2019.

mió.kr.

	2015	2016	2017	2018	2019
OGN					
Kapitalinnskot	451	460	487	390	399
Virðisbrøv	1.485	1.521	1.556	1.591	1.626
Útlán	125	122	121	109	101
Áogn o.a.	440	543	601	665	638
Tøkur peningur	2.792	2.905	3.479	3.666	3.477
Ogn tilsamans	**5.293**	**5.551**	**6.244**	**6.421**	**6.241**
SKULD					
Skuld	6.120	6.076	6.155	5.668	4.897
Útjavningarkonta	-827	-525	89	753	1.344
Skuld tilsamans	**5.293**	**5.551**	**6.244**	**6.421**	**6.241**

10.1.1 Kapitalinnskot (LG 2019/300-0102)

Kapitalinnskot fevnir um Fíggingargrunnin frá 1992.

Við árslok 2019 fevnir kapitalinnskotið um Fíggingargrunnin frá 1992, sum eigur 33,4% av P/f BankNordik.

t.kr.

Kapitalogn í landsfyritøkum	2017	2018	2019
Kapitalogn við ársbyrjan	460.425	487.311	389.911
Javning, kapitalognin samsvarar við eginognina í roknskapinum hjá Fíggingargrunninum	26.886	-97.400	9.219
Kapitalogn við ársenda	**487.311**	**389.911**	**399.130**

Í 2018 lækkaði kapitalognin í Fíggingargrunninum 97,4 mió.kr., frá 487,3 mió.kr. til 389,9 mió.kr., og í 2019 hækkaði hon 9,2 mió.kr. til 399,1 mió.kr. Kapitalognin verður javnað hvørt ár, soleiðis at hon samsvarar við eginpeningin í roknskapinum hjá Fíggingargrunninum fyri roknskaparárið frammanundan. Sostatt verður ognin í landsroknskapinum javnað eitt ár afturút.

Av tí at roknskapurin hjá Fíggingargrunninum fyri farið roknskaparár ikki er tøkur fyrr enn eftir, at landsroknskapurin er liðugur, og fyri ikki at bóka eitt fyribils tal út frá einari

meting, hevur Gjaldstovan valt at nýta tølini úr seinast lidna roknskapinum hjá grunninum.

Í ársfrásøgnini hjá Fíggingargrunninum fyri 2018 var ognarparturin í P/f BankNordik bókaður til 362,6 mió.kr., sum svaraði til kursvirðið á partabrøvunum 31. desember 2018. Virðið var 8,3 mió.kr. hægri enn við árslok 2017, tá ið kursvirðið var 354,3 mió.kr. Leiðslan greiðir í ársfrágreiðingini frá, at kursurin á partabrøvunum hjá BankNordik hækkaði úr 106 við árslok 2017 í 108,5 við árslok 2018.

Við árslok 2019 var eginpeningurin í Fíggingargrunninum 402,1 mió.kr., ella 3 mió.kr. hægri enn við árslok 2018. Sambært ársfrásøgnini 2019 er høvuðsorsøkin til hækkingina, at virðið á partabrøvunum í BankNordik er hækkað. Við árslok 2019 var kursurin 109.

Fíggingargrunnurin hevur fingið 23,4 mió.kr. í vinningsbýti frá BankNordik fyri fíggjarárið 2018. Av hesum eru 23 mió.kr. lutaðar víðari til landskassan í 2019.

Landsgrannskoðanin hevur samanborið tølini 2018 og 2019 í roknskapinum hjá Fíggingargrunninum frá 1992 við tølini í landsroknskapinum, umframt at vit hava eftirroknað ognarpartin í BankNordik. Landsgrannskoðanin hevur einki at finnast at.

Løgtingið hevur mælt til at fáa greiðu á roknskaparpostinum og at fáa skrásett grunnar o.l.

Í nógv ár hevur Løgtingið mælt til at fáa greiðu á hesum roknskaparposti, soleiðis at ikki bert Fíggingargrunnurin, men eisini aðrir grunnar o.l., sum landið eigur, verða skrásettir í landsroknskapinum, t.d. sum “Kapitalogn í landsfyritøkum”.

Í oktober 2013 kunnaði landsstýrismaðurin í fíggjarmálum um, at hesir grunnar verða ikki tiknir við í landsroknskapin, men verða partur av samlaða almenna roknskapinum.

Í 2014, 2015 og aftur í august 2016 greiddi landsstýrismaðurin frá, at arbeitt varð framvegis við spurninginum, hvussu samlaði almenni roknskapurin skuldi gerast upp. Ætlanin var, at Frítíðargrunnurin, eins og Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin, skuldi bóka beinleiðis í Búskaparskipan landsins.

Grunnarnir eru tiknir við sum notur til landsroknskapin undir partinum “Eksternir grunnar”. Í framtíðini er ætlanin, at eginpeningurin í Húsalánsgrunninum, Búnaðargrunninum, Granskingargrunninum, Mentanargrunninum og Vinnuframagrunninum verður tikin við í landsroknskapin undir “Innistandandi í landsfyritøkum, grunnum o.t.”

Eftir er at fáa greiðu á, hvussu Arbeiðsloysisskipanin, Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin, Framtaksgrunnurin og Realurin kunnu takast við í landsroknskapin.

Í august 2017 kunnaði landsstýrismaðurin um, at tað varð áhaldandi arbeitt við at fáa ein fullfíggjaðan landsroknskap. Húsalánsgrunnurin og Búnaðargrunnurin vóru aftur tiknir við í landsroknskapin fyri 2016. Arbeitt var við nýggjum lógaruppskoti fyri Realin, har støða eisini skuldi takast til tilknýti til landsroknskapin.

Í 2018 og aftur í 2019 greiddi landsstýrismaðurin frá, at tað framhaldandi var arbeitt fram ímóti einum fullfíggjaðum landsroknskapi. Arbeiðið fór fram í stigum. Í 2018 var miðað ímóti, at í landsroknskapinum fyri 2018 skuldi eginpeningurin í eksternu grunnunum takast við undir “Innistandandi í landsfyritøkum, grunnum o.t.” Sambært landsstýrismanninum var tað ikki gjørt kortini.

Arbeitt var framvegis við nýggjum lógaruppskoti um Realin. Í 2019 kunnaði landsstýrismaðurin um, at lógaruppskotið fór at vera sent til hoyringar í apríl 2019. Í uppskotinum er ásett, at Realurin verður skrásettur í landsroknskapinum, men verður ikki tikin við í fíggjarlógini. Tað eydnaðist ikki at fáa uppskotið fyri Løgtingið, áðrenn tingið fór heim í mai 2019.

Arbeitt verður við nýggjum lógar-uppskoti um Realin.

Í august 2020 hevur landsstýrismaðurin enn eina ferð greitt frá, at arbeitt verður framvegis við nýggjum lógaruppskoti fyri Realin. Lógaruppskotið er sett á løglista, sum varð latin Løgtinginum saman við løgmansrøðuni í ár, og verður tískil ætlandi lagt fyri Løgtingið í hesari tingsetuni.

10.1.2 Virðisbrøv

t.kr.

	2017	2018	2019
Sambært roknskapinum	1.555.788	1.590.788	1.625.788

Orsøkin til hækkingarnar er, at landið sambært Ll. nr. 30/2014 hevur sett 35 mió.kr. um árið í partapeningi í P/f Eystur- og Sandoyartunlar.

Yvirlit yvir partabrøv, sum eru skrásett í landsroknskapinum:

t.kr.

Skrásett í landsroknskapinum	2017	2018	2019	Til skjals
P/f Vágatunnilin	160.300	160.300	160.300	Ja
P/f Norðoyatunnilin	235.000	235.000	235.000	Ja
P/f Føroya Tele	77.948	77.948	77.948	Ja
P/f Postverk Føroya	43.000	43.000	43.000	Ja
P/f Fiskaaling	17.375	17.375	17.375	Ja
P/f Føroya Lívstrygging	11.667	11.667	11.667	Ja
P/f Vága Floghavn	807.818	807.818	807.818	Ja
P/f Atlantic Airways	86.912	86.912	86.912	Ja *)
P/f Elektron	2.347	2.347	2.347	Ja
P/f Føroya Dátusavn	0	0	0	Ja
Sp/f Ítróttavedding	20	20	20	Nei
P/f Smyril Line	32.760	32.760	32.760	Ja
P/f Tjaldur	140	140	140	Nei
P/f Føroya Banki	1	1	1	Ja *)
P/f Visit Faroe Islands	500	500	500	Nei **)
P/f Eystur- og Sandoyartunlar	80.000	115.000	150.000	Nei **)
Partabrøv tilsamans	**1.555.788**	**1.590.788**	**1.625.788**	

*) Partabrøvini eru skrásett elektroniskt og tí pappírsleys. Útskrift er fingin til vega frá Værdipapircentralen.
**) Partabrøv verða ikki útskrivað longur.

Í 9 feløgum eigur landið allan partapeningin:

t.kr.

Roknskapartøl 2019	Brutto-vinningur	Ársúrslit	Samlað ogn	Egin-peningur
P/f Vágatunnilin	11.046	3.093	204.748	191.003
P/f Norðoyatunnilin	13.349	3.148	273.780	264.059
P/f Føroya Tele (samtak)	205.798	33.717	706.677	536.412
P/f Postverk Føroya (samtak)	68.652	241	122.342	38.319
P/f Fiskaaling	17.578	354	16.560	-1.969
P/f Vága Floghavn (samtak)	70.358	13.880	919.374	833.603
P/f Atlantic Airways	194.568	7.831	765.482	258.630
P/f Visit Faroe Islands	5.466	9	4.576	534
P/f Eystur- og Sandoyartunlar	-1.069	-3.216	2.934.247	134.971
Tilsamans	**585.746**	**59.057**	**5.947.786**	**2.255.562**

Samlaða úrslitið hjá hesum feløgunum var 59,1 mió.kr. í vinningi eftir skatt, og samlaði eginpeningurin varð 2,3 mia.kr. Í 2018 var samlaða úrslitið hjá feløgunum, sum landið eigur allan partapeningin í, 86,6 mió.kr. og eginpeningurin 2,2 mia.kr.

Í 2019 áttu minnilutapartaeigararnir 11,2 mió.kr. í dótturfelagi hjá P/f Vága Floghavn.

Samlað roknskapartøl hjá feløgunum

Roknskapartølini 2008 til 2019, fyri feløg sum landið eigur allan partapeningin í:

t.kr.

Ár	Brutto-vinningur/søla	Ársúrslit	Samlað ogn	Eginpeningur
2008	925.524	-42.241	5.005.434	1.300.876
2009	695.048	-23.045	5.185.597	1.421.735
2010	714.585	27.672	5.983.268	1.524.940
2011	732.782	-268.123	7.241.118	2.201.249
2012	608.022	-513.502	3.730.656	1.631.006
2013	620.290	91.263	3.898.691	1.710.169
2014	660.020	67.148	4.201.625	1.819.871
2015	866.069	48.714	4.856.817	2.038.028
2016	607.125	71.277	5.835.015	1.990.572
2017	618.316	86.093	5.885.239	2.088.516
2018	580.528	86.576	6.097.371	2.196.207
2019	585.746	59.057	5.947.786	2.255.562

Virðismeting

Gjaldstovan hevur ásett reglur fyri, hvussu partabrøv eiga at verða goymd. Tá ið tey verða keypt, skulu tey verða latin Gjaldstovuni. Somu reglur eru galdandi fyri onnur virðisbrøv. Reglurnar viðgera ikki upp- og niðurskrivingar av partapeningi.

Skrásetti parta-peningurin gevur ikki ábending um virðið á feløgunum.

Í landsroknskapinum 2019 er partapeningurin skrásettur við keypsvirðinum. Talan er bæði um keyp til undirkurs, yvirkurs og útgávukurs. Skrásetti partapeningurin gevur sostatt onga ábending um ítøkiliga virðið á feløgunum.

Niðanfyri sæst innara virðið á 14 feløgum, samanborið við keypsvirðið sambært landsroknskapinum fyri 2019:

t.kr.

	Keypsvirðið sambært landsroknskapinum	Innara virðið
P/f Vágatunnilin	160.300	191.003
P/f Norðoyatunnilin	235.000	264.059
P/f Vága Floghavn *)	807.818	833.603
P/f Føroya Tele	77.948	536.412
P/f Postverk Føroya	43.000	38.319
P/f Fiskaaling	17.376	-1.969
P/f Føroya Lívstrygging	11.667	23.497
P/f Atlantic Airways	86.912	258.630
P/f Elektron	2.347	5.538
P/f Smyril Line	32.760	56.420
P/f Tjaldur	140	**)11.174
Sp/f Ítróttavedding	20	35
P/f Visit Faroe Islands	500	534
P/f Eystur- og Sandoyartunlar	115.000	134.971
Partabrøv tilsamans	**1.590.788**	**2.352.225**

*) Parturin hjá minnilutapartaeigarum var 11,2 mió.kr.
**) Roknskapur fyri 2019 ikki tøkur. Tølini eru frá 2018.

Sum sæst í yvirlitinum, er keypsvirðið í nøkrum førum munandi lægri enn innara virðið.

Vinningsbýti frá partafeløgum, har landskassin er einasti partaeigari:

t.kr.

	2017	2018	2019
P/f Føroya Tele	20.000	20.000	35.000

Í 2019 fekk landskassin harafturat 9,7 mió.kr. frá P/f Smyril Line, 6,5 mió.kr. fyri árið 2017 og 3,2 mió.kr. fyri árið 2018, umframt 391 t.kr. frá P/f Tjaldur.

10.1.3 Útlán

t.kr.

	2017	2018	2019
Útlán ársbyrjan	328.747	302.016	291.384
Tilgongd í árinum	20.928	9.650	10.641
Frágongd í árinum	-47.659	-20.283	-16.015
Útlán ársenda brutto	**302.016**	**291.384**	**286.010**
Sett av ímóti tapi	-181.561	-183.075	-185.068
Sambært roknskapinum	**120.455**	**108.308**	**100.942**

Heitið útlán fevnir um veðhaldsútlegg, lestrarlán, ymisk vinnulán, serlán, kurslán og stuðulslán. Tilgongdin stavar í høvuðsheitum frá, at nýggj lestrarlán eru veitt og frágongdin stavar í høvuðsheitum frá, at lestrarlán eru goldin aftur. Samanlagt eru útlánini lækkað 7,4 mió.kr. netto frá 2018 til 2019.

Sett er av ímóti tapi. Virðini á veðhaldsútleggum, serlánum, kurslánum og stuðulslánum sambært roknskapinum eru sett til 0 kr. Avsetingin svarar í høvuðsheitum til útlán til privata vinnu, sum ikki frammanundan eru avskrivað ella løgd um til rentu- og avdráttarfrí útlán.

Virðið á veðhaldsútleggum, serlánum, kurslánum og stuðulslánum er sett til 0 kr.

Rentu- og avdráttarfrí útlán

t.kr.

	2017	2018	2019
Rentu- og avdráttarfrí lán ársbyrjan	284.677	284.677	264.372
Tilgongd í árinum	0	0	0
Frágongd í árinum	0	-20.305	0
Rentu- og avdráttarfrí lán ársenda	**284.677**	**264.372**	**264.372**
Sett av móti tapi	-284.677	-264.372	-264.372
Sambært roknskapinum	**0**	**0**	**0**

Talan er um lán til Framtaksgrunnin, sjálvsognarstovnar, studningslán, eldrasambýli og Postverk Føroya. Sí notu nr. 3 í landsroknskapinum.

Sambært landsroknskapinum verða rentu- og avdráttarfrí lán tikin við í roknskapin við virðinum 0 kr., av tí at talan er um treytað lán, sum bert skulu rindast aftur, um bygningar o.t., sum lán eru veitt til, verða brúkt til annað, enn upprunaliga endamálið.

Rentu- og avdráttarfrí lán eru sett til virðið 0 kr., tí talan er um treytað lán.

10.1.4 Áogn o.a.

Skatta-, toll- o.t. skuldarar

t.kr.

	2017	2018	2019
Áogn landskassans brutto	469.657	475.870	452.093
Sett av ímóti tapi	-86.466	-113.493	-114.203
Sambært roknskapinum	**383.191**	**362.377**	**337.890**

Frá 2018 til 2019 er áognin lækkað 24,5 mió.kr. netto. Sambært landsroknskapinum eru størstu broytingarnar:

t.kr.

Broytingar 2018 til 2019	
FAS endurgjald	9.645
Felagsskattur	9.384
Tøkugjald á alivinnu	6.378
Meirvirðisgjald	-1.967
Kapitalvinningsskattur	-6.774
Vanligur landsskattur v.m.	-9.873
Tollavgjøld	-30.995

Tænastu-, vøru- og aðrir skuldarar

Talan er um tænastu- og vøruskuldarar hjá Apoteksverkinum, Landsverki, Kringvarpinum, Rúsdrekkasølu landsins og øðrum stovnum. Aðrir skuldarar eru m.a. inntøkur og endurgjøld, sum vanliga verða tíðaravmarkað. Eisini eru tað millumrokningar við landsstovnar, lønarútgjaldsskipanir, skipanir hjá TAKS, kommunum o.a.

Niðanfyri eru upphæddirnar útgreinaðar:

t.kr.

	2017	2018	2019
Tíðaravmarkingar	7.498	71.200	82.337
Avgjald á fiskatilfeingi	7.342	13.316	41.482
Inntøkufíggjað virksemi, Landsverk	15.116	16.429	25.073
Apoteksverkið	35.687	21.475	16.996
Tøkugjald á alivinnu	9.145	30.338	7.180
Fróðskaparsetur Føroya, stuðulsf. virksemi	5.670	6.895	7.079
Talgildu Føroyar	925	47	6.292
Gjald til Heilsutrygd	5.662	6.028	6.224
Landssjúkrahúsið	8.028	4.674	6.041
Kringvarp Føroya	6.219	5.457	5.890
TAKS	1.987	1.898	5.886
Heilsufrøðiliga starvsstovan	4.592	6.080	5.067
Ríkisstuðul, endurgjøld	6.385	9.274	4.415
Tryggingareftirlitið	3.806	4.036	4.088
Ymiskir skuldarar	35.219	49.611	19.559
Tilsamans sambært roknskapinum	**153.280**	**246.759**	**243.609**

Fleiri hækkingar og lækkingar eru, sum netto geva eina lækking 3,1 mió.kr. frá 2018 til 2019.

Goymslur

t.kr.

	2017	2018	2019
Sambært roknskapinum	64.509	56.170	56.376

Í tølunum eru vørugoymslurnar hjá Rúsdrekkasølu landsins, Apoteksverkinum, Strandfaraskipum landsins, Námi (útgávuvirksemi), Glasi, Miðnámi á Kambsdali, Landsverki, KT Landsins og Tekniska skúla í Klaksvík.

Virðið á goymslunum er hækkað 206 t.kr. netto frá 2018 til 2019. Talan er bert um smærri goymslubroytingar.

Ognir og útbúnaður (LG 2019/300-0101)

Í 2017 varð roknskaparkunngerðin broytt við K. nr. 110/2017. Sambært § 20 í kunngerðini skulu stovnar gera yvirlit yvir ognir, so sum verkløg, bygningar, maskinur, før, innbúgv og annan virðismiklan útbúnað. Yvirlitini skulu fevna um ognir og útbúnað, hvørs keypsvirði er oman fyri 50 t.kr. Ognirnar og útbúnaðurin skulu skrásetast í Búskaparskipan landsins, um ikki stovnurin hevur fingið loyvi til at nýta egna búskaparskipan.

Reglurnar um at skráseta ognir og útbúnað verða ikki hildnar.

Landsgrannskoðanin kann enn eina ferð staðfesta, at reglurnar um at skráseta ognir og útbúnað verða ikki hildnar.

Í august 2017 vísti landsstýrismaðurin í fíggjarmálum á, at broyting í roknskaparkunngerðini um ognaryvirlit var komin í gildi, men enn vantaði tøknilig menning av ognaryvirlitum í Búskaparskipan landsins til tess at fáa skrásett ognir við virði yvir 50 t.kr.

Í september 2018 greiddi landsstýrismaðurin frá, at ognarmodulið í Búskaparskipan landsins var broytt, soleiðis at størri stovnar við fakligum førleika fáa atgongd til at skráseta til- og frágongd av ognum. Smærri stovnar skulu framvegis venda sær til Gjaldstovuna fyri at fáa ognirnar skrásettar.

Í juli 2019 kunnaði landsstýrismaðurin um, at arbeiðið við játtanar-, roknskapar- og grannskoðanarviðurskiftum verður uppraðfest, við m.a. at fáa aðalráð og stovnar at dagføra ognaryvirlitini.

Í fíggjarstøðuni í landsroknskapinum er postur, nevndur "Immateriellur og materiellur útbúnaður, grundøki, bygningar, løgur o.t.", men eingin upphædd er ásett. Sjálvt um upprunavirði á ognum og avskrivingar eru skrásettar í Búskaparskipan landsins, ber ikki til at nýta tey til fíggjarstøðuna, tí at nógvar ognir eru ikki skrásettar, og tí at virðið á ognunum, sum eru skrásettar, er sjáldan dagført, um broytingar eru hendar eftir at ognirnar eru skrásettar.

Á síðu 235 í landsroknskapinum 2019 er ognaryvirlit. Yvirlitið er listi yvir fastognir og skip hjá tí almenna, har viðmerkt er um ognirnar eru skrásettar í Búskaparskipan landsins ella ikki. Samferðslukervi, t.e. vegir, tunlar, brýr o.t., eru ikki skrásett í ognaryvirlitinum.

Støðisognir verða bólkaðar í tríggjar bólkar. Í bólki 1 eru t.d. bygningar, jørð og samferðslukervi; hesar ognir verða vanliga útvegaðar við heimild í løgujáttan. Í bólki 2 eru maskinur, før o.t. Í bólki 3 vera smærri ognir so sum innbúgv skrásettar.

Landsgrannskoðanin hevur í apríl 2020 hugt eftir skrásetingunum av føstum ognum, skipum og bilum í bólki 1 og 2.

Føst ogn

Landsgrannskoðanin hevur sett upp yvirlit yvir fastar ognir hjá landinum, t.e. bygningar, grundøki og viðarlundir. Grundarlagið undir yvirlitinum er Búskaparskipan landsins, landsroknskapurin, yvirlit frá Landsverki og skrásetingar hjá Umhvørvisstovuni um ognarheimildir. Sjálvt um vissa ikki er fingin fyri, at yvirlitið er fullfíggjað, gevur tað eina ábending um, hvussu støðan er við skrásetingum.

Yvirlitið vísir, at landið eigur 173 ymiskar bygningar, m.a. skrivstovubygningar, skúlar, sjúkrahús, sambýli og ognir, sum Tjóðsavnið varðar av. 79 av hesum bygningunum eru skrásettir bæði í Búskaparskipan landsins og í ognaryvirltinum í landsroknskapinum, 46 eru bert í Búskaparskipan landsins, 25 eru bert í landsroknskapinum og 23 eru bert skrásettir í yvirliti frá Landsverki.

Teir tilsamans 125 bygningarnir, sum eru skrásettir í ognaryvirlitinum í Búskaparskipan landsins við tilhoyrandi grundstykki, hava eitt ásett uppruna-/útveganarvirði upp á 1.585 mió.kr. og restvirðið eftir avskrivingar er 772 mió.kr. Stór óvissa er í tølunum. Eitt er, at tað kann verða trupult at áseta virði á bygningarnar, annað er at tølini í nógvum førum ikki verða dagførd, t.d. tá ið bygningar verða umvældir. Harumframt eru í minsta lagi 48 bygningar, sum ikki eru skrásettir í Búskaparskipan landsins, og sum helst hava eitt virðið upp á hundraðtals milliónir.

Landsgrannskoðanin hevur kannað á heimasíðuni foroyakort.fo, hvør stendur sum eigari av ognunum. Í flestu førum stendur Føroya landsstýri og Føroya Løgting sum eigari, men í øðrum førum stendur ein almennur stovnum ella eitt aðalráð sum eigari. Í einstøkum førum er talan um leigugrund frá kommunum.

Samanumtikið kann Landsgrannskoðanin staðfesta, at langt er eftir á mál at skráseta fasta ogn hjá landinum í Búskaparskipan landsins.

Langt er eftir á mál at skráseta fasta ogn í BSL.

Skip

11 skip hjá Strandfaraskipum landsins, VØRN og Havstovuni eru skrásett í Búskaparskipan landsins. Skrásetingin er tó ikki dagførd, tí 3 av skipunum eru ikki longur í flotanum, og tvey onnur skip mangla at verða skrásett. Upprunavirðið er ásett til 576 mió.kr., meðan restvirðið eftir avskrivingar er 181 mió.kr.

Skráseting av skipum í BSL er ófullfíggjað.

Bilar

Í apríl 2020 vóru um 235 bilar skrásettir í ognaryvirlitinum í Búskaparskipan landsins, av teimum eru einir 30 skrásettir í 2010 ella áðrenn tað. Sannlíkt er tí at fleiri bilar í yvirlitinum ikki eru ogn hjá landinum longur.

Í 2018 gjørdi Landsgrannskoðanin eina kanning, har vit komu fram til, at tað almenna átti 330 akfør sambært akfaraskránni hjá Akstovuni. 240 av teimum vóru ikki skrásett í Búskaparskipan landsins. Høvuðsorsøkin til stóra munin er, at fleiri stovnar, sum hava nógvar bilar, hava egna búskaparskipan, og hava tí ikki skyldu til at skráseta bilarnar í ognaryvirlitinum í Búskaparskipan landsins.

Sambært Búskaparskipan landsins keypti tað almenna 25 nýggjar bilar í 2018 og 39 í 2019. Av teimum eru ávikavist 23 og 28 skrásettir í ognaryvirlitinum.

Skráseting av bilum í BSL er ófullfíggjað.

Niðurstøðan hjá Landsgrannskoðanini er, at viðvíkjandi skrásettum bilum er ognaryvirlitið í Búskaparskipan landsins ófullfíggjað.

10.1.5 Tøkur peningur

Tøkur peningur fatar um gjaldføri landsins. Sambært § 10, stk. 1, í Ll. nr. 116/2016 "um Landsbanka Føroya og Føroya váðaráð" umsitur Landsbankin gjaldføri landsins eftir ásetingum frá landsbankanevndini. Sambært stk. 2 er endamálið við umsitingini, at:

- landið altíð hevur neyðugt gjaldføri tøkt, soleiðis at tað kann halda sínar skyldur,
- landsins gjaldføri verður fyrisitið væl við atliti at tryggleika, herundir at samváðin millum landsins gjaldføri og føroyska búskapin verður sum minst, og at
- landsins gjaldføri verður rentað til marknaðarkor.

Sambært § 10, stk. 3 og 4, fevnir gjaldføri landsins um alt gjaldførið hjá allari landsumsitingini, øllum landsstovnum o.ø. Gjaldførið verður roknað sum landsins kassapeningur, innistandandi í peningastovnum og óveðsettar virðisbrævaognir.

Í fíggjarstøðuni er tøki peningurin býttur í tveir bólkar:

1. Virðisbrøv o.t., og
2. Bankakontur, girokontur og kassapeningur.

Virðisbrøv o.t.

Landsbanki Føroya hevur sett part av tøka peninginum í stuttfreistað virðisbrøv, sum eru tikin við til marknaðarvirðið. Posturin nevnist "Virðisbrøv o.t."

mió.kr.

	2017	2018	2019
Sambært roknskapinum	2.932	3.278	3.052

Landsbankin hevur dagligu umsitingina av plaseringini av gjaldførinum hjá landinum. Plaseringin byggir á íløguinstruks frá landsbankanevndini, har ásetingar eru um m.a., hvussu nógv kann plaserast í ávís sløg av virðisbrøvum.

Landsgrannskoðanin hevur kannað, um plaseringarnar av gjaldførinum eru sambært íløgureglunum í Ll. nr. 116/2016, og eisini um tær eru sambært íløguinstruksinum frá landsbankanevndini. Landsgrannskoðanin hevði einki at finnast at.

Bankakontur og kassapeningur

t.kr.

	2017	2018	2019
Sambært roknskapinum	547.568	388.575	425.187

Banka- og girokontur

Roknskaparposturin vísir ikki, hvussu nógv landskassin tilsamans hevur standandi á banka- og girokontum. Fleiri landsstovnar og -grunnar við leysum tilknýti til fíggjarlóg ella landsroknskap hava nógvan pening standandi í virðisbrøvum og á peningastovnskontum, sum ikki eru við í landsroknskapinum.

Nógvur peningur standandi í virðisbrøvum og peningastovnum, ikki við í landsroknskapinum.

Í 2019 kann upphæddin greinast sundur í tær kontur, sum Landsbankin og Gjaldstovan umsita, og tær, sum aðrir stovnar í landsroknskapinum umsita.

Landsgrannskoðanin hevur kannað:

1. um kontuavrit fra peningastovnum stemma við Búskaparskipan landsins,
2. um peningur í fremmandum gjaldoyra er tikin við í roknskapin við røttum virði,
3. um saldur av plaseringum hjá Landsbankanum eru rætt skrásettar í landsroknskapinum og Búskaparskipan landsins,
4. um Landsbankin liggur inni við ov nógvum gjaldføri, og
5. um reglurnar um minstagjaldføri eru hildnar.

Ad. 4) Landsbankin hevur gjørt innanhýsis reglugerð um, hvussu nógvur tøkur peningur kann standa í føroyskum peningastovnum, í hvørjum peningastovni sær og samanlagt. Við árslok 2019 var innistandandi í peningastovnunum í tráð við reglugerðina.

Ad. 5) Sambært § 11 í Ll. nr. 116/2016 skal landsstýrismaðurin í fíggjarmálum fyriskipa, at landsins gjaldføri, sambært § 10, stk. 3 og 4, í minsta lagi samsvarar við 15% av bruttotjóðarúrtøkuni í undanfarna ári. Landsbankanevndin skal í august mánað áseta minstagjaldførið. Landsbankin hevur upplýst, at av tí at bruttotjóðarúrtøkan fyri undanfarna ár ikki altíð er gjørd upp, tá ið landsbankanevndin skal áseta minstagjaldførið, verður seinasta uppgjørda talið brúkt, eisini um talan er um fyribilstal. Minstagjaldførið fyri 2019 tekur útgangsstøði í framrokningini av bruttotjóðarúrtøkuni fyri 2018.

Talvan niðanfyri vísir gongdina í tøka peninginum 2017 til 2019:

mió.kr.

	2017	2018	2019
Sambært roknskapinum	3.479	3.666	3.478
Harav minstagjaldføri	2.475	2.670	2.830
Munur millum gjaldføri og minstagjaldføri	**1.004**	**996**	**648**

Lógin ásetir, at gjaldførið fevnir um alt gjaldførið hjá allari landsumsitingini, øllum landsstovnum v.m., og sum er trygt og lætt tøkt. Gjaldførið fevnir eisini um óveðsett virðisbrøv. Sambært Landsbankanum kemur allur tøki peningurin í fíggjarstøðuni undir hesar treytir, og verður tí roknaður sum gjaldføri hjá landskassanum.

Tøki peningurin hjá landskassanum er lækkaður 188,6 mió.kr. frá 2018 til 2019, meðan kravið til minstagjaldførið er hækkað 160 mió.kr., t.v.s. at munurin millum tøka peningin (gjaldførið) og minstagjaldførið er minkaður við 348 mió.kr. frá 2018 til 2019. Sambært Landsbankanum er høvuðsorsøkin, at 800 mió.kr. av teimum tilsamans 1.100 mió.kr. sum vórðu rindaðar aftur av lánum í 2019, vórðu tiknar av gjaldførinum.

Tøki peningurin er lækkaður og kravið til minstagjaldføri er hækkað.

Landsgrannskoðanin hevði ikki aðrar viðmerkingar til gjøgnumgongdina enn tær, sum eru til pkt. 4 og 5.

Kassapeningur

Landsgrannskoðanin hevur framt nøkur kassaeftirlit í 2019, har vit hava stemmað kassapening av við kassauppgerðir, Búskaparskipan landsins v.m. Hava stovnarnir peningastovnskontur, eru tær stemmaðar av við kontuavrit frá peningastovnum og Búskaparskipan landsins. Eisini hava vit kannað konturnar fyri óvanligar bókingar í ávís tíðarskeið. Kassaeftirlitini eru umrødd undir hvørjum stovni sær.

10.1.6 Skuld

Innanlandsskuld, langfreistað

mió.kr.

	2017	2018	2019
Sambært roknskapinum	4.644	4.608	3.817

Við árslok 2019 var talan um 4 lánsbrævarøðir:

- FO-LB 200611, áljóðandi 1.345 mió.kr., sum fellur til gjaldingar 11. juni 2020.
- FO-LB 210622, áljóðandi 1.350 mió.kr., sum fellur til gjaldingar 22. juni 2021.
- FO-LB 230627, áljóðandi 550 mió.kr., sum fellur til gjaldingar 27. juni 2023.
- FO-LB 320503, áljóðandi NOK 550 mió.kr. (svarandi til 417,3 mió.kr. við árslok 2019), sum fellur til gjaldingar 3. mai 2032.

Við árslok 2019 var samlaða áljóðandi skuldin 3.662,3 mió.kr.

Í 2019 eru 300 mió.kr. tiknar í nýggjum láni.

Lánini verða gjørd upp til marknaðarvirði.

Frá fíggjarárinum 2016 eru lánini gjørd upp eftir marknaðarvirði.

Landsbankin selur meginpartin av brævalánunum uttanlands, og óvist er, hvørjir keypararnir eru. Heitið á roknskaparpostinum, "Innanlandsskuld, langfreistað", er tí helst ikki so beinrakið.

Uttanlandsskuld, langfreistað

mió.kr.

	2017	2018	2019
Sambært roknskapinum	500	0	0

Lánið, 500 mió.kr., stavaði frá avtaluni 10. juni 1998 ímillum donsku stjórnina og Landsstýrið. Sambært avtaluni var lánið rentu- og avdráttarfrítt við teimum treytum, sum standa í lánsavtaluni: *"Afviklingen af lånet aftales i takt med eventuelle indtægter fra fremtidig råstofudvinding. Dog afskrives gælden efter 20 år, såfremt der ikke på det tidspunkt er startet udvinding af råstoffer."* 10. juni 2018 datt lánið burtur sambært avtaluni.

Partur av langfreistaðu skuldini, ið fellur til gjaldingar í komandi ári

t.kr.

	2017	2018	2019
Sambært roknskapinum	10.579	1.100.000	1.345.000

Sambært Landsbankanum vóru veruligu afturgjøldini:

- Í juni 2018 fall eftir skránni seinasti avdráttur av FO-LB 180610, 10,6 mió.kr. til gjaldingar.
- Í juni 2019 fullu eftir skránni 1.100 mió.kr. av FO-LB 190620 til gjaldingar. Hinvegin varð FO-LB 200611 hækkað 300 mió.kr.
- Í juni 2020 fullu eftir skránni 1.345 mió.kr. av FO-LB 200611 til gjaldingar.

Stuttfreistað skuld (onnur skuld)

t.kr.

	2017	2018	2019
Sambært roknskapinum	1.010.733	1.060.060	1.080.133

Talan er í høvuðsheitum um vanligar kreditorar, millumrokningar við kommunur, tíðaravmarkingar og skuld, sum er greidd til útgjaldingar frá ymiskum skipanum. Skrásettu upphæddirnar í landsroknskapinum samsvara við sundurgreiningar, sum liggja aftanfyri.

10.2 Útjavningarkonta (LG 2019/300-0203)

t.kr.

	2018	2019
Salda 1. januar	156.868	752.710
RLÚ-úrslit	573.008	283.798
Búskapargrunnur Føroya	116.730	276.745
Ymiskar broytingar	-93.895	31.016
Salda 31. desember	**752.710**	**1.344.268**

"Ymiskar broytingar" eru broytingar í fíggjarstøðuni, sum ikki verða førdar yvir raksturin. Talan er m.a. um tøkniligar munir, sum standast av broytingum í roknskaparmeginreglum, rættingum av skeivum bókingum, sum viðvíkja undanfarnum árum, avtøkum av grunnum, úrslitum hjá internum grunnum, broytingum í avsetingum, mótbókingum til útlánsroknskap og mótbókingum til kapitalinnskot.

Útjavningarkontan líkist ikki "kontu fyri eginpening" í einum privatum virki. Ognirnar í landsroknskapinum verða virðismettar øðrvísi, og materiell støðisogn, t.d. bygningar, skip og vegir, verða ikki virðisásett í roknskapinum. Útjavningarkontan hevur tí so at siga bert eitt tøkniligt endamál.

Landsgrannskoðanin hevur kannað rørslurnar á útjavningarkontuni fyri árini 2014 til 2019.

Rakstrar- og íløguúrslitið samsvarar við RLÚ II í landsroknskapinum.

10.2.1 Javning av fíggjarstøðu við ársbyrjan

Tvær rættingar gjørdar í fíggjarstøðuni við ársbyrjan.

Í landsroknskapinum 2019 eru tvær rættingar gjørdar í fíggjarstøðuni við ársbyrjan, har nettoupphæddin er 38,9 mió.kr.

Við aðrari rættingini, er fíggjarstøðuposturin "Skattaskuldarar o.t." lækkaður við 105,7 mió.kr. Talan er um, at TAKS hevur sett 105,7 mió.kr. ov lítið av viðvíkjandi skatti, meirvirðisgjaldi v.m.

Rættingin av skattaskuldarum o.t. er greinað soleiðis:

t.kr.

Stovnsnr.	Heiti	31. des. 2018	Javning av primo	1. jan. 2019
120349	TAKS, innkrevjing	29.135	2.921	32.056
126701	Vanligur landsskattur	142.943	-71.175	71.769
127001	Felagsskattur	-2.428	-299	-2.728
127701	Meirvirðisgjald	77.986	-37.860	40.127
151660	Skattur av pensjónsinngjøldum	-987	730	-258
	Javning av primo tilsamans		**-105.683**	

Rættingin er mótbókað sum ein lækking av útjavningarkontuni í fíggjarstøðuni og ávirkar tí ikki rakstrar-, løgu- ella útlánsúrslitið.

Við hinari rættingini er fíggjarstøðuposturin "Aðrir skuldarar" hækkaður við 66,7 mió.kr. orsakað av, at skrásetingarmeginreglan viðvíkjandi fólkapensjónum, fyritíðarpensjónum o.l. er broytt. Undanfarin ár eru pensjónir, ið eru útgoldnar í desember, rakstrarførdar í desember, hóast pensjónirnar eru fyri januar í komandi ári, og áttu at verið rakstrarførdar eftir ársskiftið.

Við broytingini í 2019 eru pensjónirnar, ið eru goldnar í desember fyri januar 2020, settar á fíggjarstøðupostin "Aðrir skuldarar" um ársskiftið og rakstrarførdar í nýggja árinum.

Rættingin av øðrum skuldarum er greinað soleiðis:

t.kr.

Stovnsnr.	Heiti	31. des. 2018	Javning av primo	1. jan. 2019
124801	Fólkapensjón		42.988	42.988
125201	Viðbót til ávísar pensjónistar		2.634	2.634
132542	Hægsta fyritíðarpensjón		14.209	14.209
134064	Miðal fyritíðarpensjón		4.433	4.433
136080	Fyritíðarpensjón, avlamisveiting		304	304
138040	Lægsta fyritíðarpensjón		2.105	2.105
153800	Trivnaðartænastan	428	61	489
	Javning av primo tilsamans		**66.734**	

Rættingin er mótbókað, sum ein hækking av útjavningarkontuni í fíggjarstøðuni og ávirkar tí ikki rakstrar-, løgu- og útlánsúrslitið.

Broytta skrásetingarmeginreglan hevur tó við sær, at rakstrar-, løgu- og útlánsúrslitið í 2019 er økt við 5,5 mió.kr., tí hækkingin av pensjónsgrundarlagnum, sum fekk gildi 1. januar 2020 er rakstrarførd á roknskaparárið 2020 og ikki á 2019, sum eftir gomlu skrásetingarmeginregluni.

Útjavningarkontan lækkar 38,9 mió.kr. netto av primo-javningum.

Rættingarnar av primopostunum, sum eru ávikavist -105,7 mió.kr. og 66,7 mió.kr., hava við sær, at útjavningarkontan í fíggjarstøðuni lækkar við 38,9 mió.kr. netto. Javningarnar av fíggjarstøðuni við ársbyrjan eru nærri greinaðar í yvirlitum á síðu 220 og 221 í landsroknskapinum 2019.

10.2.2 Javningar á útjavningarkontuni undanfarin ár

Undanfarnu 10 roknskaparárini eru 9 ferðir gjørdar primorættingar ella javningar av fíggjarstøðuni við ársbyrjan.

Fyri at vísa á, hvussu stóra ávirkan rættingar á útjavningarkontuni við ársbyrjan kunnu hava, hevur Landsgrannskoðanin greinað primorættingarnar undanfarnu 10 roknskaparárini niðanfyri:

t.kr.

Ár	Viðvíkjandi	Debit	Kredit	Netto
2019	Skattaáogn, pensjónir	-105.683	66.734	-38.949
2018	Aðrir skuldarar og gjaldføri *(Eingin ávirkan á útjavningarkontuna)*	0	0	0
2017	Barsilsgrunnurin	0	9.380	9.380
2016	Lánsbrævaskuld, Lív-partabrøv, TAKS munur millum skipanir o.a.	-180.083	69.500	-110.583
2015	*(Eingin primojavning)*	0	0	0
2014[27]	Apoteksverkið	-80.287	73.579	-6.708
2013	Trivnaðartænastan	-1.874	0	-1.874
2012[28]	Útlán, TAKS munur millum skipanir o.a., eldrasambýli v.m.	-355.420	4.373	-351.047
2011	Kursmunir í lánum, lønaravseting	-993	79.890	78.897
2010	Trygdargrunnurin, Heilbrigdi	-84.554	645	-83.909
	Javning av primo tilsamans	**-808.894**	**304.101**	**-504.793**

Primojavningar síggjast ikki í rakstrinum.

Primojavningar á útjavningarkontuni gera, at hesi viðurskifti ikki síggjast í rakstrinum, hvørki í inniverandi ári ella í undanfarna ári, men fíggjarstøðupostar, sum t.d. áogn og skuld, verða tó rættaðir í fíggjarstøðuni.

[27] Í landsroknskapinum 2014 samsvara útgreiningarnar ikki við samlaðu javningina á útjavningarkontuni við ársbyrjan (Landsroknskapurin 2014 s. 211-217).
[28] Í landsroknskapinum 2012 samsvara útgreiningarnar ikki við samlaðu javningina á útjavningarkontuni við ársbyrjan (Landsroknskapurin 2012 s. 219-240).

Rættingarnar hava í høvuðsheitum verið hesar:
- Broyttur roknskaparháttur
- Rættaðar tíðargreiningar
- Uppskrivað virði av partabrøvum
- Upptøka av grunnum
- Niðurskrivað lán
- Rættaðir feilir

Fyrstu 5 orsøkirnar til rættingar kunnu metast at vera avleiðingar og fylgibroytingar av fyrisitingarligum avgerðum, har t.d. roknskaparhátturin er broyttur ella ein grunnur er tikin við í landsroknskapin, sum innanhýsis grunnur.

Landsgrannskoðanin heldur, at tað er óheppið, at feilir henda javnan, og tískil mugu rættast á útjavningarkontuni við ársbyrjan.

Gjaldstovan hevur vístá, at teimum vitandi eru ongantíð tiknir týðandi feilir beinleiðis við á eginpeningin, sum áttu at verði tiknir við á rakstrinum eftir galdandi roknskaparmeginreglunum. Feilurin við avsetingum hjá TAKS, viðvíkjandi 2019, var ein rætting til nakað, sum samsvarandi roknskaparmeginreglunum í landsroknskapinum, ongantíð er tikið við í raksturin. Avseting av skattaeftirstøðum fer beinleiðis fram á fíggjarstøðuni, og verður ikki tikin við í raksturin. Ikki fyrr enn krav verður eftirgivið ella hevur mist rættargildi, verður tað tikið yvir raksturin.

10.3 Fyrisiting av gjaldføri og skuld (LG 2019/300-0104 og 0202)

Landsbanki Føroya fyrisitur gjaldføris- og skuldarviðurskifti landsins. Ll. nr. 116/2016 “um Landsbanka Føroya og Føroya váðaráð” kom í gildi 1. januar 2017 og setti úr gildi Ll. nr. 140/2012 “um landsins gjaldføris- og skuldarfyrisiting”.

Í broti 3.7 undir fíggjarmálum er greitt frá Landsbankanum og grannskoðan okkara av stovnsrakstrinum. Í brotunum 10.1.5 og 10.1.6 undir fíggjarstøðuni er stutt greitt frá um tøkan pening og skuld landsins.

10.3.1 Porteføljuskipanin

Til at fyrisita gjaldføris- og skuldaraviðurskifti nýtir Landsbankin eina danska skipan, nevnd PandaConnect. Landsbankin hevur bert rætt til at spyrja í skipanini.

Bókingar fara ikki sjálvvirkandi í BSL.

Bókingarnar fara ikki sjálvvirkandi yvir í Búskaparskipan landsins. Tá ið PandaConnect hevur endað mánaðarliga bókhaldið, verður ein fíla send Landsbankanum við broytingum frá mánaðinum frammanundan. Fílan verður bókað í Búskaparskipan landsins umvegis kontubrúgv. PandaConnect og Búskaparskipanin verða stemmaðar av. Landsbankin hevur ikki formligt loyvi frá Fíggjarmálaráðnum til PandaConnect skipanina, men hevur heitt á Gjaldstovuna um at fáa loyvi.

Landsbankin fær grannskoðanarváttan um skipanina hvørt ár. Landsgrannskoðanin hevur mett um grannskoðanarváttanina, og hevur kannað:
- um øll trygdartiltøk verða hildin (innritan, funktiónsskilnaður, trygdaravrit o.s.fr.), og
- um samsvar er ímillum porteføljuskipanina og Búskaparskipan landsins.

Einki var at finnast at.

10.3.2 Gjaldførið hjá landinum

Við árslok 2019 vóru 3.478 mió.kr. í tøkum peningi skrásettar í landsroknskapinum; harav 3.052 mió.kr. í virðisbrøvum o.t. Við árslok 2018 var tøki peningurin 3.666 mió.kr., tá vóru 3.278 mió.kr. í virðisbrøvum o.t.

Í talvuni er tøki peningurin sambært Búskaparskipan landsins sundurgreinaður:

t.kr.

Tøkur peningur	2016	2017	2018	2019
Lánsbrøv	1.834.109	2.959.285	2.855.638	2.523.675
Lánsbrøv, rentuáogn	7.906	8.274	8.071	8.211
Partabrøv	408.789	442.986	543.231	644.146
Onnur virðisbrøv	88.409	94.948	105.173	132.976
Repohandlar[29]	0	-149.996	0	0
Ogn hjá øðrum	0	-423.727	-234.421	-256.548
Virðisbrøv tilsamans	***2.339.213***	***2.931.770***	***3.277.692***	***3.052.460***
Bankakontur, landskassin	142.653	162.748	231.786	274.505
Útlendskar bankakontur	458.944	335.143	82.686	123.245
Ogn hjá øðrum	-104.724	0	371	0
Aðrar bankakontur og kassar	69.164	49.677	73.731	27.437
Tilsamans	**2.905.250**	**3.479.338**	**3.666.266**	**3.477.647**

Virðisbrøvini eru skrásett í landsroknskapinum til marknaðarvirði. Landsbankin hevur greitt frá, at øll virðisbrøvini eru skrásett í PandaConnect. Somuleiðis eru útlendskar peningastovnskontur, sum hava við virðisbrøv at gera, skrásettar í PandaConnect, og svara tær til næstan allan peningin á útlendsku kontunum.

Aðrar útlendskar og føroyskar peningastovnskontur eru ikki skrásettar í Panda-Connect. Talan er um kontur, sum Gjaldstovan og aðrir almennir stovnar umsita.

Plasering av gjaldførinum

Landsbankin hevur ymiskar reglur um, hvussu gjaldførið hjá landinum skal handfarast. Reglurnar standa m.a. í lógini um Landsbankan og ásetingum frá nevndini fyri bankan.

Landsgrannskoðanin hevur kannað:

- um Landsbankin hevur nøktandi og dagførdar skrivligar mannagongdir um, hvar hann plaserar gjaldførið,
- um plaseringarnar av gjaldførinum eru sambært Ll. nr. 116/2016,
- um plaseringarnar av gjaldførinum eru í tráð við instruksin frá landsbankanevndini, og
- um Landsbankin heldur seg til roknskaparinstruksin frá landsbankanevndini viðvíkjandi plaseringum av gjaldføri.

Landsgrannskoðanin hevði einki at finnast at.

Transaktiónsslóðin ikki nóg góð.

Landsgrannskoðanin skal tó vísa á, at transaktiónsslóðin millum porteføljuskipanina og Búskaparskipan landsins er ikki nóg góð, tá ið tað ikki ber til at finna allar skrásetingar av einari bóking í Búskaparskipan landsins, men neyðugt er at fara víðari til porteføljuskipanina, um skrásetingar av einari transaktión skulu finnast fram.

Landsbankin hevur víst á, at bankin goymir øll skjalprógv, so bankin hevur transaktiónsslóðina. Landsbankin kundi viðheft skjalprógvini í Búskaparskipan landsins, men heldur at tað er ov nógv og kann ørkymla.

Úrslitið av plasering av gjaldførinum

Sambært landsroknskapinum 2019 vóru rentur av innistandandi 162,7 mió.kr. Fluttar eru 28,6 mió.kr. og 122 mió.kr. til ávikavist Búskapargrunnin (§ 89 og internur grunnur) og "Frávik fyri rentuinntøkur" á § 80 undir RLÚ II, soleiðis at roknskapurin fyri 20.50.2.01.01 "Rentur av innistandandi" samsvarar við játtanina upp á 40,7 mió.kr. í inntøkum.

[29] Repohandlar: Endurkeypsavtalur, t.e. avtalur, sum fevna um sølu og at keypa lánsbræv aftur til ásetta tíð.

Í talvuni eru rentuinntøkur o.a. sundurgreinaðar.

t.kr.

Heiti	2018		2019	
	Játtan	*Roknskapur*	*Játtan*	*Roknskapur*
Rentur og ógreinað		-20.344		-5.780
Vinningsbýti		-9.140		-23.124
Staðfestur kurs-/gjaldoyramunur		27.922		-4.644
Ikki staðfestir kurs-/gjaldoyramunir		46.060		-157.285
Rentur, bankar		220		337
Kostnaðir		475		-809
Innanh. flyt. millum alm. grunnar		-4.580		28.569
Innanh. flyt. millum alm. stovnar		-72.513		122.036
Tilsamans	**-31.900**	**-31.900**	**-40.700**	**-40.700**

Sum sæst, er talan um munandi broytingar í kursmunum, serliga ikki staðfestu mununum.

Munandi broytingar í kursmunum.

Sambært ársfrágreiðingini frá Landsbankanum var avkastið av íløgurøktini -1,4% í 2018 og 6,3% í 2019. Landsbankin hevur kunnað um, at avkastið í miðal hevur verið 2,4% árini 2015 til 2019.

Landsbankin hevur eftirlitsfund hvønn mánað, og ger eina frágreiðing, sum byggir á fundin og tað, sum er gjørt at fylgja honum upp.

Benchmark[30] fyri 2019 var 5,97%. Avkastið av plaseringunum hjá Landsbankanum liggur tí nakað yvir benchmarkið. Benchmarkið fyri 2018 var -0,88%.

Sambært Landsbankanum er benchmarkið ásett fyri hvønn aktivklassa sær, og er ásett eftir miðalvektunum á teimum ymisku aktivklassunum. Benchmark eru ikki fyri alternativar íløgur og kontur.

Á heimasíðuni hevur Landsbankin greinað avkastið í 2019 í aktivklassar.

t.kr./%

Aktivklassi	Miðal íløga v/innláni	Avkast DKK	Avkast %	Vekt %
Lánsbrøv	2.503.951	38.337	1,53	76,72
Partabrøv	545.463	160.103	29,23	16,71
Alternativar íløgur	118.520	8.198	6,92	3,63
Innistandandi	95.906	-1.154	-1,20	2,94
Tilsamans	**3.263.841**	**205.485**	**6,30**	**100,00**

Sum sæst, standa partabrøvini fyri 17% av samlaðu upphæddini, men úrslitið av partabrøvunum er 29% av samlaða avkastinum. Landsbankin umsitur íløgurøktina fyri landskassan og nakrar almennar grunnar undir einum. Parturin hjá grunnunum av samlaða avkastinum upp á 205 mió.kr. var 13,8 mió.kr.; avkastið hjá landinum (íroknað Búskapargrunnin) var 191,7 mió.kr.

10.3.3 Landskassaskuld - brævalán

Heimild at læna

Sambært § 42 í Ll. nr. 103/1994 “um stýrisskipan Føroya” kunnu lán ella borgan, ið skuldbinda løgting, landsstýri ella stovnar undir landinum, ikki verða tikin ella veitt uttan við heimild í lóg. Sambært § 1 í Ll. nr. 116/1991 “um lántøku til landskassan og umlegging av landskassalánum” verður landsstýrinum heimilað landskassans vegna at taka lán til at rinda avdráttir av lánum, til afturrindan av lánum og til framskundaða afturrindan av lánum í Føroyum og uttan fyri Føroyar.

Landsgrannskoðanin hevur kannað lániheimildirnar fyri árini 2011 til 2019. Einki var at finnast at.

[30] samanburðargrundarlag

Lánini í tráð við prospektini

Í sambandi við lántøku ger Landsbankin kunningartilfar til íleggjarar og onnur, nevnt prospekt. Í prospektinum er m.a. kunning um búskaparviðurskifti, upplýsingar um útgevaran av lánsbrøvunum og upplýsingar um lánsbrøvini, so sum samlaða upphædd, rentu, kurs, lánitíð og fondskotu.

Landsgrannskoðanin hevur kannað, um lánini, sum vóru virkin við árslok 2019, eru í tráð við prospektini. Einki nýtt brævalán er stovnað í 2019, men eitt verandi lán, FO-LB 200611, er hækkað 300 mió.kr. í árinum.

Skráseting av brævalánum

Í landsroknskapinum síggjast brævalánini sum langfreistað innanlandsskuld í fíggjarstøðuni. Í notu 8 eru sundurgreiningar, sum vísa marknaðarvirði og viðhangandi rentu. Notan vísir eisini samanhangin millum navnvirði og marknaðarvirði, eitt yvirlit yvir einstøku brævalánsrøðirnar, umframt hvussu stórur partur av skuldini fellur til gjaldingar í komandi ári, og hvussu stór restskuldin er um 5 ár.

Við árslok 2019 er bókaða virðið á brævalánunum 3.817 mió.kr. í mun til 4.608 mió.kr. við ársbyrjan. Lánsupphæddirnar eru sambært roknskaparmeginreglunum í landsroknskapinum grundaðar á marknaðarvirðið umframt tíðargreinaðar rentur.

t.kr.

Brævalán	2018			2019		
	Lán	*Lánsbýti*	*Tilsamans*	*Lán*	*Lánsbýti*	*Tilsamans*
Marknaðarvirði	4.519.475	61.873	4.581.348	3.703.249	95.638	3.798.887
Viðhang. renta	28.675	-2.213	26.462	20.174	-2.080	18.094
Tilsamans	**4.548.150**	**59.660**	**4.607.810**	**3.723.423**	**93.558**	**3.816.981**

Lánsbýti: Sonevndur swap, sum t.d. kann fevna um lán, rentu og gjaldoyra.
Viðhangandi renta: Tíðargreinað renta viðvíkjandi roknskaparárinum, goldin eftir roknskaparlok.

Brævalánini hava síðani 2016 verið virðisásett til marknaðarvirði. Áður vórðu lánini bókað til kursvirði útgávudagin; kursmunurin varð avskrivaður liniert yvir lánstíðina.

Broytta virðisásetingarmeginreglan hevði í 2016 við sær, at bókaðu upphæddirnar við ársbyrjan 2016 vórðu 104 mió.kr. hægri enn tær við árslok 2015. Samsvarandi upphædd er mótbókað á útjavningarkontuna í landsroknskapinum. Upphæddin á útjavningarkontuni verður tann sama, so leingi meginreglan ikki verður broytt. Kursbroytingar eftir tað verða rakstrarførdar hvørt ár.

t.kr.

FO-LB	Restskuld við byrjan 2019	Virði við byrjan 2019	Munur	Restskuld við árslok 2019	Virði við árslok 2019	Munur	Broytt markn. virði
190620	1.100.000	1.112.793	-	-	-	-	-
200611	1.045.000	1.066.109	21.109	1.345.000	1.354.361	9.361	-15.734
210622	1.350.000	1.371.060	21.060	1.350.000	1.368.117	18.117	-2.943
320503	447.883	447.883	0	447.883	447.883	0	0
320503 - gjaldoyra		-36.098	-36.098		-30.598	-30.598	5.500
320503 - lánsbýti		61.873	61.873		95.638	95.638	33.765
230627	550.000	557.728	7.728	550.000	563.486	13.486	5.759
Tils.	**4.492.883**	**4.581.348**	**75.672**	**3.692.883**	**3.798.887**	**106.005**	**26.346**

FO-LB 320503: Lánið er í norskum krónum, men er býtt um við (swappað til) danskar krónur. Gjaldoyramunurin og virðið á lánsbýtinum eru víst fyri seg.

Samlaði kursmunurin er hækkaður.

Í talvuni hava vit greinað restskuldina á brævalánunum, sum vóru virkin ávikavist við árslok 2018 og við árslok 2019. Sum sæst, er samlaði kursmunurin við árslok 2019 hækkaður í mun til við ársbyrjan. Broytingin verður tikin við í raksturin undir høvuðskontu 20.50.1.01 “Rentur at gjalda” sum ikki staðfestur kursmunur.

Sambært Landsbankanum er ikki ætlanin at rinda lánið, FO-LB 320503, sum er í norskum krónum, og er swappað til danskar krónur, aftur fyri tíð. Tá ið lánið verður rindað aftur í 2032, verður kursmunurin 0.

t.kr.

FO-LB	Restskuld við árslok 2019	Kursur smb. roknskapi	Kursur smb. VP[31]	Virði smbr. roknskapi	Virði smb. VP	Munur í virði
200611	1.345.000	102,696	102,696	1.354.361	1.354.361	0
210622	1.350.000	101,342	101,342	1.368.117	1.368.117	0
320503	417.285	100,000	100,000	417.285	417.285	0
320503 - lánsbýti				95.638	95.682	-44
230627	550.000	102,452	102,450	563.486	563.475	11
Tils.	**3.662.285**			**3.798.887**	**3.798.921**	**-33**

FO-LB 320503: Lánið í norskum krónum er til kursvirðið í donskum krónum við árslok 2019.

Í talvuni síggjast brævalánsrøðir og lánsbýti við árslok 2019. Sambært roknskapar-meginreglunum verða árligu broytingarnar í keypskála skrásetta kursvirðinum tiknar við í roknskapin. Vit hava samanborið lánini og kursin, sum er brúktur í lands-roknskapinum, við upplýsingar sambært skjølum frá VP Securities A/S fyri at vissa okkum um upphæddirnar, sum eru í umferð, og at brúkti kursurin samsvarar við marknaðarkursin við árslok. Virðið á lánsbýtinum er borið saman við "market value report" frá Nordea. Munur er í tveimum av brævalánsrøðunum í mun til kursin hjá VP við árslok 2019.

Sambært Landsbankanum er Nordea "marketmaker" á landskassans lánsbrøvum, t.v.s. at tey regluliga áseta kursir á lánsbrøvum til tann besta kursin, tey kunnu koma fram til. VP er eitt skrásetingarstað. Landskassans lánsbrøv verða sjáldan keypt og seld, og tí er trupult at áseta heilt rætta kursin. Landsbankin metir, at kursurin sum Nordea brúkar er "rættari", enn tann VP brúkar.

t.kr.

FO-LB	Restskuld við árslok 2019	Tíðargr. renta	Rentudagur	Dagar	Roknað renta í %	Ásett renta í %
200611	1.345.000	7.460	11-06-2019	203	1,0000	1,0000
210622	1.350.000	3.541	22-06-2019	192	0,5000	0,5000
320503	417.285	7.417	03-05-2019	237	2,7000	2,7000
230627	550.000	1.756	27-06-2019	187	0,6250	0,6250
	3.662.285	***20.174***				
320503 - lánsbýti	-417.285	-7.417	03-05-2019	237	-2,6968	-2,7000
320503 - lánsbýti	447.883	5.337	03-05-2019	237	1,8100	1,8100
Tilsamans	**3.692.883**	**18.094**				

Rentudagar: Í FO-LB 320503 verða nýttir 30/360 dagar í mánaðinum/árinum; í øðrum lánum eitt vanligt ár.
FO-LB 320503: Lánið í norskum krónum er til kursvirðið í donskum krónum við árslok 2018; lánið er býtt um við danskar krónur.

Í talvuni hava vit eftirroknað tíðargreinaðu rentuna av hvørjum láni sær í mun til rest-skuldina við árslok 2019. Norska lánið hevur eina rentu á 2,7%, men varð býtt um til danskar krónur við 1,81% rentu. Rentumunurin verður góðskrivaður landinum.

Skráseting av rentuútreiðslum o.ø.

Rentuútreiðslur o.a. vóru 55,1 mió.kr.; 11,6 mió.kr. vórðu fluttar á § 80 undir RLÚ II.

Rentur av skuld vóru 55,1 mió.kr. sambært landsroknskapinum. 11,6 mió.kr. eru fluttar til "Frávik fyri rentuútreiðslur" á § 80 undir RLÚ II, soleiðis at roknskapurin fyri 20.50.1.01 "Rentur at gjalda" samsvarar við játtanina 43,5 mió.kr. Í talvuni eru rentu-útreiðslur o.a. sundurgreinaðar:

[31] VP Securities A/S: Felag, sum tekur sær av skráseting og handli av børsskrásettum virðisbrøvum

t.kr.

Heiti	2018		2019	
	Játtan	*Roknskapur*	*Játtan*	*Roknskapur*
Goldnar rentur		48.624		48.140
Broytt tíðaravmarkað renta o.a.		2.122		-8.414
Rentur tilsamans		***50.746***		***39.726***
Staðfestir kursmunir		-233		-13.013
Ikki staðfestir kursmunir		-27.469		26.393
Kursmunir tilsamans		***-27.702***		***13.380***
Ómaksgjøld o.a.		0		1.100
Aðrar rentuútreiðslur		649		850
Innanh. flyt. millum alm. stovnar		-5.693		-11.557
Tilsamans	**18.000**	**18.000**	**43.500**	**43.500**

Goldnar rentur: Í Búskaparskipan landsins eru renturnar ikki greinaðar í goldnar og tíðargreinaðar rentur – upphæddirnar eru roknaðar sambært yvirlitum úr Pandaskipanini.

Sambært yvirlitinum vóru nettoútreiðslurnar av rentum og kursmunum av brævalánunum, 23.044 t.kr. í 2018 og 53.106 t.kr. í 2019.

Í talvuni niðanfyri eru goldnar rentur og tíðargreinaðar rentur í 2019 býttar á brævalánini. Vit hava roknað, hvat samlaða rentuupphæddin fyri hvørt lánið er í mun til eina miðalsaldu á láninum í árinum. Roknaða rentan er samanborin við ásettu rentuna á hvørjum láni.

t.kr.

FO-LB	Miðalsalda í 2019	Goldin renta	Broytt tíðargr. renta	Renta tilsamans	Roknað renta í %	Ásett renta í %
190620	515.342	19.250	-10.232	9.018	1,7500	1,7500
200611	1.204.452	10.376	1.648	12.024	1,0044	1,0000
210622	1.350.000	6.750	-10	6.740	0,4993	0,5000
320503	414.535	11.338	98	11.436	2,7405	2,7000
230627	550.000	3.438	-5	3.433	0,6241	0,6250
Tilsamans	***4.034.330***	***51.152***	***-8.500***	***42.651***		
Lánsbýti	-414.535	-11.118	133	-10.985	-2,6326	-2,7000
Lánsbýti	447.883	8.107	0	8.107	1,8100	1,8100
Tilsamans	**4.067.677**	**48.140**	**-8.367**	**39.773**		

Sambært landsroknskapinum vóru rentuútreiðslurnar 39.726 t.kr. Munurin er, at útreiðslurnar í landsroknskapinum er 47 t.kr. lægri samanborið við útrokningina í talvuni. Hinvegin var ikki staðfesta kurstapið í landsroknskapinum 26.393 t.kr. Tað er ein hægri útreiðsla í landsroknskapinum upp á 47 t.kr., samanborið við útrokningina í talvuni á síðu 188, har munurin á marknaðarvirðinum á brævalánunum við árslok í mun til við ársbyrjan er eftirroknaður. Samlaði munurin er tí eingin. Sambært Pandaskipanini er talan um ikki staðfestan gjaldoyravinning.

Rentuútreiðslur lægri, tí netto 800 mió.kr. vórðu rindaðar aftur í 2019.

Í 2019 vóru renturnar av brævalánunum 39.726 t.kr. og í 2018 vóru tær 50.746 t.kr. Høvuðsorsøkin til lækkingina er, at netto vóru 800 mió.kr. av landskassaskuldini rindaðar aftur í 2019.

Útreiðslur av rentu, kursi og lánsbýti í árinum

Í talvuni niðanfyri hava vit samanhildið brævalánini við samlaðu rakstrarbroytingarnar, sum lánini hava við sær í árinum.

t.kr.

FO-LB	Restskuld við árslok 2019	Renta smbr. roknskapi	Kursbroyt. o.a. smb. roknskapi	Rakstrar-broytingar tilsamans
190620	0	9.018	-12.793	-3.775
200611	1.345.000	12.024	-15.734	-3.710
210622	1.350.000	6.740	-2.943	3.797
320503	447.883	8.510	39.092	47.602
230627	550.000	3.433	5.759	9.191
Tilsamans	**3.692.883**	**39.726**	**13.380**	**53.106**

Í kursbroytingum o.ø. er ikki kursmunur í sambandi við útgávu. Útgávukursmunir verða staðfestir, tá ið lánini verða innfríað. Lán nr. FO-LB 190620 er innfríað í árinum. Kursmunir á øðrum lánum eru ikki staðfestir. Sum sæst[32], svaraðu útreiðslurnar til 0,7 % av láni nr. FO-LB 190620.

Aðrar rentuútreiðslur

Aðrar útreiðslur enn rentur og kursmunir av brævalánunum eru 1.950 t.kr., t.e. gjøld fyri skráseting, eftirlit o.a. Í 2019 eru eingi nýggj brævalán stovnað, og tí eru heldur eingi ómaksgjøld í tí sambandi. Nakrar útreiðslur eru av føroyskum peningastovns-kontum hjá Landsbankanum og Gjaldstovuni.

Útreiðslurnar av sjálvari porteføljuskipanini verða rindaðar av játtanini til Landsbankan. Útreiðslur í sambandi við plasering av gjaldføri, t.d. kurtaga, fara av høvuðskontu 20.50.2.01 "Rentuinntøkur av innistandandi".

Í juli 2019 greiddi landsstýrismaðurin frá, at Landsbankin bjóðaði íløgurøktina í 2018 út. Frá 1. januar 2019 hevur landskassin havt 5 íløgurøktarar, sum eru Nordea, SEB, Handelsbanken, Nykredit og Sydbank. Ætlanin var eisini at bjóða út høvuðsbanka-sambandið, men tað er fyribils útsett. Landsbankin metti ikki, at tað var skynsamt at bjóða íløgurøktina og høvuðsbankasambandið út í senn, men hvítvaskgølan hjá Danske Bank gjørdi eisini sítt til, at tann avgerðin varð tikin.

Í august 2020 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at ætlanin er framvegis, at høvuðs-bankasambandið verður boðið út, men tað er ikki gjørt enn.

Ætlanin er framvegis at bjóða høvuðs-bankasambandið út.

Játtanir undir § 20 til rentur av brævalánum og plaseringum

Landsgrannskoðanin hevur í undanfarnum ársfrágreiðingum umrøtt meginreglurnar fyri virðisásetingum av skuld, sum Landsbankin fyrisitur. Í 2016 vórðu meginreglurnar broyttar soleiðis, at brævalánini vera tikin við í roknskapin til marknaðarvirði. Fígging landsins mælti til broytingina í 2015, soleiðis at somu meginreglur vóru galdandi fyri fíggjarliga ogn og skuld. Fígging landsins vísti á, at onnur lond hava tjóðbanka, sum hevur tiltøkupeningin hjá landinum um hendi, og tá síggjast rentur o.a. ikki beinleiðis í landsroknskapinum.

Skuld og gjaldføri landsins verða virðisásett til marknaðarvirði.

Landsgrannskoðanin hevur vísst á, at roknskaparmeginreglurnar, sum verða brúktar, eiga at vera tær, sum á bestan hátt endurspegla tær avgerðir, sum verða tiknar í fíggjarárinum. Eitt høvuðsendamál við fíggjarlógini og landsroknskapinum er at halda saman tað, sum er brúkt ella rátt yvir, í mun til tað, sum er samtykt. Tann mest rættvísandi myndin av landsroknskapinum er tí tær upphæddir, sum samsvara við tær avgerðir, sum ein landsstýrismaður ella stovnsleiðsla tekur.

Er endamálið við at taka lán einans at fíggja almennan rakstur, og lánini ætlandi ikki verða innfríað fyri tíð, hava kursbroytingar á hvørjum ári ikki útreiðslur ella inntøkur við sær í samlaðu lánstíðini. Rentan, sum hevur útreiðslur við sær á hvørjum ári, endur-speglar veruligu avgerðirnar. Árligu kursbroytingarnar geva tí ikki betri upplýsingar –

[32] Roknað broyting í %: Broytingin er roknað sum samlað rakstrarbroyting í mun til miðalsaldo í 2019.

sum við plaseringunum –, men kunnu hinvegin heldur órógva veruligu myndina av útreiðslunum av skuldini.

Játtanir og roknskapir fyri ávikavist rentur av skuld og rentur av innistandandi síðani 2016.

t.kr.

	2016	2017	2018	2019
Rentur av skuld				
Játtan	54.000	20.000	18.000	43.500
Roknskapur				
Rentur	75.791	54.331	50.746	*39.726*
Kursbroytingar	-16.608	21.079	-27.702	*13.380*
Ómaksgjøld o.a.	3.825	4.114	649	*1.950*
Javning	-9.008	-59.524	-5.693	*-11.557*
Rentur av innistandandi				
Játtan	-26.700	-25.800	-31.900	-40.700
Roknskapur				
Samlaður vinningur	-86.734	-79.724	45.193	*-191.305*
Javning	60.034	53.924	-77.093	*150.622*

Í ársfrágreiðingini 2017 vísti Landsgrannskoðanin á, at útreiðslurnar av rentum, kursbroytingum o.ø. í 2017 vóru 80 mió.kr. Játtanin var 20 mió.kr. Sjálv rentan var 54 mió.kr. Landsgrannskoðanin ivaðist tí í, um broyttu roknskaparmeginreglurnar høvdu við sær, at bókaðu útreiðslurnar á bestan hátt endurspeglaðu tær avgerðir og tiltøk, sum vóru framd innan játtanarøkið.

Í 2019 er játtanin 43,5 mió.kr. til rentur av skuld. Í talvuni sæst, at rentuútreiðslurnar eru 39,7 mió.kr., og kursbroytingarnar eru 13 mió.kr. í útreiðslu.

Í juli 2019 greiddi landsstýrismaðurin frá, at í fíggjarlógini 2019 var játtanin til rentuútreiðslur á § 20 "Inntøkur" ásett sum effektiva rentan við upptøku av lánsbrævaskuldini, soleiðis at hon endurspeglar miðalrentustig í mun til støddina á skuldini.

Javning av rentuútreiðslum og -inntøkum millum § 20 og § 80

Frávikið í mun til játtan verður flutt til § 80 undir RLÚ II.

Í undanfarnum ársfrágreiðingum hevur Landsgrannskoðanin eisini umrøtt broytingarnar í upplýsingunum um rentu o.a. Viðgerðin av rentuinntøkum og rentuútreiðslum, kursbroytingum o.ø. er nú soleiðis, at inntøkurnar og útreiðslurnar gjøgnum árið verða tiknar við undir § 20, sum er partur av RLÚ I, men mánaðarliga verða tær javnaðar soleiðis, at frávikið í mun til játtan verður flutt til § 80 "Rentur", sum er partur av RLÚ II.

Landsgrannskoðanin helt tað vera ivasamt, um tað var rætt at javna ella flyta millum høvuðskontur, soleiðis at nýtslan samsvarar við játtanina.

Í fíggjarlógini 2019 undir høvuðskontu 20.50.1.01 "Rentur at gjalda" er greitt frá, at fyri rentuútreiðslurnar verður effektiva rentan brúkt. Metingin av rentuútreiðslunum er grundarlag undir bæði játtan og roknskapi, og frávik í mun til játtan verða skrásett sum óvanligar útreiðslur og inntøkur.

Frá 2019 brúkar Landsbankin effektivu rentuna á lánunum við upptøku.

Landsbankin hevur greitt frá, at frá 2015 hevur bankin mett um rentuútreiðslurnar við at brúka effektivu rentuna á lánsbrævarøðunum, tá ið metingin var gjørd. Tað er viðkomandi, um broytingar verða gjørdar í lántøkuni í úrtíð, men av tí at ætlanin ikki er at rinda lánini aftur fyri tíð, brúkar Landsbankin, frá og við 2019, effektivu rentuna á lánunum, við upptøku. Tað eigur í framtíðini at endurspegla rættari rentukostnað í fíggjarlógini.

Í landsroknskapinum 2019 eru rentuútreiðslurnar undir § 20 javnaðar við 11,6 mió.kr. og rentuinntøkurnar við 150,6 mió.kr. Í javningini av rentuinntøkunum eru 28,6 mió.kr. í muni, sum sambært Búskaparskipan landsins er nettopartur hjá Búskapargrunninum av samlaðu íløgurøktini, frádrigið 453 t.kr. í umsitingargjaldi til Landsbankan.

11. Orðalisti

AMEG - Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin.

Brúkararættindi - rættindini hjá tí einstaka til at stovna, lesa, broyta ella strika dátur í KT-skipanum.

Búskaparskipan landsins (BSL) - felagsheiti fyri allar skipanirnar, sum Gjaldstovan umsitur.

C.átekning - við C.átekning kann heimild verða givin til at flyta óbrúktar løgujáttanir til seinni fíggjarár, ella til innanhýsis flytingar millum høvuðskontur sama ár.

Change management - Broytingarleiðsla og mannagongdir til stýring av broytingum í skipanum fyri at tryggja, at allar broytingar verða gjørdar eftir ávísum standardum at tryggja kvalitetin á broytingunum.

Dygdarskipan – samanløgd skipan hjá kommunulæknunum til eftirútbúgving og gransking.

Eftirlitsumhvørvi – Virðisgrundarlagið sum leiðslan leggur í hugburðin, starvsfólkini hava til eftirlit og stýring. Tað er grundarlagið undir, hvussu væl innaneftirlitið er skipað.

Eksternir grunnar - grunnar, sum ikki eru tiknir við í fíggjarstøðu landskassans, og sum hava sjálvstøðugan roknskap.

Eykajáttanarlóg - broytingar, sum Løgtingið ger í játtanum, eftir at fíggjarlógin er samtykt.

Fígging Landsins - fyrrverandi deild hjá Gjaldstovuni, sum umsat gjaldførið hjá landinum.

Fíggjargrannskoðan - er at ansa eftir, at roknskapurin er rættur, og at tær avgerðir, sum roknskapurin fevnir um, eru samsvarandi veittum játtanum, galdandi lógum og fyriskipanum, verandi avtalum og vanligum siði.

Fíggjarlig grannskoðan - grannskoðan av, um roknskapurin er rættur. Skal tryggja, at hvør postur er rættur, flokkaður rætt, skrásettur á rætt tíðarskeið og hoyrir til virksemið.

Fíggjarstýringsskjal - eitt Excel rokniark, sum Landsverk brúkar at stýra fíggjarliga partinum av verkætlanum við.

Flexsalda - tal av tímum, eitt starvsfólk eigur á ella skyldar.

Fyrisitingargrannskoðan - er at ansa eftir, at tað er hóskandi atborið fíggjarliga í sambandi við umsiting av ognum og viðvíkjandi rakstri av teimum stovnum og tí virksemi, roknskapurin fevnir um.

Grannskoðanarlógin - løgtingslóg nr. 25/1999 “um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.”

H-bygningur – nýggjur bygningur hjá Landssjúkrahúsinum.

Heildarskipanin - í frágreiðingini meinast við nýggju Heildarskipanina hjá Almannaverkinum.

Høvuðskonta - játtanir verða veittar á høvuðskontum, og tað er høvuðskontan, ið er sjálv játtanin, sum Løgtingið atkvøður um.

Innaneftirlit - tey tiltøk, sum leiðslan setir í verk fyri at fáa nóg stóra vissu fyri, at roknskapurin er rættur og álítandi, at raksturin er effektivur, og at lógir og reglur verða hildnar.

Innheintingarskipanin hjá TAKS (IK skipanin) - er ein KT-skipan til at krevja inn skatt og o.a., sum er fallið til gjaldingar.

Inntøkufíggjað virksemi - er virksemi, ið ber handilsligan dám. Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum kann loyva stovnum at hava inntøkufíggjað virksemi. Nærri reglur um inntøkufíggjað virksemið eru í kap. 6 í K. nr. 84/2011 "um rakstrarjáttan".

ISAE 3402 - altjóða standardur, sum verður brúktur í sambandi við grannskoðanir og váttanir, sum skulu geva høga vissu fyri tryggum umhvørvi hjá tænastuveitarum, herundir KT-veitarum.

ISO/IEC 27001 - altjóða standardur um stýring av KT-trygd.

ISO/IEC 27002 - altjóða standardur um íverksetan av KT-trygdarstandardi.

Løgujáttan – játtanarslagið løgujáttan verður nýtt í sambandi við bygging, ognan ella avhending av bygningum, løgum, skipum o.ø. og í sambandi við stór viðlíkahaldsarbeiði.

Kervisgrannskoðan - grannskoðan av KT-skipanum.

Keypsportalurin - portalur har lýst verður alment, tá ið almennir stovnar skulu keypa vørur ella tænastur.

Kontuskipan landsins - kontuplanur fyri tað almenna. Reglur fyri, hvussu útreiðslur og inntøkur skulu flokkast í landsroknskapinum.

KT Landsins - deild hjá Gjaldstovuni, sum hevur til uppgávu at veita almennum stovnum KT-tænastur og at samskipa KT á yvirskipaðum stigi.

Landsnet - tænasta, sum KT Landsins veitir. Tænasturnar fevna um hýsing og rakstur av servarum og netverkum, uppseting og atgongd til grundleggjandi forrit á brúkarateldum og KT-support til brúkarar.

Landsroknskapurin - samlaði ársroknskapurin hjá landinum og fevnir um allar inntøkur og útreiðslur landsins fyri farið fíggjarár og aktiv og passiv landsins. Gjaldstovan setir landsroknskapin upp.

Løgfrøðiliga-kritisk grannskoðan - grannskoðan av, at roknskapurin er samsvarandi veittum játtanum, galdandi lógum og fyriskipanum, verandi avtalum og vanligum siði.

Markamót - heitið á sambindingarliði millum ymiskar skipanir.

PandaConnect - porteføljuskipan til at fyrisita gjaldføris- og skuldaraviðurskifti.

Penetratiónsroynd - er eitt umbiðið álop á ella innbrot í eina telduskipan.

Produktivitetur - eisini nevnt framleidni, er lutfallið millum tilfeingisnýtslu og framleiðslunøgd.

Rakstrarjáttan - játtan, sum fevnir um at seta starvsfólk og at halda útreiðslur í hesum sambandi, herímillum at keypa vørur, tænastur o.a.

RLÚ - er ein stytting fyri Rakstur, Løgu og Útlán.

RLÚ I – ársúrslit av vanligu postunum í landsroknskapinum.

RLÚ II – RLÚ I pluss úrslit av óvanligum postum.

Roknskapargóðkenningarskipanin - stytt RGS, er ein KT-skipan, sum góðskutryggjar tann almenna roknskapin við góðkenningum av stovnsroknskapum.

Roknskaparkunngerðin - Kunngerð nr. 22/2007 "um roknskaparverk landsins".

Roknskaparlógin - løgtingslóg nr. 33/1994 “um landsins almenna roknskaparhald v.m.”

Roknskaparreglugerð - reglugerð við ábyrgdar- og heimildarreglum fyri roknskaparhaldið hjá stovnum.

Roknskaparrundskrivið - Roknskaparrundskriv frá Fíggjarmálaráðnum frá 2001 um vegleiðing um roknskaparreglugerðir.

Ræðisrættur - er at hava ræði á einari kontu ella játtan.

ScanJour - journal-, málsviðgerðar- og útgjaldsskipan hjá Almannaverkinum.

Serbreytir - serligt skipað miðnám.

Serviceskipan hjá TAKS - til at taka ímóti krøvum frá Almannaverkinum o.ø.

Setanarpolitikkur landsins - partur av starvsfólkapolitikkinum hjá landinum. Setanarpolitikkurin hevur til endamáls at tryggja, at stovnar seta umsøkjarar, ið, úr einum heildarsjónarmiði, eru best egnaðir til starvið, og tryggja, at umsøkjarar, sum ikki fáa starv, kunnu vera vísir í, at avgerðin er farin fram á rættan hátt.

SEYF - skipan hjá Landsverki til verkætlanarstýring. Navnið SEYF stendur fyri Støða, Eftirlit, Yvirlit og Fíggjarstýring.

SLA - Service Level Agreement - er heiti á einari KT-rakstrar- og viðlíkahaldsavtalu millum partar.

Standardkonta (St.kt.) - Sundurgreinar inntøkurnar og útreiðslurnar í t.d. sølu, lønir, vørukeyp, tænastuveitingar o.a.

Standardroknskaparkonta (StRk) - Neyvari útgreining av standardkontu.

Stuðulsfíggjað virksemi - virksemi undir rakstrarjáttan, sum ikki er av handilsligum slag, og sum er fíggjað við stuðli.

Stýrisskipanarlógin - Ll. nr. 103/1994 “um stýrisskipan Føroya”, v.s.b.

Støðla - er í verandi fíggjarárið at útreiðsluføra eina útreiðslu, ið fer at verða hildin í komandi fíggjarárum/seta av til væntaðar útreiðslur.

TotalView - er skipan, sum fleiri almennir stovnar brúka til at skráseta tíðarnýtslu v.m.

Transaktiónsslóð - eisini nevnd viðskiftisslóð – er treytin um at allar skrásetingar skulu kunna finnast í roknskapinum og at tølini í roknskapinum skulu kunna loysast upp í tær skrásetingar, sum tey eru samansett av.

Trygdarkunngerðin - K.nr. 28/2003 “um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum”.

Trygdarpolitikkur - er ein yvirskipaður politikkur, ið tekur atlit at váðum, ið hótta.

Undirkonta - verður brúkt, tá ið neyðugt er at býta eina játtan sundur í fleiri virkisøki.

Útjavningarkonta - minnir um eginpeningskontuna í roknskapum hjá privatum virkjum, men er tó meiri tøknilig, m.a. tí at ogn og skuld vera virðisásett øðrvísi.

Váðameting - er at eyðmerkja og greina teir vandar, sum mest sannlíkt kunnu raka stovnin meint.

Vaktætlan (el. Vaktplan) - KT-skipan at ráðleggja arbeiðstíð í og at avgreiða lønir við.

Verklagslóg - er lóg, sum eigur at verða løgd fyri Løgtingið, tá ið íløguætlan er 10 mió.kr. ella størri.

Verkætlan - er t.d. bygging av einum bygningi ella vegi og granskingarverkætlanir.

Verkætlanarleiðsla - leiðslan fyri einari verkætlan.

VFS-skipan - er stytting fyri Viðskiftafólkaskipan, ein "gomul" málsviðgerðarskipan hjá Almannaverkinum, sum er eitt arkiv í dag.

Víðkað fyrisitingargrannskoðan - ein størri og meira víðfevnd kanning, enn vanlig fyrisitingar-grannskoðan, sum løgtingsgrannskoðararnir kunnu biðja um.

Vinnugluggin - skipan hjá TAKS til at lata inn roknskapir o.a.

Web-løn – KT-skipan til lønaravgreiðslu hjá Gjaldstovuni.

XBRL - skipan til at lata inn roknskap.